# HVÍTABÓK

*Støðið undir*

*einum sáttmála,*

*ið skipar Føroyar*

*sum eitt*

*fullveldisríki*

*í samstarvi*

*við Danmark*

FØROYSKT FULLVELDI

# HVÍTABÓK

Hvítabók
© Føroya landsstýri
Umbróting og repro: Hestprent
Prent: Estra
Innbinding: Helge Justinussen
Útgevari: Føroya Landsstýri 1999

ISBN 99918-53-31-6

ISBN 99918-53-30-8 øll 3 bindini

# Innihaldsyvirlit

Formæli . . . . . . . 7

Samandráttur og niðurstøður . . . . . . . 9

1. partur: Hugtakið fullveldi . . . . . . . 18
2. partur: Stjórnmálasøga Føroya . . . . . . . 21
3. partur: Sáttmáli millum Íslands og Danmarkar 1918-1944 . . . . . . . 33
4. partur: Millum heimastýri og fullveldi . . . . . . . 57
5. partur: Smátjóðir við fullveldi . . . . . . . 72
6. partur: Altjóðarættur og føroyskt fullveldi . . . . . . . 92
7. partur: Stjórnarrættur og føroyskt fullveldi . . . . . . . 111
8. partur: Mannagongdir fyri sáttmálagerð og staðfesting . . . . . . . 115
9. partur: Fyrisiting . . . . . . . 118
10. partur: Búskapur . . . . . . . 131

Hugtøk og heiti . . . . . . . 151

Upprit og aðrar heimildir . . . . . . . 160

# Formæli

Tann 2. oktober 1998 samtykti løgtingið uppskot landsstýrisins um at fyrireika og taka upp samráðingar við ríkisstjórnina um ein sáttmála millum Føroya og Danmarkar, ið skipar Føroyar sum fullveldisríki í samstarvi við Danmark.

Tað var sum lið í hesum fyrireikingum, at landsstýrismaðurin í sjálvstýrismálum tann 25. november 1998 skipaði sáttmálanevndina við tí setningi at greina út støðið undir umrødda sáttmála. Frágreiðing nevndarinnar verður løgd fram í hesi bók.

Tvey fylgibind eru til bókina. Annað er frágreiðingin frá búskaparnevndini, sum varð sett at lýsa grundarlagið undir eini búskaparligari og fíggjarligari uppgerð millum Føroya og Danmarkar, og hitt er frágreiðingin frá fyrisitingarbólkinum, sum varð settur at lýsa tað fyrisitingarliga samstarvið við Danmark, og at lýsa hvørji krøvini verða, skulu Føroyar umsita øll málsøki sjálvar.

Tann útgreinaði setningurin hjá sáttmálanevndini var at lýsa hesi viðurskifti:

- stjórnmálaviðurskiftini millum Danmarkar og Føroya í søguligum høpi;
- dømi um skipanir millum føroysku heimastýrisskipanina og fullveldi;
- dømi um smátjóðir, ið eru skipaðar sum fullveldisríki í samstarvi við onnur lond;
- sáttmálan frá 1918 millum Danmarkar og Íslands;
- stjórnarrættarligar og altjóðarættarligar fyritreytir fyri, at Føroyar verða skipaðar sum fullveldisríki;
- hvussu ein sáttmáli kann gerast millum Danmarkar og Føroya, umframt mannagongdirnar.

Eisini varð nevndini álagt at gera samandráttir av frágreiðingunum hjá búskaparnevndini og fyrisitingarbólkinum. Harafturat er álagt nevndini at gera eitt sáttmálauppskot og eitt samráðingarstøði, sum tó verða at skipa sum serlig trúnaðarskjøl.

Nevndin hevur havt 20 fundir. Á fyrsta fundi skipaði hon seg í bólkar, sum fingu ábyrgdina av at greina út teir ymisku partarnar av setninginum og at gera uppskot um, hvussu teir kundu loysast. Síðani

vórðu upprit skrivað um hvønn partin sær, ið liggja til grundar fyri nevndarfrágreiðingini, sum ein samfeld nevnd tekur undir við.

Í starvi sínum hevur nevndin søkt sær ráð hjá hesum serfrøðingum: Barry Bartman, professara og doktara í stjórnmálafrøði, University of Prince Edward Island, Kanada; Frederik Harhoff, dosenti og doktara í løgfrøði, Københavns Universitet, Danmark; Guðmundi Alfreðssyni, professara og doktara í altjóðarætti, Lunds Universitet, Svøríki; Hurst Hannum, professara og doktara í altjóðarætti, Tufts University, USA; Jens Paula Nolsøe, cand.mag. í søgu, Føroya Studentaskúla, Føroyum; Jens Peter Christensen, professara og doktara í løgfrøði, Århus Universitet, Danmark; Kára Jespersen, cand.mag. í søgu, Føroya Studentaskúla, Føroyum; Sigurði Líndal, professara og doktara í løgfrøði, Háskóla Íslands, Íslandi.

Nú nevndin leggur fram frágreiðing sína, er tað í teirri vón, at hon verður eitt nýtiligt íkast til orðaskiftið um stjórnarrættarligu viðurskifti Føroya.

Í Tinganesi á ólavsøku 1999

Herluf Sigvaldsson
formaður

Sigmundur Isfeld
skrivari og næstformaður

Árni Olafsson    Gloria Kalsø    Halgir Winther Poulsen

Hans Trygvi Teirin    Herálvur Joensen    Julianna Klett

Kate Sanderson    Ulla Svarrer Wang

/ Sjúrður Skaale
fundarskrivari

# Samandráttur og niðurstøður

1. partur viðger hugtakið fullveldi. Evsta heimildin til alt stjórnarvald liggur hjá fólkinum, ið útinnir hetta vald gjøgnum síni kosnu umboð. Hægsta ríkisvaldið er vanliga tríbýtt: lóggávuvald, útinnandi vald og dómsvald. Innlendis fullveldi ber í sær evsta vald á tí umveldi og tí fólki, ið hoyrir ríkinum til. Í hesum liggur einkarættur stjórnarvaldsins at skipa og uppihalda landsins lógum og at verja land og fólk fyri uppílegging uttaneftir.

Øll ríki eiga javnstøðu í fullveldi. Tey eru javnsett til rættindi og skyldur og eru javnbjóðis limir í altjóðasamfelagnum hóast ymisk til búskaparligar, samfelagsligar, politiskar og aðrar umstøður. Fullveldið hjá einum ríki ber sostatt í sær, at tað er ikki undirgivið nøkrum øðrum ríki, og at onnur ríki kunnu ikki leggja seg út í tess innlendisviðurskifti. Bert ríki við fullveldi kunnu gerast limir í Sameindu tjóðum, og einans tey hava fullan førleika at gerast partur í millumtjóða sáttmálum.

At Føroyar undir heimastýrisskipanini ikki hava fullveldi, er eyðsæð. Heimastýrislógin tilskilar, at skipanin er av stjórnarrættarligum slagi, og at lóggávuvaldið og útinnandi valdið hjá heimastýrinum er avmarkað til yvirtikin sermál. Harafturat kemur, at dómsvaldið ikki kann yvirtakast. Gerast Føroyar fullveldisríki, fáa tær lut í altjóðasamfelagnum sum onnur ríki og kunnu samstarva við tey á jøvnum føti.

2. partur viðger stjórnmálasøgu Føroya. Tað fyrsta, ið vitað er um, ráddu føroyingar sær sjálvum og høvdu egið alting. So líðandi komu føroyingar tó undir norskt kongsvald, og Føroyar gjørdust skattland undir Noregs kongum frá umleið 1035.

Sannlíkt er, at føroyingar eins og grønlendingar og íslendingar hava gjørt sáttmála við Noregs kong í 1260-árunum, og støða Føroya sum kongsins skattland gerst alt greiðari við rættarbótini hjá Magnusi kongi lagabøtara frá 1271. Við landslógini frá 1274 varð altingið, har allir frælsir menn høvdu rætt at møta, umskipað til eitt løgting við tilnevndum tingmonnum.

Tá ið Noreg og Danmark komu undir sama kong í 1380, fylgdu Føroyar við sum skattland hjá Noregs kongi.

Tá ið kongur fekk einaveldi í 1661-62, sendi hann umboðsmenn sínar til Føroya at taka við hyllingareiði frá landsins fremstu monnum.

Í 1814 fór Noreg undir svenskan kong. Støða Føroya var ógreið, men varð stundum av donskum myndugleikum lýst sum hjálandastøða. Í 1816 vórðu løgtingið og løgmansembætið avtikin og amtmaður settur í Føroyum.

Danska grundlógin varð lýst at galda í Føroyum í 1850 við einvísari danskari avgerð. Ósemja er um, hvørt heimild var fyri hesum.

Hóast hesa søgugongd, mistu Føroyar ongantíð støðu sína sum serstakt løgdømi. Nevnast kann í hesum viðfangi kongsbræv (*reskript*) frá 12. mai 1668, ið ásetti, at lógir skuldu verða settar serstakt í gildi í Føroyum fyri at kunna galda her, eins og kongliga fyriskipanin frá 1821 ásetti serstakt, hvussu lógir skuldu verða settar í gildi í Føroyum.

Í 1852 varð løgtingið endurstovnað sum amtsráð við víðari heimildum, enn amtsráð í Danmark høvdu. Løgtingsins støða sum umboð Føroya fólks varð styrkt í 1923, tá ið amtmaður ikki longur var føddur tingformaður. Sum frá leið, fekk løgtingið eisini meira ávirkan á útinnandi valdið, eftir at landsnevnd varð skipað í 1928.

Tá ið Danmark varð hersett av Týsklandi 9. apríl 1940, tóku løgting og amtmaður við stjórn landsins sambært bráðfeingis stýrisskipan frá 9. mai 1940. Løgtingið hevði nú lóggávuvaldið saman við amtmanni. Amtmaðurin hevði saman við landsnevndini útinnandi valdið um hendur. Dómsvaldið lá hjá sorinskrivara og løgtingsvaldum dómsmonnum. Henda skipan helt fram, til hon varð avloyst av heimastýrisskipanini 1. apríl 1948.

3. partur greiðir frá samveldissáttmálanum frá 1918 millum Ísland og Danmark. Hann hevur verið nevndur sum møgulig fyrimynd fyri framtíðarskipan Føroya og Danmarkar millum. Í hesum sáttmála verður Ísland viðurkent sum ”fullvalda ríki”, sum er í kongsfelagsskapi við Danmark.

Sáttmálin var í lógarformi. Íslendingar fingu við hesum sáttmála ræði á øllum landsins málum, men góvu danska ríkisvaldinum umboð at røkja uttanríkismál, hægstarætt og sjóverju. Longu í 1920 stovnaðu íslendingar egnan hægstarætt. So líðandi tóku teir størri partar av sjóverjuni upp á seg. Eisini í uttanríkismálum tóku íslendingar so við og við størri lut.

Sambært sáttmálanum høvdu íslendingar og danir hvørjir sín ríkisborgaraskap, men danskir borgarar høvdu sama rætt í Íslandi sum ís-

lendskir borgarar, og íslendskir borgarar sama rætt í Danmark sum danskir borgarar.

Ísland og Danmark høvdu sama gjaldoyra, meðan norðurlendska gjaldoyrasamgongan stóð við til 1931. Eftir hetta fekk Ísland egið gjaldoyra.

Avtalað varð, at veitingin úr danska ríkiskassanum til íslendsk sermál, sum hevði verið 60.000 kr. árliga, datt burtur, men kapitaliseraða virðið av hesi árligu veiting, tilsamans tvær milliónir krónur, varð sett í tveir grunnar, ein íslendskan og ein danskan. Peningur úr grunnunum skuldi latast til mentamál og áherðsla leggjast á at styrkja mentanarliga samstarvið landanna millum.

Eftir árslok 1940 kundi hvør parturin krevja sáttmálan endurskoðaðan, og fekst ikki semja um tað, kundi hvør parturin siga sáttmálan upp. Í tí landi, ið segði upp sáttmálan, skuldi uppsøgnin góðkennast við fólkaatkvøðu.

Eftir at Danmark og Ísland vórðu hersett í 1940, hvørt av sínum parti, varð sáttmálin uppsagdur, og 17. juni 1944 gjørdist Ísland lýðveldi.

4. partur lýsir skipanir millum heimastýri og fullveldi. Umrøtt verður, hvussu viðurskifti millum ríkisstjórnir og ríkislutastjórnir kunnu verða skipað. Nomið verður við skipanir, ið geva meira sjálvstýri enn núverandi heimastýrisskipan, uttan at nýtt ríki verður stovnsett. Víst verður á, hvussu slíkar skipanir eru í ymsum londum. Hetta verður gjørt við atliti at viðurskiftunum Føroya og Danmarkar millum.

Víst verður á hesar høvuðsleiðir: Troyting av núverandi heimastýrislóg, rúmari heimastýri innan galdandi grundlóg, víðtøkt sjálvstýri undir broyttari danskari grundlóg og frælsan felagsskap við Danmark.

Í orðaskiftinum um stjórnarrættarligu støðu Føroya hevur serliga verið víst á hesar meginvansar við heimastýrisskipanini: (1) At heimastýrið kann sigast at vera grundað á umboð (*delegatión*), ið einvíst kann verða afturtikið, (2) at løgtingslógir kunnu sigast at vera á lægri rættarstigi enn ríkislógir, og (3) at Føroyar undir tílíkari skipan hava avmarkaðar møguleikar fyri øktari luttøku í millumtjóða samstarvi.

Ávísir møguleikar eru framvegis fyri at troyta núverandi heimastýrislóg, men í sjálvum sær hevði hetta ikki borið í sær nøktandi loysnir av omanfyri nevndu vansum.

Eisini tykist sera ivasamt, um ein broytt heimastýrisskipan innan galdandi grundlógarkarm kundi loyst nevndu vansar.

Tá ið havt verður í huga, at mannagongdin fyri grundlógarbroyting setur so stór krøv, at danir ikki tykjast sinnaðir at gera broytingar, ið annars verða mettar ynskjandi av innlendis donskum ávum, tykist

møguleikin at víðka heimastýrið við grundlógarbroyting veruleikafjarur, og verður tí ikki gjørt meira burtur úr honum.

Víst verður at enda á tann møguleika, at framtíðarstøða Føroya verður skipað leys av donsku grundlógini, men í sáttmála við Danmark. Í tílíkum sáttmála fáa føroyingar fult ræði á egnum viðurskiftum. Tó verða uttanríkismál og verjumál undir donskum yvirræði. Sum part av sáttmálagerðini verður fráboðað Sameindu tjóðum í orðsending, at Danmark og Føroyar hava gjørt sáttmála sínámillum um frælsan felagsskap (*free association*). Sáttmálin kann einans verða broyttur í semju partanna millum, tó kunnu Føroyar einvíst siga sáttmálan upp og stovna egið fullveldisríki.

**5. partur** er um smátjóðir við fullveldi. Í heiminum eru 10 smáríki (*microstates*), ið hava fólkatal sum Føroyar ella minni. Vanligt er at skilmarka smáríki sum ríki við fólkatali um eina millión og minni. Av heimsins stívliga 190 londum við fullveldi, eru 43 slík smáríki. 28 teirra eru oyggjaríki, og 15 hava færri enn 100.000 íbúgvar.

Í flestum førum eru smáríki stovnað í semju við gamla miðveldið. Flest smáríki høvdu í hjálandastøðu síni sera avmarkaðan og heftan búskap. Royndirnar hjá teimum, við fáum undantøkum, hava verið munandi vøkstur og fjølbroytni í búskapinum. Búskaparliga alheimsgerðin hevur stuðlað upp undir hesa gongd.

Ymiskt er, hvussu smáríki hava skipað seg og luttikið í millumtjóða samstarvi. Hóast avmarkaða umsitingarorku hava mong teirra kunnað framt síni áhugamál í altjóðaskipanini, lutvíst við egnari umboðan og lutvíst gjøgnum samstarv við grannalond, ofta gamla miðveldið.

Trygdartørvurin hjá smáríkjum hevur ofta kunnað verið nøktaður í samstarvi við grannalond, og einans fá teirra hava egna hermegi.

Í flestøllum førum hava smáríki hildið fram at hava vinarlig sambond við gamla miðveldið, bæði viðvíkjandi hjálp og íløgutiltøkum, umframt millumstjórnasamstarvi, heruppií samstarvi á trygdarøkinum. Hetta hevur eisini havt við sær framhald av gomlum ferða- og samstarvsmynstrum, sum vóru framman undan sjálvstøðuni. Ungdómur úr smáríkinum fer ofta undir hægri lestur í gamla miðveldinum, har ið mál og onnur mentanarfyribrigdi eru kunnug. Í summum førum hava smáríki havt felags kong við miðveldið.

Fullveldisstøðan gevur smáríkjum beinleiðis samband við fremmandar stjórnir og millumríkja felagsskapir, ið er eitt týdningarmikið amboð at røkja áhugamál landsins. Samstundis krevur henda støða eisini, at førdur verður ein ábyrgdarmikil trygdar- og búskaparpolitikkur.

6. partur viðger altjóðarætt og føroyskt fullveldi. Her verða lýstar reglur í altjóðarætti, ið kunnu hava týdning fyri skipan av Føroyum sum ríki við fullveldi. Fyrst verður í høvuðsdráttum greitt frá altjóðarætti. Harnæst verður greitt frá teimum formligu reglunum og krøvunum til stovnan av nýggjum ríki sambært klassiskum altjóðarætti. Síðan verður sagt frá teirri kollveltandi gongdini, ið tók dik á seg eftir seinna heimsbardaga, og sum hevði við sær, at hugtakið sjálvsavgerðarrættur tjóðanna frá at vera ein politisk hugsjón gjørdist ein mestsum alment viðurkend løgfrøðilig grundregla, ið fann sítt endaliga skap í teirri søgugongdini, ið vanliga verður nevnd avtøka av hjálandaveldinum (*decolonization*). Týdningurin av sjálvsavgerðarrættinum fyri støðu føroyinga í dag, tá ið um ræður skipan av føroyskum fullveldi, verður eisini viðgjørdur. At enda verða søgd nøkur orð um viðurkenning av nýggjum ríkjum og rættindi og skyldur teirra sum partur av altjóða samfelagnum.

7. partur viðger stjórnarrætt og føroyskt fullveldi. Danska grundlógin hevur ongantíð havt nakra fortreyt um, at danska ríkið ikki kann lutast sundur. Grein 1 í grundlógini frá 1953 sigur ikki, at umveldi ríkisins er grundlógartryggjað, so at tað einans kann verða minkað samsvarandi reglunum um grundlógarbroyting í grein 88.

Av grein 19 í grundlógini skilst greitt, at umveldi ríkisins kann eins væl verða minkað og verða økt, uttan at tað krevur grundlógarbroyting. Stjórnin hevur myndugleika til tess, men skal tryggja sær samtykki fólkatingsins.

Ásetingarnar í grundlógini, har ið Føroyar eru nevndar, t.d. um fólkatingsumboðini, verða standandi óvirknar, fara Føroyar úr ríkinum. Sostatt er einki í grundlógini til hindurs fyri, at umveldi ríkisins verður minkað, so at tað ikki fevnir um Føroyar longur.

8. partur viðger mannagongdir fyri sáttmálagerð og staðfesting av fullveldissáttmálanum. Her verður greitt frá teim fyriskipaðu mannagongdunum í ávikavist Føroyum og Danmark fyri sáttmálagerð og staðfesting av millumtjóða sáttmála, ið skipar Føroyar sum fullveldisríki.

Í Føroyum verður mannagongdin samsvarandi ásetingunum í grein 52 og grein 54 í stýrisskipan Føroya. Tær eru um myndugleika landsstýrisins við samtykki frá løgtinginum at gera sáttmálar, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintir, ella sum annars eru týdningarmiklir. Landsstýrið førir samráðingarnar Føroya vegna, ráðførir seg við uttanlandsnevnd løgtingsins um gongdina og leggur úrslitið fyri løgtingið til góðkenningar.

Stýrisskipan Føroya hevur onga áseting um fólkaatkvøður. Lands-

stýrið hevur tó í viðmerkingum sínum til uppskot til samtyktar boðað løgtinginum frá hesum: ”Sáttmálin verður lagdur fyri løgtingið, og tá ið løgtingið hevur samtykt hann, verður hann lagdur til fólkaatkvøðu til góðkenningar.” Løgtingið samtykti uppskotið 2. oktober 1998.

Um stjórnarrættarligar mannagongdir í Danmark er at siga, at fullveldissáttmálin kann gerast sum ein vanligur altjóðarættarligur sáttmáli, har ið danska avgerðin verður tikin sambært ásetingunum í grein 19 í grundlógini um myndugleika stjórnarinnar við samtykki frá fólkatinginum at minka um umveldi ríkisins. Onnur mannagongd er at leggja lógaruppskot fyri fólkatingið til samtyktar, sum fevnir um tann altjóðarættarliga sáttmálan, ið frammanundan er gjørdur millum Føroyar og Danmark.

9. partur er um fyrisiting. Í fyrisitingarálitinum, sum er seinna fylgibind til hesa frágreiðing, verður útgreinað, hvørji ábyrgdarøkini hjá donsku ríkismyndugleikunum eru í Føroyum, eins og hugt verður at, hvussu nógv tey donsku økini kosta í dag.

Samanumtikið kann verða sagt, at hóast meginparturin av føroyska samfelagnum verður rikin eftir føroyskum lógum og fyrisitin av føroyskum myndugleikum, setur fullveldisætlanin stór krøv til bæði lóggávu, fyrisiting og fígging.

Danska ríkið hevur framvegis ábyrgdina av fleiri stórum økjum, sum koma undir føroyskt málsræði, verður fullveldisætlanin sett í verk. Tey tyngstu av teimum eru fiskiveiðieftirlit, tilbúgving, havumhvørvisvernd, skipatryggleiki, flogferðsla, fólkakirkja, fíggjareftirlit, dómsvald, ákæruvald, løgregla og uttanríkismál – heruppií trygdarmál og luttøka í millumtjóða felagsskapum.

Myndugleikarnir eru farnir at fyrireika seg til at fáa undir føroyskt málsræði økini skipatryggleika, flogferðslu, tilbúgving, havumhvørvisvernd og fólkakirkju.

Verður fullveldisætlanin sett í verk, verður neyðugt antin sum skjótast at fara undir fyrireikingar til eisini at taka við ábyrgdini av hinum nevndu økjunum, ella at gera ásetingar um, at Danmark í eina tíð umsitur tey - ella nøkur av teimum - Føroya vegna.

Harafturat verður tørvur á at kanna, hvussu fyrisitingin betur kann lagast til føroyskar fortreytir.

Á at kalla øllum økjum er samstarv millum føroyskar og danskar myndugleikar og stovnar. Tað er týdningarmikið at tað í fullveldissáttmálanum verður ásett, at hetta samstarv kann halda fram.

Tann rættur, sum danskur ríkisborgaraskapur gevur føroyingum, ið fáa sær útbúgving uttanlands, eigur eisini at verða tryggjaður í fullveldissáttmálanum, soleiðis at vit ikki missa hesi rættindi frá degi til

dags, men fáa eina tíð at leggja framtíðarviðurskiftini á hesum øki til rættis.

Ein eyðsæddur møguleiki er, at hetta verður gjørt við eini áseting um, at føroyingar og danir í skiftistíðini hava full rættindi hvør hjá øðrum. Hetta var galdandi millum Ísland og Danmark, tá ið Ísland fekk fullveldi, og slíkar semjur við fyrrverandi miðveldið eru vanligar, tá ið smá lond fáa fullveldi.

Tað kundi eisini verið gjørt við eini áseting sum sigur, at føroyingar, ið eru føddir sum danskir ríkisborgarar, varðveita síni rættindi sum danir.

10. partur er um búskap. Búskaparfrágreiðingin er fyrra fylgibind til hesa frágreiðing, og har verður mett um, hvønn týdning útreiðslur ríkisins í Føroyum hava fyri tann føroyska búskapin, og hvussu tað fer at ávirka búskapin, um hesar útreiðslur minka burtur.

Ríkisútreiðslurnar í Føroyum svara til umleið 30% av øllum teimum almennu inntøkunum í landinum. Í 1997 vóru tær almennu inntøkurnar umleið 4,4 mia. kr, og har av vóru ríkisútreiðslurnar umleið 1,3 mia. kr.

Størsti parturin av hesum pengum er heildarveitingin til landskassan (blokkstuðulin), sum er umleið 900 mió. kr. Útreiðslurnar sum eru av at reka ríkisstovnar í Føroyum eru eisini taldar við. Tær eru umleið 300 mió. kr., harav størsti parturin fer til *Færøernes Kommando.*

Harafturat koma pensiónir, sum eru umleið 100 mió. kr. um árið. Hetta er peningur, sum ríkismyndugleikarnir rinda einstøkum persónum í Føroyum, og upphæddin er tí ikki knýtt at stjórnarrættarligu støðu Føroya.

Aðrar útreiðslur og inntøkur, ið ikki eru so neyvt upplýstar í almennum yvirlitum, og nýggjar inntøkur, sum kunnu koma við føroyskum fullveldi, verða ikki viðgjørdar í búskaparfrágreiðingini.

Í Føroyum hevur innlendski eftirspurningurin ikki bara lagað seg at tí, sum landið sjálvt hevur framleitt, men eisini at veitingunum frá danska ríkinum og lántøku í útlondum.

Í tíðarskeiðinum 1962-1989 var eftirspurningur føroyinga í miðal 13% størri enn framleiðslan. Síðan 1990 hava nýtslan og íløgurnar tó í miðal verið 7% minni enn framleiðslan.

Tað, at nýtslu- og íløgustigið hevur verið lægri enn framleiðslan hevur havt við sær stórt og varandi avlop á gjaldsjavnanum. Hetta er eindømi í nýggjari føroyskari búskaparsøgu, og tað ger, at løgir nú eru til at laga búskapin at minkandi ríkisveitingum uttan at minka so nógv um eftirspurningin og virksemið, sum annars hevði verið neyðugt.

Fara almennu kassarnir framhaldandi at hava avlop, og tann al-

menna skuldin harvið heldur fram at minka, ber til at nýta ein alt størri part av hesum avlopi til at fíggja minkingina av ríkisútreiðslunum.

Greitt er, at tá ið ríkisútreiðslurnar í Føroyum minka, verður tað almenna lutfalsliga minni. Hetta hevur við sær, at eftirspurningurin frá tí almenna eisini verður lutfalsliga minni, og tí verður útboðið frá vinnuni til hitt almenna av vørum og tænastum ein minni partur av samanlagda útboðnum.

Tá ið ríkisútreiðslurnar verða nýttar í føroyska samfelagnum, koma nøkur ringárin (eisini nevnd *multiplikatoreffekt*), sum økja um tjóðarinntøkuna og um skattagrundarlagið. Tí kann tað fáa álvarsamar avleiðingar um ríkisútreiðslurnar minka so skjótt, at neyðugt verður at fíggja minkingina við stórum skerjingum innan tað almenna. Hendir tað, mugu tær almennu útreiðslurnar í Føroyum, orsakað av nevndu ringárinum, minkast við eini størri upphædd, enn ríkisútreiðslurnar minka.

Tí er sera umráðandi, at vinnulívið fær stundir at laga seg til tær nýggju fortreytirnar. Hendir tað ikki, minkar eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi. Ein slík gongd skapar arbeiðsloysi, og kann gera, at fólk flytur í onnur lond.

Men tá ið ein tíð er liðin, hevur hetta við sær fall (ella minni vøkstur) í lønarlagnum, bøtt kappingarføri í útflutningsvinnuni, og harvið vaksandi framleiðslu. Sum frá líður hevur hetta aftur við sær, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi økist, og at fólk aftur flytur til landið. Tá eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi so gerst størri enn útboðið, hækkar lønarlagið aftur.

Búskaparvøkstur kann eisini hava við sær vaksandi almennar inntøkur, sum kunnu nýtast til at fíggja minkingina av ríkisútreiðslunum, soleiðis at tað slepst undan beinleiðis almennum sparingum. Hetta krevur tó, at meirinntøkurnar ikki verða nýttar til almennar útreiðslur, og tað hevur við sær, at hitt almenna verður at vaksa spakuligari enn búskapurin sum heild, soleiðis at almenni parturin av heildarbúskapinum sum frá líður minkar.

Verður búskaparvøksturin komandi árini varisliga mettur til 2%, sum svarar til helvtina av søguliga vøkstrinum í útflutninginum, skuldi verið óneyðugt hjá tí almenna at framt beinleiðis niðurskurðir, so hvørt sum ríkisútreiðslurnar minka, um so er, at tær minka eftir einum longri áramáli, t.d. 15-20 árum.

Avgerandi fortreyt fyri lagaligari búskapartillaging er tó, at løgting og landsstýri megna at taka skynsamar avgerðir um fíggjarpolitikkin í longri tíðarskeið.

Búskaparstýringin eigur at verða grundað á, at høvuðsinntøkukeldurnar í føroyska búskapinum, heruppií ríkisútreiðslurnar, eru óvissar.

Til tess at minkingin í ríkisútreiðslunum ikki skal fáa ov skaðilig árin á føroyska búskapin, verður rátt til, at fíggjarpolitikkurin verður lagaður at eini varisligari meting av sonevndu *støðuginntøkuni* av ríkisútreiðslunum. Støðuginntøkan er ein støðug upphædd, sum tað almenna kann nýta í framtíðini, eisini eftir at ríkisútreiðslurnar eru burtur. Hugskotið er, at tað almenna ikki nýtir allar tær árligu ríkisútreiðslurnar, men sparir ein part av teimum saman, meðan tær enn eru stórar. Støðuginntøkan er tað árliga avkastið, sum henda samansparing gevur tí almenna.

Tørvur er á styrktum mannagongdum fyri fíggjarlógararbeiðið. Stjórnarskipanarligar bindingar á fíggjarpolitikkin, heruppií bann fyri, at almennu kassarnir seta seg í skuld, kunnu verða umhugsaðar.

Mælt verður til, at lata óheftar altjóða búskaparligar góðskumetingarstovnar (*rating agencies*) ummæla almennu fyrisitingina og føroyska búskapin sum heild.

Harumframt kann stovnast serligur *búskapargrunnur*, møguliga við norska oljugrunninum sum fyrimynd. Í grunnin skulu m.a. beinast *serinntøkur*, soleiðis at ótryggar inntøkur ikki órógva búskapargongdina í samfelagnum. Serinntøkur eru inntøkur sum eru skiftandi, óvissar ella tíðaravmarkaðar, sum t.d ríkisútreiðslur í Føroyum, oljuinntøkur og inntøkur, sum kunnu standast av, at almennar fyritøkur verða privatiseraðar. Búskapargrunnurin kann verða við til at tryggja støðuga búskaparmenning, ið ikki hvílir á ótryggum inntøkugrundarlagi. Hesin grunnurin hevði virkað sum eitt fríholt, sum ger, at serinntøkurnar verða brúktar skynsamt, sum frá líður.

Viðvíkjandi gjaldoyranum verður víst á, at fyri Føroyar hevði verið hent um galdandi gjaldoyraskipan við donsku krónuni sum grundgjaldoyra, varð broytt til eina gjaldoyraskipan við evruni sum grundgjaldoyra.

# Hugtakið fullveldi

Hugtakið fullveldi (á enskum: *sovereignty*, á donskum: *højhedsret*) hevur langa søgu, bæði í stjórnarrætti og altjóðarætti. Hildið hevur verið, at ein og hvør rættarskipan má byggja á eina grundvallarheimild, ið so at siga lá uttan fyri ella omanfyri sjálva rættarskipanina, skuldi henni ikki vanta veruligan myndugleika og trúvirði.

Upprunin at fullveldishugtakinum er átrúnaðarligur. Einans hjá Gudi fanst tað fullkomna veldi, sum heimsins fúrstar umboðaðu á foldum. Pávin, ið stóð á odda fyri einasta "heimsveldi" eftir tátíðar meti, vildi vera tann fremsti millum fúrstanna, og í stríðnum við týsku keisararnar var støða hansara sum Guds umboð á fold evsta hugmyndafrøðiliga vápnið. Hetta stríðið endaði við sigri fyri fúrstarnar, og við trúbótini og upplýsingartíðini gjørdist neyðugt at leita eftir aðrari kjølfestu til fullveldið enn teirri gudgivnu.

Stríðið um evsta valdið í samfelagnum var drúgt og mangan blóðugt, men endin varð, ið hvussu er um okkara leiðir, at fólkið vann, og fólkaræðið varð alment viðurkent sum einasta sannførandi samfelagsskipan. Evsta heimildin til alt stjórnarvald liggur sostatt hjá fólkinum, ið útinnir hetta vald gjøgnum síni kosnu umboð.

Hægsta ríkisvaldið er vanliga tríbýtt, lóggávuvald, útinnandi vald og dómsvald. Innlendis fullveldi verður vanliga lýst sum evsta vald á tí umveldi og tí fólki, ið hoyrir ríkinum til. Við øðrum orðum er tað einkarættur stjórnarvaldsins at skipa og uppihalda landsins lógum og at verja land og fólk fyri uppílegging uttaneftir.

Tá ið fullveldishugtakið verður nýtt í altjóðarætti, er myndin ikki fult so greið, tí ein av grundreglunum undir altjóða samskifti er, at øll fullveldisríki eru javnsett. Einki ríki kann tí sigast at hava fullveldi í altjóða høpi, um hugtakið skal merkja tað sama sum í innlendis høpi, nevniliga evsta vald at skipa lóg og rætt. Altjóðarættur verður júst ikki skipaður á sama hátt sum tjóðarrættur, tí í altjóða samfelagnum er eingin lóggevi, ið hevur myndugleika til einvíst at áseta, hvat er galdandi rættur, bindandi fyri limirnar í altjóða samfelagnum, sum fyrst og fremst eru fullveldisríki.

Í grein 2 stk. 1 í stovningarsáttmála Sameindu tjóða verður sagt, at felagsskapurin er grundaður á javnstøðu í fullveldi (*the sovereign equality*) hjá øllum limaríkjunum, meðan grein 2 stk. 7 setur bann fyri uppílegging í viðurskifti, sum eru avgerandi partur av innlendis løgdøminum hjá einum ríki.

Í yvirlýsingini hjá ST-aðalfundinum frá 1970 um vinalig viðurskifti og samstarv landa millum, er ein partur um javnstøðu ríkjanna í fullveldi, ið verður lýst soleiðis:

*Øll ríki eiga javnstøðu í fullveldi. Tey eru javnsett til rættindi og skyldur og eru javnbjóðis limir í altjóða samfelagnum, hóast ymisk til búskaparligar, samfelagsligar, politiskar og aðrar umstøður. Javnstøða í fullveldi fevnir serstakliga um hesi evni:*

*(a) Øll ríki eru løgfrøðiliga javnsett.*
*(b) Hvørt ríki eigur tey í heilum fullveldi íbornu rættindi.*
*(c) Hvørt ríki hevur skyldu at virða persónleikan hjá øðrum ríkjum.*
*(d) Landøkið og politiska frælsið hjá einum ríki eru friðhalgað.*
*(e) Hvørt ríki hevur rættin til í fullum frælsi at kjósa sær og menna sínar politisku, samfelagsligu, búskaparligu og mentanarligu skipanir.*
*(f) Hvørt ríki hevur skyldu til trúliga og til fulnar at halda sínar altjóða skyldur og at binda frið við onnur ríki.*

Fullveldið hjá einum ríki ber sostatt sambært altjóðarætti í sær, at tað er ikki undirgivið nøkrum øðrum ríki, og at onnur ríki kunnu ikki leggja seg út í tess innlendis viðurskifti. Bert ríki við fullveldi kunnu gerast limir í Sameindu tjóðum, meðan fleiri av serstovnum Sameindu tjóða loyva londum, ið ikki hava fullveldi, limaskap.

Meðan felagsskapir og einstaklingar í ávísan mun kunnu hava rættindi og skyldur sambært altjóðarætti, eru tað bert fullveldisríki, ið kunnu skapa altjóðarætt, annaðhvørt við sínum atburði (siðvenjurætti) ella við sáttmálum (sáttmálarætti). Altjóðadómstólurin hevur einans rætt at døma í ósemjum millum tey lond, ið staðiliga hava viðurkent myndugleika dómstólsins.

Fullveldi er tó ikki óavmarkað. Av sjálvum fullveldishugtakinum fylgir sum nevnt, at einki ríki hevur rætt at leggja seg út í innlendis viðurskiftini hjá øðrum ríkjum. Hendan reglan, ið er staðfest í grein 2 stk. 7 í stovningarsáttmálanum hjá ST, hevur tó ikki forðað Sameindu tjóðunum í at leggja seg út í viðurskiftini í einum landi, tá ið tað ræður um grov mannarættindabrot og onnur viðurskifti, ið altjóðasamfelagið fordømir. Sambært VII. kapitli í ST sáttmálanum kann trygdarráðið somuleiðis skipa fyri tiltøkum móti einum landi, ið verður mett at hótta altjóða friðin. Harafturat kemur, at tað verður alt meira viðurkent, at altjóðarættur loyvir uppílegging í innlendis viðurskifti hjá einum ríki av humaniterum grundum. Semja er tó ikki um hetta, ella um hvørjar treytirnar skulu vera fyri tílíkari uppílegging.

At eitt ríki hevur sáttmálabundið seg til altjóða samstarv, ið leggur band á fullveldi tess, kann ikki sigast at vera løgfrøðilig avmarking av fullveldinum, ið hvussu er ikki í tann mun, sáttmálin kann sigast upp, sum er tað vanliga. Hinvegin eru mong dømi í altjóða siðvenjurætti (*customary law*) um avmarkingar í fullveldinum. Eitt teirra er støðuga menningin av mannarættindunum seinastu árini og vaksandi uppíleggingin frá altjóða samfelagnum í innlendis viðurskifti hjá ríkjum, ið grovliga gera seg inn á hesi rættindi.

Í Evropa hava tvinni rák seinastu árini ført til munandi skerjingar í veruliga innihaldinum í fullveldinum hjá øllum teimum mest týðandi ríkjunum í heimspartinum. Tað fyrra er búskaparliga og politiska samstarvið í Evropiska samveldinum (ES), ið sum frá hevur liðið er vorðið alt meira umfevnandi og djúpgongt. Á teimum mongu týðandi samfelagsøkjum, ið samstarvið fevnir um, er lóggávuvaldið í roynd og veru hjá samveldismyndugleikunum, og sama er galdandi fyri dómsvaldið. Henda gongd gerst uppaftur greiðari, nú talan tykist vera um at skipa okkurt slag av evropaheri í tilknýti til hetta samstarvið.

Hitt rákið er evropiska mannarættindaverjan, ið uttan samanbering er tann framkomnasta í øllum heiminum, bæði tá ið ræður um tey rættindi, ið eru sáttmálavard, og ta verju, ið evropiski mannarættindadómstólurin hevur møguleika at fremja í verki.

Í báðum førunum, ið nevnd eru frammanfyri, ber til at føra fram, at einki ríki er bundið at vera við í hesum samstarvi uttan av egnum vilja, og í so máta er fullveldið framvegis óskalað. Hetta er helst rætt, hóast ongar uppsagnarreglur eru í ES-sáttmálanum, men í royndum man tað fara at gerast alt veruleikafjarari at fara burturúr, tess meira veruliga valdið verður miðsavnað, og tess drúgvari samstarvið gerst.

At Føroyar ikki hava fullveldi undir heimastýrisskipanini er eyðsæð. Lógin sjálv tilskilar greitt, at skipanin er av stjórnarrættarligum slagi, og at lóggávuvaldið og útinnandi valdið hjá heimastýrinum eru avmarkað til yvirtikin sermál. Harafturat kemur, at dómsvaldið als ikki kann yvirtakast sambært heimastýrislógini.

Gerast Føroyar fullveldisríki, fáa tær lut í altjóðasamfelagnum sum onnur ríki og kunnu sostatt luttaka í altjóða samstarvi á jøvnum føti við tey. Sum danska-íslendska samveldislógin frá 1918 sýnir, forðaði tað ikki Íslandi at verða viðurkent sum fullveldisríki, at ávís grundleggjandi samfelagsmál sum dómsvald, uttanríkismál og sjóverja framhaldandi skuldu verða røkt av Danmark. Ein líknandi skipan Føroya og Danmarkar millum skuldi sostatt heldur ikki verið til hindurs fyri, at Føroya fullveldi varð viðurkent av altjóða samfelagnum.

# Stjórnmálasøga Føroya

Stjórnmálasøga Føroya er serstøk á tann hátt, at semja í høvuðsheitum tykist vera um stjórnmálastøðu Føroya tær fyrstu øldirnar, meðan ósemjan um, hvussu vit skulu skilja støðuna, verður alsamt størri, longri fram í tíðina komið verður. Ósemjan snýr seg í høvuðsheitum um tulking av fyriliggjandi heimildum og kendum hendingum við atliti at tilknýti Føroya til ríkini Noreg og Danmark.

## Miðøld – frá sjálvstøðu til skattland

Føroyar vóru eitt sjálvstøðugt land, frá tí at tey fyrstu norrønu niðursetufólkini úr Noregi, og helst eisini úr norrønt ávírkaðum bretskum oyggjum og strandaøkjum (m.a. Hetlandi og Orknoyggjum), búsettust her fyri góðum ellivuhundrað árum síðan.

Eftir norrønum siði vórðu ting rættiliga skjótt skipað kring um í oyggjunum, og felags fyri allar føroyingar var altingið í Tinganesi í Tórshavn, har allir frælsir menn kundu møta til tess at greiða ósemjur og tingast um felagsmál landsins. Altingið gav lógir og dømdi í rættarmálum, umframt at tingið eisini viðgjørdi ymisk mál av felags týdningi fyri føroyingar.

Í nøkur ættarlið hava Føroyar havt hesa støðu sum eitt óheft og sjálvstøðugt land. Tá ið Føroyar verða nevndar land í hesum høpi, er týdningurin landafrøðiligur, politiskur og rættarligur. Landafrøðiliga eru Føroyar greitt skildar frá øðrum londum. Politiskt og rættarliga var hetta landið skipað sum ein eind við felags tingi og rættarskipan, seinni eisini við føroyskari løgbók.

Hóast Føroyar í hesi tíð vóru eitt sjálvstøðugt land, ber neyvan til at tala um eitt ríki, tí eingin veruligur felags myndugleiki tykist hava verið. Tað hevur verið eitt meira leysliga skipað samfelag, har fleiri høvdingar og stórmenn hava havt meira ella minni ræði hvør í sínum parti av landinum. Í okkara viðgerð hevur tað tó mestan týdning, at tingið var ein samskipandi, lóggevandi og dømandi stovnur í hesum samfelag, ið m.a. hevur skulað forða fyri, at høvdingar og onnur tóku rættin í egnar hendur. Hesa friðarvarðveitandi uppgávu fekk altingið kortini ikki altíð framt, tí einki veruligt útinnandi vald var annað enn tað hjá høvdingunum.

Stríðið millum høvdingarnar Sigmund og Trónd er kent úr Før-

oyingasøgu. Hetta stríð er eisini dømi um, at føroyingar hava roynt at seta seg ímóti royndum hjá norskum kongum at fáa teir undir vald sítt.

Sambært Føroyingasøgu fóru Føroyar undir norskan kong á døgum Leivs Øssurssonar og Magnusar kongs Ólavssonar (1035-1047). Noregssøga frá umleið 1180 sigur frá, at tá lótu føroyingar Noregskongum skatt. Føroyar vóru skattland, onkuntíð eisini nevnt atland, hjá Noregskongi. Her skal tó verða víst á, at tað í miðøld ikki altíð var samsvar millum skattskyldu og tegnskyldu, og fyri tað, um føroyingar lótu kongi skatt, er ikki eyðsæð, at teir eisini vóru kongsins tegnar í øðrum viðurskiftum. Frásagnirnar um Trónd og Sigmund og gátuføru lagnu Karls hins mørska, benda á, at føroyingar sum longst hava hildið seg undan at koma undir beinleiðis kongsvald.

Tá ið stjórnarvald varð skipað í miðøld, bar ikki til at skilja millum hugtøkini altjóðarætt og stjórnarrætt. Valdið var bæði býtt millum kong, aðalsmenn og onkuntíð keisara, og millum verðsligu valdsharrarnar og kirkjuna, sum umframt sína leiðandi átrúnaðarligu støðu eisini umsat nógv tímiligt vald, ið rakk tvørturum landamørkini. Stundum hevði kirkjan yvirlutan í maktjavnvágini við kongsvaldið, og stundum tók kongur sær størri vald, sum søgan sigur um Sverra kong í Noregi, tá ið „hann talaði Roma beint ímót" og varð bannlýstur.

Ólavur kongur heilagi læt í sínum níggjunda ári í 1024, sambært Føroyingasøgu, seta lógir í gildi í Føroyum. Vanligar verðsligar lógir hava hetta neyvan verið, men sama ár læt Ólavur kongur smíða kristnirætt fyri Noreg. Helst vóru hesar lógir tí ein kristnirættur. Kristnirættur var í gildi fram til trúbótina. Í katólskari tíð umsat kirkjan henda partin av rættarskipanini, ið m.a. fevndi um nógv av tí, vit nú á døgum nevna familjurætt.

Norska landslógin frá 1274 varð sett í gildi í Føroyum við samtykt á altingi, ið við hesi avgerð samstundis tók seg sjálvt av. Aftan á hetta var eingin innlendskur lóggevandi myndugleiki í Føroyum. Tingið fekk nú heitið løgting.

Sum nevnt var serstakur útinnandi myndugleiki ikki í elstu tíðum annar enn tað avmarkaða valdið hjá høvdingunum í Føroyum. Seinni í tíðini fór útinnandi valdið so líðandi at liggja hjá kongi, og varð tá í Føroyum útint av embætismonnum hansara. Stutt fyri ár 1200 og aftur í rættarbótini frá 1271 verða kongsins umboðsmenn í oyggjunum nevndir sýslumenn. Í skjali frá 1407 verður ein sýslumaður nevndur í Suðuroy. Um hesa tíðina verður kongsins umboðsmaður í oyggjunum helst nevndur fúti.

Eingi tekin eru um, at norskir kongar løgdu seg út í verðsligu lóggávuna fyri Føroyar fyrr enn seinast í trettandu øld. Men í rættarbót Magnusar Hákunarsonar Lagabøtara í 1271 varð sagt, at í Føroyum

skuldu ganga tær lógir, sum gingu um alt Gulating (løgdømi í Vesturnoregi), men at búnaðarbólkurin (lóggávan um landbúnaðarmál) skal vera eftir tí, sum løgbók teirra sjálvs váttar áður. Seyðabrævið frá 1298 tók av búnaðarbólkin, sum varð verandi eftir frá gamlari føroyskari lóg undan 1274. Seyðabrævið tók tó eftir øllum at døma støði í teirri gomlu føroysku lógini. Tann upprunaliga føroyska løgbókin er ikki til skjals.

Kongur tók sær við landslógini rætt til bøtur, men játtaði at lækka tær niður í ein triðing av tí, sum norska løgbókin ásetti. Eisini skuldi kongur hava sýslumann í oyggjunum. Mangt bendir á, at henda rættarbót samstundis var ein sáttmáli millum føroyingar og Noregs kong. Hetta minnir rættiliga nógv um Gamla sáttmála, sum íslendingar gjørdu við Noregskong í 1262. Íslendingar vístu í kjakinum kring donsku grundlógina í 1849 til Gamla sáttmála, tá ið teir grundgóvu fyri, at Ísland ikki var partur av Danmarkar ríki.

Stóru lógarbroytingarnar seinast í 13. øld høvdu við sær, at kongur vann sær bæði lóggevandi og útinnandi valdið í Føroyum. Um somu tíð hendu líkar broytingar í Íslandi. Har var tó heitið *alting* varðveitt.

Sum nevnt hevði løgtingið ikki vald til at geva lógir. Virksemi tess var tískil tvíbýtt:

1. Dómstólur við løgmanni sum formanni í løgrættinum og yvirdómara. Løgrættumenninir vóru 36. Tó luttóku teir ongantíð fleiri enn tólv í dómsmálum.
2. Stovnur, sum viðgjørdi felagsmál landsins. Harumframt samtykti løgtingið eisini føroyskar serskipanir sum Hundabrævið og Skipanina um tingfaratoll.

Um stjórnmálastøðu Føroya kann samanumtikið sigast, at Føroyar sum land komu undir vald Noregskongs, men tað er ivasamt, um til ber at siga, at Føroyar nakrantíð gjørdust ein fullkomiliga samrunnin partur av norska ríkinum.

Føroyingar góvu seg undir valdið hjá Noregskongi og komu tann vegin undir valdið hjá felags danska-norska konginum við sameiningini av tí norska og danska kongsvaldinum í sama kongi í 1380. Danska-norska samveldið varð formliga staðfest í einum tvíríkjasáttmála, Bergenssáttmálanum frá 1450, har ríkisráðini í báðum ríkjum vóru undirritarar. Føroya biskupur hevði sæti í norska ríkisráðnum, men var ikki á hesum týdningarmikla fundi.

Av tí, at Føroyar hoyrdu til veldið hjá norska konginum, vórðu tær sum frá líður stýrdar av donskum kongum, men einans av teirri orsøk, at teir samstundis vóru norskir kongar. Heimildir týða á, at Føroyar alla tíðina vórðu viðgjørdar sum eitt serstakt land, ein politisk eind

fyri seg, bæði eftir at tær vóru komnar undir norskan kong og eftir, at danski-norski kongurin hevði fingið einaveldi.

Kongur, sum nú sat í Keypmannahavn, skrivaði til føroyingar í 1569, at hann viðurkendi, at løgmaður og løgting umboðaðu felags mál landsins.

Sambært fornum norrønum stjórnarskipanum gjørdu alting av, hvør ið kongur skuldi vera, og hvussu leingi hann skuldi sita. Eftir at Noreg í 1152/53 varð gjørt til eitt kirkjudømi við erkibiskupssæti í Tróndheimi, staðfesti ein nýggjur samfelagsstovnur, *høvdingafundur*, kongsval og aðrar týdningarmiklar stjórnarskipanarligar avgerðir. Frá 1163/64 skuldu biskupar eisini taka lut á *ríkisfundum* í sambandi við kongsvalið. Eisini føroysku biskuparnir tóku lut á slíkum fundum – Sørkvir í 1223 og Erlendur á krýningarhaldi Eiriks Magnussonar í 1280.

Bæði altingið og løgtingið vóru umboðsstovnar Føroya mótvegis útheimi. Formaður altingsins, løgmaður (eisini nevndur løgsøgumaður), stóð fyri viðurskiftum Føroya við onnur lond. Sum dømi kann nevnast, at Gilli løgmaður var á samráðingarferð í Noregi í sambandi við nevnda kristnirættin frá Ólavi heilaga. Annað dømi um, at føroyingar í miðøld hava havt samband við myndugleikar í øðrum londum er, at Jákup VI kongur Skotlands sendi Føroya løgtingi bræv í 1591 um fiskiveiðirættindi skota undir Føroyum. Her skal havast í huga, at samskiftið millum myndugleikar í ymsum londum ikki var skipað á sama hátt í miðøld sum í nýggjari tíð, m.a. tí fullveldishugtakið tá ikki hevði tað innihald, sum tað fekk seinni. Kortini benda hesi dømi á, at Føroyar gjøgnum síni egnu umboð hava havt frælsi til at ávirka viðurskiftini við onnur lond og ríki.

Løgtingið hevði eisini týdning, tá ið nýggjur løgmaður skuldi setast í embæti. Tingið valdi løgmann, og kongur tilnevndi hann. Ikki fyrr enn í seinnu helvt av átjandu øld kom ólag í henda rætt tingsins.

Langt inn í 18. øld finnast dømi um serskipanir gjørdar á løgtingi.

## Einaveldi við samtykt føroyinga

Arvaeinaveldislóg varð sett í gildi í 1661 bæði í Danmark og í Noregi. Í Íslandi og í Føroyum hendi hetta í 1662. Kongalógin kom í 1665. Viðvíkjandi Noregs ríki lógu til grundar trý ymisk skjøl, har Føroyar, Ísland og Noreg vórðu lýst sum trý serstøk lond. Trúskapareiður føroyinga er ritaður í skjal við yvirskriftini *Enevolds Arveregerings Acte af Indbyggerne paa Færøe*. Enn eitt dømi um, at Føroyar vóru mettar sum eitt land fyri seg, er ein serstøk *reskript* frá 12. mai

1668, sum ásetti, at lógir skuldu setast serstakt í gildi í Føroyum fyri at galda her.

Danski kongurin fekk sostatt einaveldi í ríkjum sínum – Danmark og Noregi – og londum sínum – Føroyum og Íslandi – sum gjørdust arvalond einaveldiskongsins, og sum vóru stjórnað úr Keypmannahavn eins og bæði kongsríkini. Dømi um hetta er Norska lóg Kristians fimta, ið var sett serstakt í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan í 1688. Kongsins vald og støða Føroya til hansara sæst aftur í heitunum, sum nýtt vórðu í einaveldistíðini, so sum *Vort land Færø* og *Vore riger Danmark og Norge samt Island og Færøerne*. Eisini ímyndarliga kom hetta til sjóndar. Ávikavist føroyska, íslendska, grønlendska, norska og danska skjaldramerki eru til skjals sum skjaldramerki fyri serstøk lond í vápnaskjøldri einaveldiskongs Danmarkar og Noregs.

## Skilnaður millum Noregs og Føroya

Í sambandi við Napoleonskríggini var kongur Danmarkar og Noregs fyri stórum missi av landøkjum. Fjórða grein í friðarsáttmálanum frá 1814 í Kiel segði, at kongsríkið Noreg skuldi latast Svøríkis kongi, men *Grønland, Færøerne og Island ikke deri indgrebne*. Hetta varð endaliga váttað av uttanríkisráðharra Svøríkis og Noregs í 1819.

## Danskt hjáland

Í tíðini beint eftir skilnaðin millum Danmark og Noreg í 1814, síggjast Føroyar, Ísland og Grønland ájøvn við Vesturindisku oyggjarnar nevnd sum „*koloniir*“, hjálond, í flestum millumtjóða sáttmálum, sum Danmark ger, m.a. á henda hátt: „*De danske Kolonier, Grønland, Island og Færøerne deri indbegrebet*”. Eisini í innanríkisskjølum sum *Cancelli Skriv. 30. Maj 1820: „Island, Færøerne og øvrige Colonier”*. Tað tykist sum týdningurin av hugtakinum hjáland um hesa tíðina hevur mest at gera við viðurskifti Danmarkar við onnur ríki. Tað er helst ikki av leið at lýsa hesa støðuna sum eina varðlandsstøðu *(protektorat)*.

## Serstøða Føroya

Føroya løgting og løgmansembætið vórðu tikin av við *kancelli-plakat frá 18. mai 1816*, og aftan á hetta vóru allar avgerðir um samfelags-

viðurskifti Føroya tiknar í Danmark og av danska embætismannaveldinum í Føroyum.

6. juli sama ár varð fyrsti amtmaður settur í Føroyum. Sostatt varð handanhavs „hjálandið" skipað sum eitt serstakt slag av donskum amti. Serstøðan sást við, at Føroyar framvegis vóru eitt serligt løgdømi, har danskar lógir ikki av sær sjálvum høvdu gildi, uttan at tær vórðu lýstar á serstakan hátt í Føroyum, sum ásett í kongsbrævi (*reskript*) frá 12. mai 1668, *kancelli-plakat* frá 1813 og í kongligari fyriskipan frá 1821.

Hóast tíðin frá 1814 til 1850 er merkt av donskum royndum at innlima Føroyar í danska ríkið, gjørdust Føroyar tó ongantíð ein samrunnin partur av danska løgdøminum. Stjórnarskipanarliga vóru Føroyar og Ísland soleiðis fyri, at danskar lógir ella serskipanir ikki guldu í hesum londum *medmindre forordningen af kancelliet var foranstaltet på lovlig måde bekendtgjort.*

Kongliga fyriskipanin frá 1821 ásetti, at donsk lóg ikki galt í Føroyum, fyrr enn amtmaðurin her á landi hevði verið spurdur til ráðs, um hóskandi var at seta hana í gildi. Í øðrum førum varð dømt eftir norsku lóg. Amtmaðurin kann tískil sigast at hava havt serstakan leiklut í Føroyum, ið eina mest líkist tí hjá einum varakongi ella landshøvdingum í bretsku hjálondunum.

Í 1844 sendu føroyingar í Keypmannahavn stættatinginum bønarbræv um, at Føroyar fingu stovn, ið líktist tí gamla løgtinginum. Einki var gjørt við hetta málið. Um sama mundið skrivaðu føroyingurin Niels Winther og danin Frederik Barfod í donskum bløðum um tørvin á at endurreisa Føroya løgting. Í 1846 varð úr Føroyum sent bønarbræv, undirritað av fleiri føroyingum, til stættatingið í Roskilde, um at biðja kong stovnseta serstakt fólkating í Føroyum. Helst er tað eitt stættating, eins og tað íslendska frá 1843, ið biðið verður um. Umbønin var teimum sýtt, hóast nakrir danskir politikarar tóku undir við hesum.

Stutt eftir kongsskiftið í 1848 boðaði Fríðrikur kongur sjeyndi frá við yvirlýsing, at hann vildi taka einaveldið av og skriva út val til grundlógargevandi tjóðfund, har Ísland skuldi hava fimm kongsvald umboð og Føroyar eitt. Stovnað varð ein serlig stýrisdeild at umboða íslendsk, føroysk og grønlendsk áhugamál.

Eins og í stættatinginum í Roskilde tóku føroyingar ikki sjálvir lut sína vegna í grundlógartingingunum í 1848/49. Harafturímóti vóru íslendingar sum nevnt umboðaðir av fimm landsmonnum. Jón Sigurðsson, ein teirra, hevði ta áskoðan, at avtøkan av einaveldinum var einans eitt sínámillum mál danakongs og íslendinga. Íslendingar høvdu í 1262 samsvarandi Gamla sáttmála givið seg undir Noregs kong, men ikki latið seg lima inn í Noregs ríki. Undir somu

treytum høvdu teir viðurkent einaveldið hjá kongi Danmarkar og Noregs í 1662. Sostatt høvdu teir ikki givið seg undir fullveldi Danmarkar, tí at viðurskifti Íslands við Danmarkar ríki bygdu á eitt kongssamband við upprunaliga norska kongin, og seinni við danska kongin.

Sum nevnt, høvdu føroyingar ikki sjálvir umboð á tjóðfundinum í Roskilde. Føroyar vórðu umboðaðar av fyrrverandi amtmanninum Pløyen, og úrslitið gjørdist, at grundlóg Danmarkar varð lýst í Føroyum og á henda hátt fekk lógargildi her. Tað hendi á tann hátt, at hon varð tinglisin á føroysku sýslutingunum í 1849 og 1850. Føroyingar vórðu hvørki eftirspurdir ella mótmæltu. Einki løgting ella annar umboðandi stovnur var tá, ið kundi viðgera grundlógarspurningin, og orsøk kann tí vera til at halda, at føroyingar flestir hava havt lítlan og ongan kunnleika um týdningin av hesum fyri land og fólk.

Undir viðgerðini av serstakari ríkisdagsvallóg fyri Føroyar á heysti 1850, íbirtist ein sterkur politiskur vilji millum danskar ríkisdagsmenn at lima Føroyar inn í Danmarkar ríki. Um somu tíð royndu donsku ríkismyndugleikarnir at seta grundlógina í gildi í Íslandi. Ein orsøk hevur helst verið, at danska støðan í Slesvík var vorðin veik, og tí vildu ríkisdagspolitikarar knýta tey norrønu londini hjá kongi saman í eina stjórnarskipanarliga eind.

Ríkisdagsvallógin varð samtykt í 1850, og við hesum fór grundlóg Danmarkar at virka í Føroyum.

Tað ber ikki til at staðfesta, at Føroyar áðrenn 1850 vóru danskur ríkislutur. Ósemja hevur verið um, hvørt tær aftan á 1850 eru at rokna sum danskur ríkislutur.

Fleiri ríkisdagsmenn atkvøddu ímóti, at grundlógin varð lýst at galda fyri Føroyar í 1850. Ein teirra var A. S. Ørsted. Hann ivaðist í, um grundlógin kundi setast í gildi í Føroyum á ein slíkan hátt, tí at danskar lógir høvdu ongantíð av sær sjálvum verið galdandi í Føroyum, við tað at Føroyar høvdu altíð verið serstakt løgdømi. Harumframt helt hann, at í øllum førum áttu føroyingar at verið eftirspurdir, áðrenn ein slík atgerð varð framd.

Hóast føroyingar nøkur ár frammanundan høvdu biðið um at fáa endurreist ting sítt, so varð hetta ynskið sýtt teimum av kongi sjálvum. Eitt úrslit av hesum danska politikki var, at eingin føroyskur stovnur var til, ið kundi viðgera spurningin, hvørt føroyingar áttu at koma undir donsku grundlógina. Løgtingið varð ikki endurreist fyrr enn í 1852, tó at fundir vóru hildnir í Tórshavn longu í 1847 við luttøku av donskum embætismonnunum og fimtan føroyingum tilnevndum av amtmanni. Fundirnir snúðu seg um *at der på Færøerne var ønsker om en eller anden institution, som kunne kombineres med, eller eventuelt erstatte, færøsk repræsentation i Roskilde.*

Sum kunnugt var støðan í Íslandi ein onnur, tí har var tingið júst endurreist, áðrenn støða skuldi takast til spurningin um gildi hjá donsku grundlógini í Íslandi.

## Føroyar sum amt

Við lóg um Føroya løgting í 1852 fingu føroyingar eitt amtsráð. Tvey ár seinni kom nýggj løgtingslóg. Tingmannatalið øktist úr sekstan í átjan fólkavaldar, og valskeiðið broyttist frá seks til fýra ár. Fastir tinglimir vóru amtmaðurin, ið var tingformaður, og próstur.

Viðurskiftini millum løgtingið og donsku stjórnina líktust í stóran mun viðurskiftunum millum donsku amtini og donsku stjórnina, men týdningarmikil frávik vóru kortini. Danska stjórnin hevði ovasta útinnandi myndugleika, sum læt upp í hendur heimildir sínar til amtmenn og løgting, tó soleiðis, at amtmaðurin kundi ógilda løgtingssamtyktir.

Føroyar vóru sum amt, við løgtinginum sum amtsráði, stjórnarskipanarliga nærum ein sameindur partur av danska ríkinum. Kongur kundi upploysa løgtingið. Tó fekk løgtingið størri heimildir enn amtsráð í Danmark. Løgtingið fekk ráðgevandi leiklut í løgfrøðiligum og búskaparligum spurningum og hevði rætt og skyldu at geva ríkisdegnum lógaruppskot Føroyum viðvíkjandi. Løgtingið hevði rætt og skyldu at taka støðu til lógir samtyktar av ríkisdegnum Føroyum viðvíkjandi. Amtmaðurin hevði eftirlit við løgtinginum og amtinum. Av øðrum serskipanum er at nevna, at Føroyar vóru egið tolløki. Við einstøkum undantøkum guldu føroyingar ikki skatt til donsku stjórnina, og føroyingar høvdu ikki herskyldu.

Tað politiska valdið lá tó altíð í hondunum á danska ríkisvaldinum. Formliga staðfestingin frá danskari síðu av, at danski ríkisdagurin hevði lóggevandi valdið í Føroyum kom í 1855, tá ið danska løgmálaráðið kunngjørdi, at *de af rigsdagen vedtagne og af kongen stadfæstede love også er gældende for Færøerne, når der ikke i loven findes nogen udtrykkelig bestemmelse om det modsatte.* Síðan fingu danskar lógir, sum ikki skuldu galda í Føroyum, ta kendu orðingina: *Denne lov gælder ikke for Færøerne.*

Í 1870 árunum kyknaði tjóðskaparrørslan millum føroyingar í Keypmannahavn og 10 ár seinni í Føroyum. Nýskipanin *(systemskiftet)* í Danmark í 1901 hevði við sær, at nýhugsan kom í danska politikkin mótvegis Íslandi og Føroyum. Íslendingar fingu heimastjórn í 1903/04. Í 1906 fingu føroyingar tað sonevnda tilboðið um størri sjálvstýri í danska ríkinum, t.d. at løgtingið kundi ráða yvir øllum skattainntøkum í Føroyum, og gera av, hvussu tær kundu nýtast. Eis-

ini skuldi árligur ríkisstuðul latast. Jóannes Patursson hevði sum fólkatingsmaður samráðst við Alberti løgmálaráðharra um eitt fyribils uppskot, ið varð ætlað at vera grundarlag undir framhaldandi samráðingum við donsku stjórnina. Stórur meiriluti var tó ímóti hesum uppskoti, og tað varð víst burtur. Teir, sum vóru ímóti stovnaðu Sambandsflokkin í 1906, og teir, sum stuðlaðu uppskotið, stovnaðu í 1909 Sjálvstýrisflokkin.

Høvuðsendamál Sambandsfoksins var *„at samle de medlemmer af tinget, som vil arbejde for en frisindet udvikling for det færøske folk med særligt henblik på bevarelsen af de nuværende statsretlige forhold”.* Øll árini frá 1906 til 1928, 1918-1920 undantikin, hevði Sambandsflokkurin stóran meiriluta á tingi.

Sjálvstýrisfloksins høvuðsendamál var *„At arbejde for at skaffe lagtinget så stor indflydelse og så meget selvstyre, som man kan opnå i god forståelse med regering og rigsdag”* og *„at bevare de særlige færøske landsrettigheder”.*

## Fram móti heimastýrisskipanini

Støða løgtingsins sum umboð fyri føroyska fólkið varð styrkt í 1923, tá ið amtmaður og próstur mistu sæti sum fastir løgtingslimir. Amtmaðurin varðveitti tó møti- og talurætt á tingi eins og rættin at leggja fram lógaruppskot til viðgerðar, men atkvøðurættin misti hann. Løgtingið fekk yvirhøvur eina sterkari støðu, eisini viðvíkjandi umsiting og eftirlitsuppgávum. Við fíggjarætlanunum *(finansplaner)* í 30-árunum fekk løgtingið uppaftur styrkt sína umsitingarligu støðu, m.a. við at tað valdi eina landsnevnd, ið var ein tingnevnd við egnari skrivstovu, sum yvirtók partar av umsitingini, ið til tá høvdu ligið hjá amtinum. Við hesum var tann grundleggjandi bygnaðurin skipaður, sum heimastýrisumsitingin seinni varð grundað á.

Fyri tjóðskaparligu menningina hevði tað stóran týdning, at føroyska málið fekk formliga viðurkenning í 1936 sum javnsett við tað danska í skúla og kirkju.

Í 1940 vórðu Danmark og Føroyar hersettar av ávikavist Týsklandi og Bretlandi. Samstundis var sambandið landanna millum kvett. Bretar gjørdu í sambandi við hersetingina greitt, at teir hersettu Føroyar av hernaðarligum orsøkum og fóru við krígslok at lata Føroyar aftur til Danmarkar.

Ein bráðfeingis stýrisskipan varð sett í gildi í Føroyum tann 9. mai 1940. Hon gav løgtingi og amtmanni lóggevandi valdið, amtmanni og løgtingsins landsnevnd útinnandi valdið, og sorinskrivara og løgtingsvaldum dómsmonnum dómsvaldið. Harumframt vóru føroyskir

pengaseðlar nýttir, og føroyskt varð viðurkent javnbjóðis donskum sum rættarmál og lógarmál. Føroyska flaggið varð av bretsku stjórnini viðurkent sum tjóðarmerki Føroya tann 25. apríl 1940.

Í brævi frá 27. oktober 1945 frá Buhl forsætisráðharra viðurkendi danska ríkisstjórnin stýrisskipan Føroya. Í sama brævi viðurkendi danska ríkisstjórnin rætt Føroya til at velja fulla loysing frá Danmark.

Løgtingsval var í 1945, og á vári 1946 fóru umboð fyri føroysku flokkarnar til samráðingar við donsku stjórnina um framtíðar stjórnarrættarligu støðu Føroya. Føroysku flokkarnir møttu hvør við sínum uppskoti. Tá ið av tornaði, setti danska stjórnin fram eitt tilboð í 1946. Hetta tilboð varð tó ikki samtykt av løgtinginum.

14. september í 1946 var fólkaatkvøða, har føroyingar fingu møguleikan at velja annaðhvørt danska stjórnaruppskotið ella loysing frá Danmark. Úrslitið av valinum var ein meiriluti fyri loysing. 11.624 fólk greiddu atkvøðu, svarandi til eina valluttøku upp á 66,4% av teimum, ið høvdu valrætt. Til samanberingar var valluttøkan á løgtingsvalinum 1945 75,7%, í 1946 73,3%, í 1950 61,3% og í 1954 66,9%. Nevnast kann, at valluttøkan á fólkaatkvøðugreiðsluni í 1953 í Føroyum um uppskot um nýggja danska grundlóg var heilt niðri á 7,6%. Við atliti at øðrum valum í Føroyum um hesa tíðina ber tískil ikki til at siga, at valluttøkan 14. september 1946 var serliga lág. Talið av ógildum atkvøðum var kortini nakað størri enn vanligt, 4,1%, serliga tí nógvir veljarar mótmæltu móti valkostunum við at skriva „nei" á atkvøðuseðilin.

Av teim gildugu atkvøðunum, valdu 50,7% „loysing" og 49,3% valdu „stjórnaruppskotið". 166 atkvøður vóru á muni millum meiriluta og minniluta.

Undan fólkaatkvøðuni boðaði danski forsætisráðharrin Vilhelm Buhl frá, at meirilutin av atkvøðugreiðsluni fór at verða virdur. Beint eftir fólkaatkvøðuna hevði danska stjórnin somu støðu, men hon tók skjótt aðra støðu. Tá løgtingið skuldi fremja loysingina, uppleysti kongur tingið og sendi tað heim. Nývál til løgtingið varð útskrivað. Grundgivið varð við, at løgtingið framdi grundlógarbrot við at royna at loysa frá Danmark uttan at samráðast um hetta fyrst.

## Heimastýri

Fram til várið 1948 vóru samráðingar millum eina samráðingarnevnd við umboðum úr flokkunum á nýggja løgtinginum og eina nýggja danska stjórn. Endin var, at heimastýrislógin varð sett í gildi 1. apríl 1948.

Heimastýrislógin í føroyskari og danskari útgávu varð samtykt á

Føroya løgtingi 5. desember 1947. Hon varð staðfest og lýst av amtmanninum í tveimum útgávum, eini føroyskari og eini danskari, í Dimmalætting 31. mars 1948 sambært fyribilsstýrisskipanini fyri Føroyar frá 1940, ið var galdandi til heimastýrislógin fekk gildi 1. apríl 1948.

19. mars 1948 samtykti danska fólkatingið heimastýrislógina, ið varð staðfest av kongi 23. mars og lýst í Lovtidende A hin 31. mars sama ár. Vert er at leggja til merkis, at hendan danska útgávan av heimastýrislógini ikki er lýst í Føroyum, soleiðis sum hon annars átti sambært tágaldandi donsku „Lov nr. 51 af 1. April 1896". Tískil eru tvær ymiskar heimastýrislógir bæði samtyktar og lýstar á hvør sín hátt. Orðingarnar eru ikki heilt einsljóðandi, heldur ikki millum tær báðar danskmæltu útgávurnar.

Inngangurin *(præambel)* í heimastýrislógini, sum hevur sín uppruna í íslendsku stjórnarskipanini *(forfatningslov)* frá 1874, viðurkennir tjóðskaparligu, søguligu og landafrøðiligu serstøðu Føroya í Danmarkar ríki. Við støði í hesum inngangi og sum úrslit av gongdini síðani seinna heimsbardaga, er serstøða Føroya í Danmarkar ríki vorðin uppaftur meira eyðsýnd. Serstakliga kemur hetta til sjóndar í okkara politisku viðurskiftum við útheimin, har Danmark og Føroyar eru farin ymsar leiðir. Sum dømi kunnu nevnast, at Føroyar eru limur í Havsúgdjóranevndini fyri Norðuratlantshav (NAMMCO), har Danmark ikki er limur, at londini eru farin hvør sín veg í eini røð av øðrum millumtjóða sáttmálum, og at danski limaskapurin í Evropiska samveldinum (ES) ikki fevnir um Føroyar.

Føroya landsstýri førir eisini samráðingar við onnur lond um fiskiveiðisáttmálar, handilssáttmálar, og seinasta dømi er marknasáttmálin við Stórabretland. Hetta verður gjørt við heimild í heimastýrislógini og við danskari luttøku, men tað er vert at leggja til merkis, at føroyski samráðingarleikluturin er vorðin alsamt meira virkin og leiðandi, meðan leikluturin hjá danska uttanríkismálaráðnum samstundis er vorðin meira ráðgevandi, umboðandi og eygleiðandi. Dømi eru eisini um, at føroysk umboð samráðast beinleiðis við útlendsk umboð, uttan at nakað danskt umboð er hjá.

Semja er ikki millum lógkønar um, hvør skipan heimastýrisskipanin er. Eitt sjónarmið er, at hon í grundregluni er ein vanlig donsk lóg, ið gevur føroyskum myndugleikum umboð frá donskum myndugleikum at stjórna sermálum Føroya. Annað sjónarmið er, at hon er ein sáttmáli millum Føroya og Danmarkar, ið skipar tey stjórnarskipanarligu viðurskiftini millum londini. Í hesum sambandi verður víst til ymisk søgulig viðurskifti, so sum at Føroyar undir seinna heimsbardaga stjórnaðu egnum viðurskiftum, og at danska stjórnin aftan á bardagan viðurkendi hesa skipan. Harumframt verður sagt, at heima-

stýriskipanin er eitt samráðingarúrslit, ið av pørtunum báðum frá fyrsta degi *de facto* hevur verið viðgjørd sum ein semja millum tvey lond, sum gevur rúm fyri ymiskum tulkingum.

Støðan hjá donsku stjórnini, tá ið hon longu í 1945 og fleiri ferðir síðan hevur viðurkent rætt føroyinga til loysing, styrkir eisini grundarlagið undir eini sáttmálatulking av heimastýrislógini. Tó hava danskir myndugleikar higartil hildið uppá, at talan bert er um avmarkaða og einvegis myndugleikaavhending *(delegatión)*, sum í grundregluni er av sama slagi, sum tann myndugleikaavhending, ið fer fram millum ríkið og vanligu donsku kommunurnar. Móti hesum sjónarmiði talar eitt nú danski doktarin í løgfrøði Frederik Harhoff, ið heldur, at heimastýrisskipanin bæði upphavliga og gjøgnum siðvenjumenning er á hægri stigi enn vanligar danskar fólkatingslógir, men kortini undir grundlógini.

Vanligt hevur verið í Føroyum at tulkað heimastýrislógina sum eina semju millum Føroyar og Danmark, men eisini í Føroyum eru ymsar hugsanir um hetta mál.

# Sáttmáli millum Íslands og Danmarkar

Stríðið fyri íslendskum sjálvræði byrjaði um 1830. Franska julikollveltingin var helst ein íblástur. Í Danmark elvdi hetta kollveltingarrák til, at fyriskipan um stættating var givin 28. mai 1831. Stættatingini skuldu vera ráðgevandi, og tilskilað var, at íslendingar fingu tvey umboð á stættatingið fyri „oyggjarnar" í Roskilde. Íslendingar talaðu í staðin fyri, at endurreisa altingið, sum var avtikið í 1800. Hetta ynskið varð eftirlíkað av kongi, og Altingið varð endurreist í 1843.

Tá ið danir í 1848 tóku av einaveldið, mettu oddamenn í Íslandi, at hetta setti landið í kongsfelagsskap við Danmark. Hesin kongsfelagsskapur hvíldi á Gamla sáttmála, sum íslendingar høvdu gjørt við Noregs kong í 1262-64.

Íslendingar vildu ikki ganga undir donsku grundlógina frá 1849. Teir hildu í 1851 serstakan tjóðfund at taka endaliga avgerð um støðu og stjórnarskipan landsins. Fundurin varð tó slitin, áðrenn nøkur niðurstøða fekst.

Einki hendi so aftur, fyrr enn danir einvíst ásettu støðuna hjá Íslandi við serligari lóg frá 2. januar 1871, støðulógini, við ásetingum um íslendsk sermál. Síðan vórðu broytingar gjørdar í ovastu umboðstjórn í landinum, og ein stjórnarskipan varð í 1874 givin sum gáva frá kongi, nú túsund ár vóru liðin frá landnámi. Henda stjórnarskipan gav Altinginum lóggávuvald og játtanarvald í teimum sermálum, ið tilskilað vóru í støðulógini frá 1871. Longu í 1881 vórðu krøv sett fram um at endurskoða stjórnarskipanina, m.a. fyri at fáa útinnandi valdið til Íslands. Í 1904 var komið undir land við hesum, og eitt heimastýri varð stovnað, sum bar í sær, at ein innlendskur ráðharri varð settur, sum tingræðisliga stóð Altinginum til svars.

## Samveldissáttmálin

Tá ið íslendingar nú høvdu fingið størri lut í lóggávuvaldinum og útinnandi valdinum, hildu mong, at tíðin var komin at endurskoða sambandið við Danmark. Í 1908 feldi Altingið eitt uppskot um nýskipan. Stíggjur kom í málið, sum eisini varð seinkað av fyrra heimsbardaga.

Eitt hjartamál hjá íslendingum hesi árini var at fáa flaggið viðurkent, og serliga var áherðsla løgd á henda spurning í 1917. Danir

vildu tó ikki samráðast um einstøk stríðsmál, men vóru heldur sinnaðir at viðgera viðurskiftini millum londini sum heild. Dønum varð harafturímóti gjørt greitt, at lítið batti at fara undir samráðingar, vildu danir ikki viðurkenna íslendskt fullveldi við kongsfelagsskapi sum grundarlag.

Íslendingar treytaðu sær, at sáttmálasamráðingarnar fóru fram í Reykjavík við umboð fyri Altingið. Samráðingar vóru so í Reykjavík dagarnar 1.-18. juli 1918 og endaðu við, at eitt uppskot varð lagt fram um danska-íslendska samveldislóg, ið lóggávutingini í londunum báðum samtyktu. Lógin varð lýst 30. november 1918 og kom í gildi dagin eftir.

## Viðurkenning av fullveldinum

Í grein 1 í donsku-íslendsku samveldislógini var henda áseting:

*Danmark og Ísland eru fræls og fullvalda ríki, sum eru í felag um ein og sama kong og um tann sáttmála, sum henda samveldislóg røkkur um.*

*Nøvnini á báðum londum eru tikin við í heiti kongs.*

Hetta bar í sær, at Danmark viðurkendi íslendska fullveldið og síðan boðaði øðrum londum frá hesum, sambært grein 19 í lógini. Hinvegin var Danmark longu fullveldisríki og kravdi sjálvsagt onga viðurkenning. Ásetingin var kortini orðað, sum hon er, fyri at leggja dent á, at londini vóru javnstødd og javnsett.

Fullveldisviðurkenningin varð sett inn í sjálvan sáttmálan fremst í grein 1, men varð kortini ikki roknað upp í hann, tí Danmark kravdi ikki at gera sáttmála um eina slíka viðurkenning. Hetta var ein einvís yvirlýsing hjá dønum eins og viðurkenning av nýggjum ríki vanliga er hjá tí, sum viðurkennir. Viðurkenningin var grundarlagið undir og fyritreytin fyri sáttmálanum.

Tað er eyðsæð, at greiðari hevði verið, um fullveldisviðurkenningin hevði staðið fyri seg, og at ein yvirlýsing boðaði frá, at Danmark gjørdi soljóðandi sáttmála við Ísland, men tað eigur tó ikki at ørkymla nakran og forða fyri, at henda áseting verður rætt skilt. Eftir hesum er ásetingin býtt sundur í tveir partar. Øðrumegin er ein einvís yvirlýsing um íslendska fullveldið, smbr. orðini: „*Danmark og Ísland eru fræls og fullvalda ríki, sum eru í felag um ein og sama kong [...]*" og hinumegin ein yvirlýsing um ta eftirfylgjandi semjuna, smbr. orðini:"*[...] og um tann sáttmála, sum henda samveldislóg røkkur um.*"

Sáttmálin er sostatt gjørdur millum tvey sjálvstøðug lond. Ført

hevur verið fram, at tað svaraði ikki saman, at Danmark gjørdi sáttmála við Ísland, sum tá framvegis var partur av danska ríkinum. Til hetta er at siga, at Ísland var viðurkent sum sjálvstøðugt land, tá ið samveldislógin kom í gildi og fekk tá fullveldi. Sáttmálin sjálvur var síðan gjørdur millum Íslands, sum nú var sjálvstøðugt, og Danmarkar. Í roynd og veru komu bæði viðurkenningin av íslendska fullveldinum og samveldislógin í gildi í senn, tann 1. desember 1918. Hinvegin má samveldissáttmálin, ið er ein millumtjóðasáttmáli, sjálvsagt bera í sær, at Danmark longu tá hevur viðurkent Ísland sum sjálvstøðugt land, tí tað er fyritreytin fyri at gera sáttmálan yvirhøvur.

Viðurkenningin av íslendska fullveldinum er óheft av, um sáttmálin er galdandi ella ikki, og stendur við, hóast samveldislógin fer úr gildi, annaðhvørt við uppsøgn sambært grein 18 í lógini ella á annan hátt. (Um grein 18, sí bls. 52).

## Samveldislógin – sáttmáli ella lóg

Sáttmálin frá 1. desember 1918 nevnist samveldislóg, og tað krevur at vera útgreint. Orðið lóg kundi bent á, at Ísland og Danmark við hesum sáttmálanum gjørdust eitt samveldisríki, og at samveldislógin var ein lóg, ið kom frá einum felags lóggávutingi hjá hesum báðum londum. Men so er ikki, sum víst varð á í pettinum frammanundan. Semja er millum íslendska og danska serkunnleikan um, at samveldislógin var ein sáttmáli millum tvey sjálvstøðug lond.

Í samráðingunum var støðan hjá donsku nevndarlimunum, at sambandið millum londini skuldi vera eitt stjórnarrættarligt samband, men íslendsku nevndarlimirnir skutu hinvegin upp, at tað skuldi vera eitt altjóðarættarligt samband millum tvey sjálvstøðug lond.

Íslendingar vildu hava tveir sáttmálar. Annar skuldi áseta kongsfelagsskapin, og í honum skuldi eingin uppsagnarregla vera, og hin skuldi tilskila ymisk íslendsk mál, ið danir skuldu hava um hendur. Hesum havnaðu donsku samráðingarmenninir við teirri grundgeving, at tað bæði var óhóskandi og óneyðugt at tingast um kong og kongsfelagsskapin við tað, at eingin ósemja var um henda spurning. Tað samtyktu íslendingar, og orðingarnar í samveldislógini staðfesta, at kongsfelagsskapurin varð tikin fyri sjálvsagt. Eftir hesum var kongsfelagsskapurin til áðrenn sáttmálin. Samsvarandi átti grein 18 um avtøku av sáttmálanum, sum samveldislógin rakk um, ikki at galda fyri kongsfelagsskapin; hann stóð við, hóast samveldislógin var sett úr gildi.

Donsku samráðingarmenninir stóðu fastir við, at tað var neyðugt at gera sáttmálan í lógarformi. Danski ríkisdagurin skuldi samtykkja sáttmálan, og tað skuldi gerast á sama hátt, sum gjørt varð við lógar-

uppskot. Íslendsku samráðingarnevndarlimirnir hildu ikki at tað gjørdi nakran innihaldsligan mun, tí hetta var ein millumtjóðasáttmáli, uttan mun til hvat sniðið var.

Ikki er heilt greitt, hví donsku samráðingarmenninir tóku hesa støðu. Helst hava teir viljað hildið upp á, og tað var eisini eyðvíst, at ein sáttmáli, sum ikki bert tók støðulógina frá 2. januar 1871 úr gildi, men somuleiðis broytti ymsar danskar lógir, mátti hava lógarstøðu til at kunna koma í gildi sambært donskum stjórnarrætti.

Tó er samveldislógin, sum nevnt, í høvuðsheitum ein millumtjóðasáttmáli við ymsum lógartræðrum ívovnum og stendur sostatt í gildi sum lóg. Tað er tí ikki skeivt at nevna hann samveldislóg. Havt eigur tó at vera í huga, at altjóðarættarparturin er tann tyngri, og tað er alt avgerandi fyri, hvørja støðu sáttmálin hevur sum rættarheimild, og hvussu hann skal tulkast. Samveldissáttmálin hevur eisini ta serstøðu, at hvørki tað danska ella tað íslendska lóggávuvaldið kundu seta hann úr gildi eins og aðrar lógir. Hann skuldi harumframt tulkast eftir sjónarmiðum, sum galda fyri tulking av millumtjóðasáttmálum og ikki vanligum lógum.

Í hesum viðfangi skal takast fram, at samráðst varð ikki um allar ásetingarnar í samveldislógini, eitt nú ikki um donsku viðurkenningina av íslendska fullveldinum og kongsfelagsskapin.

Samveldislógin var fyri størsta partin ein sáttmáli millum tvey lond, og tí høvdu ásetingarnar í henni kunnað verið bindandi sum millumtjóðasáttmáli, hóast tær ikki vóru viðgjørdar sum lóg. Sambært stjórnarskipanunum í báðum londunum var nevniliga ikki neyðugt at samtykkja slíkar sáttmálar sum lóg. Eftir altjóðarætti høvdu bæði londini verið bundin av samveldislógini, um kongur staðfesti lógina, Alting og Ríkisdagur samtyktu hana og somuleiðis íslendsku veljararnir.

Eftir stjórnarrætti hevði hetta kortini ikki verið nógmikið. Í samveldislógini eru nakrar ásetingar, sum veittu borgarum í hvørjum landi ávís rættindi í hinum, bæði londini bundu seg til at inna ymiskt ella halda viðurskiftum óbroyttum, og til tað kravdist lóggáva í báðum londum. Vanlig lóggáva var neyðug til at veita hinum landinum tey flestu ella øll tey lunnindi, sum tí vóru tilskilað. Neyðugt var at broyta stjórnarskipanirnar, og tað var gjørt bæði í Danmark og í Íslandi, men gildiskoma sáttmálans var ikki heft at hesum.

Hóast samveldislógin var samtykt sum lóg bæði í Íslandi og í Danmark, merkti tað ikki í sjálvum sær, at hon var galdandi javnt í báðum londum. Tær ásetingarnar, sum burturav vóru fyriskipanir til íslendskar myndugleikar ella borgarar, kundu vera lóg í Íslandi eins og fyriskipanir til danskar myndugleikar og borgarar vóru lóg í Danmark. Rættiliga nógvar ásetingar í lógini vóru tó galdandi í báðum londum. Lóggáva, sum ikki samtykti við sáttmálan varð mett at vera brot móti altjóðarætti.

## Kongsfelagsskapurin

Í grein 1 í samveldislógini er ásett, at Danmark og Ísland eru fræls og fullvalda ríki, sum hava ein og sama kong og tann sáttmálan, sum samveldislógin røkkur um, í felag. Orðalagið í greinunum 1 og 18 bendir á, at roknað varð við, at kongsfelagsskapurin longu var til undan sáttmálanum. Grein 18 fevndi tískil ikki um kongsfelagsskapin – hann stóð við hóast aðrar ásetingar í sáttmálanum fóru úr gildi. Kongsfelagsskapurin var sjálvt grundarlagið undir sáttmálanum. Hetta hava báðir partar í samráðingunum óivað ætlað, tó við ymiskum fyritreytum.

Ætlanin hjá dønum var ikki at avmarka sambandið til bert at vera kongsfelagsskap, men at varðveita kongsfelagsskapin, hóast samveldissáttmálin varð sagdur upp sambært grein 18 stk. 2. Við hesum var verri enn so tryggjað, at kongsfelagsskapurin fór at vara við. Afturímóti var tað sáttmálabundið, meðan samveldislógin var í gildi. Arvarøðin átti sambært lógini at vera tann sama í báðum londum og skuldi svara saman við tær reglur, sum vóru galdandi, tá ið samveldislógin kom í gildi. Skuldu hesar reglur broytast, kravdu bæði londini at samtykkja broytingina. Danski stjórnarrættarfrøðingurin Knud Berlin helt hinvegin, at kongsfelagsskapurin í ein vissan mun var fyritreytin fyri sáttmálanum, men hann var eisini partur av honum og kundi tessvegna sigast upp saman við sáttmálanum 25 ár eftir, at hann var gjørdur.

Kongsfelagsskapurin var sostatt sáttmálabundin, meðan samveldislógin var í gildi, og hon ásetti, hvør rættarstøðan hjá kongi var. Um felagsskapurin varð slitin í ótíð, áðrenn hann eftir grein 18 í lógini átti, t.d. tí at sáttmálin var mishildin ella vegna annað sáttmálabrot, fell sáttmálabindingin burtur. Somuleiðis var, um sáttmálin varð settur úr gildi eftir ásetingunum í grein 18. Men kongsfelagsskapurin kundi kortini varðveitast, um londini hvørt í sínum lagi loyvdu kongi at hava kongstign í hinum landinum. Men fór kongur frá, hevði tað tó ikki havt sambandslit við sær, tí tá kundi tann, ið næstur var í kongsarvarøðini, taka við sambært lógini um kongsarvarøð.

Meðan lógin enn var í gildi var kortini ásett, at lógin um kongsarvarøð var tann sama í Danmark og Íslandi. Somu reglur vóru galdandi fyri, hvussu kongsvaldið skuldi útinnast, fekk kongur forfall, og um almennar fyritreytir fyri at hava kongstign.

Ein áseting um kongsarvarøðina, sum samsvaraði við ásetingarnar í samveldislógini, varð síðan sett í íslendsku stjórnarskipanina 18. mai 1920.

## Uttanríkismál

Í grein 7 stk. 1 í samveldislógini stóð:

*Danmark hevur uttanríkismál Íslands um hendur í umboði tess.*

Ásetingin bar í sær, at Danmark fekk litið til at umboða Ísland í uttanríkismálum, og at íslendingar sjálvir stungu politikkin út. Tær avgerðir, sum takast máttu við lóg um íslendsk uttanríkismál, tók lóggávuvaldið í Íslandi, og tað var m.a. gjørt í grein 17 í íslendsku stjórnarskipanini frá 1920, ið segði:

*Kongur ger sáttmálar við onnur lond. Tó kann hann ikki, uttan so at Altingið samtykkir tað, gera nakran slíkan sáttmála, sum ber í sær avhending av rættindum ella skyldum á landi ella sjóøki, ella um líkindi eru til, at viðkomandi sáttmáli kann broyta stjórnarviðurskiftini í landinum.*

Ísland tók sambært ásetingunum í samveldislógini avgerðir um uttanríkismál, og boð samsvarandi teimum vóru at rokna sum fyriskipanir til danska uttanríkisráðharran um, hvussu hann og starvsfólk hansara áttu at bera seg at, meðan Danmark hevði umboð til at røkja íslendsk uttanríkismál. Hetta hevði við sær, at danska lóggávuvaldið ikki kundi áseta reglur um íslendsk uttanríkismál.

Kortini er greitt, at íslendingar ikki ráddu yvir sínum uttanríkismálum ótreytað. Eitt nú kundu íslendingar bert lata donsku uttanríkistænastuni slík verkevni í hendur, sum hevd var fyri og sum rímiligt var, at hon tók upp á seg. Íslendingar kundu ikki víðka arbeiðsøkið hjá uttanríkistænastuni, so at tað elvdi til munaverdar eykaútreiðslur umframt tær, sum uttanríkistænastan hevði fyri 1. desember 1918.

Í verki var skipanin tann, at danska uttanríkistænastan hevði íslendsk uttanríkismál um hendur og útinti tey undir leiðslu av danska uttanríkisráðharranum. Hægsta vald á málsøkinum hevði haraftur-ímóti tann ráðharrin í Reykjavík, sum tók sær av uttanríkismálum. Íslendingar tóku kortini í samveldistíðini so við og við ein størri og størri part av uttanríkismálunum í egnar hendur. Virksemið vaks serliga í kreppuni eftir 1930, og leingi vóru handils- og viðskiftamál drúgvasti parturin. Ein grundin til tað var, at Ísland hevði givið yvirlýsing um viðvarandi uttanveltaða støðu, og sostatt tók stjórnin bert í heilt fáum førum politiska støðu í uttanríkismálum.

Mestu tíðina, samveldislógin var í gildi, hevði eingin íslendskur ráðharri heiti uttanríkisráðharri. Forsætisráðharrin hevði uttanríkismál um hendur.

Sum heild kann sigast, at samstarvið millum danir og íslendingar um uttanríkismál árini frá 1918-1944 var uttan stórvegis trupulleikar. Serliga var tað trúnaðarfulltrúin hjá Íslandi í danska uttanríkisráðnum, sum átti æruna fyri, at so væl gekk í hond. Danska uttanríkistænastan var íslendingum ein góður skúli, so at teir, tá ið teir í 1940 noyddust at taka um endan í uttanríkismálum sjálvir, høvdu nøkur roynd fólk tøk.

### Hvussu víðfevnt var umboðið?

Danmark fekk umboð til at hava íslendsk uttanríkismál um hendur og átti at røkja hesar skyldur sínar javnt við síni egnu áhugamál. Tí er ymiskt, hvussu víðfevnt umboðið varð hildið at vera. Danir høvdu skjótt sagt øll íslendsk uttanríkismál um hendur uttan tey, ið viðvíktu dønum sjálvum. Allastaðni skuldi tað koma skilliga fram, at Ísland var umboðsgevi. Undirritaði ein embætismaður í donsku uttanríkistænastuni eitt skjal fyri Ísland, skuldi hann viðmerkja tað við orðunum „fyri Ísland" á tí máli, sum skjalið var á.

Samanumtikið kann sigast, at umboðið var tvískift: Í fyrra lagi var Ísland einsamalt bundið av tí, sum danski uttanríkisráðharrin gjørdi við tí umboði hann fekk haðani, og í øðrum lagi bar Ísland einsamalt ábyrgd fyri brot móti altjóðarætti. Var ósemja millum danir og íslendingar, tóku íslendingar sjálvir viðkomandi mál.

### Trúnaðarfulltrúi

Í grein 7 stk. 2 í samveldislógini er tilskilað, at ein íslendskur trúnaðarfulltrúi skal vera í danska uttanríkisráðnum. Ásetingin er soljóðandi:

*Eftir ynski frá íslendsku stjórnini skal ein trúnaðarfulltrúi, sum er kønur í íslendskum viðurskiftum, setast í uttanríkisráðnum til at viðgera íslendsk mál.*

Hesin trúnaðarfulltrúin var danskur embætismaður, og danski uttanríkisráðharrin setti hann í starv. Trúnaðarfulltrúin vísti beinleiðis til danska uttanríkisráðharran, og hann skuldi fylgja gjølla við, hvussu íslendsk uttanríkismál vórðu viðgjørd í danska uttanríkisráðnum.

### Sendiharrar og sendifulltrúar

Í grein 7 stk. 3 í samveldislógini stóð:

*Har ið eingin sendiharri ella sendimaður er, skal ein setast eftir ynski frá íslendsku stjórnini og í samráð við hana, treytað av at Ísland ber kostnaðin. Við somu korum skulu ráðgevar, ið eru kønir í íslendskum*

*viðurskiftum, setast á teimum sendistovum og konsulátum, sum nú eru. Um íslendska stjórnin fyri egnan kostnað vil senda sendimenn í onnur lond at gera sáttmálar um serlig íslendsk viðurskifti, kann tað gerast í samráð við uttanríkisráðharran.*

Eftir fyrstu orðunum í hesi áseting at døma, hevði Ísland møguleika at fáa teir omanfyri nevndu sendifulltrúarnar settar fyri egnan kostnað, har ið eingir vóru frammanundan. Annars er óneyðugt at hava nógv orð um hesa ásetingina, tí sendimenn vórðu ongantíð settir sambært hesi heimild.

Omanfyri nevnda áseting tilskilar eisini, at ráðgevar, sum eru kønir í íslendskum viðurskiftum kunnu setast á sendistovum og konsulátum. Í 1934 varð gjørt av at royna hesa ásetingina, og tað árið varð settur ein íslendingur sum „*attaché*" á donsku sendistovuni í Oslo. Í 1935 varð eitt íslendskt viðskiftaumboð sett sum „*attaché*" á donsku sendistovuni í Madrid við sæti í Barselona. Løn og annan kostnað í sambandi við virksemið hjá hesum báðum umboðum bar íslendski ríkiskassin og fyri ein part vinnufeløg og bankar. Seinni fekk eitt umboð afturat slík diplomatisk rættindi, og tríggir íslendingar fingu sostatt størv sambært hesi áseting.

Við ásetingini at enda í stk. 3 í grein 7, ið heimilar íslendingum í samráð við danska uttanríkisráðharran at senda sendifulltrúar at gera sáttmálar um seríslendsk viðurskifti, verður hugsað um diplomatiskar sendifulltrúar og ikki um fólk, sum verða send í vanligum viðskiftaørindum.

### Sáttmálar við onnur ríki

Í stk. 3 í grein 7 stóð soleiðis um sáttmálar við onnur lond:

*Teir sáttmálar, sum longu eru gjørdir millum Danmark og onnur lond, og sum eru kunngjørdir, og viðvíkja Íslandi, galda eisini har. Millumtjóðasáttmálar, sum Danmark ger, eftir at henda samveldislóg er staðfest, binda ikki Ísland, uttan so, at viðkomandi íslendsku myndugleikar samtykkja tað.*

Her er skilt ímillum sáttmálar, sum vóru gjørdir fyri 1. desember 1918 og sáttmálar, ið vórðu gjørdir eftir henda dag. Teir, sum vóru gjørdir fyri nevnda dag í 1918, skuldu verða verandi í gildi fyri Ísland. Tvær treytir lógu tó við: At sáttmálin varð kunngjørdur í Íslandi, og at sáttmálin viðvíkti Íslandi. Hesar reglur vórðu mettar bert at galda millum Ísland og Danmark. Spurningurin um, hvat gildi slíkir sáttmálar høvdu í mun til tey lond, sum Danmark gjørdi teir við, valdaðist sjálvandi um tær almennu reglur í altjóðarætti, sum hildnar vóru

at galda, tá ið ein ríkispartur loysti frá einum ríki, ið hann áður hoyrdi undir. Antin slíkir sáttmálar høvdu gildi ella ikki, treytaðist av, um teir burturav viðvíktu Íslandi.

Viðvíkjandi sáttmálum, sum vóru gjørdir eftir 1. desember 1918 var meginreglan tann, sambært áðurnevndu áseting í samveldislógini, at teir bundu ikki Ísland uttan so, at viðkomandi íslendsku myndugleikar samtyktu tað. Sum fyrr nevnt var kongi fingið valdið at gera sáttmálar við onnur lond, men samtykki frá Altinginum varð kravt, um sáttmáli var gjørdur, sum bar í sær avhending av rættindum ella skyldum á landi ella sjóøki, sambært grein 17 í íslendsku stjórnarskipanini frá 1920. Sambært hesum var skipanin tann, at kongur undirritaði íslendskar millumtjóðasáttmálar og avvarðandi íslendski ráðharrin saman við honum. Tá ið slíkir sáttmálar vórðu uppsagdir, varð farið fram eftir somu reglum.

Í samveldislógartíðini tók danska uttanríkistænastan stig til millumtjóðasáttmálar, men summar sáttmálar tók íslendska stjórnin tó stig til sjálv, serliga handilssáttmálar eftir 1930. Tað kom eisini fyri nakrar ferðir, at íslendski sendiharrin í Keypmannahavn skrivaði undir millumtjóðasáttmála fyri Ísland. Ikki varð skrivað undir nakran millumtjóðasáttmála, fyrr enn stjórnarráðið í Reykjavík hevði viðgjørt tekstin, og íslendska stjórnin hevði samtykt at gera sáttmálan.

Í 1930 vóru túsund ár liðin frá tí, at Altingið varð stovnað, og í tí sambandi varð skipað fyri hátíðarhaldi á Tingvøllum. Gjørt var av, at eitt mál, sum mett var at vera umráðandi, skuldi avgreiðast á einum tingfundi har. Tað var ein sáttmáli við hini norðurlondini, Danmark, Finnland, Noreg og Svøríki „um loysn av ósemjum á friðsamligan hátt." Hini norðurlondini høvdu gjørt sínámillum sáttmálar um loysn av slíkum ósemjum. Íslendingar vildu, at íslendski forsætisráðharrin undirritaði sáttmálarnar á Tingvøllum og hildu einki vera til hindurs fyri tí. Danir afturímóti mettu, at neyðugt var, at íslendski forsætisráðharrin fekk umboð til tess frá danska uttanríkisráðharranum, tí annars hevði undirskriftin ikki gildi eftir altjóðarætti orsakað av ásetingunum í samveldislógini um, at danir høvdu íslendsk uttanríkismál um hendur.

Endin var, at kongur gav íslendska forsætisráðharranum umboð til at undirrita, og forsætisráðharrin medundirritaði umboðsskjalið. Sostatt gjørdi Ísland við hetta høvi fyri fyrstu ferð sáttmála við onnur lond uttan nakran millumlið. Hetta var tí eitt týðandi stig í royndunum at styrkja íslendska fullveldið.

### Millumtjóðasáttmálar, ið bundu Ísland sambært samveldislógini

Tilskilað var í stk. 4 í grein 7 í samveldislógini, at sáttmálar millum Danmark og onnur lond, sum eru kunngjørdir í Íslandi, skulu galda

har. Sáttmálar, ið gjørdir vóru eftir 1. desember 1918 kravdu røttu íslendsku myndugleikar at samtykkja. Kortini var ógreitt, hvørjir millumtjóðasáttmálar bundu Ísland. Farið varð undir at kanna hesi viðurskifti í 1940, og arbeiðið helt við nøkrum steðgum fram til 1963, tá ið fyrst eitt sáttmálasavn varð givið út og síðan ein skipað framhaldsútgáva.

Hetta bendir alt á, at tað kom í drag at taka endaliga støðu til útgreining av grein 7 í samveldislógini um, hvat gildi teir sáttmálar høvdu, sum gjørdir vóru millum Danmark og onnur lond, áðrenn samveldislógin kom í gildi, og sum viðvíktu Íslandi. Kanningar vístu, at sáttmálar ikki høvdu verið kunngjørdir so regluliga, sum teir áttu. Tað bar tí mangan illa til at skilja ímillum, antin Ísland var partur í einum sáttmála ella ikki. Ásetingin í grein 7 bar tí valla annað í sær, enn at danir lótu íslendingar nýta teir sáttmálar, ið teir vildu. Var ein millumtjóðasáttmáli kunngjørdur og ikki settur úr gildi aftur, so varð hann sjálvandi roknaður at vera bindandi. Var ein sáttmáli ikki kunngjørdur, varð mett um, hvørt hann var Íslandi til gagns. Varð sáttmálin mettur at vera gagnligur fyri Ísland, varð kannað eftir, hvørja støðu mótparturin hevði til sáttmálan. Játtaði hann at sáttmálin var í gildi, var málið leyst og liðugt. Um einki svar fekst, var reglan tann, at tøgn samtykkir.

### Samstøða um uttanríkismálini

Endamálið við at geva dønum umboð til at røkja íslendsk uttanríkismál, var at tryggja, at samstøða var um, hvussu berast skuldi at í uttanríkismálum, og at forða fyri ósambæriligum ásetingum og atgerðum. Greitt er kortini, at eingin fullvissa var fyri hesi samstøðu í grein 7 í samveldislógini og tað sæst m.a. av tí, at íslendskir sendifulltrúar kundu samráðast um og greiða íslendsk mál einsamallir, sambært stk. 3 í grein 7. Sostatt var einki til hindurs fyri, at danir og íslendingar kundu taka hvør sína stevnu upp.

Hvussu er og ikki, so er tó eyðsæð, at umboðið hjá Danmark trongdi um hjá báðum pørtum. Danski uttanríkisráðharrin hevði umboðið, og til hansara noyddust íslendingar við øllum, sum hevði við danska viðgerð av íslendskum uttanríkismálum at gera. Danski uttanríkisráðharrin stóð tó ikki Altinginum til svars í uttanríkismálum. Tað gjørdi tann íslendski ráðharrin, sum hevði uttanríkismál undir sær, og tað var forsætisráðharrin. Soleiðis var skipanin til 1940, tá ið ein serstakur uttanríkisráðharri fyri fyrstu ferð varð settur.

Um danski uttanríkisráðharrin ikki røkti skyldur sínar til lítar sambært tí umboði, ið hann hevði fingið, hevði íslendski forsætisráðharrin rætt at kæra til danska forsætisráðharran og kundi enntá, var tað álvarslig misrøkt, krevja, at uttanríkisráðharrin varð sagdur úr starvi.

Bataði kæra ikki, hevði tað kunnað havt við sær sambandslit millum londini, av tí at samveldissáttmálin var mishildin.

Í veruleikanum var Ísland í einari serstøðu. Eitt nú fóru danir upp í Fólkasamgonguna, men tað gjørdu íslendingar ikki, hóast samgongan sjálv boðaði frá, at ein íslendsk umsókn fór at verða játtað. Um hetta var drúgt kjak, og nógvir íslendingar mæltu kortini til at fara uppí við teirri grundgeving, at limaskapur framdi íslendsk áhugamál, styrkti trygdina og skorðaði fullveldið betur.

Serstøðan, ið Ísland hevði, sást eisini aftur í teimum viðskiftasáttmálum, ið gjørdir vórðu, eitt nú viðskiftasáttmálanum við Italia í 1936. Í 1935 legði Italia harðar treytir við innflutningi, og tá ið landið um heystið sama ár gjørdi innrás í Abbessinia (Etiopia), settu italskir myndugleikar javnvirðiskeyp sum treyt fyri framhaldandi samhandli. Samráðingarnar gingu trekliga, men tá ið av tornaði fingu íslendingar ein sáttmála, sum í summum var lagaligari enn teir, ið onnur lond høvdu fingið. Orsøkin var tann, at Ísland ikki var limur í Fólkasamgonguni og tískil ikki tók lut í teimum tiltøkum, sum samgongan setti í verk til tess at revsa Italia fyri krígsførsluna í Abessinia.

## Íslendsk umboðan í Danmark og donsk í Íslandi

Í grein 15 í samveldislógini stóð:

*Hvørt landi sær ger av, hvussu áhugamálini hjá tí og borgarum tess skulu røkjast í hinum landinum.*

Íslendingar høvdu ta støðu, at eftir 1. desember 1918 áttu tey diplomatisku viðurskiftini við Danmark ikki at vera øðrvísi enn tey, ið Danmark hevði við onnur sjálvstøðug lond við tí frábrigdi sjálvandi, at londini høvdu sama ríkisleiðara. Hetta kravdi bert, at greitt kom fram, antin kongur við almenn høvi umboðaði Ísland ella Danmark. Ásetingin í grein 15 var eitt undantak frá umboðnum, sum íslendingar góvu dønum, og íslendingar høvdu sostatt uttanríkismálini, sum viðvíktu Danmark, um hendur sjálvir og ráddu fyri teimum.

Í 1919 settu danir ein sendiharra í Íslandi, og árið eftir settu íslendingar sín í Keypmannhavn. Hesir sendiharrarnir høvdu øll tey somu rættindini sum aðrir slíkir sendiharrar úr øðrum londum.

## Hægstirættur

Í grein 10 í samveldislógini var soljóðandi áseting:

*Hægstirættur í Danmark er ovasta dómsvald í íslendskum málum, hagar til íslendingar gera av sjálvir at stovna ovasta dómstól í landinum. Hagar til skal ein íslendingur skipast í eitt av dómarasætunum í hægstarætti, og skal henda áseting fremjast næstu ferð, sæti verður leyst í hægstarætti.*

Stutt eftir at samveldislógin var komin í gildi, gjørdu íslendingar av at taka ovasta dómsvald í íslendskum málum í egnar hendur. Hægstirættur í Íslandi varð stovnaður longu 1. januar 1920, og fór at virka 16. februar sama ár. Hetta var tó eingin grundbroyting. Tann Kongligi íslendski landsyvirrætturin hevði virkað í landinum síðan 11. juli 1800, og í honum sótu tríggir løglærdir dómarar. Landsyvirrætturin hevði stóra ávirkan á rættarligu gongdina í Íslandi í 19. øld og álitið á honum vaks í hvørjum. Fram undir aldaskiftið vóru bert heilt fá mál skotin inn fyri hægstarætt í Danmark. Tí kann av røttum sigast, at íslendska fólkið hevði givið rættinum eina so dygga álitisváttan, at ovasta dómsvald í roynd og veru longu var í landinum.

Íslendingar høvdu kortini fult álit á hægstarætti í Danmark og orsakirnar til, at broytingin varð gjørd, vóru aðrar. Í fyrsta lagi var tað málið, tí hóast dómarar áttu at døma í íslendskum málum og eftir íslendskari lóg, kravdu teir ikki at duga eitt einasta orð í íslendskum. Tískil máttu øll skjøl týðast, og síðan skuldi dømast eftir danskari týðing av íslendskum lógum. Í øðrum lagi treyt dómarum mangan vitan um viðurskiftini í Íslandi, um mentanina og hugsanarháttin hjá fólkinum. Í triðja lagi hildu mong í Íslandi, at tað var nóg so undirbrotligt hjá íslendingum at geva seg undir ein dómstól, tá ið teir onga ávirkan høvdu á, hvussu hann var skipaður. Í fjórða lagi var tað kostnaðurin, ið m.a. stóðst av at týða skjøl, sum bert fólk í góðum korum høvdu ráð til, og í fimta lagi, at tað seinkaði nógv fyri málum, at hægsti rættur var danskur.

Ímóti hesum varð ført fram, at í hægstarætti í Danmark sótu 13 mætir løgfrøðingar, sum vóru óheftir av øllum trætum og deilum í Íslandi, og heldur ikki kendu partarnar í málunum, sum dømast skuldu. Sagt varð, at hetta tryggjaði, at teir ikki vóru parthallir. Hóast landsyvirrætturin hevði vunnið sær álit, so var kortini ein ávís misnøgd um, at summir dómarar vóru uppi í politikki, men tað var nú at kalla dottið burtur seinastu tíðina, sum rætturin virkaði. Í einum fámentum landi sum Íslandi kundu dómarar illa vera óheftir á sama hátt, sum dómarar í øðrum londum. Ímóti hesum varð sagt, at við tað gjørdist ikki annað enn at bøta um rættarskipanina og styrkja ovasta dómsstigið.

Stutt sagt hildu íslendingar ikki land sítt vera fullsjálvstøðugt,

meðan hægsta dómsvald enn var í einum øðrum landi og teir onga ávirkan høvdu á, hvussu tað var skipað.

Tað hevði tískil í roynd og veru fáar broytingar við sær, at hægstirættur var settur á stovn í Íslandi. Meginbroytingin var tann, at rættarmálsviðgerð var munnlig og ikki skrivlig. Teir tríggir dómararnir í landsyvirrættinum fingu sæti í hægstarætti og tveir vóru settir afturat so, at í alt vóru fimm dómarar í honum. Nú eru teir níggju, og rætturin er skiftur í tvær deildir.

Forseti Íslands setur dómarar eftir tilmæli frá løgmálaráðharranum, ið frammanundan skal biðja hægstarætt meta umsøkjararnar. Hóast strong krøv verða sett um vitan og starvsroyndir hjá dómarum bæði alment og í viðgerð av einstøkum málum, hevur tað kortini ikki staðið á at fáa skikkað fólk í hesi størv, sum til fulnar lúka tey krøv, ið eiga at verða sett uttan mun til, hvussu lítið íslendska samfelagið er. Tað eigur í hesum viðfangi eisini at vera havt í huga, at altjóðafelagsskapir hava eftirlit við stórum pørtum av rættarskipanini í einstøkum londum, serliga teimum sum viðvíkja virkseminum hjá dómstólunum.

Um hægstarætt kann sigast, at hann hevur í mongum lutum myndað íslendskan rætt við dómsfyridømum og á tann hátt merkt íslendska rættarvenju. Takast skal fram her, at Ísland ikki altíð hevur evnað at lata lóggávu sína fylgja rættarligu gongdini í grannalondunum, so væl sum teir áttu, og kemst tað helst m.a. av, hvussu fáment land Ísland er. Tað hevur tí fallið hægstarætti í lut at gera reglur. Tað hevur hann gjørt á flestum rættarøkjum, ikki minst í stjórnarrætti, fyrisitingarrætti, endurgjaldsrætti og ognarrætti, hóast meiri fullfíggjað lóggáva nú er gjørd á hesum øki enn áður. Hægstirættur hevur eisini nakrar ferðir ógildað lógir, tí tær ikki vóru í samsvari við stjórnarskipanina. Í hesum hevur hægstirættur saman við hægstarætti í Finnlandi havt eina serstøðu í mun til ovastu dómstólar í øðrum Norðurlondum.

## Sjóverjan

Í grein 8 í samveldislógini var henda áseting um sjóverjuna:

*Danmark hevur undir donskum flaggi fiskiveiðieftirlitið um hendur á íslendskum sjóøki, til Ísland ger av sjálvt at taka tað yvir lutvíst ella heilt fyri egnan kostna.*

Alt frá 17. øld metti kongur seg hava fullveldi yvir norðurhøvum frá Bergen í Noregi til Hvarvið á Grønlandi og norður í íshavið mill-

um Grønland og Noreg. Seinni vunnu hugmyndir um frælst hav fótafesti, og fylgjan av tí var serreglur um sjómørk hjá strandarlondum. Í 1901 var sjómarkið við sáttmála millum Danmark og Bretland ásett at vera tríggjar fjórðingar úr landi við serskipan fyri flógvum og firðum.

Útlendsku skipini trároyndu grunnarnar, og viðhvørt vóru samanbrestir við íslendingar. Danska sjóverjan setti ikki stóra orku í at loysa hesar trupulleikar, og sjóverjuskipini vóru bert undir Íslandi summarmánaðirnar. Útlendska ovurveiðin elvdi til íslendsk krøv um at herða sjóverjuna, og frá 1907 til 1939 vóru donsk verjuskip undir Íslandi meginpartin av árinum.

Við samveldislógini viðurkendi Danmark, at Ísland hevði fullveldi yvir sínum sjóøki, men átók sær samstundis at verja tað. Danir fingu ikki gjald fyri hetta, men danskir og íslendskir ríkisborgarar fingu javnan fiskiveiðirætt á sjóøkinum hvørjir hjá øðrum. Hesi rættindi komu serliga føroyingum til góðar, ið fiskaðu undir Íslandi. Verjuskipini sigldu undir donskum flaggi, og yvirmenninir á teimum vóru undir myndugleika danska herflotamálaráðharrans eins og aðrir yvirmenn á ríkisherskipum. Tí sum hesi skip høvdust at undir Íslandi, høvdu danir ábyrgd av, og íslendska stjórnin var í somu støðu mótvegis danska flotamálaráðharranum, sum hon var mótvegis uttanríkisráðharranum viðvíkjandi íslendskum uttanríkismálum. Hinvegin høvdu íslendingar sjálvir ábyrgd av allari sakarmálsviðgerð, dómum og fulnaði.

Ætlanin var, at danski parturin í sjóverjuni skuldi vera tann sami, sum hann var, áðrenn samveldislógin kom í gildi, men tað bar í sær, at danir hvørki kundu víðka ella minka hana uttan við samtykki frá íslendingum. Íslendingar sóu hesa skipan sum eina fyribilsskipan, og tóku so við og við ein størri part av sjóverjuni upp á seg sjálvar. Hetta loysti kortini ikki danir undan skuldbindingum teirra á hesum øki so leingi samveldislógin var í gildi.

Í 1922 samtykti Altingið eitt uppskot um at mæla stjórnini til at bera so í bandi við danir, at teir hvørt ár fyribils høvdu tvey sjóverjuskip undir Íslandi fast ella sum longst. Tað førdi til, at danska-íslendska ráðgevingarnevndin legði eitt uppskot fram til sáttmála millum íslendingar og danir. Við tað, at eingin semja fekst, vórðu tey ráðini tikin í staðin at leiga skip til endamálið. Í 1926 keypti Ísland eitt vápnað eftirlitsskip, sum fyrr hevði verið leigað. Við hesum var sett á at skipa eina íslendska sjóverju. Danir høvdu sum áður nevnt tvey verjuskip undir Íslandi til 1939, men síðan hava danir ikki tikið lut í sjóverjuni undir Íslandi.

## Javnrættur millum danskar og íslendskar borgarar

Um javnrætt millum borgarar í báðum londum varð hetta ásett í grein 6 í samveldislógini:

*Danskir borgarar hava í øllum viðurskiftum sama rætt í Íslandi sum íslendskir borgarar, ið eru føddir har, og øvugt.*

*Borgarar í báðum londum eru undantiknir herskyldu hjá hinum.*

*Danskir og íslendskir borgarar hava á jøvnum føti og uttan mun til, hvar teir eru búsettir, frían rætt til fiskiskap innan sjómark hjá báðum londum.*

*Donsk skip hava somu rættindi í Íslandi sum íslendsk skip og øvugt.*

*Londini skulu ikki lata danskar og íslendskar vørur hava ólagaligari treytir hvørt hjá øðrum enn tær úr øðrum londum.*

Hendan ásetingin mundi vera tann í allari samveldislógini, ið mest varð funnist at, tá ið hon kom til viðgerðar í Íslandi. Hon gjørdi sítt til, at tveir tingmenn tóku støðu ímóti henni.

Eftir samveldislógini skuldu íslendingar og danir ikki hava felags ríkisborgararætt, men hvørjir sín borgararætt við sjálvstøðugum borgararættindum, sambært serliga grein 6 omanfyri. Tað kom til sjóndar í samskiftum teirra við triðjalond og í stóran mun í sínámillum viðurskiftum teirra. Eftir ætlan skuldu londini hvørt í sínum lagi seta lóg um borgararætt hjá sær, og tað gjørdi Ísland 6. oktober 1919, men roknað varð samstundis við, at fyriskipanir hesum viðvíkjandi vóru sambæriligar í báðum londum.

Danir løgdu serligan dent á, at borgararættindi skuldu vera tvívirkin og uttan fyrivarni. Men treytir kundu leggjast við javnrættinum, fiskiveiðirættindi undantikin. Tað ið um ráddi var tí, at allar reglur vóru tær somu fyri allar borgarar. Eitt nú var tað treyt fyri atkvøðurætti í Íslandi og valbæri til Altingi, at ein hevði verið búsettur í Íslandi í minst fimm ár undan valdegi. Ognar- og brúksrættur til fasta ogn og harafturat ymisk arbeiðsrættindi vóru treytað av, at ein búði í landinum. Eingin ivi var heldur um, at danskir borgarar noyddust at geva seg undir tær almennu avmarkingar, sum lagdar vóru á vinnufrælsið í Íslandi t.d. í sambandi við fiskiveiði og brennivínshandil. Eingi undantøk vórðu gjørd onnur enn fyri herskyldu, tí í hvørgum landi høvdu borgarar úr hinum herskyldu.

Tá ið samveldissáttmálin var gjørdur, varð harðast funnist at ásetingunum í grein 6 um javnrættindi hjá íslendskum og donskum ríkisborgarum. Atfinningarnar snúðu seg serliga um ósambærliga danska ávirkan í Íslandi og vandan fyri, at danir fóru at flyta í stórum tali til Íslands og leggja vinnutólini undir seg, serliga í fiskivinnuni.

Hugsandi kundi hetta hent, men royndirnar vístu kortini, at lítið var at óttast fyri. Ásetingin um javnrætt elvdi ikki til, at danir fluttu til Íslands ella trokaðu seg inn í vinnulívið í Íslandi. Sannleikin er óivað tann, at fleiri íslendingar fingu gagn av ásetingini um javnrætt, meðan teir vóru í Danmark, enn danir í Íslandi.

## Fíggjarlig uppgerð

Stríð var leingi um fíggjarviðurskiftini millum íslendingar og danir. Danir søgdu seg at hava havt stórar útreiðslur av Íslandi, og at íslendingar ongantíð fóru at fáa fótin fyri seg fíggjarliga. Jón Sigurðsson, fremsti undangongumaður í íslendska sjálvstøðisstríðinum í 19. øld, kannaði søgulig skjøl gjølla og helt seg við kanningum sínum kunna sanna, at danir skyldaðu íslendingum stórar upphæddir. Danir vóru tó ikki serliga sinnaðir at viðgera hesa niðurstøðu nágreiniliga, men skipaðu eina nevnd við tí setningi at kanna spurningin, og úrslitið, hon kom til, var, at danir áttu at lata pening til serstøk íslendsk neyðsynjamál, hóast teir ikki tóku undir við tí, ið Jón Sigurðsson førdi fram. Í Íslandi varð tó hildið nógv um sjónarmiðið hjá Jóni Sigurðssyni, ið stimbraði sjálvsálitið hjá íslendingum.

Trætan endaði við eini lóg frá 2. januar 1871 um støðuna hjá Íslandi í danska ríkinum. Í lógini var ásett, at til tær serligu útreiðslurnar hjá Íslandi skuldi ein føst upphædd latast hvørt ár, ið var 30.000 ríkisdálar og í 10 ár ein upphædd, sum var 20.000 ríkisdálar um árið og eftir tað tey næstu 20 árini minkaði við 1.000 ríkisdálum um árið, til gjaldið eftir 20 árum fell burtur. Tá ið krónan kom í staðin fyri ríkisdálan, var ein ríkisdáli 2 kr. Eftir hesum var tann fasta upphæddin úr ríkiskassanum 60.000 kr. og tann tíðarbundna veitingin 40.000 kr. um árið, tó minkandi.

Við serligum útreiðslum hjá Íslandi varð hugsað um tey málsøki, ið sambært støðulógini frá 1871 vóru íslendsk sermál. Annars skuldi Ísland bera allan fyrisitingarligan kostnað sjálvt. Íslendingar skuldu tó ikki gjalda nakað til málsøki, sum vóru felags fyri ríkið, meðan teir eingi umboð høvdu í danska Ríkisdegnum og tískil onga ávirkan á tað, sum har fór fram. Í 1918 var danska veitingin til Íslands samsvarandi tí, sum sagt er omanfyri, 60.000 kr.

Í grein 13 var tilskilað, at henda upphædd datt burtur:

*Tann árliga veitingin úr danska ríkiskassanum til Íslands upp á 60.000 kr. og kostnaðurin, sum ríkiskassin ber av skrivstovuni hjá íslendska stjórnarráðnum í Keypmannhavn, detta burtur.*

*Somuleiðis missa íslendsk lesandi tann forrætt, tey hava havt til serrættindi á Lærda háskúlanum í Keypmannhavn.*

Tað kom ongantíð upp á tal í sáttmálasamráðingunum, at Ísland setti krøv fram um ríkisognir, ella at Ísland skuldi taka ein part av donsku ríkisskuldini upp á seg. Eins og áður nevnt varð viðurkent, at Ísland ongan kostnað bar av málsøkjum, ið vóru felags millum londini, við tað at tað ikki tók lut í lóggávu um almenn ríkismál.

Ósemja var afturímóti um, hvørt annað landið átti okkurt á hjá hinum. Hesin spurningur varð loystur á tann hátt, at ein upphædd skuldi gjaldast úr danska ríkiskassanum, sum til samans var eitt stovnsfæ, ið gav 60.000 kr. í rentu, kostnaðurin sum danir høvdu av íslendskum studentum í Keypmannhavn afturatlagdur – tann sonevndi Garðsstyrkurin.

Tveir grunnar skuldu stovnast, sum tilsamans vóru tvær milliónir kr. Annan skuldi Lærdi háskúlin í Keypmannhavn umsita; hann nevndist *Dansk-islandsk fond*. Hin skuldi Lærdi háskúlin í Reykjavík umsita; hann nevnist Sáttmálagrunnurin. Ein millión skuldi vera í hvørjum. Pengar úr grunnunum skuldu latast til mentamál og áherðsla leggjast á at styrkja mentanarliga sambandið millum Ísland og Danmark. Við einum hugtaki úr búskaparfrøðini kann verða sagt, at árligu donsku veitingarnar til Íslands á henda hátt vórðu kapitaliseraðar.

## Gjaldoyra

Í grein 9 í samveldislógini var soljóðandi áseting um gjaldoyra:

*Tann mynteind, sum higartil hevur verið í gildi í báðum londum, skal framvegis vera í gildi, meðan norðurlendska gjaldoyrissamgongan stendur við.*

*Um Ísland vil fara undir egnan myntslátt, krevur semja at verða gjørd við Noreg og Svøríki um, hvørt mynt, sum er sligin í Íslandi, skal viðurkennast sum lógligt gjaldoyra í hesum báðum londum.*

Henda áseting bar í sær, at tann mynt, sum var sligin í Danmark og av sama slag sum tær, ið gjaldnýtar vóru har á landi 1. desember 1918, eisini skuldu vera lógligt gjaldoyra í Íslandi. Henda skipanin skuldi halda fram, so leingi sum norðurlendska gjaldoyrasamgongan stóð við. Hóast norðurlendska gjaldoyrasamgongan ikki slitnaði fyrr enn í 1931, var hon longu farin at ridla av álvara í krígsárunum frá 1914-18. Ísland fór upp í gjaldoyrasamgonguna beint eftir, at tað var

viðurkent sum sjálvstøðugt land. Sambært stk. 2 í grein 9 hevði Ísland heimild til at sláa sjálvstøðuga mynt til egið brúk. Íslendsk mynt varð á fyrsta sinni sligin í Íslandi í 1922, men hon var bert gjaldnýtt innanlands.

## Ráðgevingarnevndin

Í greinunum 16 og 17 í samveldislógini vóru tvær ásetingar, sum miðaðu ímóti at tryggja sambandið millum londini. Tann fyrra var soljóðandi:

*Ein donsk-íslendsk ráðgevingarnevnd skal stovnast, og í henni skulu vera minst seks limir. Danski Ríkisdagurin velur aðra helvtina av limunum og íslendska Altingið hina.*

*Øll lógaruppskot, sum gjøllari viðvíkja, hvussu tey mál, ið umrødd eru í hesi samveldislóg, og lógaruppskot um tey sermál hjá øðrum landinum, ið eisini viðvíkja hinum, skal luthavandi stjórnarráð, um serliga tvørligar umstøður ikki forða, leggja fyri nevndina til ummælis, áðrenn tey verða løgd fyri Ríkisdagin ella Altingið. Nevndin skal gera tilmæli um broytingar í teimum ásetingum í uppskotinum, sum hon metir vera til vansa fyri áhugamálini hjá øðrum landinum og borgarum tess.*

*Nevndin hevur harumframt tann setning, at hon, annaðhvørt eftir tilráðing frá stjórnunum ella av sínum eintingum, skal taka stig til at gera uppskot, ið miða ímóti samstarvi millum londini og samsvari í lóggávu teirra millum, og at taka lut í felagslóggávu fyri Norðurlond.*

*Gjølligari fyriskipanir um, hvussu nevndin skal skipast og virka, gevur kongur eftir tilmæli frá stjórnunum í báðum londum.*

Eftir ásetingini eiga seks limir í minsta lagi at vera í hesi nevndini, men sambært fyriskipan frá 28. mai 1919 um, hvussu dansk-íslendska nevndin skal skipast og virka, skulu nevndarlimirnir ikki vera fleiri enn 8 og valskeið teirra 8 ár. Nevndin skuldi halda fund minst eina ferð um árið til skiftis í Reykjavík og Keypmannhavn. Nevndin var skift í tveir partar og formaður valdur fyri hvønn. Nevndin helt fund eina ferð um árið og virkaði í roynd og veru sum tvær ymiskar nevndir. Setningurin hjá nevndini var skjótt sagt at hava umsjón við, hvussu samveldissáttmálin kom í verk, serliga arbeiðinum við nýggjum lógum, eins og tilskilað er í omanfyri nevndu áseting í sáttmálanum.

Ivamál var um, hvørjar lógir, ið neyðugt var at leggja fyri nevndina, og hóast tað ikki var gjørt, fingu viðkomandi lógir kortini gildi, men hinvegin var slíkt eyðvitað sáttmálabrot. Tað var greitt, at hesar ásetingarnar bert fevndu um stjórnaruppskot, tí sjálvandi er tinglimum

frítt og frælst at leggja fram øll tey lógaruppskot á tingi, sum teir vilja, óheft av stjórnini. Tó fekk nevndin tey fyrstu árini allar lógir sendandi, sum tjóðtingini bæði samtyktu, og øll nevndin ella annar parturin av henni fór ígjøgnum tær og gjørdi viðmerkingar, um okkurt var at viðmerkja. Tey lógaruppskot, sum skuldu leggjast fyri nevndina, vóru tey, sum viðvíktu viðgerð av málum, ið samveldislógin fevndi um, og mett var, at ásetingin eisini viðvíkti fyriskipanum, sum íkomnar vóru á annan hátt.

Nevndin skuldi harafturat taka upp slík sermál hjá øðrum landinum, ið viðvíktu hinum ella støðuni hjá borgarum tess, eitt nú í sambandi við lóggávu um borgararættindi og vinnuvirksemi, og mál, sum høvdu við javnrættindini hjá borgarunum at gera. At enda kundi nevndin av sínum eintingum ella eftir tilráðing frá stjórnunum í teimum báðum londunum gera lógaruppskot, ið miðaði ímóti samstarvi teirra millum og taka lut í felags lóggávu fyri øll Norðurlond.

Ráðgevingarnevndin hevði sín fyrsta fund 1. mai 1919 í Keypmannhavn og kom síðan regluliga saman eina ferð um árið til skiftis í Keypmannhavn og Reykjavík. Seinasti fundurin varð hildin í Keypmannhavn 4. september 1939.

Á fyrsta fundinum var ein hópur av íslendskum og donskum lógaruppskotum lagdur fyri nevndina. Hetta komst mest av, at neyðugt var við ymsum lógarbroytingum orsakað av teirri nýggju støðu, ið Ísland nú hevði mótvegis Danmark. Eitt av høvuðsmálunum, sum nevndin viðgjørdi, var spurningurin um, hvussu sjóverjan skuldi skipast. Eisini varð nógv tosað um uttanríkismál, og um hvussu grein 7 í samveldislógini skuldi tulkast. Fleiri ivamál komu upp, sum áður greitt frá. Eftir 1925 vóru uttanríkismál at kalla ikki viðgjørd í nevndini. Javnrættarásetingin í grein 6 var eisini nógv umrødd og somuleiðis avhending av íslendskum skjølum, handritum og forngripum úr donskum søvnum. Einki bendir tó á, at nevndin nakrantíð loysti nakað av hesum trætumálum ella gjørdu nakran nývørr.

Um gerðarrættin í grein 17 er bert at siga, at hann varð ongantíð settur.

## Broytingar og uppsøgn

Óneyðugt átti at verið at sagt nógv um broytingar í sáttmálanum, tí ongar vóru gjørdar. Um partarnir nú høvdu komið ásamt um at gera broytingar kortini, so kravdu bæði Altingið og danski Ríkisdagurin at samtykkja tær, og síðan skuldu altingsveljararnir í Íslandi atkvøða um broytingar í samsvari við grein 76 stk. 2 í stjórnarskipanini frá 1920.

Um uppsøgn av samveldissáttmálanum var soljóðandi áseting í grein 18 í samveldislógini:

*Eftir árslok 1940 kunnu bæði danski Ríkisdagurin og Altingið nær sum helst krevja, at farið verður undir tingingar um endurskoðan av hesi lóg.*

*Fæst eingin semja í lag innan trý ár frá tí, at kravið er sett fram, kann annaðhvørt Ríkisdagurin ella Altingið samtykkja at seta úr gildi sáttmálan, sum henda lóg røkkur um. Skal ein slík samtykt fáa gildi krevst, at í minsta lagi tveir triðingar av tinglimunum annaðhvørt í báðum deildum í Ríkisdegnum ella í sameindum Altingi atkvøða fyri henni, og síðan skulu teir veljarar, ið hava atkvøðurætt til tingið í landinum, samtykkja hana í einari atkvøðugreiðslu. Um atkvøðugreiðslan vísir, at í minsta lagi tríggir fjórðingar av teimum, ið hava atkvøðurætt, hava luttikið í atkvøðugreiðsluni og at í minsta lagi tríggir fjórðingar av greiddum atkvøðum eru fyri at slíta, er sáttmálin farin úr gildi.*

Við hesum fáa lóggávutingini í báðum londum einvísan rætt til eftir árslok 1940 at krevja, at samveldislógin verður tikin upp til endurskoðanar. Tað er ikki ásett, at kravið skal setast fram beint eftir árslok 1940; tað kundi altíð setast fram við sama rætti. Var kravið sett fram, átti hvørt land sær at bera so í bandi, at farast kundi undir sáttmálasamráðingar so skjótt sum til bar. Um nýggjur sáttmáli skuldi gerast, mátti hvørt land sær gera sítt til at semja fekst í lag innan trý ár frá tí degi, kravið var sett fram.

Endurskoðan av samveldislógini kundi enda við einum sáttmála um, at londini bert høvdu felags kong, men ikki onnur málsøki. Í hesum førinum hevði helst verið neyðugt at fara eftir stk. 2 í grein 18, sum tilskilar atkvøðutal á altingi og í fólkaatkvøðuni, sum kravdist um spurningin.

Endurskoðan av lógini kundi eisini enda við einari einvísari yvirlýsing, sum hevði við sær, at nýggjur sáttmáli ikki fekst í lag, áðrenn trý ára freistin var úti. Um so var kundu bæði altingið og danski ríkisdagurin samtykkja at seta samveldissáttmálan úr gildi. Sum áður nevnt var samveldislógin ein sáttmáli millum tvey lond, fullveldisyvirlýsingin og ásetingarnar um kong undantiknar. Hóast samveldislógin varð sett úr gildi á henda hátt, hevði tað onga ávirkan á fullveldisviðurkenningina ella kongsfelagsskapin.

At enda skal nevnast, at samveldislógin hevði verið mett at vera endurnýggjað við tigandi samtykki, setti hvørgin parturin fram krav um endurskoðan. Ikki var ásett serstakt, hvussu slík endurskoðan skuldi samtykkjast, men tað var hildið vera sjálvsagt, at hon var viðtikin sum tingsamtykt, ið tveir triðingar av tinglimunum tóku undir

við á einum fundi, sambært galdandi lóg og stjórnarskipan. Um annað lóggávutingið gjørdi samtykt um at slíta sambandið, kravdi samtyktin at fara til fólkaatkvøðu, og hon fekk bert gildi, um tríggir fjórðingar av øllum atkvøðuførum borgarum høvdu tikið lut og tríggir fjórðingar av teimum atkvøtt fyri sambandssliti. Báðar treytirnar skuldu lúkast.

## Sáttmálauppsøgnin

Í 1928 varð ein fyrispurningur settur fram í Altinginum um, hvørt stjórnin ætlaði at virka fyri, at samveldissáttmálin skuldi sigast upp, so skjótt sum lógin loyvdi, og kanna, hvussu best var at skipa uttanríkismálini, tá ið íslendingar sjálvir tóku um endan. Stjórnin svaraði játtandi, og allir flokkar á tingi tóku undir við svarinum. Níggju ár seinni í 1937 samtykti Altingið at áleggja stjórnini beinanvegin at fara undir at finna ta skipan í uttanríkismálum, sum best hóskaði, tá ið íslendingar nýttu uppsagnarrættin, sum samveldislógin tilskilaði.

Brádliga skipaðist alt um, tá ið heimsbardagin brast á 1. september 1939. Tann 9. apríl hertóku týskarar Danmark, og sambandið við Ísland slitnaði. Íslendingar høvdu tá longu gjørt ávísar fyrireikingar til tess at taka upp á seg uttanríkismálini sjálvir. Dagin eftir at Danmark var hertikið, tann 10. apríl, gjørdi Altingið tvær samtyktir. Onnur var um kongsvaldið:

*Við tað at tann støða, sum nú er íkomin, forðar kongi í at útinna tað vald, sum hann sambært stjórnarskipanini hevur, boðar Altingið frá, at tað lítur íslendsku stjórnini hetta vald í hendur.*

Hin var soljóðandi:

*Orsakað av teirri støðu, sum nú er íkomin, kann Danmark ikki útinna tað umboð, ið tað hevur til at røkja íslendsk uttanríkismál sambært grein 7 í donsk-íslendsku samveldislógini og heldur ikki sjóverjuna sambært grein 8 í somu lóg, tískil boðar Altingið frá, at Ísland tekur hesi málsøki í egnar hendur.*

Hesar samtyktir vóru grundaðar á alment viðurkend neyðrættarsjónarmið, og danir talaðu ikki at heldur.

Bretar hertóku Ísland 10. mai 1940. Íslendingar mótmæltu harðliga og søgdu hetta vera brot á uttanveltaðu støðu teirra, men bretar lovaðu, at teir á ongan hátt fóru at leggja seg út í stjórnmálaviðurskiftini í landinum.

Tá ið tað gjørdist greitt, at kríggið fór at verða drúgt, og danir ikki

fóru at megna at halda skyldur sínar sambært samveldislógini, hoyrdist oftari og oftari, at íslendingar nú høvdu fullan rætt at slíta samveldissáttmálan við tað, at Danmark mishelt hann. Tað bar ikki til, segðist, at fresta at taka endaliga avgerð, tí annars fóru viðurskiftini hjá Íslandi at vera ógreið, tá ið kríggið endaði og farið var undir friðarsamráðingar. Summi hildu tó lítið skil vera í at taka avgerð um henda spurning, meðan Ísland var hertikið. Eingin ivi var hinvegin um, at skipanin frá 10. apríl 1940 ikki kundi halda fram. Við hesum í huga var tann 17. mai 1941 eftir tilstuðlan frá stjórnini soljóðandi samtykt gjørd, har ið Altingið boðar frá:

*At tað metir, at Ísland nú hevur fullan rætt at slíta sambandið við Danmark, við tað at Ísland longu hevur noyðst at taka yvir øll síni mál orsakað av, at Danmark ikki hevur kunnað røkt tey málsøki, sum tað tók upp á seg vegna Ísland í samveldissáttmálanum millum Ísland og Danmark frá 1918.*

*At Ísland sínumegin ikki ætlar at tingast um endurnýgging av samveldissáttmálanum við Danmark, og hóast tað av krígsumstøðunum ikki høvir at slíta sambandið formliga nú og gera endaliga stjórnarskipan fyri landið, eigur tað ikki at vera frestað longri enn til krígslok.*

Hesar yvirlýsingar bóru í sær, at íslendingar í roynd og veru hildu, at sambandið við Danmark var at enda komið. Sáttmáli skuldi hvørki gerast um nýtt stjórnarrættar- ella altjóðarættarsamband. Hinvegin varð hildið, at umstøðurnar, sum var, ikki vóru tær røttu at gera eina endaliga stjórnarskipan fyri Ísland. Sama dag var ein landsstjóri valdur, sum skuldi útinna kongsvaldið. Eisini samtykti Altingið, at boða frá, at tað vildi, at lýðveldið var stovnað í Íslandi beinanvegin sum sambandið við Danmark var slitið.

Samtyktirnar um rættin til at slíta sambandið við Danmark og til at stovna lýðveldi vóru gjørdar donsku ríkisstjórnini kunnigar í orðsending frá íslendsku sendistovuni í Keypmannhavn dagsettari 20. mai 1941. Henda orðsendingin kundi metast sum ein fráboðan frá íslendingum um, at samveldissáttmálin ikki fór at verða endurnýggjaður, sambært stk. 1 og 2 í grein 18 í samveldislógini.

Við tingsamtykt tann 10. juli 1941 staðfesti Altingið ein sáttmála við USA um vernd av Íslandi, meðan heimsbardagin vardi. Bretski herurin tók seg síðan úr Íslandi aftur, men samstundis gingu íslendingar frá yvirlýsingini um uttanveltaðu støðu sína í samveldislógini. USA lovaði treytaleyst at viðurkenna frælsið og fullveldið hjá Íslandi og at streingja á tey lond, sum eftir kríggið vóru við í friðarsamráðingum, at gera tað sama. Amerikanarar lovaðu harafturat ikki at leggja

seg út í stjórnmálaviðurskifti Íslands, meðan teir høvdu hermegi í landinum.

Hetta var einki minni enn eitt politiskt sinnalagsskifti. Nú viðurskiftini fullu soleiðis fyri, og viðurkenning var frá amerikanarum, vildu summi at formligur skilnaður frá Danmark skuldi fremjast longu í 1942. Spurningurin var umhugsaður. Kannað varð, hvørja støðu tey lond høvdu, sum mest um ráddi at fáa viðurkenning frá. At enda var ætlanin kortini slept, helst tí at amerikanarar hildu tað vera óheppið, at íslendingar slitu sambandið við danir, fyrr enn greið heimild var til tað eftir samveldislógini.

Kortini varð farið undir at endurskoða stjórnarskipanina. Tað var neyðugt orsakað av ætlanunum um at slíta sambandið við danir og seta á stovn lýðveldi. Stjórnarskipanin varð broytt stutt fyri árskiftið í 1942. Eftir hesa broyting kravdist til tess at samtykkja nýggja stjórnarskipan, at hon varð samtykt av tinginum, og at veljarar landsins tóku undir við henni á fólkaatkvøðu. Síðan varð arbeitt við at fáa viðurkenning frá øðrum londum. Tann 14. oktober 1942 boðaði amerikanska stjórnin frá, at hon metti, at íslendingar høvdu rætt at loysa frá Danmark eftir árslok 1943 og segði seg ikki vera ímóti tí. Bretar tóku ikki til mótmælis. Uppskot til nýggja stjórnarskipan lá klárt 7. apríl 1943.

Ivamál var eina tíð millum íslendskar serkønar, hvørt rætt var at skiljast frá Danmark og kongi uttan samráðingar. Samst varð í 1944 um, at samveldissáttmálin ikki skuldi fara út gildi og lýðveldi verða stovnað, fyrr enn trý ár vóru gingin frá tí, at fráboðanin um samveldisuppsøgn varð send donsku stjórnini 20. mai 1941.

Stjórnin legði eitt loysingaruppskot fyri Altingið, sum var einmælt samtykt í februar 1944. Tað var soljóðandi:

*Altingið hevur samtykt at boða frá, at danski-íslendski samveldissáttmálin frá 1918 er settur úr gildi.*

*Henda samtykt skal sendast veljarunum til støðutøku, antin fyri ella ímóti, og atkvøðugreiðslan skal vera loynilig. Fær samtyktin undirtøku, kemur hon í gildi, tá ið Altingið eftir hesa atkvøðugreiðsluna av nýggjum hevur samtykt hana.*

Stjórnarskipanaruppskotið varð avgreitt á Altingi 8. apríl 1944.

Dagarnar 20.-23. mai 1944 var fólkaatkvøða, og var hon tvískift. Atkvøtt varð um sambandsslit og um stjórnarskipanina hvørt sær. Stjórnarskipanaruppskotið bar í sær, at kongsfelagsskapurin skuldi slítast. 98,61% av veljarunum tóku lut í fólkaatkvøðuni. Fyri sambandsslitið atkvøddu 97,3% av veljarunum. Fyri stjórnarskipanini – ella fyri at slíta kongsfelagsskapin – atkvøddu 95,04% av veljarunum.

Tann 16. juni 1944 vórðu síðan tvær samtyktir einmælt viðtiknar. Onnur setti samveldissáttmálan úr gildi:

*Altingið samtykkir at boða frá, at danski-íslendski samveldissáttmálin frá 1918 er settur úr gildi.*

Hin setti stjórnarskipanina hjá íslendska lýðveldinum í gildi:

*Altingið samtykkir við tilvísing til grein 81 í stjórnarskipanini hjá íslendska lýðveldinum og við tað at treytirnar, ið settar eru í somu grein um atkvøðugreiðslu, har ið allir borgarar við valrætti luttaka, eru loknar, at stjórnarskipanin skal koma í gildi leygardagin tann 17. juni 1944, tá ið forsetin í sameinda Altinginum kunnger tað á fundi í Altinginum.*

Á einum serstøkum altingsfundi áðurnevnda dag á Tingvøllum varð so kunngjørt, at stjórnarskipanin hjá íslendska lýðveldinum var komin í gildi. Á sama fundi varð lýðveldisforseti valdur, og umboð úr nøkrum londum boðaðu frá, at stjórnir teirra viðurkendu tað nýggja lýðveldið. Sama dag kom ein heilsan frá kongi, har hann viðurkendi, at kongsfelagsskapurin var slitin.

# Millum heimastýri og fullveldi

Hesin parturin er í tveimum. Fyrst verður við dømum uttan úr heimi víst á, hvussu viðurskifti millum ríkisstjórnir og ríkislutastjórnir kunnu vera skipað. Síðani verður umrøtt, hvørjir møguleikar eru fyri eini skipan fyri Føroyar, sum gevur meira sjálvræði enn núverandi heimastýrisskipan, uttan at Føroyar verða fullveldisríki.

## Dømi uttan úr heimi um sjálvstýrisskipanir

Tað er sera torført at seta ymsar skipanir við avmarkaðum sjálvstýri í bás, ella at seta tær upp hvørja ímóti hvørji aðrari og siga við vissu, hvørt ein er víðtøkari enn onnur. Talan er um víðtøkt sjálvstýri, tá ið ein ríkislutur á einum ella fleiri málsøkjum hevur størri heimildir enn aðrir ríkislutir í sama ríki, annaðhvørt viðkomandi ríki verður fatað sum eindarríki ella sambandsríki. Alt eftir umstøðunum kann dentur vera lagdur á at útvega viðkomandi ríkisluti ávísar heimildir á serstøkum málsøkjum.

Niðanfyri verður greitt frá, hvørjar heimildir ymiss umveldi við víðtøkum sjálvstýri hava á hesum økjum:

Lóggávuvald og útinnandi vald
Dómsvald
Ríkisborgararættur
Búskaparviðurskifti
Uttanríkismál
Løgfesting av stjórnarættarligu støðuni

Síðan verður greitt frá skipanini *frælsur felagsskapur*, ið fer longri enn tað, ið vanliga verður tillutað ríkislutum á ávísum málsøkjum.

### Lóggávuvald og útinnandi vald

Skipanin við einum lista, sum gjølliga tilskilar, hvørjar heimildir eru serskildar ella latnar ríkislutastjórnum í hendur, er í gildi í t.d. Føroyum, Grønlandi, Hong Kong, Mindanao, Suður-Tyrol og Sri Lanka.

Ein blandingsskipan, har heimildirnar hjá bæði ríkisstjórnini og ríkislutastjórnini eru nágreiniliga tilskilaðar, er í gildi í eitt nú Finnlandi (Álandi) og Spania (Katalonia og Baskalandi).

Í flestum sambandsríkjum, eitt nú í USA, er tann meginregla galdandi, at teir einstøku statirnir hvør sær framhaldandi hava tær heimildir, ið ikki serstakliga eru latnar av hondum til samveldisstjórnina. Kortini verða samveldisstjórnarheimildir tíðum útlagdar soleiðis, at tær víðkast, og tað hevur við sær, at heimildirnar stigvíst koma undir samveldismyndugleikarnar. Sama er galdandi í ríkjasambondum og er eftir øllum at døma støðið undir Kongsríki Niðurlanda, sum eisini fevnir um Niðurlendsku Antilloyggjar. Tær víðtøknu stjórnarskipanarligu broytingarnar, ið komu í gildi í Belgia í 1993, góvu teimum trimum móðurmálsøkjunum í landinum rætt at varðveita ávísar heimildir, ið ikki liggja undir samveldisstjórnini, hóast Belgia ikki formliga er eitt samveldisríki.

## Dómsvald

Ilt er at finna ein samnevnara fyri tær skipanir, sum ymiskir sjálvstýrandi ríkislutir hava í rættarviðurskiftum sínum. Støðan, sum Føroyar í løtuni eru í við ongum sjálvstøðugum dómsvaldi, samsvarar við umstøðurnar í Grønlandi, Álandi og teimum sjálvstýrandi landslutunum í Spania. Suður-Tyrol hevur heldur ikki sjálvstøðuga rættarskipan, men ein sjálvstøðug deild í landslutarrættinum tekur mál til viðgerðar, ið hava at gera við brot móti reglunum um javnstøðu millum móðurmálini í Suður-Tyrol.

Hóast umveldi hava sjálvstøðuga rættarskipan, kunnu mál, ið tikin verða upp í ríkislutarætti, kortini fleiri staðni skjótast inn fyri hægsta rættarmyndugleika í ríkinum. Dømi um hetta eru at finna eitt nú í Niðurlendsku Antilloyggjunum, Niue og Cook Islands. Eisini heilt sjálvstøðug lond heimila, at mál kunnu skjótast inn fyri hægstarætt í øðrum landi til endaliga avgerð, eins og gjørt verður í mongum fyrrverandi bretskum hjálondum í Karibiahavi. Hesi lond heimila, at ávís mál, um áneyðir eru, kunnu skjótast inn fyri *British Privy Council.*

Ein sjálvstøðugari rættarskipan finst annaðhvørt í londum, har viðurskiftini millum ríkisstjórn og ríkislutastjórn eru merkt av misáliti ella har rættarskipanin í viðkomandi ríkisluti er heilt øðrvísi enn aðrastaðni í ríkinum. Í Hong Kong er tað *Hong Kong Court of Final Appeal*, ið hevur evsta dómsvald, og ikki kinverskir dómstólar.

Í samveldum eru síðuskipað dómsvøld vanlig, har tær einstøku eindirnar – ríki ella lýðveldi – hava óskerdan og endaligan dómsmyndugleika á málsøkjum, har lóggávuvaldið er í teirra hondum, men ein samveldisdómstólur afturímóti á øllum økjum, sum samveldið lóggevur fyri.

Ríkisborgararættur

Ríki við fullveldi hava serskildan myndugleika at gera av ríkisborgararættin hjá íbúgvum sínum. Hesin myndugleiki hjá fullveldisríkjum er á sama hátt galdandi fyri íbúgvarnar í teirra sjálvstýrandi ríkislutum, so at ríkisborgararætturin verður felags.

Tað man tí helst ikki vera av tilvild, at lond, ið hava frælsan felagsskap við annað land sum eitt nú Niue og Cook Islands, har íbúgvar eru nýsælendskir ríkisborgarar, ikki hava fingið limaskap í Sameindu tjóðunum. Afturímóti hava fullveldislond sum Mikronesia og Marshalloyggjarnar, ið eru limir í ST, sjálvstøðugan ríkisborgararætt óheftan av amerikonskum.

Ymiskur borgararættur nýtist sjálvandi ikki at hava við sær, at munur verður gjørdur á íbúgvum í øllum viðurskiftum. Í Bretlandi hava íbúgvar úr Írlandi og londum í *Commonwealth*, sum eru búsettir í Bretlandi, leingi havt bæði valrætt og valbæri. Sum samstarvið í Evropiska samveldinum so hvørt er víðkað, er vantandi ríkisborgararættur í einum landi alt minni forðing fyri, at fólk frítt kunnu ferðast, og at vørur og tænastur kunnu flytast millum limalondini. Íbúgvar á Marshalloyggjum, Mikronesia og Palau hava rætt at búsetast og arbeiða í USA og at gera sjálvbodna tænastu í amerikanska herinum.

Felags ríkisborgararættur nýtist hinvegin ikki í sjálvum sær at merkja, at íbúgvarnir hava sama rætt í øllum viðurskiftum, og ymsar skipanir kunnu hava ávísar ásetingar, ið gera mun millum ymsar bólkar av samborgarum til tess at verja serstøk rættindi hjá borgarunum í einum sjálvstýrandi ríkisluti. Tey rættindi, sum mest um ræður í hesum viðfangi, viðvíkja oftast búseturætti, heimstaðarrætti, fastognaviðurskiftum og luttøku í ríkislutapolitikki. Tá ið slíkar serásetingar, ið hava til endamáls at verja ein minniluta í ríkinum, eru undantiknar, krevja almennar mannarættindareglur um bann ímóti mismuni, at allir íbúgvar ríkisins annars fáa sama rætt.

Álendski heimstaðarrætturin er óivað ein nýtiligur háttur at avmarka búsetu ella forða fyri innsúgi í tann sjálvstýrandi ríkislutin av fólki, ið talar annað mál og er av øðrum uppruna. Skipanin hevur tó higartil verið umsitin lagaliga, og tað hevur ikki verið trupult hjá finnlendingum at fáa játtaða umsókn um heimstaðarrætt.

Í Hong Kong eru viðurskiftini sambærilig í tann mun, at íbúgvarnir har hava sama borgararætt sum íbúgvar í øðrum pørtum av Kina. Myndugleikarnir í Hong Kong útflýggja sjálvir kinverjum, ið hava lívstíðargildugt samleikaprógv og bústaðarrætt í Hong Kong, pass, og bert ávísir bólkar av kinverjum hava bústaðarrætt í Hong Kong.

Fastognarættur hjá íbúgvum í sama ríki kann avmarkast, um viðkomandi íbúgvar ikki hava heimstaðarrætt í tí sjálvstýrandi ríkislutinum. Dømi um hetta er aftur Áland.

Við jarðarsølu liggja tíðum treytir, serliga er tað jørð, ið frumbúgvar ella ættarbólkar eiga í felag, og stjórnin í viðkomandi landi vil forða øðrum íbúgvum í at leggja undir seg slíka hevdvunna samogn. Eitt nú er heimild í indisku stjórnarskipanini fyri at avmarka og stýra jarðognarskiftum á nærri tilskilaðum økjum, har ættarbólkar halda til. Myndugleikarnir í Niue kunnu ikki ognartaka ella lata frá sær jørð, sum er almenningsogn, fyrr enn ein kanningarnevnd hevur lagt fram álit um málið. Í Føroyum kenna vit líkar avmarkingar í lóggávu um vinnuligan fiskiskap og fiskaaling við tí endamáli at forða fyri, at útlendingar fáa ræði á ov stórum pørtum av hesum vinnugreinum og tilhoyrandi náttúrutilfeingi.

### Búskaparviðurskifti

Hong Kong hevur serstøðu í mun til Kina partvíst tí, at ríkisluturin er so nógv ríkari og framkomnari enn meginlandið annars, og tí at hann er undir einari frælsari búskaparskipan. Tað er tí ikki løgið, at ríkisluturin hevur at kalla fult sjálvræði í búskaparmálum. Hong Kong hevur egna skattaskipan og er ikki ríkisstjórnini í Peking skattskyldugt. Hong Kong hevur eisini fult ræði á peningaviðurskiftum sínum og er sjálvstøðugt tolløki, óheft av Kina. Hong Kong man harafturat eisini vera eitt eindømi við tað, at ríkisluturin hevur sítt egna gjaldoyra, ið ikki er knýtt at kinverska gjaldoyranum.

Heilt øðrvísi eru viðurskiftini afturímóti hjá Niue og Cook Islands, ið bæði eru í frælsum felagsskapi við Nýsæland og hava mestsum fult sjálvræði, men kortini dúva upp á fíggjarligan stuðul haðani til at halda fyrisiting sínari og almannaverkinum uppi. Hóast Niue hevur heimild til at krevja inn skatt og ongar fíggjarligar skyldur hevur mótvegis Nýsælandi, hevur Nýsæland bundið seg til framhaldandi at veita Niue neyðuga fíggjarliga og umsitingarliga hjálp. Embætisfólk úr Nýsælandi luttaka í grannskoðan av landsroknskapunum hjá Niue og eru eisini umboðað í nevndini fyri almenna umsiting í Niue.

Millum hesar báðar møguleikar, ið nevndir eru, er at kalla einki mark fyri, hvussu útreiðslurnar kunnu vera millum ríkislutastjórn og ríkisstjórn. Eitt dømi er býtið av almennu útreiðslunum millum St. Kitts og Nevis, har latið verður til hvønn partin eftir fólkatalinum í oyggjunum. Í Suður-Tyrol hava myndugleikarnir heimild til at álíkna skatt og fáa eisini ein skiftandi part av ymsum gjøldum, sum italska stjórnin krevur inn í Suður-Tyrol. Í Álandi verður tann parturin av finsku ríkisskattainntøkunum, sum Áland fær í sín lut, ásettur árliga eftir einari serstakari útjavningarskipan. Í Spania er skipanin tann, at Baskaland og Katalonia krevja skatt og flestu gjøld inn sjálv og síðan verða inntøkurnar býttar millum ríkislutirnar og ríkisstjórnina eftir reglum, ið samst verður um á hvørjum ári.

Uttanríkismál

Tað, sum eyðkennir fullveldisríki í sambandi við uttanríkismál, er í fyrsta lagi rættur teirra at gerast partur í millumríkjasáttmálum og í øðrum lagi rættur teirra at gerast limur í millumríkjafelagsskapum. Hesin seinni spurningurin verður tikin upp aftur niðanfyri.

Flestu ríkislutir seta í verk síni egnu handilsfremjandi tiltøk, hóast ongar tilskilaðar løgligar ella stjórnarskipanarligar heimildir eru til tað sum so í lóggávuni hjá avvarðandi ríki. Eitt nú hevur Québec fleiri umboðsstovur í ymsum londum, og teir flestu statirnir í USA hava viðskiftastovur, sum miðvíst virka fyri at styrkja handilssamskifti og búskaparliga samskifti sítt við fremmand lond og fyritøkur.

Hinvegin hava ríkislutastjórnir sjáldan heimild til at gera bindandi millumríkjasáttmálar, ið hvussu er ikki uttan við samtykki frá ríkisstjórnini. Belgia er kortini eitt undantak. Belgia er býtt í tríggjar landspartar, ið hava hvør sítt serskilda móðurmál og ráð. Tey trý ráðini í landinum hava fingið serligan myndugleika at fara upp í millumtjóða sáttmálar um mentan og útbúgving. Eisini Hong Kong er eitt undantak, tí undir navninum *Hong Kong, China* kann ríkisluturin gera sáttmálar við onnur lond um búskaparlig viðurskifti, handil, fígging, flutning, samskifti, ferðafólkavinnu, mentan og ítrótt. Ríkisluturin kann eisini hava viðskiftastovur í øðrum londum. Ríkisstjórnini skal verða fráboðað um slíkar umboðsstovur, men samtykki hennara krevst ikki til at lata tær upp. Loyvi krevst afturímóti frá kinversku stjórnini, um útlendskar umboðsstovur skulu latast upp í Hong Kong.

Eins og siðvenjan er í danska ríkinum í sambandi við Føroyar og Grønland, hava fleiri ríkisstjórnir umboð fyri sínar ríkislutir við í sendinevndum í millumríkjafelagsskapum. Hetta er vanligt fyri ríkislutir við víðtøktum sjálvstýri, eitt nú Hong Kong, men eisini í sambandi við ríkislutir, har sjálvræði ongantíð er komið upp á tal yvirhøvur. Landslutastjórnir í Týsklandi hava umboð í týskum sendinevndum í UNESCO. Í amerikonskum sendinevndum luttaka javnan umboð fyri teir einstøku statirnar, og í summum førum fyri býir, eisini á altjóða ráðstevnum og í millumríkjafelagsskapum, ið hava búskaparmál ella handilsmál um hendur.

Tá ið ræður um at taka lut í millumríkja samstarvi, er limaskapur í flestum millumtjóða felagsskapum tilskilaður fullveldisríkjum. Sostatt kunnu einans fullveldisríki gerast limir í ST, Evroparáðnum, Evropiska samveldinum (ES), Felagsskapinum fyri trygd og samstarvi í Evropa (OSCE), verjufelagsskapinum NATO og Heimshandilsfelagsskapinum (WTO).

Formligt fullveldi er ein avgerandi fortreyt í millumríkjasamstarvi, og at eitt land er lítið og í roynd og veru ósjálvbjargið, er eingin forð-

ing. Smáríki sum Tuvalu, Kiribati, San Marino, Monako og Andorra hava uttan trupulleikar fingið limaskap í ST.

Av teimum fullveldisríkjum, sum eru í frælsum felagsskapi við annað land, eru Marshalloyggjar og Micronesia limir í ST. Niue og Cook Islands, sum ikki hava fullveldi, eru ikki limir.

Bæði lond, sum ikki eru ST-limir, og lond, ið ikki hava fullveldi, kunnu sjálvandi á ymsan hátt hava eitthvørt tilknýti til millumtjóða felagsskapir. Eitt nú hava PLO og Vatikanríkið eygleiðarastøðu í ST. Meginreglan er tó tann, at undir vanligum umstøðum er hvørki fullgildigur ella avmarkaður limaskapur møguligur fyri lond uttan fullveldi. Eitt undantak er viðvíkjandi Suðurkyrrahavsráðstevnuni, ið er rættiliga óformlig, og har stjórnarleiðarar úr bæði fullveldislondum og sjálvstýrandi ríkislutum í økinum luttaka.

Flestir serstovnar undir ST og fleiri aðrir altjóða felagsskapir, sum eru stovnaðir við avmarkaðum endamáli í huga, loyva kortini ósjálvstøðugum londum annaðhvørt fullgildugan ella avmarkaðan limaskap. Limaskapstreytirnar eru ymiskar eftir felagsskapum, men í øllum førum kann limaskapur bert fáast, um tað fullveldisríki samtykkir, ið hevur uttanríkispolitikkin um hendur vegna viðkomandi sjálvstýrandi ríkislut.

Sum dømi um, hvussu uttanríkisviðurskifti hjá sjálvstýrandi ríkislutum kunnu skipast, kann nevnast, at Hong Kong undir navninum *Hong Kong, China* hevur rætt at luttaka í millumtjóða felagsskapum og ráðstevnum, har luttøka ikki er avmarkað til ríki. Í millumtjóða felagsskapum, har bert ríki hava limaskap, kunnu umboð fyri Hong Kong vera við í kinversku sendinevndini og hava heimild til óheft at leggja fram síni sjónarmið eins og føroyingar í summum førum kunnu eftir galdandi skipan.

### Løgfesting av stjórnarrættarligu støðuni

Ein spurningur, ið er havdur á lofti í sambandi við føroysku heimastýrisskipanina, er í hvønn mun danska stjórnarvaldið einvíst kann seta heimastýrislógina úr gildi. Ymsar hugsanir eru um henda spurning. Niðanfyri verður hugt at, hvussu ríkislutir aðrastaðni eru tryggjaðir á hesum øki.

Tá ið ræður um løgfesting av stjórnarrættarligu støðuni hjá einum ríkisluti innan fyri eitt ríki, verður ein semja gjørd millum partarnar, ið staðfestir, at broytingar í stjórnarrættarligu støðuni ikki kunnu gerast uttan so, at bæði ríkislutastjórnin og ríkisstjórnin samtykkja tær.

Verður harumframt tilskilað, at ríkisluturin samstundis hevur rætt at einsæris at taka seg burtur úr ríkinum, verður stjórnarrættarliga støða hansara í høvuðsheitum tann sama sum hjá teimum londum, ið eru í frælsum felagsskapi við onnur ríki.

Í hesum sambandi ber til at staðfesta ta broyttu stjórnarrættarligu støðuna í altjóða høpi. Hetta kann gerast á ymsan hátt, men tann mest einfalda mannagongdin er, um ríkisstjórnin tekur fyridømi eftir finnlendingum í sambandi við Áland og ger eina formliga yvirlýsing um, at viðurskiftini millum ríkið og ríkislutin nú eru grundað á aðrar fyritreytir og sínámillum semju. Ein slík yvirlýsing kann vera ein formlig frágreiðing ella ein orðsending til aðalskrivaran, aðalfundin ella trygdarráð Sameindu tjóða.

### Frælsur felagsskapur

Hugtakið frælsur felagsskapur (*free association*) varð sett fram í 1960 í aðalfundarsamtyktini um meginreglur fyri, hvussu lond eiga at gera av, hvørt tey høvdu skyldu til at boða ST frá teimum ófrælsu umveldum, ið tey høvdu yvirræði á. Hetta verður nærri viðgjørt í sætta parti um altjóðarætt og føroyskt fullveldi.

Treytir ST fyri at viðurkenna eina skipan sum frælsan felagsskap eru í høvuðsheitum tvær. Onnur er, at viðkomandi umveldi hevur óskerdan rætt til sjálvt at taka avgerð um síni innlendis stjórnarrættarligu viðurskifti uttan uppílegging uttaneftir. Hetta forðar kortini ikki fyri, at tað kann verða ásett í sáttmálanum um frælsan felagsskap, at samráð kann havast frammanundan við hin partin, áðrenn stjórnarrættarligar broytingar verða framdar. Hin treytin er, at tað tilknýtta umveldið hevur einsæran rætt til at broyta stjórnarrættarligu støðu sína, so at tað verður skipað sum eitt fullveldisríki.

Heitið frælsur felagsskapur verður ofta lýst við tilvísing til viðurskiftini, ið ávikavíst Cook Islands og Niue hava við Nýsæland. Hesi oyggjalondini hava bæði tvey fult málsræði á øllum økjum, verjumál og uttanríkismál tó undantikin, umframt at íbúgvarnir kortini eru nýsælendskir ríkisborgarar.

Síðani eru stjórnirnar í Marshalloyggjum, í Samveldisríkinum Mikronesia og í Palau farnar í frælsan felagsskap við USA. Londini vóru áður undir amerikanskari umsjón. Hesi lond hava øll formligt fullveldi, men sáttmálin um frælsan felagsskap tilskilar amerikonskum myndugleikum ávís rættindi og áleggur teimum skyldur á ymsum málsøkjum, eitt nú í uttanríkismálum, verjumálum, fjarskiftismálum og í málum viðvíkjandi útlendingaeftirliti, umhvørvisvernd, fíggjarligum stuðli og gjaldoyra.

Omanfyri umrøddu lond hava øll fult ræði á sínum uttanríkismálum, slík viðurskifti undantikin, har annað er tilskilað í viðkomandi sáttmála. Tað málsøki, sum USA í øllum trimum londunum hevur tilskilað sær burturav, eru verjumál, sum USA hevur fult ræði á og ábyrgd av. Hóast sáttmálarnir kunnu sigast upp, annaðhvørt við semju millum báðar partar ella einsæris, verða ásetingarnar um verjumál

kortini framvegis í gildi í eitt ávíst áramál. Í sáttmálanum við Palau er ein áseting, sum útilokar alt hervald uttan hitt amerikanska, og hon er galdandi í óavmarkaða tíð, ella til londini sínámillum semjast um at seta hana úr gildi.

Eitt tættari samband er hinvegin millum USA og Norður-Marianasoyggjar, sum somuleiðis var eitt av teimum oyggjalondum, ið áður vóru undir amerikanskari umsjón. Norður-Marianasoyggjar eru eitt sjálvstýrandi land í politiskum felagsskapi við USA og undir tess fullveldi. USA hevur fult ræði á málsøkjum viðvíkjandi uttanríkispolitikki og verju. Íbúgvarnir í Norður-Marianasoyggjum eru amerikanskir ríkisborgarar, og ávísar amerikanskar lógir og ásetingar í amerikansku stjórnarskipanini eru í gildi í oyggjunum. Meginásetingarnar í sáttmálanum, sum er stjórnarrættarliga støðið undir oyggjalandinum, kunnu bert broytast, um báðir partar samtykkja tað.

## Møguleikar fyri eini skipan fyri Føroyar, sum er millum heimastýrisskipanina og fullveldi

Í galdandi føroysku heimastýrisskipanini eru tey málsøki, ið framvegis eru undir donskum málsræði, slík meginmálsøki sum eitt nú uttanríkismál, verjumál, rættarmál, áseting av meginreglum í borgaraligum rætti og revsirætti og ávís búskaparmál.

Í høvuðsheitum hevur Føroya løgting víðfevndar heimildir á málsøkjum, ið beinleiðis ávirka viðurskifti hjá føroyingum eitt nú í heilsumálum, almannamálum, skattamálum, skúlamálum, samferðslumálum, málum, ið viðvíkja føroyska búskapinum, gagnnýting av livandi tilfeingi og síðani 1992 eisini gagnnýting av ráevnum í undirgrundini.

Sjálvræði hjá Føroyum kann økjast annaðhvørt við at víðka tær serheimildir, ið longu eru, ella við at endavenda heimastýrisskipanini so at Føroyar fáa allar tær heimildir, sum ikki eru serskilt danskar.

Harafturat kundi verið formliga tilskilað, at føroyskar lógir, sum settar verða í gildi fyri málsøki, ið eru føroysk, eru yvirskipaðar danskari lóggávu og somuleiðis, at Føroyar verða undantiknar donskum lógum og millumríkjasáttmálum, samtykkja føroyskir myndugleikar ikki annað, afturímóti sum nú, ið heimastýrislógin bert tilskilar, at samráð skal havast við heimastýrismyndugleikarnar. Ein slík broyting hevði møguliga kravt broyting í donsku grundlógini.

## Ítøkilig ynski um størri sjálvræði

Til ber at seta upp ein lista við møguligum ítøkiligum føroyskum ynskjum um størri sjálvræði, og trygging av rættindum hjá føroysku tjóðini. Hesi kundu verið:

- Trygd fyri, at stjórnarrættarliga støða Føroya ikki kann verða skerd av ríkismyndugleikunum.
- Føroyskur heimstaðarrættur.
- Fult lóggávuvald á øllum økjum.
- Føroyskt dómsvald.
- Føroysk kirkja.
- Føroysk løgverja.
- Føroyskt sum einasta almenna mál.
- Altjóðarættarlig tilvera, heruppií rættur Føroya til sjálvar at gera sáttmálar við onnur ríki.

Um málið er at fáa eina skipan, ið gevur meira sjálvræði enn tann núverandi, uttan at Føroyar verða fullveldisríki, er fyrsta stigið, at føroyingar sjálvir semjast um, hvørji av hesum ynskjum, ið samráðast skal um við ríkisvaldið, og hvussu tey skulu raðfestast. Síðan mugu samráðingarnar vísa, hvussu langt ríkismyndugleikarnir vilja fara í teimum ymsu spurningunum, og hvørjar avleiðingar ein samráðingarloysn fær á tí stjórnarrættarliga økinum.

Ein loysn, ið gevur Føroyum nakað víðari heimildir og trygdir kann kanska rúmast innan fyri verandi danska grundlógarkarm, men hetta mugu fyrst og fremst ríkismyndugleikarnir taka støðu til. Verður talan um eina loysn, ið ikki rúmast innan henda karm, tykist, sum umrøtt niðanfyri, lítið sannlíkt, at grundlógin verður broytt av hesum ávum. Um so er, er neyðugt annaðhvørt at lata sær lynda við eina meira avmarkaða skipan, ella at finna eina loysn, ið liggur uttanfyri danska grundlógarkarmin, men kortini ikki ber í sær føroyskt fullveldi. Tá kemur okkurt slag av frælsum felagsskapi uttan fullveldi upp á tal.

### Eitt hugsað dømi

Niðanfyri verður víst á eitt hugsað dømi um eina skipan, ið hevði givið Føroyum munandi størri heimildir og trygdir enn galdandi heimastýrislóg, tó uttan fullveldi:

1. Føroyingar skipa sjálvir sítt stjórnarvald sambært egnari stjórnarskipan innan fyri karmarnar av grundlóg Danmarkar ríkis.

2. Øll málsøki, uttanríkismál, verjumál og gjaldoyramál undantikin, liggja undir fullum málsræði hjá stjórnarvaldi Føroya.
3. Málsøkini uttanríkismál, verjumál og gjaldoyramál eru ríkismál, tó so, at ríkislógir og millumríkjasáttmálar kunnu ikki verða settir í gildi í Føroyum uttan staðiligt samtykki frá stjórnarvaldi Føroya.
4. Stjórnarvald Føroya kann vegna Føroyar gera sáttmálar við onnur ríki um mál, ið serliga viðvíkja Føroyum.
5. Egið føroyskt dómsvald verður skipað, tó við hægstarætti Danmarkar sum evsta kærurætti.
6. Stjórnarrættarliga støða Føroya kann ikki skerjast, uttan samtykki úr Føroyum.

Spurningurin er, um ein skipan við hesum eyðkennum hevði fingið undirtøku millum danskar politikarar, og um ríkismyndugleikarnir høvdu fingið hana at samríma við galdandi donsku grundlógina.

Spurningurin um, hvørt ein nýggj skipan krevur danska grundlógarbroyting ella ikki, er sera týdningarmikil, tí endurskoðan av grundlógini krevur sterkan politiskan vilja í Danmark og er trupul. Mannagongdin, sum sambært grundlógini verður at nýta í sambandi við broytingar av henni, krevur í fyrsta lagi, at tvey fylgjandi fólkating samtykkja grundlógaruppskotið óbroytt, og í øðrum lagi, at ein meiriluti, sum í minsta lagi umboðar 40% av teimum, ið hava valrætt til fólkatingsval, góðkenna grundlógaruppskotið á fólkaatkvøðu. Tí er kvíðandi fyri, at um ein nýggj skipan er treytað av danskari grundlógarbroyting, fær hon neyvan politiska undirtøku í Danmark.

## Rásarúmið fyri størri sjálvstýri innan fyri ríkiskarmin

Um ynskið er at fáa eina skipan við størri sjálvræði uttan fullveldið, eru fýra høvuðsleiðir at fara: Troyting av verandi heimastýrislóg, rúmari heimastýri innan fyri núverandi donsku grundlóg, víðtøkt sjálvstýri innan fyri broytta danska grundlóg, og frælsur felagsskapur við Danmark. Hesar skipanir verða stutt umrøddar niðanfyri.

### Troyting av verandi heimastýrislóg

Framvegis eru mál á lista A í heimastýrislógini, ið antin ikki eru yvirtikin, ella bert yvirtikin sambært grein 9. Meginparturin av donsku heildarveitingini hevur støði í, at dýr mál sum heilsu-, undirvísingar- og almannamál verða skipað sambært grein 9, og sostatt framvegis í evstu syftu eru undir ábyrgd ríkisins. Somuleiðis eru einstøk B mál, har enn ikki hevur verið roynt at samráðast um, hvørt ella í hvønn

mun, tey kunnu yvirtakast sum sermál. Um eitt av hesum, kirkjuna, verða í løtuni samráðingar um yvirtøku fyrireikaðar.

Harumframt finnast fordømi um, at danska stjórnin í ávísum førum, so sum við navnalóggávuni, hevur tulkað heimastýrislógina nakað víðari, soleiðis at møguligt hevur verið at yvirtaka ávís málsøki, hóast tey ikki beinleiðis eru nevnd í lista A ella B. Kanska eru heldur ikki hesir møguleikar fyri víðkandi tulkingum enn troyttir til fulnar. Hinvegin sýnir dømið um noktandi danska svarið á áheitanina um yvirtøku av bankalóggávuni, at mark er fyri, hvussu langt slepst henda vegin.

Tað, ið hevur sett fullveldisverkætlanina, sum henda frágreiðing er partur av, í gongd, er eitt ynski um grundleggjandi broytingar í stjórnarstøðu Føroya. Víst hevur m.a. verið á hesi trý viðurskifti:

- Tað er tørvur á at fáa sligið fast, at heimildirnar hjá teimum føroysku myndugleikunum ikki stava frá umboði (*delegatión*), sum donsku myndugleikarnir hava givið, og sum kann takast aftur uttan føroyskt samtykki.
- Tað er tørvur á at fáa staðfest, at løgtingslógir eru á sama rættarstigi sum fólkatingslógir og ikki kunnu verða trokaðar til viks av fólkatingslógum.
- Tað er tørvur á, at Føroyar kunna fáa víðari heimildir at samráðast og gera sáttmálar við onnur ríki enn tær núverandi, sum í grundregluni verða givnar eftir umbøn í hvørjum einstøkum føri.

Tað er vert at hava í huga, at sjálvt ein fulltroyting av verandi heimastýrislóg framvegis "bert" er heimastýri í tí týdningi, sum heimastýrislógin frá 1948 leggur í hetta hugtak, og at hetta ikki hevði borið í sær nøktandi loysnir av omanfyrinevndu vansum.

### Rúmari heimastýri innan fyri verandi grundlóg

Roynt kann verða at samráða seg fram til eitt rúmari slag av heimastýri enn tað, sum stendur í heimastýrislógini frá 1948. Hetta kann gerast við, at Føroyar fáa nakrar av teimum trygdum, ið umrøddar eru omanfyri, men so at støða Føroya framvegis verður staðfest í donskum stjórnarrætti. Møguliga kann størri dentur enn nú verður lagdur á, at føroyska heimastýrið er grundað á sáttmála, ið ikki kann broytast einvíst, uttan at hetta kortini nertir við verandi stjórnarskipan fyri danska ríkið, nevniliga grundlógina frá 1953.

Í orðaskiftinum millum teir stjórnarrættarserkønu um heimastýrislógina og grundlógina, hevur m.a. verið ført fram, at heimastýrisskipanin í roynd og veru er farin út um teir formligu karmar, grundlógin setur. Hetta kann føra til tvær heilt ymiskar niðurstøður:

Onnur er, at um so er, man neyvan bera til at sleppa longur innan fyri teir karmar, ið settir verða í verandi grundlóg. Hin er, at tá til hevur borið at fara so langt, so man eisini bera til at skipa eitt rúmari heimastýri, uttan at grundlógin forðar fyri tí.

### Víðtøkt sjálvstýri innan fyri broytta danska grundlóg

Til ber at hugsa sær fleiri ymiss frábrigdi av skipanum um støðu Føroya í ríkinum, ið høvdu kunnað veitt føroyingum nakrar av omanfyri nevndu trygdum og skapað greiðari ábyrgdarbýti millum føroyskar og danskar myndugleikar, um so er, at grundlógin frá 1953 verður broytt, soleiðis at tað eindarríkið, ið lýst er í grundlógini, onkursvegna verður umskipað, so at tað rúmar Føroyum við meira víðtøkum sjálvstýri (*autonomi*) innan karmin av einum felags ríki.

Áðrenn samráðingar við ríkismyndugleikarnar um eina slíka skipan, eigur vissa at fáast um, hvørt danska politiska skipanin hevur hug at royna at fáa slíkar broytingar gjørdar í donsku grundlógini. Tað er ikki nógv, ið bendir á, at so er. Men sjálvt um ein meirluti í danska fólkatinginum kundi hugsað sær at tikið undir við slíkum grundlógarbroytingum, er ikki vist, at tað hevði borið til at framt tær í verki, tí tað, sum nevnt, er sera torført at broyta donsku grundlógina, og tað er lítið, sum bendir á, at hon verður broytt í bræði.

Annar trupulleiki við at fáa ásett karmarnar fyri føroyskum sjálvstýri í donsku grundlógini, er, at føroyskir myndugleikar og veljarar hava sera lítla ávirkan á mál um grundlógarbroying. Spurningurin um at gera broytingar á økinum í framtíðini verður tískil latin upp í hendurnar á donskum myndugleikum og veljarum, um hendan leiðin verður vald. Tó er møguliga hugsandi, at millum grundlógarásetingarnar um føroyskt sjálvstýri eisini var ein, sum gav Føroyum rætt til at fara úr ríkinum eftir einvísari føroyskari avgerð.

### Frælsur felagsskapur við Danmark

Er ógjørligt at eftirlíka føroysku ynskjunum um broytingar í stjórnarrættarligu støðuni í danska ríkinum, uttan at grundlógin verður broytt, og vil danska ríkisvaldið ikki broyta grundlógina, eru kortini ikki allar súðir syftar. Helst ber til at varðveita eitt tætt tilknýti millum Føroyar og Danmark, og kortini koma burtur úr spurninginum um broyting av donsku grundlógini, við at gera semju um *frælsan felagsskap* landanna millum.

Frælsur felagsskapur er ein skipan, har miðveldið (her Danmark) í orðsending boðar ST frá, at ein ávísur ríkislutur ella land undir yvirræði tess (her Føroyar) frameftir verður í frælsum felagsskapi við miðveldið.

Vanliga eru uttanríkismál og verjumál felags í tílíkum felagsskapi

og liggja tey í høvuðsheitum hjá miðveldinum. Tó kunnu lond í frælsum felagsskapi hava lutfalsliga stórt uttanríkispolitiskt rásarúm, so leingi tey ikki koma í beinleiðis andstøðu til týdningarmikil uttanríkispolitisk áhugamál hjá miðveldinum. Vanliga er evsti dómstólurin eisini felags.

Frælsur felagsskapur verður vanliga skipaður við sáttmála millum tilknýtta landið og miðveldið, har myndugleikabýtið teirra millum er ásett. Í sáttmálanum er eisini áseting um, at tað tilknýtta landið hevur rætt at fara burturúr felagsskapinum og stovnseta egið fullveldisríki. Fleiri dømi eru sum nevnt um lond í frælsum felagsskapi, ið hava stovnsett egið fullveldisríki.

Til ber tí at siga, at hetta er ein skipan, ið gongur ytst at fullveldisgáttini.

Um skipanin er sambærilig við ta donsku grundlógina, veldst um hennara ítøkiliga innihald og politiska viljan at tulka grundlógina rúmliga. Men sannlíkt er, at ein slík skipan má fatast á tann hátt, at Føroyar verða roknaðar at vera uttanfyri donsku grundlógina, so at sambandið Føroya og Danmarkar millum einans verður ásett í sjálvum sáttmálanum um tann frælsa felagsskapin.

Um ein slík skipan verður framd landanna millum ber hon tí helst í sær, at Føroyar formliga fara úr Danmarkar ríki, skilt sum tað umveldi, har danska grundlógin hevur gildi. Stjórnarrættarliga verður danska grundlógin tískil ikki longur galdandi í Føroyum og heldur ikki verður neyðugt at broyta hana til tess at fremja hesa skipan.

Føroyska stjórnarvaldið verður evsta vald í øllum innlendis málum Føroya. Altjóðarættarliga verða Føroyar eitt umveldi undir yvirræði av danska stjórnarvaldinum. Danska stjórnarvaldið verður tískil evsta vald í øllum uttanríkismálum Føroya, heruppií verjumálum, men sambært sáttmálanum um frælsa felagsskapin kunnu Føroyar hava ávísar standandi heimildir at samráðast við onnur lond og gera sáttmálar við tey á ávísum málsøkjum.

Higartil eru tað bert fyrrverandi hjálond, ið hava verið í frælsum felagsskapi við miðveldi, men í altjóðarætti er einki til hindurs fyri, at Føroyar kunnu fáa eina slíka skipan. Heldur ikki nýtist danskur stjórnarrættur at forða fyri hesum, er politiski viljin til staðar.

Ein tílík skipan, har Føroyar eru í frælsum felagsskapi við Danmark og uttan fyri donsku grundlógina, hevði sum nevnt kunnað verið framd við sáttmála landanna millum. Meginreglurnar í sáttmálanum kundu verið hesar:

1. Føroyar verða viðurkendar sum umveldi í frælsum felagsskapi við kongsríkið Danmark.

2. Stjórnarvald Føroya hevur málsræði á øllum innanlandsmálum Føroya.
3. Stjórnarvald Danmarkar hevur evstu ábyrgdina av uttanríkismálum Føroya, heruppií verjumálum.
4. Stjórnarvald Danmarkar kann ikki einsæris broyta sáttmálan ella seta hann úr gildi.
5. Stjórnarvald Føroya hevur rætt til einvíst at skipa Føroyar sum fullveldisríki.
6. Afturat hesum kunnu ásetingar verða gjørdar um ymiskt annað samstarv landanna millum.

Skipanin kundi verið framd í tveimum stigum. Í fyrra lagi verður ein sáttmáli gjørdur landanna millum, ið skipar Føroyar í ein frælsan felagsskap við Danmarkar ríki. Í seinna lagi boðar danska stjórnarvaldið Sameindu tjóðum frá nýggju skipanini í eini orðsending, sum samstundis viðurkennir rætt Føroya til einvíst at skipa seg sum fullveldisríki.

Hóast einans skipanir millum verandi føroyskt heimastýri og føroyskt fullveldi verða viðgjørdar í hesum parti, eigur at verða havt í minni, at tvey sløg av skipanum við frælsum felagsskapi eru til, ein uttan fullveldi, sum er viðgjørd omanfyri, og ein við fullveldi.

Samanumtikið kann sigast, at einasti munurin millum skipanirnar báðar er, at í teirri seinnu (frælsur felagsskapur við fullveldi) høvdu Føroyar verið viðurkendar sum ríki av øðrum ríkjum og tískil verið ein viðurkendur partur í altjóða høpi, ið hevði havt myndugleika at skipa fyri sínum millumtjóða viðurskiftum á stjórnarstøði.

Ein skipan, har Føroyar høvdu fullveldi og vóru í frælsum felagsskapi við Danmark, hevði sostatt verið lík skipanini, sum Ísland og Danmark høvdu sambært sínámillum sáttmálanum í tíðarskeiðinum 1918 til 1944.

Samanumtikið kann sigast, at møguleikarnir fyri at broyta stjórnarrættarligu støðu Føroya uttan at stovna fullveldisríki, soleiðis at skipanin verður millum núverandi heimastýri og fullveldi, eru hesir:

| | |
|---|---|
| Troyting av núverandi heimastýrislóg | Broytir ikki Føroya stjórnarrættarligu støðu. |
| Rúmari heimastýri innan fyri núverandi grundlóg | Rásarúmið fyri slíkum skipanum er avmarkað. |
| Víðtøkt sjálvstýri innan broytta danska grundlóg | Ikki sannlíkt, at danska ríkisvaldið hevur áhuga fyri grundlógarbroyting, sum hartil er sera torfør at seta í verk. |
| Frælsur felagsskapur | Flytur áhugan burtur frá spurninginum um, hvørt stjórnarrættarliga støða Føroya er sambærilig við donsku grundlógina. Gongur dygst at fullveldinum og ger eitt møguligt skifti til fullveldi formliga léttari. |

# Smátjóðir við fullveldi

Í heiminum eru 10 smáríki (*microstates*), ið hava eitt fólkatal sum Føroyar ella minni. Vanligt er í stjórnmálafrøðini at skilmarka smáríki sum ríki við fólkatali um eina millión og minni. Av heimsins stívliga 190 londum við fullveldi, eru 43 smáríki. 28 teirra eru oyggjaríki, og hóast vit ikki telja Vatikanríkið við, eru 15 smáríki við færri enn 100.000 íbúgvum.

Í hesum parti verða viðgjørd ymisk týdningarmikil viðurskifti hjá øllum heimsins smáríkjum við fólkatali undir 300.000. Hetta úrval verður gjørt fyri at gera tað lættari at bera saman við Føroyar. Í einstøkum førum verða eisini smáríki við fleiri enn 300.000 íbúgvum nevnd, tó einans, tá ið tey kunnu verða havd sum áhugaverd dømi.

## Smáríkini í heimssamfelagnum

Sum gongdin hevur verið seinnu árini, er hugsandi, at fleiri smá ósjálvstøðug lond, ella atlond (*dependencies*), flest teirra við fólkatali undir 200.000, fara at fáa fullveldi. Tá ið seinni heimsbardagi var av, og ætlanir um at lata hjálond fáa fullveldi vórðu umhugsaðar, varð vanliga fatanin í ráðandi hjálandaveldunum, at smáríki við so lítlum fólkatali ikki kundu fáa eina trygga tilveru. Samanumtikið stuðla tær royndir, smáríki higartil hava gjørt, ikki hesa fatan.

Tá ið altjóða felagsskapurin Sameindu tjóðir varð stovnaður eftir seinna heimsbardaga, vóru ikki so nógv smáríki sum nú, og tey, sum vóru, vórðu ikki rættiliga tikin fyri fult í millumlanda viðurskiftum. Luksemborg var í roynd og veru einasta smáríki, ið var stovnandi limur í ST. Ísland kom uppí árið eftir. Søguligu evropisku smáríkini (Andorra, Liktinstein, Monako og San Marino) vórðu sett úti við dyr í millumríkjasamstarvi. Fullveldi teirra var ikki beinleiðis hótt, men tey vórðu fjónað í royndum sínum at sleppa við í altjóða skipanina javnbjóðis hinum, á sama hátt sum umsóknir teirra um at sleppa við í Fólkasamgonguna høvdu verið teimum noktaðar sløk 25 ár frammanundan. Sum frá leið, vórðu hesi smæstu evropisku ríkini kortini tikin upp í fleiri serstovnar undir ST, men við tí fyrivarni, at tey skuldu ikki verða fordømi fyri, at smáríki komu við í aðalstovnar hjá altjóða skipanini. Stutt sagt, ímillum 1946 og 1960 vóru Ísland og

Luksemborg einastu smáríkini, sum vóru við í altjóða skipanini sum viðurkendir javnlíkar.

Harumframt vóru smæstu evropisku smáríkini mett sum undantøk frá regluni um, at pinkustødd forðaði fyri neyðugum førleika at fremja fullveldi í verki. Hetta var áskoðanin á uttanlands- og hjálandaskrivstovum hjá evropisku hjálandaveldunum fram til 1960-árini. Ofta var henda áskoðan rótfest í veruligari umsorgan: Stjórnin í miðveldinum (*metropolitian power* ella *colonial power*), hevði ábyrgdina av trygdini og vælferðini hjá teim smæstu, ósjálvstøðugu londunum. Í summum førum, sum við flestum av smæstu oyggjunum, tóktist hetta soleiðis at skilja, at hjálandastøðan skuldi vera ein varandi skipan. So seint sum í 1958 metti bretska hjálandamálaráðið (*Colonial Office*), at ósjálvstøðug lond smærri enn Sierra Leone, sum tá hevði um 2,5 milliónir íbúgvar, ikki í álvara kundu metast at vera før fyri at umsita eitt fullveldi. Tað var tá hildið at vera hóskiligari hjá slíkum smálondum, at tey fingu tillutaðan ein meira avmarkaðan sjálvsavgerðarrætt.

***Talva 1: Heimsins smáríki við fólkatali undir 300.000.***

*Heimildir: Division of the UN Secretariat, World Population Prospects / Statistics Division of the UN Secretariat and International Labour Office. CIA World Factbook 1998.*

| **Land** | | **Fólkatal** 1994 | **Landøki** km² | **BTÚ/íbúgva 1997** Umroknað til DKK |
|---|---|---|---|---|
| **Andorra** | Evropa | 48.000 | 450 | 97.100 |
| **Antigua** | | | | |
| **& Barbuda** | Karibiahav/Atlantshav | 67.000 | 440 | 62.400 |
| **Bahamaoyggjar** | Atlantshav | 272.000 | 13.940 | 92.600 |
| **Barbados** | Atlantshav | 260.000 | 430 | 58.100 |
| **Belis** | Miðamerika | 206.000 | 22.960 | 19.800 |
| **Brunei** | Suðurkinahav, | | | |
| | á oynni Borneo | 282.000 | 5.770 | 127.000 |
| **Dominika** | Karibiahav/Atlantshav | 71.000 | 750 | 24.300 |
| **Grenada** | Karibiahav/Atlantshav | 92.000 | 340 | 23.800 |
| **Ísland** | Atlantshav | 266.000 | 103.000 | 193.000 |
| **Kiribati** | Kyrrahav | 77.000 | 717 | 4.800 |
| **Liktinstein** | Evropa | 28.000 | 160 | 249.700 |
| **Maldivoyggjar** | Indiahav | 241.000 | 300 | 9.400 |
| **Marshalloyggjar** | Kyrrahav | 53.000 | 181 | 11.800 |
| **Mikronesia** | Kyrrahav | 118.000 | 702 | 13.500 |
| **Monako** | Evropa | 28.000 | 2 | 169.300 |
| **Nauru** | Kyrrahav | 10.000 | 21 | 70.000 |
| **Palau** | Kyrrahav | 16.000 | 458 | 41.300 |
| **St. Kitts & Nevis** | Karibiahav | 41.000 | 269 | 45.500 |

| | | | | |
|---|---|---|---|---|
| **St. Lusia** | Karibiahav/Atlantshav | 141.000 | 620 | 28.600 |
| **St. Vinsent &** | | | | |
| **Grenadinur** | Karibiahav/Atlantshav | 111.000 | 340 | 18.100 |
| **San Marino** | Evropa, á Italia-hálvoynni | 23.000 | 60 | 141.700 |
| **Sao Tomé** | | | | |
| **& Principe** | Atlantshav | 130.000 | 960 | 2.300 |
| **Seyskelloyggjar** | Indiahav | 73.000 | 455 | 51.900 |
| **Tonga** | Kyrrahav | 98.000 | 748 | 12.700 |
| **Tuvalu** | Kyrrahav | 13.000 | 26 | 5.600 |
| **Vanuatu** | Kyrrahav | 165.000 | 14.760 | 10.100 |
| **Vatikanríkið** | Evropa, á Italia-hálvoynni | 1.000 | 0,44 | - |
| **Vestursamoa** | Kyrrahav | 272.000 | 2.860 | 14.700 |
| ***Føroyar*** | **til samanberingar** | 44.000 | 1.399 | *152.000 |

*Ríkisútreiðslur Danmarkar í Føroyum eru íroknaðar.

***Talva 2: Heimsins smáríki við fólkatali úr 300.000 og meira.***
*Heimildir: Somu sum í talvu 1.*

| **Land** | | **Fólkatal** | **Landøki** | **BTÚ/íbúgva 1997** |
|---|---|---|---|---|
| | | 1994 | km$^2$ | Umroknað til DKK |
| **Barain** | Arabiska hálvoyggin | 563.000 | 620 | 67.600 |
| **Cape Verde** | Atlantshav | 407.000 | 4.030 | 5.900 |
| **Ekvatorguinea** | Atlantshav | | | |
| | + meginland Afrika | 389.000 | 28.050 | 2.500 |
| **Fiji** | Kyrrahav | 755.000 | 18.270 | 19.400 |
| **Gambia** | Afrika | 956.000 | 11.300 | 2.300 |
| **Djibuti** | Afrika | 496.000 | 22.000 | 7.000 |
| **Gujana** | Suðuramerika | 825.000 | 214.970 | 6.300 |
| **Katar** | Arabiska hálvoyggin | 476.000 | 11.437 | 114.800 |
| **Komoroyggjar** | Indiahav | 630.000 | 2.170 | 2.400 |
| **Kýpros** | Miðjarðarhav | 729.000 | *9.250 | **78.900 |
| **Luksemborg** | Evropa | 383.000 | 2.586 | 268.300 |
| **Malta** | Miðjarðarhav | 364.000 | 320 | 61.900 |
| **Sálomonsoyggjar** | Kyrrahav | 366.000 | 28.450 | 6.000 |
| **Surinam** | Suðuramerika | 455.000 | 163.270 | 26.500 |
| **Svasiland** | Afrika mett 1998 | 966.000 | 17.360 | 10.100 |

*Grikski og turkiski parturin til samans.

**Miðaltal fyri alla oynna. Í grikska partinum er BTÚ fyri hvønn íbúgva á leið dupult so stór sum í tí turkiska. Hetta eru mett tøl.

Tann vanliga hugsanin í miðveldinum sást ofta aftur sum ivasemi hjá teimum fyrstu tjóðskaparleiðarunum í smáu londunum. Í fleiri førum var stúrt fyri at ganga alla leiðina at skipa sjálvstøðugt ríki. Hetta var m.a. støðan hjá máttmikla leiðara arbeiðarafloksins á Malta, Dom

Mintoff, har miðað fyrst varð eftir at fáa eina støðu sum atland hjá Stórabretlandi (*Crown Dependency*) eins og Isle of Man, Jersey og Guernsey høvdu. Hesum vóru bretar lítið hugaðir fyri, og Malta fekk í staðin fullveldi og hevur ment seg sum eitt sjálvstøðugt ríki. Eisini á Seyskelloyggjum varð til fánýtis fyrst roynt at fáa í lag eina støðu sum minnir um ta hjá Man.

Grenada royndi fyrst eina støðu í frælsum felagsskapi (*Free Association*), sum var ein skipan, ið gav ógvuliga smáum oyggjum fult sjálvræði á flestum økjum, tó ikki í uttanríkismálum og verjumálum. Hesin frælsi felagsskapur vardi ikki leingi. Týdningarmesti tátturin í hesi loysn var ásetingin um, at oyggjarnar kundu sjálvar enda hesa støðu á fólkaræðiligan hátt og stovnseta egið fullveldi. Hetta gjørdu flest allar um síðir.

Broyting kom í, tá ið Gabon og Kýpros gjørdust sjálvstøðug í 1960. Hetta hevði við sær nýggj krøv um sjálvstøðu í smæstu atlondunum, tí teirra sjálvsálit styrktist alsamt, tá ið tað sást, at sjálvstýrisætlanirnar hjá øðrum smáum londum hepnaðust væl.

Í 1965, tá ið Maldivoyggjar fingu fullveldi, var hetta ikki so vælumtókt í ST-trygdarráðnum, har stúrt varð fyri útlitunum fyri einum ST-aðalfundi við „bygdaríkjum" (*village states*). Umsóknin frá Maldivoyggjum um limaskap í ST hevði brotið eitt ónevnt lágmark, tí oyggjarnar tá høvdu færri enn 100.000 íbúgvar.

Royndirnar hjá USA og Stórabretlandi at loysa „smáríkjatrupulleikan" við ymsum uppskotum um avmarkaðan limaskap og limaskap við ongum atkvøðurætti vórðu vrakaðar. Tað bar ikki til at sannføra ríki, sum vildu verða limir, um, at teirra fullveldi varð virt til fulnar, samstundis sum teimum í roynd og veru varð noktað at vera við á jøvnum føti. Harumframt var ein og hvør avmarking av slíkum slag illa dámd millum triðjaheimslondini, ið gjørdust ein alt størri bólkur á ST-aðalfundinum.

Tvey tey næstu tíggjuáraskeiðini gjørdust mong nýggj smáríki limir í ST. Gongdin var fyri ein part úrslit av lúgvaðum miðveldum. Hetta var serstakliga galdandi fyri Bretland. Í bretsku stjórnarumsitingini var hvørki vilji ella orka at varðveita eitt heimsveldi „har sólin aldri setur." Um Bretland royndi at tala onkur lond frá sjálvstøðu, var tað ikki við tí í hyggju at varðveita tey sum bretsk lond, men heldur at yvirtala tey at ganga saman við grannarnar. Dømi um hetta eru ætlaða Vesturindiska Sambandsríki *West Indies Federation*, og stovnanin av Senegambia, samveldið millum oyggjabúgvar á Gilbert og Ellice. Bara í Sameindu Arabisku emirríkjunum eydnaðist ein slík felagsskipan. Í øllum hinum førunum høvdu ymsu londini gjørt av at ganga sínar egnu leiðir til sjálvstøðu. Grundgevingar um, at tey vóru ov smá, vóru stødd á heimsins útjaðarum, ella at tey vóru alt ov heft

búskaparliga, rinu ikki við tey. Tað hevði í hesum viðfangi stóran týdning at londini *sóu*, at hjálandaavtøkan (*decolonization*) gekk væl. Um Gujana, hví ikki Barbados? Og um Barbados, hví ikki Grenada? Og um Grenada, hví ikki St. Kitts? Royndirnar hjá øðrum høvdu stóran týdning sum íblástur.

Harafturat gjørdist skjótt greitt, at smáríki kundu brúka ymsar fíggjarskipanir og stuðulsskipanir, eins og menningarætlanir í millumtjóðastovnum. Í staðin fyri bara at dúva upp á vælvild frá gamla miðveldinum, sluppu nýggju sjálvstøðugu smáríkini fram at eini ørgrynni av fleirlanda fíggingarveitarum og alsamt vaksandi tvílandaskipanum og øktu soleiðis um útlitini fyri menning. Fullveldi vísti seg at verða eitt altjóða „atgongumerki," sum á fyrsta sinni gav smáríkjum atgongd til allar heimsins stjórnarskrivstovur.

Bráðvøksturin av smáríkum um allan heim slóðaði eisini fyri, at tey smæstu evropisku smáríkini fyri fyrstu ferð av álvara sluppu upp í millumríkjasamstarvið. Liktinstein fór upp í Evroparáðið í 1979 og upp í ST í 1990. San Marino og Monako fingu eisini fullan ST-limaskap. Við nýggjari grundlóg í 1993 endaði tann ógreiða miðaldarliga stjórnarskipanin í Andorra, og pyreneiska fúrstadømið fylgdi við hinum evropisku smáríkjunum inn í millumríkjasamstarvið.

## Sjálvstýrisgongdin

Í at kalla øllum førum fingu smáríkini fullveldi á friðarligan hátt og í samstarvi við miðveldið. Serstakliga var hetta galdandi í teim yvir tjúgu gomlu bretsku hjálondunum, sum fingu fullveldi. Bara á Kýpros bardust bretar ímóti eini hernaðarligari sjálvstýrisrørslu. Málið fløktist av stríði millum grikskar og turkiskar kýpriotar, ið fingu stuðul úr ávikavist Grikkalandi og Turkalandi. Í summum førum, serstakliga í Belis og Brunai var sjálvstýrisleiðin forðað av ótta fyri ætlanum hjá grannalondunum. Trygdarspurningar hjá smáríkjum, eins og hjá størri ríkjum, valdast sum oftast um viðurskiftini í grannalondunum.

Men flest bretsk hjálond gjørdust sjálvstøðug uttan háva. Aloftast bóðu bretar um okkurt slag av fólkaræðiligari mannagongd sum fyritreyt fyri at stuðla eini avgerð um sjálvstøðu. Vanligt var, at hetta hevði við sær tjóðartingsval og/ella fólkaatkvøðu um sjálvstøðu. Hevði valstríð verið um sjálvstýrismál, plagdi nýggja stjórnin at fara undir samráðingar við Bretland, og síðan var fólkaatkvøða ella tjóðartingsval. Í nøkrum londum, sum í sjeikadømunum við Persaflógva ella kongsríkinum Tonga, hóskaði henda manngongd ikki. Hesi lond kunnu hóskiliga verða lýst sum varðlond (*protectorates*), sum leingi

høvdu havt fult frælsi at stýra sjálv og høvdu sína egnu, søguligu menning. Sama er við Brunai.

Fronsku royndirnar vórðu nakað øðrvísi. Avgerðin hjá de Gaulle forseta at veita øllum fronskum hjálondum í Afrika sjálvstýri slóðaði fyri, at Djibuti og Komoroyggjar til endans fingu fullveldi. Sambondini millum sjálvstøðugu ríkini og París vórðu verandi tøtt og einamest av handilsligum slag.

Fleiri av teim smáu fronsku londunum í Karibiahavi og Kyrrahavi hava sættast við at verða verandi handanhavs umsitingareindir (*departements* – Franskt Gujana, Guadaloupe, Martinique, Reunion), handanhavs umveldi (*territories* – Franskt Polynesia, Nýkaledonia, Walis og Fatuna) ella handanhavs samlond (*collectivité territoriale* – Mayotte, St. Pierre og Miquelon). Hesi fronsku atlond senda øll, hvørt í sínum lagi, umboð bæði á franska tjóðartingið og í senatið. Tey eru stjórnarskipanarliga ein partur av franska ríkinum, hóast okkurt teirra liggur hinumegin jarðarknøttin. Fyri ein stóran part komst teirra hugur at verða verandi fronsk atlond av teirri fíggjarligu vælvild, sum hesi lond fáa úr París, og sum hevur givið teimum lutfalsligan framburð, samanborið við grannarnar. Sum dømi er at nevna, at størri helmingurin av bruttotjóðarinntøkuni á Guadaloupe stavar frá fronskum ríkisstuðli. Skuldi viljin hjá stjórnini í París at stuðla hesi umveldi minkað, kann ivi verða um framtíðarstøðuna hjá hesum londum. Fleiri teirra hava sterkar tjóðskaparpolitiskar rørslur, ið onkustaðni eisini hava roynt at gera valdsligan uppreistur við krøvum um sjálvstøðu.

Tað einasta fyrrverandi niðurlendska landið í hesum bólki, Surinam, fekk lættliga sjálvstýri frá Niðurlondum við sera góðum sømdum fyri surinambúgvar, sum búðu í miðveldinum. Niðurlendsku Antilloyggjar (Curacao, Bonaire, St. Marten, St. Eustatius, Saba) og Aruba hava gjørt av at verða verandi sjálvstýrandi niðurlendskir ríkislutir.

Trý oyggjalond (Marshalloyggjar, Mikronesia og Palau) í Kyrrahavsverndarøkinum hjá USA (*United States Trust Territory of the Pacific*) noyddust ígjøgnum sera drúgv samráðingarskeið við USA, áðrenn málið varð greitt. Serliga torgreiddur var spurningurin um at loyva USA at nýta teirra øki til hernaðarendamál. Allar oyggjarnar hava fingið sáttmála um frælsan felagsskap (*Compact of Free Association*), við USA, sum sær til, at búskaparligur stuðul verður veittur aftur fyri havnarættindi og rættindi til hernaðarliga hjáveru. USA rindar oyggjaríkjunum fyri at varðveita sína hermálsligu støðu í hesum pørtum av Kyrrahavi. Tað merkir sjálvsagt eisini, at USA er bundið til at verja oyggjarnar.

Samráðingar um sjálvstýrisgongdina hjá smáríkjum hava í høvuðs-

heitum verið avmarkaðar til hesar spurningar: (1) Treytir fyri framhaldandi fíggjarligum stuðuli fyrstu árini – í eini skiftistíð – eftir at fullveldi varð stovnsett. (2) Borgararættindi fyri ríkisborgarar í londunum hjá hvørjum øðrum. (3) Treytir fyri verju og trygdarútgerð, um ætlanin var at halda fram at hava tílíkt í tí nýggja ríkinum.

Av tí at flest smáríki fingu fullveldi, tá ið farið varð frá hjálandastøðuni, høvdu spurningar um býtið av ogn og skuld lítlan týdning. Í allar flestum førum fluttu hjálandaveldini heilt einfalt íløgurnar, tey høvdu gjørt í almenna bygnaðin, til tey nýggju, sjálvstøðugu ríkini og hildu seg bæði til stavin og andan í sjálvsavgerðarrættinum, sum hann er orðaður í fleiri ST-samtyktum, og sum siðvenja er viðvíkjandi hjálandaavtøku. Hóast alt, vóru slíkar ognir hildnar at vera ábyrgd hjá hjálandaveldinum fyri sínum atlondum og ikki íløgur, ið kundu verða burturbeindar ella goldið skuldi verða fyri so títt og brátt, hjálandaflaggið var strikað.

Í árunum undan at Botsvana, Lesoto og Svasiland fingu fullveldi, gjørdi Bretland íløgur í flutningskervi sum vegir, jarnbreytir og tílíkt; annars hevði tað kunnað verið sagt, at Bretland hevði vanrøkt landið við at rýma úr tí og ikki veita tí tey neyðugu amboðini til lívført sjálvstýri. Dømi eru um líknandi atlit hjá Danmark, tá ið danir góðtóku rættin hjá Íslandi til fullveldi. (Sí 3. part).

Í stuttum sagt var leiðin til sjálvstýri í øllum førum, uttan í Kýpros og Guinea-Bissau, friðarlig og grundað á meirilutaundirtøku frá fólkinum. Í flestum smáríkjum var ein fólkaræðisligur táttur í gongdini annaðhvørt við at ein greiður meiriluti, sum stóð fyri sjálvstýri, varð valdur á ting ella við fólkaatkvøðu ella við báðum. Í øðrum førum, t.d. á Cape Verde, varð sjálvstýri veitt gjøgnum beinleiðis tingingar við stjórnarflokk, og í uppaftur øðrum førum, sum í Brunai og Flógvaríkjunum, varð samráðst við ein ráðandi valdsharra á staðnum. Sjálvt í londum, har sjálvstýri í fyrstuni fekk mótstøðu, t.d. í Seyskelloyggjum, var greið undirtøka, so skjótt tað var viðurkent, at fullveldi var einasti sannlíki veruleiki.

## Búskaparlig sjálvstøða

Tá ið undantikin eru smáríkini á evropiska meginlandinum, sum leingi hava havt búskaparligan framburð, og sjálvandi ríku oljulondini, sum flógvasjeikadømini og Brunai, høvdu flestu londini ógvuliga heftan búskap tá ið hjálandastøðan varð avtikin, og tey fingu fullveldi. Tað vanligasta var, at tey settu sítt álit á eina ávísa framleiðslu, sum var ógvuliga viðkvæm fyri óstøðugum prísum.

Av tí at smáríkini liðu undir ólagaligum handilstreytum, hava tey

flestu verið bundin at menningarhjálp. Henda hjálp varð nýtt til at bøta um fíggjarligt hall, sum stóðst av, at landsinntøkurnar minkaðu, tí vøruprísurin lækkaði á heimsmarknaðinum. Í summum førum var allur búskapurin grundaður á eina ávísa grøði sum t.d. sukur í Mauritius (ið er áhugavert dømi, hóast fólkatalið er beint yvir milliónina) til fyri kortum, ella turkaðar kokoskjarnar í Tonga. Sjálvt smáríki, sum vóru ógvuliga heft at vinnu sum olju (Trinidad og Tobago), vóru ikki vard ímóti prísbroytingum. Hetta gjørdi tey so bundin at menningarhjálp, at tað var hættisligt fyri ta búskaparligu trygdina.

Nøkur smáríki, sum liggja væl fyri, t.d. Seyskelloyggjar og Barbados, hava ment eina blómandi ferðavinnu. Hóast hetta er heimsins størsta vinnugrein, kann tað verða eins óstøðugt at vera ov mikið bundin at ferðavinnu, tí marknaðurin kann vera svikafullur. Búskaparlig fjøltáttan við fleiri vinnubeinum at standa á, er tí eitt neyðugt mál at seta sær.

Í roynd og veru er tað ikki ein spurningur um at gerast búskaparliga púra óheftur beinanvegin, tí tað vil aloftast vera ein meiri drúgførd tilgongd. Heldur er tað ein spurningur um, hvussu ein sjálvur dugir at stýra sínum sambondum og dugir at skapa búskaparliga fjøltáttan, sum kann lætta byrðarnar og gera, at ikki eitt einstakt miðveldi ella annað „fremmant" vald einsamalt kann umsita búskaparligu lagnuna hjá smátjóðini. Hetta hevur eydnast í flestum smáríkjum bæði við íløgum og hjálpartiltøkum, við at farið er undir nýggjar vinnur, við rentuinntøkum og við menning av frálandatænastum í fíggjarvinnu, sjóvinnu og slíkum.

Vanliga dúvaðu smáríkini upp á fíggjarligan stuðul frá miðveldinum fyrstu árini, eftir at sjálvstøða var fingin. Tað hava verið skipanir, sum tingast varð um í tíðini framman undan sjálvstøðuni. Frakland helt fram sum høvuðsleikari í Djibuti og Komoroyggjum og stóð fyri millum 55 og 70% av allari tvílandahjálp, enntá so seint sum 10 ár eftir at sjálvstøða varð fingin. Soleiðis var eisini við Ekvatorguinea, sum, hóast tað var gamalt, spanskt land, gjørdist eitt land við alsamt vaksandi franskari ávirkan, eftir at sjálvstøða varð fingin í lag.

Myndin er ein heilt onnur við bretsku atlondunum. Serliga í karibisku fullveldisríkjunum, ið eru limir í *Commonwealth* (samstarvsfelagsskapur millum Stórabretland og fyrrverandi hjálond), hevur bretskur stuðul verið avloystur av stuðli úr USA og Kanada. Sama sæst í gomlum bretskum londum í Suðurkyrrahavi við Avstralia, Nýsælandi og Japan, sum standa fyri stórari tvílandahjálp til oyggjarnar. Í gomlu bretsku londunum, sum hava søguligt tilknýti til Fraklands, t.d. Mauritius, St. Lusia og Seyskelloyggjum, heldur Frakland fram sum ein av týdningarmestu fíggingarveitarunum, tá ið ræður um at fíggja búskaparmenning.

Fyri flest smáríki hevur sjálvstøðan merkt, at hjálp og íløgur uttan-eftir eru broyttar ógvisliga. Tey vóru fullkomiliga heft av veitingum frá miðveldinum, men fullveldisstøðan hevur givið smáríkjunum høvi at nærkast øðrum fíggingarveitarum, og sjálvandi eisini millumtjóða felagsskapum. Fullveldi gevur smáríkjum størri møguleikar fyri at stýra ávirkanini uttaneftir, við tað at landið ikki gerst fíggjarliga bund-ið av veitingum frá bert *einum* landi.

Sama fjøltáttan sæst í útflutninginum hjá smátjóðum. Nøkur smá-ríki hildu fram at hava ein ógvuliga eintáttaðan vøruútflutning, serliga oljuríkini og tey fátækastu av smáríkjunum. Tó hava flest smáríki ment ein alsamt meira fjøltáttaðan útflutning. Tíggjuáraskeiðið frá 1975 til 1986 er gagnligur tíðarkarmur fyri okkara metingar, tí hetta fyri flest smáríki eru fyrstu árini við fullveldi. Í hesum tíggjuáraskeiði fjøltáttaðust útflutningsvørurnar í 21 smáríkjum, og hjá flestum teirra munandi.

Tá ið talan er um økt sjálvræði, er líka umráðandi at fáa skapt fjøltáttaðar marknaðir, sum tað er at hava ymisliga framleiðslu. Í sama tíggjuáraskeiði høvdu 26 smáríki fingið nógv breiðari marknað. Í flest-um førum endurspeglar henda gongd nýggja framleiðslu, sum kann lata nýggjar marknaðir upp. Eitt gott dømi er Mauritius. Í 1971 varð eitt útflutningsfremjandi øki (*Export Processing Zone, EPZ*) stovnað á Mauritius, við fyribils skattafrælsi, tollfríum innflutningi og lágrentu-lánum. Hetta hevur gjørt landið minni bundið av sukri, sum alt ov nógv varð dúvað uppá frammanundan. Hetta økið hevur upplivað ein munandi vøkstur í arbeiðsplássum og beinleiðis útlendskum íløgum. Í 1995 stóðu EPZ-útflutningsinntøkur fyri sløkum 70% av samlaðu útflutningsinntøkunum, og tað gjørdi Mauritius til eitt afrikanskt há-vøkstursland. Meginparturin av framleiðsluni var klædnavørur, men tiltøkini hjá stjórnini fyri at skapa eina meiri fjølbroytta framleiðslu hava gjørt, at nýggjar framleiðslur hava tikið seg upp, eitt nú ur og nákvæmistól (presisiónstól), gimsteinar og elektrotøkni. Nú er brutto-tjóðarúrtøkan í Mauritius fyri hvønn íbúgva meiri enn tríati ferðir hægri enn á Madagaskar, sum er næsta stóra grannalandið.

Vøksturin í framleiðsluvinnuni á St. Lusia, sum nú er um leið 13% av bruttutjóðarúrtøkuni, er eisini grundaður á fjølbroytt menningar-tiltøk lík teimum í Mauritius. At íløgur eru gjørdar í undirstøðukervi, sum t.d. bingjupláss og djúpa havn, hevur eisini eggjað til beinleiðis útlendskar íløgur.

Í mongum smáríkjum er tænastuvinnan høvuðsmotorurin, tá ið búskapurin skal gerast meira fjølbroyttur. Alsamt fleiri smáríki eru komin inn í tann bráðvaksandi altjóðamarknaðin fyri frálands fíggjar-tænastu. Hetta er vinna, sum krevur eftiransni og lýtaleysa løgfrøði-liga ábyrging. Treytin fyri at sleppast kann inn á teir mest álítandi

marknaðirnar, er, at tað eydnast at skapa trúvirði til eina slíka ábyrgdarstøðu. Vøksturin í hesi vinnu ger hana til eina nýtiliga keldu til fjølbroytni, um álítandi karmar verða tryggjaðir. San Marino er eitt hóskandi dømi, sum sýnir, hvønn týdning, ið lóggávuvaldið í einum fullveldi hevur, tá ið um ræður at menna hesa vinnu. Ein nýggj frágreiðing frá altjóða gjaldoyragrunninum *(IMF)* um búskapin í San Marino rósti búskaparligu stýringini í lýðveldinum, bæði hvat viðvíkur vøkstri í hávirðisframleiðslu og skilagóðum vøkstri í tænastuvinnuni. Fíggjar- og tryggingarvinnurnar í búskapinum eru vaksnar í stórum sum beinleiðis úrslit av vantandi áliti á politiska støðufestið í altumfevnandi grannanum, Italia. San Marino megnaði at draga til sín ognir hjá italiumonnum, ið kendu seg ótryggar av óstøðugu politisku viðurskiftunum í Italia.

Tænastuvinnur á øllum økjum halda fram at bjóða fram ómetaligar møguleikar at skapa fjølbroyttar smáríkjabúskapir. T.d. kunnu karibisku londini í Commonwealth brúka sítt høga bókliga kunnleikastig at menna vinnu í kunningartøkni. Her ger internetið tað munandi lættari hjá oyggjalondum at vera við, enn tað var áður. Sama gongd sæst í Felagsskapinum av smáum oyggjaríkjum (*Association of Small Island States*), ið leggja nógva orku í at styrkja um fjarskiftiskervið og førleikan hjá limalondum. Henda strategi ger, at tað fær alsamt minni týdning at londini eru oyggjar og at tey eru fjarskotin.

Sum nevnt er ferðavinna ein vaksandi inntøkukelda hjá mongum smáríkjum. Í Seyskelloyggjum og Maldivoyggjum hevur ferðavinna verið avgerandi fyri, at búskapurin í oyggjunum er vorðin meira fjølbroyttur. Sjálvt fjarlagdastu smáríkini eru før fyri at marknaðarføra, hvussu forkunnug tey eru fyri ferðafólk við serynskjum, til dømis í mentanar- og ævintýraferðavinnu og enntá vistfrøðiferðavinnu. Falklandsoyggjar eru dømi um, at ófýsið veðurlag ikki nýtist at vera forðing fyri vaksandi ferðavinnu.

Sagt í stuttum hava royndirnar hjá smáríkjum, við fáum undantøkum, verið ein munandi búskaparvøkstur, eins og búskapurin er vorðin meiri fjøltáttaður. Alheimsgerðin veitir smáum búskapum møguleikar, serstakliga í menning av servinnum.

Avgerandi fyri at kunna menna seg í einum alheimsgjørdum búskapi er, at smásamfelagið hevur neyðuga stjórnarvaldið og megnar at nýta tað sum tilfeingi. Annaðhvørt ætlanin er at brúka búskaparpolitisk tiltøk at lokka íløgur til landið og at lata upp nýggjar leiðir fyri búskaparligum virksemi, ella um tað er atgongd til høvuðsstaðir ella millumtjóða felagsskapir, hevur fullveldi hjá smáríkjum víst seg at verið eitt høvuðsamboð í sjálvum sær til at gera seg minni búskaparliga heft av øðrum og at seta sær mál, ið styrkja teirra sjálvstøðu.

## Smáríki í millumríkjasamstarvi

Á uttanríkispolitiska økinum sum t.d. sendiharraumboðan, er ymist, hvussu virkin smáríkini eru. Stødd hevur eyðsýniliga týdning á hesum øki. Lond við størri fólkatali hava vanliga sendistovur í fleiri londum enn smærri lond. Smáríki hava ikki so nógv støðug tvílanda sambond, sum størri lond, men leggja størri dent á at vera umboðað í fleirtjóða felagsskapum. Tvílanda sambond hjá smáríkjum eru vanliga við grannalond, heldur enn um allan heim.

Tað eru fýra umboðsmiðdeplar, sum flest smáríki raðfesta fremst: Sameindu tjóðir, fyrrverandi miðveldið, millumlanda økisfelagsskapurin í teirra parti av heiminum og næsta stórveldi ella høvuðsland.

Í karibisku oyggjalondunum, ið eru limir í *Commonwealth*, eru raðfestingarnar t.d. London, Washington og New York (Antigua og Barbuda, St. Kitts & Nevis, St. Lusia og St. Vinsent & Grenadinur). Hesi lond hava enntá samst um felags umboðan í serumboðsstovum í Ottawa, Washington og London, hóast tey heilt avgjørt vilja varðveita sínar egnu umboðsstovur í New York, og ymist er, hvussu tey skipa seg í Ottawa og London.

ST stendur eyðsýniliga frammarlaga, tí tað gevur smáríkjum atgongd til alt heimssamfelagið. Nøkur smáríki, eitt nú Vestursamoa, fingu sær ikki umboðsstovu hjá ST í New York beinanvegin av ótta fyri kostnaðinum, men nú hava at kalla øll smáríki fingið sær fastar umboðsstovur, hóast smáar. Summi smáríki hava minkað um útreiðslurnar við at hava ymist virksemi í felag. Nøkur hava felags skrivstovu, tó at tey hava hvør síni umboð, tí felagsumboðan verður ikki hildin at vera góð fyri sjálvstøðug ríki.

Sendiheimild (*accreditation*), serliga tá ið ræður um at stovna sendistovur hvør hjá øðrum, verður avmarkað til nøkur fá lond. Tey týdningarmestu her eru vælvildarlond (*patron states*), sum kunnu vera fyrrverandi miðveldið, grannalond ella bæði. Harumframt verður dentur, sum nevnt, lagdur á fleirlandasambond og umboðan á viðkomandi økisstigi – í Evropa t.d. í ES – og á altjóða stigi í Sameindu tjóðum. Hetta er ein háttur at gagnnýta avmarkaða tilfeingið av pengi og embætisfólki til at røkja síni altjóða áhugamál. Sjálvt tey fáu smáríki, sum ikki eru limir í ST, luttaka í teimum ST-stovnum, ið hava mest at týða fyri teirra áhugamál.

At vera við í leiki økir í sjálvum sær um tign og løgfrøðiliga javnstøðu hjá øllum ríkjum, og ágóðar og fyrimunir eru eisini við tí. Ein er við til at taka avgerðir á millumtjóða stigi um dagføringar og samskipan av ymsum meiri og minni bindandi semjum um millumtjóða handilsviðurskifti, umhvørvi, trygd og mangt annað. Slíkt starv gevur

eisini smáríkjum atgongd til týdningarmiklar millumtjóða stovnar, ið kunnu veita fígging til eitt nú vinnuætlanir og granskingarætlanir.

Í summum førum kann ein millumtjóða felagsskapur, ofta økisfelagsskapur, vera fremsta álitið í millumríkjasamstarvi, og hetta kann minka um tørvin á sendistovum hvør hjá øðrum. Harumframt kann eitt smáríki leggja seg eftir ávísum serkunnleika og miðsavna ávíst tilfeingi, so at tað gevur smáríkinum týðandi ávirkan, tá ið fleirtjóða politikkur verður avgjørdur. Íkastið hjá Malta til altjóða havrættarsáttmálan er dømi um munadygt sendiharravirksemi hjá smáríkjum, sum røkkur út um heimlig áhugamál.

Størri lond eru limir í fleiri millumtjóða felagsskapum enn smærri lond, av tí at tey hava meiri pening og fólk til virksemi sítt. Ríki við fólkatali millum eina og seks milliónir eru í miðal limir í 46 økis- og heimsumfatandi millumtjóða felagsskapum, og smáríki eru í miðal limir í 26 slíkum felagsskapum. Flest smáríki hava ímillum 20 og 40 limaskapir. Ísland hevur 55. Øll uttan fýra ríki, Kiribati, Nauru, Tonga og Tuval, hava fullan limaskap í ST, men Nauru hevur boðað frá sínum ætlanum at gerast ST-limur.

Smáríki eru vanliga við í ymsum stovnum undir ST, eisini tey, ið ikki eru limir í hesum felagsskapi. Tey eru við í eitt nú heimsbankanum (IBRD), Millumtjóða gjaldoyragrunninum (IMF), Heimsheilsufelagsskapinum (WHO), og mentamálafelagsskapi Sameindu tjóða (UNESCO). Fjúrtan smáríki eru við í Heimshandilsfelagsskapinum (WTO).

*Commonwealth* er annar stórur millumtjóða felagsskapur fyri smáríki. Í royndum er *Commonwealth* fyri stóran part ein smáríkjafelagsskapur, har nógv virksemi fer fram av serligum týdningi fyri smáríki.

Øll smáríki hava samstarv við viðkomandi økisfelagsskapir í sínum parti av heiminum. CARICOM er fyri øll fyrrverandi bretsk hjálond á karibisku leiðini, Suðurkyrrahavstingið (*South Pacific Ocean Forum*), er fyri øll smáríki í Suðurkyrrahavi, og so framvegis. Luksemborg hevur fullan limaskap í Evropasamveldinum, og neyvan verður leingi, til Kýpros og Malta eisini fara uppí. Liktinstein og Ísland eru EFTA-lond, sum vóru við at stovna evropiska búskaparliga samstarvsøkið (EBS). Andorra, Monako og San Marino hava sínar egnu sáttmálar við ES. Øll smáríki í Evropa eru limir í OSCE, og øll uttan Monako eru limir í Evroparáðnum. Økisfelagsskapir virka sum hentir samkomustaðir, har ið fjálgað kann verða um daglig sambond við grannar.

Av smáríkjunum hava bara 14 stovnað fleiri enn 10 sendistovur í útlondum, og ikki óvæntað eru tað annaðhvørt oljulond ella lutfalsliga vælstandandi evropisk lond sum Luksemborg og Malta, sum eisini millum smáríki eru í tí størra fólkatalsbólkinum. Luksemborg hev-

ur 20 sendistovur í øðrum londum, Malta hevur 16 og Ísland hevur 13. Nøkur smáríki hava ongar sendistovur (Nauru og Kiribati), og trý hava bara eina umboðsstovu uttanlands. Flestu smáríki hava tó millum fýra og tíggju umboðsstovur. Í Evropa hevur San Marino átta umboðsstovur á sendistovustigi, Monako hevur sjey og Andorra fýra. Í hesum føri mugu vit minnast til, at Andorra er nústani komið upp í altjóðaskipanina sum fult viðurkent fullveldisríki.

Sjálvt ein einstøk umboðsstova kann hava sera stóran týdning. Hásendiharrin fyri Tonga í Bretlandi hevur viðurkenda sendiheimild í fleiri stórum evropiskum londum og týdningarmest í Evropasamveldinum í Brússel. Saman við limaskapi kongsdømisins í *Commonwealth* er tað teirra atgongd til umheimin. Stórt meira er ofta ikki neyðugt.

Samstarvsbond við vinarliga sinnað lond eru vanlig og kunnu virka á tann hátt, at størra landið tekur sær av at umboða áhugamálini hjá minna landinum, tá ið skipað verður fyri tí, ella biðið verður um tað. Luksemborg hevur millumríkjasambond við 108 lond. Hetta ber m.a. til, tí 10 av sendiharrunum eisini hava sendiheimild í 23 øðrum londum. Í semju við Beniluks samstarvsfelagarnar, umsitur Belgia kortini handilslig og búskaparlig áhugamál hjá Luksemborg, og Niðurlond umboða politiska virksemið og sendharravirksemið í teimum mongu londum, har Luksemborg ikki hevur sendistovur.

Liktinstein hevur umboðsstovur í Bern, Geneve og New York. Aðrastaðni umboðar Sveis áhugamál í útlondum. Hetta merkir ikki, at rættur Liktinsteins at hava sendistovu ella myndugleika at gera sáttmála er sleptur. Tað er eitt skipað samstarv, har Sveis virkar eftir boðum frá stjórnini í Liktinstein.

Brússel verður ein alt meira týðandi høvuðsstaður at hava umboðstovu í. Øll velja kortini ikki at virka úr Brússel. Summi velja sær annan høvuðsstað í nánd, sum t.d. London, Berlin ella París, tá tílanda áhugamál teirra har eru nóg týdningarmikil.

At veita sendiheimild at starva í fleiri londum verður sjálvsagt nógv brúkt í smáríkjum, og Ísland er frálíkt dømi um, hvussu ein vísiliga kann nýta hesa heimild. Skipanin við sendiheimildum gevur smáríkjum høvi til at hava eitt somikið gott millumríkjasamstarv, at hon kann verða samanborin við skipanirnar í størru smáríkjunum. Nøkur smáríki nýta embætisfólk, sum virka úr heimlandinum (heimasitandi sendiharrar), og onnur nýta fyrimunirnar við ferðasendiharrum, sum taka sær av ávísum málum ella nøkta serstakan tørv, tá ið hann stingur seg upp.

Konslaumboðan (ræðismannaumboðan) er ein nógv nýttur háttur, ið er ógvuliga skynsamur fíggjarliga. Hvørt ein velur at hava sendiharra ella konsul (ræðismaður), veldst um, hvat slag av virksemi, talan er um. Ofta er ilt at skyna á reint handilsligum áhugamálum hjá ein-

um landi og politiskum og enntá strategiskum umhygni. Ábyrgdin hjá konsli at styrkja vinabond millum tjóðirnar í báðum ríkjum við ymsum mentanartiltøkum ber ofta eisini við sær politiskt uppíbland. Í summum førum hevur henda stóra ábyrgd verið formliga viðurkend, og konslar við tign sum aðalkonslar hava loyvi at virka í sjálvum høvuðsstaðnum og verða góðtiknir sum umboð við forrættindum (*ministers for purposes of precedence*). Fyri evropisku smáríkini hevur konslaumboðan politiskan týdning. Nøkur smáríki seta alt sítt álit á konslaumboðan sum sambond við umheimin. Monako hevur sjey sendistovur, men 43 konslaumboð. Fyri Ísland eru tølini 13 og 50 og fyri San Marino 8 og 47.

Ymiskt frá yrkiskonslum verða heiðurskonslar tilnevndir á staðnum, og teimum tørvar ikki at vera borgarar í landinum, teir umboða. Starv teirra krevur onga serliga útbúgving, og vanliga fáa teir lítla og onga samsýning. Hinvegin er umráðandi, at heiðurskonslar kunnu vera uppi í vinnuligum virksemi og tískil kunnu hava týdningarmikil sambond bæði av vinnuligum og politiskum slag. Heiðurskonslaskipanin er ódýr og ein háttur hjá smáríkjum at fáa fólk í sína tænastu, ið eru kunnug við viðurskiftini á staðnum, har tey búgva og virka.

Sendistovur hjá *øðrum* londum í smáríkjum er fyri einstaka smáríkið ein týðandi sambinding við umheimin. Eins og smáríki í størra fólkatalsbólkinum aloftast hava fleiri umboðsstovur í øðrum londum enn smáríki við minni fólkatali, eru aloftast fleiri sendistovur hjá øðrum londum í smáríkjum við størri fólkatali enn í teim minni fólkaríku smáríkjunum. Aftur at fólkatalinum hevur eisini ríkidømi, landafrøðilig nær- ella fjarstøða og hermálsligur týdningur ávirkan á, hvussu nógvar útlendskar sendistovur, eitt smáríki kann draga at sær.

Stórveldissumboðan í smáríkjum er ógvuliga ymisk. Í Íslandi, Kýpros og Luksemborg eru sendistovur hjá teim fimm stórveldunum, USA, Russlandi, Kina, Stórabretlandi og Fraklandi, í níggju smáríkjum eru umboð frá fýra stórveldum, og í 24 smáríkjum eru millum eitt og trý stórveldi umboðað. Í sjey smáríkjum er einki stórveldi umboðað. Kortini skal verða havt í huga, at tað er fyrst og fremst í oyggjaríkjum í Suðurkyrrahavi og Karibiahavi, at stórveldini ikki eru so væl umboðað. Hesi oyggjaríki eru limir í *Commonwealth*, har ein einstøk sendistova á økinum, vanliga í Suva ella Bridgetown, lættliga kann veita tænastu til fleiri smáríki. Í smáríkjum á evropiska meginlandinum eru umboðini heldur ikki so nógv, tí økini eru høglig at røkja hjá umboðum í teimum størru grannalondunum.

Samanumtikið merkir tann nýhugsandi hátturin at reka millumríkjasamstarv, at hóast smáríki hava avmarkað umsitingartilfeingi, kunnu tey fremja síni áhugamál í altjóða skipanini. Smáríki fara ikki at hava áhuga í øllum málum, sum eru á altjóða dagskránni, hóast

høvuðsmál sum friður og trygd, altjóða menning og mannarættindi eru eins viðkomandi fyri tey sum fyri øll onnur heimsins ríki. Tey raðfesta tó betur, hvar tey nýta orku sína, og hava meir enn so gjørt vart við seg á altjóða stigi. Fleiri slík dømi bera boð um, at smáríki tíðum hava veruliga týðandi leikpartar í altjóða samfelagnum. Men tað, ið hevur mest at siga, er, at smáríki sjálv fáa umboðað síni áhugamál í teimum málum, sum hava beinleiðis týdning fyri teirra vælferð. Førleiki Íslands at nýta fullveldi sítt at verja sín lívstýðandi fiskiskap er vælkent dømi um hetta.

## Trygdarmál

Fyrst er at siga, at hjá flest smáríkjum er lítil vandi fyri, at tey verða álopin ella hótt av einum nøskum hernaðarveldi. Fyri flest teirra, t.d. Ísland, er trygdarviðkvæmið partur av støðuni hjá samstarvslondum og grannum, í hesum føri NATO. Vanliga fáa oyggjasmáríki frið fyri hernaðarligum ágangi, men nøkur undantøk eru. Til dømis hava Maldivoyggjar, Brunai og fleiri oyggjar í Eysturkaribia onkuntíð staðið fyri skotum frá grannaríkjum á meginlandinum, og onnur dømi eru eisini.

Nú á døgum er sera torført hjá einum størri landi ótarnað at taka eitt lítið grannaland við valdi, sum altjóða álopið á Irak fyri innrásina í Kuvait hevur víst. Tað vísir seg enntá at vera ringt hjá størri londum at halda upp á egnar ríkispartar við harðskapi, so sum roynt hevur verið í Kosovo og Eysturtimor, uttan at onnur lond ella altjóðasamfelagið (t.d. NATO) leggja uppí. Tá ið Argentina hertók Falklandsoyggjar, gjørdu venesuelar og guatemalar herar sínar tilbúnar á markinum móti Gujana og Belis. Gujana varð tá so mikið skelkað, at tað bað um serligan fund í ST-trygdarráðnum. Síðan tá er ógvuliga nógv bøtt um trygdarstøðuna hjá hesum londum.

Aftur ímóti teirri vanligu áskoðanini á fullveldi fyri øld síðan, tá ið von Treitschke helt, at „eitt ríki, sum ikki kundi draga svørð úr slíðrum, tá ið tað helt tað vera neyðugt, kundi av kurteisi verða nevnt kongsdømi, men var í roynd og veru ikki eitt rættiligt ríki," er hernaðarpolitiska støðan í heiminum nú tann, at bara heilt fá av heimsins ríkjum lúka hesa fullveldistreyt hjá von Treitschke. Lond sum t.d. Noreg og Danmark lúka hana ikki, heldur enn Ísland, og tí hava tey valt at verða limir í NATO. Kortini ivast eingin í, at Noreg, Danmark og Ísland hava fullveldi í tess vanligu merking.

Eins og hjá størri londum er verjan hjá smáríkjum knýtt at samstarvi við onnur sterkari hervøld og ofta á yvirríkjastigi, sum í NATO. Hetta, saman við teirri sannroynd, at smáríki ikki megna at hava nakra stórvegis stríðstilbúna hermegi, ger, at tey aloftast heldur skipa

eitt gott samstarv við onnur enn at skipa fyri egnari hermegi. Tó eru nøkur heilt fá smáríki við veruligum hervaldi. Katar hevur t.d. herflota og loftmegi við til samans 15.000 monnum, og Barain hevur hermegi við 11.000 monnum. Hví so er, er lætt at skilja – bæði ríki eru í heimsins kanska óstøðugasta øki. Brunai ansar somuleiðis ógvuliga væl eftir trygdini av einum smáríki at vera, tí landið kennir seg ótrygt í síni landafrøðiligu støðu sum eitt oljuríkt smáríki ímillum ASEAN-veldini, sum øll hava landakrøv á dagskránni. Aftur at teim 5.000 hermonnunum hjá Brunai, heldur sultanurin framvegis ein gurkhaher við 900 monnum, umframt hermenn úr Singapor, ið stuðla við venjing.

Men flestu smáríki dúva upp á løgreglu, og í oyggjaríkjum hevur løgreglan harafturat skip og bátar til taks. Tá ið hugsað verður um trygdartørvin hjá smáríkjum, er umvarðandi at hava eina breiða trygdarfatan, tí er tann hernaðarliga hóttanin lítil, so eru tó aðrar hóttanir at ansa sær fyri. Dømi eru rúsevnishandil, sjórán, vanvirðing fyri náttúrutilfeingi, ovurveiða, skipað brotsverk, flóttafólkasmugling, og peningahvítting í einum og hvørjum veikum løgdømi. Hesir ikki-hernaðarligu trygdartrupulleikarnir hjá smáríkjum, sum ofta eru teir somu sum hjá størri ríkjum á somu økjum, kunnu ofta verða loystir við økissamstarvi ella samstarvi við eitt ella fleiri størri lond nærindis.

Trygd má fatast í breiðum týdningi, og í hesum høpi gevur altjóða viðurkenda fullveldisstøðan hjá smáríkjum teimum betri møguleikar at greiða trupulleikarnar gjøgnum fastar fyriskipanir við onnur lond. Hesar fyriskipanir kunnu verða greiddar millum fleiri smáríki, har fleiri slík eru í sama øki, men eisini við gamla miðveldið.

Fyri Marshalloyggjar, Mikronesia og Palau er amerikanska ábyrgdin av verju og trygd teirra klárt og greitt útgreinað í sáttmálanum um frælsan felagsskap ímillum hvørt av hesum londum og USA. Uppaftur aðrar skipanir eru settar í verk gjøgnum altjóða felagsskapir.

Í summum førum, sum til dømis við peningahvítting, er tað týdningarmest at hava strangar lógir innanlands og sjálvsagt at uppihalda teimum á nøktandi hátt. Onnur føri, sum t.d. at kanna fleiri hundrað vágir og firðir fyri rúsevnishandilsmenn ella at hava løgreglueftirlit við fiskiránsmonnum fram við ómetaligum sjómørkum, kunnu meira enn so krevja samstarv við annað størri land ella góða tilbúgving í økisfelagsskapinum.

Í Eysturkaribia er ein økistrygdarskipan, sum USA stuðlar, og sum veitir smáríkjum har um leiðir nakað ta somu verju. Nógv smáríki líta á stuðul frá gamla miðveldinum ella frá lutfalsliga sterkum londum í økinum.

Í stuttum hevur fullveldið fyri smáríkini í flestum førum ikki havt við sær, at tey hava stovnað hermegi. Trygdartørvurin hjá smáríkjum

kann aloftast best verða nøktaður við einum vælvandum løgregluliði, góðum samskifti um upplýsingar, og samstarvi við onnur lond í økinum. Tá ið hugsað verður um trygdina hjá einum ríki, antin tað er lítið ella stórt, eigur ein tó altíð at hugsa í ógvuliga víðum tíðarkarmum, tí tíðir kunnu skifta. Hetta atlitið undirstrikar enn eina ferð týdningin av at samstarva við góðar og sterkari grannar um trygdarspurningar.

## Viðurskiftini við miðveldið

At kalla øll smáríki hava hildið fram at hava vinarlig og tøtt sambond við gamla miðveldið, bæði hvat viðvíkur hjálp og íløgutiltøkum, umframt millumstjórnasamstarvi, heruppií samstarvi á trygdarøkinum. Hetta hevur eisini við sær framhald av mynstrum, sum vóru framman undan sjálvstøðuni fyri borgararnar í nýggja smáríkinum. Til dømis er vanligt, at ungdómur úr smáríkinum fer undir hægri lestur í gamla miðveldinum, har ið mál og onnur mentanarfyribrigdi, sum báðir partar kennast við, eru við til at skapa fjálgar umstøður. Víðfevnd ættarbond í gamla hjálandaríkinum styrkja eisini bondini landanna millum, eftir at sjálvstøða er fingin.

Tað merkir tó ikki altíð, at borgarar í smáríkjum framvegis hava sama rætt til búseting, arbeiði og landognir, sum teimum var heimilað í hjálandatíðini. Í roynd og veru er tað t.d. soleiðis fyri borgarar í fyrrverandi bretskum hjálondum, at teir hava truplari við at sleppa inn í Bretlandi enn borgarar í Evropasamveldinum. Hetta kemst av, at lutfalsliga nógv fólk býr í fleiri av fyrrverandi hjálondunum, í summum enntá meira enn í sjálvum Bretlandi. Bretland kunngjørdi fyri stuttum, at tað gevur teimum ríkisborgaraskap, sum búgva í teimum ógvuliga smáu atlondunum, ið framvegis eru eftir (Turks og Caicos, St. Helena o.ø.). Her býr so lítið fólk, at tað ikki kann geva Bretlandi stórvegis trupulleikar at loyva teimum inn í bretska samfelagið.

Í summum førum hava smáríki havt felags ríkisovasta. Tá ið Ísland fekk fullveldi í 1918, varðveitti landið danska kongin sum ríkisovasta fram til 1944. Tíggju *Commonwealth*-smáríki í Karibiahavi og Suðurkyrrahavi hava varðveitt bretsku drotningina sum ríkisovasta, umboðað av einum ríkisumboði (*Governor General*). Henda skipan er enntá rótfest í nógv størri ríkjum sum Kanada, Avstralia og Nýsælandi. Tað hevur kortini ikki við sær, at tey ymsu ríkini hava felags stjórnarskipan.

Eitt heilt serligt dømi um felags ríkisovasta er fúrstadømið Andorra, har ið franski forsetin øðrumegin, sum ríkisarvingi til avsøgdu

fronsku trónuna, og hinumegin spanski biskupurin í Urgel, eru samprinsar. Tá ið Andorra í 1993 fekk nýggja fólkaræðisliga stjórnarskipan, gjørdist púra greitt, at henda skipan á ongan hátt setur fullveldið ella tjóðartingið í Andorra í vanda. Leikluturin hjá hesum samprinsum er bara ímyndaligur og formligur. Stjórnarskipanarliga er støða Monako eisini serstøk. Reinier prinsur er ríkisovasti, men stjórnarleiðarin er altíð ein hátignarligur franskur ríkistænastumaður, sum prinsurin velur ímillum tríggjar, ið Frakland mælir til.

Framhaldandi løgfrøðilig sambond eru eisini varðveitt í summum smáríkjum í *Commonwealth*. Í Eysturkaribia er ein felags eysturkaribiskur hægstirættur við sæti í St. Lusia. Kortini kunnu mál frá tí rættinum verða kærd til dómskærunevndina hjá *British Privy Council* (*Judicial Committee of the Privy Council*) í London. *Privy Council* er eisini hægsti kærudómstólur hjá Cook Islands, Belis, Bahamaoyggjar, Barbados og Tuvalu. Í summum førum fáa smáríki dómarahjálp frá grannalondum. San Marino býður t.d. italskum dómarum at hava umsjón við sakarmálum í rættum lýðveldisins. Á Solomonoyggjum verða dómarar til kærudómstólin tilnevndir í Avstralia, Nýsælandi og Papua Nýguinea. Í Tuvalu verður kærudómstólurin í Fijioyggjum nýttur sum eitt millumstig, áðrenn mál verða endaliga løgd fyri *Privy Council*.

Gjaldoyra er annað mál. Smáríki kunnu annaðhvørt royna at hava felags gjaldoyraskipan, ella at nýta tað, ið er í gildi í øðrum ríki. 21 smáríki hava egið gjaldoyra. Í summum førum, í Tonga til dømis, varð tað knýtt at øðrum gjaldoyra, í tí føri avstralska dollaranum. CFA-frankurin, sum verður brúktur í fleiri fyrrverandi fronskum hjálondum, eitt nú í Ekvatorguinea, er í føstum veksilvirði við franska frankin. Franski frankurin verður brúktur í Monako og saman við sponskum peseta í Andorra. Sveisarfrankur er gjaldoyra í Liktinstein, og italskur líri verður brúktur í San Marino og Vatikanríkinum, hóast serstakur peningur eisini verður gjørdur. Kiribati, Nauru og Tuvalu hava øll avstralskan dollara. Í Marshalloyggjum, Mikronesia og Palau er US-dollarin almenna gjaldoyrað. Tað eru sostatt ymiskar skipanir fyri gjaldoyruni.

Nøkur smáríki hava tollsamgongu við onnur lond. Hetta er eyðsýnt fyri Luksemborg í sambandi við Evropasamveldið. Malta og Kýpros hava samstarvssáttmála við ES, og bæði londini fara eftir øllum at døma skjótt uppí. Arbeiðarastjórnin í Malta ógildaði gomlu umsóknina frá oynni, sum annars hevði sett Malta á beina kós ímóti ES-limaskapi, men ein tjóðskaparlig stjórn varð afturvald, sum aftur fer at seta umsóknina hjá Malta fremst á dagsskránna.

Tað er áhugavert, at tjóðskaparsinnaðir flokkar kunnu hava sum mál at innlima landið í økisfelagsskap. Hetta er júst støðan hjá skotska

tjóðskaparflokkinum (SNP), ið bæði virkar fyri fullveldi til Skotlands, og at Skotland gerst sjálvstøðugur limur í ES. Andorra, Monako og San Marino hava øll tollsamgongu við grannar sínar og sersáttmálar við Evropasamveldið. Flest smáríki í menning hava ávís rættindi viðvíkjandi atgongd til Evropasamveldið við tryggjaðum útflutningsnøgdum umframt øðrum framíhjátiltøkum. Gamla hjálandasambandið hevur havt nógv at siga, tá ið londini hava fingið atgongd til ein nógv størri evropiskan marknað.

Nøkur smáríki varðveita tætt samband við tað gamla miðveldið. Nøkur samstarva við ein sterkan granna, og nøkur, t.d. karibisku smáríkini í *Commonwealth*, samstarva við smáríki í somu støðu í einum økisfelagsskapi. Hesi sambond nýtast ikki at verða nevnd í stjórnarskipanini. Tó verður tað gjørt, tá ið ríkisovastin ella hægsti kærudómstólurin í gamla miðveldinum er felags. Í summum førum, sum t.d. í Eysturkaribia, eru hesi mál formskipað við sáttmála. Í øðrum førum eru sambondini óformlig, men kortini greið.

## Samanumtikið

Bráðvøksturin av smáríkjum, serliga í árunum millum 1960 og 1990, at kalla samstundis sum heimsbúskapurin gerst meira opin, og vit tala um alheimsgerð, tykist vera tekin um, at tvey at síggja til mótstríðandi rák í tíðini onkursvegna eru samlívað. Altjóðaskipanin hevur um somu tíð miðfirrandi og miðsavnandi ávirkan á heimssamfelagið. Innlendis í samansettum ríkjum síggjast miðfirrandi máttir gera um seg, sum í fleiri førum hava havt við sær, at nýggj ríki eru stovnað, samstundis sum ríkini gerast tættari knýtt sínámillum í heimssamfelagnum, m.a. í økisfelagsskapum sum ES. Ein fyritreyt fyri at eitt land skal sleppa upp í part í slíkum millumtjóða felagsskapum, er, at landið hevur fullveldi.

Rákið við økisfelagsskapum og ST-stovnum, har altjóða regluskipanir verða gjørdar, skapar betri líkindi fyri smá ríki at troyta teir møguleikar, ið fullveldi gevur, enn fyri bara fjøruti árum síðan, tá ið smærri lond nógv oftari noyddust at dúva upp á stuðul og verju frá einumhvørjum miðveldi, oftast við at vera beinleiðis undirløgd einum slíkum veldi stjórnarskipanarliga.

Hópurin av smáríkjum er undankomin seinasta mansaldurin, og flestu teirra hava megnað at skipa seg væl í alheimssamfelagnum. Summi undantøk eru kortini, oftast í sambandi við eina óhepna landafrøðiliga støðu, sum t.d. í Kýpros.

Menningin av alheimsskipanini eftir seinna heimsbardaga, serstakliga heft at ST, hevur bæði skapt betri og tryggari umstøður fyri, at

smátjóðir kunnu fáa fullveldi, og betri livilíkindi fyri hesi smáu fullveldisríki, tá ið tey eru stovnað.

Nú eru smáríkini før fyri at koma fram fyri fremmandar stjórnir og millumtjóða felagsskapir beinleiðis og eftir egnum treytum. Teirra støða sum fullveldisríki virkar sum eitt atgongumerki til heimsins stjórnarskrivstovur og millumríkja felagsskapir. Tó krevur henda støða eisini, at førdur verður ein skilagóður og ábyrgdarfullur politikkur viðvíkjandi trygdarpolitiskum og búskaparpolitiskum avbjóðingum.

# Altjóðarættur og føroyskt fullveldi

Her skal verða roynt at lýsa tær reglur í altjóðarætti, ið kunnu haldast at hava týdning fyri skipan av Føroyum sum ríki við fullveldi. Fyrst verður greitt eitt sindur frá altjóðarætti. Harnæst verður greitt frá teimum formligu reglunum og krøvunum til stovnan av nýggjum ríki sambært klassiskum altjóðarætti. Síðan verður greitt frá teirri kollveltandi gongdini, ið tók dik á seg eftir seinna heimsbardaga, og sum førdi til, at hugtakið *sjálvsavgerðarrættur tjóðanna* frá at vera ein politisk hugsjón við ómetaligari megi gjørdist ein mestsum alment viðurkend løgfrøðilig grundregla, ið fann sítt endaliga skap í teirri søgugongdini, ið vanliga verður nevnd avtøkan av hjálandaveldinum *(decolonization*). Roynt verður eisini at lýsa týdningin av sjálvsavgerðarrættinum fyri støðu føroyinga í dag, tá ið um ræður at skipa føroyskt fullveldi. At enda eru nøkur orð um viðurkenning av nýggjum ríkjum og rættindi og skyldur teirra sum partur av altjóða samfelagnum.

## Eitt sindur um altjóðarætt

Altjóðarættur skilur seg á mangan hátt frá tjóðarrætti. Avgerandi munurin er, at meðan flestu nútímans ríki hava eina rættarskipan við føstum reglum um, hvussu lógir verða skipaðar og handhevjaðar, eru hesi viðurskifti skipað á heilt annan hátt í altjóðarætti.

Aðalfundur Sameindu tjóða er einki altjóða lóggávuting, Altjóða dómstólurin kann bert døma í málum, har báðir partar hava givið sítt samtykki til tess, og útinnandi valdið hjá trygdarráði Sameindu tjóða er avmarkað bæði løgfrøðiliga og politiskt.

Hóast hendan grundleggjandi mun, er kortini vaksin fram ein sera umfevnandi altjóða rættarskipan, serstakliga seinastu fimmti árini, við grundleggjandi regluskipanum á so ymiskum økjum sum eitt nú altjóða friði og trygd, krígsførslu, havrætti, kjarnorku, umhvørvi og mannarættindum. Og hóast eingin løgregla og eingi fangahús finnast í altjóða rættarskipanini, ber til á ymiskan hátt at „revsa" tey lond, ið bróta hesar reglur.

Í einum ríki við skipaðum rættarkervi er reiðiliga einfalt at finna

fram til hvat er galdandi rættur, og vanliga verða rættarkeldurnar skipaðar í eina stigskipan við stjórnarskipanini ovast. Í altjóðarætti er einki skipað lóggávuvald og lítið av reglum, ið binda onnur lond enn tey, ið hava samtykt í reglunum. Tann royndin at skipa rættarkeldurnar í altjóðarætti, ið higartil hevur fingið størstu undirtøku, er grein 38 stk. 1 í reglugerðini fyri altjóða dómstólin, ið ásetur:

*Dómstólurin, sum hevur til fyrisetning at taka avgerð sambært altjóðarætti í teimum trætumálum, ið verða løgd fyri hann, skal grunda avgerðir sínar á:*

*(a) altjóða sáttmálar, bæði almennar og serstakar, ið áseta reglur sum stríðandi londini staðiliga viðurkenna;*
*(b) altjóða venju sum váttan um almenna mannagongd, ið er viðurkend sum galdandi rættur;*
*(c) almennar løgfrøðiligar grundreglur, ið eru viðurkendar av mentaðum londum;*
*(d) við fyrivarni fyri grein 59, dómsgerðir og lærusetningar settir fram av fremstu serfrøðingum úr ymiskum londum sum hjálparamboð til áseting av galdandi rætti.*

Grein 59 ásetur, at dómur hjá altjóða dómstólinum einans bindur partarnar og bert í viðkomandi máli.

Við undantaki av hjálparreglunum undir (d) omanfyri er eingin beinleiðis stigskipan galdandi fyri rættarkeldurnar í altjóðarætti. Tó er tann avgerandi munurin millum siðvenjurætt (*customary law*) og sáttmálarætt (*treaty law*), at tann fyrri er alment bindandi, men tann seinni bindir bert tey lond, ið hava samtykt viðkomandi sáttmála.

Í víðari merking finnast mangar aðrar keldur til altjóðarætt. Hóast samtyktir hjá aðalfundi Sameindu tjóða ikki eru bindandi og enn minni skipa rætt í vanligari merking, hava tær tó alstóran týdning sum tulkingaríkast og ábending um rættarfatanina hjá altjóðasamfelagnum, serliga tá ræður um samtyktir um almenn viðurskifti, sum fáa fulla ella stóra undirtøku av limalondunum. Sum dømi kann heimsyvirlýsing Sameindu tjóða um mannarættindi frá 10. desember 1948 verða nevnd. Hóast „bert” ein samtykt og ikki sáttmáli er tað vanlig hugsan í dag, at yvirlýsingin er vorðin bindandi altjóðarættur.

## Altjóðarættur: Fortreytir fyri stovnan av nýggjum ríki

Grein 1 í Montevideosáttmálanum frá 1933 er soljóðandi:

*Eitt ríki eigur at lúka hesi krøv til tess at verða viðurkent sum partur í altjóðarætti: (a) støðugt fólk, (b) avmarkað landøki, (c) ríkisstjórn, (d) evni at hava samskifti við onnur ríki.*

At Føroyar eru framúr væl avmarkaðar sum serstakt landøki skuldi ikki verið neyðugt at nevnt. Eingi krøv eru til minstu støðd av landøki sum grundarlag undir einum ríki. Til dømis gjørdist Mikronesia við einum landøki upp á 702 ferkilometrar limur í ST í 1991 og Palau við 458 ferkilometrum limur í 1994.

Umframt landøki krevst vituliga eitt *fólk*, sum hevur ávíst varandi tilknýti til økið (*permanent population*). Hesa treytina lúka føroyingar eisini lættliga, enntá so fyrimunarliga, at um Føroyar gjørdust egið ríki, hevði tað verið eitt av teimum heilt fáu eintjóðarríkjunum í Evropa.

Sum kunnugt eru tað bert ríki, ið kunnu gerast limir í Sameindu tjóðunum. Sambært grein 4 stk. 1 í ST-sáttmálanum er limaskapur opin fyri *"øllum friðarelskandi ríkjum, ið taka á seg skyldurnar sambært hesum sáttmála, og eftir meting ST eru før fyri og fús at lúka hesar skyldur."*

Heldur ikki minstastødd av fólkatali er treyt fyri limaskapi í ST, men kravið um at limir skulu vera førir fyri at lúka skyldur sínar mótvegis ST fekk fleiri limalond at skjóta upp, at smáríki, ið gjørdust limir, bert skuldu fáa avmarkaðan atkvøðurætt. Í 1969 setti ST-trygdarráðið eina serfrøðinganevnd at viðgera málið, men eftir at nevndin læt eina fyribilsfrágreiðing frá sær í 1970, hevur einki verið gjørt við spurningin. Fleiri smáríki hava eisini fingið fullan limaskap í ST, eitt nú St. Kitts & Nevis við 42.000 íbúgvum (1983) og Palau við 18.000 íbúgvum (1994). Av smáríkjum í Evropa ber til at nevna Liktinstein við 31.000 íbúgvum (1990), Andorra við 61.000 íbúgvum (1993), Monako við 31.000 íbúgvum (1993) og San Marino við 24.000 íbúgvum (1992).

Eitt *ríkisvald* við fyrisiting og dómstólum er besta verndin um eina trygga samfelagsskipan, og í so máta er kravið um eina ríkisstjórn, ið er før fyri at útinna lóg og landaskil, kanska tað týdningarmesta kravið sambært Montevideosáttmálanum.

Kravið um evni til samskifti við onnur ríki merkir, at fullveldið ikki bert er ein spurningur um formlig viðurskifti, men eisini skal vera til staðar í verki sum sjálvstøða (*independence*).

Í førum, har ein ríkispartur setur fram krav um stovnan av egnum ríki, ger tað alstóran mun um kravið fær stuðul frá ríkisstjórnini ella ikki. Onnur ríki og altjóðasamfelagið sum heild seta minni krøv til góðkenningar av tí nýggja ríkinum, um gamla ríkisstjórnin viðurkennir tað, enn um hon setur seg ímóti. Tað man helst hava verið við hes-

um í huga, at íslendingar fingu eina reglu við í samveldislógina frá 1918 um, at Danmark skuldi boða øðrum ríkjum frá, at tað hevði viðurkent Ísland sum ”fullvalda ríki”.

Somu viðurskifti gjørdu seg galdandi í Evropa í áttati- og nítiárunum. Meðan Baltalondini og onnur fyrrverandi sovjetsk lýðveldi møttu lítlari vælvild í stríði sínum fyri stovnan av egnum ríkjum, og ikki fyrr enn sum frá leið vórðu viðurkend av hinum evropisku ríkjunum, høvdu Kekkia og Slovakia ongar trupulleikar í so máta.

## Sjálvsavgerðarrættur tjóðanna

Í teimum báðum altjóðasemingunum, ið vórðu samtyktir av ST í desember 1966, og sum eru um ávikavist borgaralig og stjórnmálalig rættindi og um búskapar-, samfelags- og mentanarrættindi, er grein 1 felags og einsljóðandi:

1. *Allar tjóðir hava sjálvsavgerðarrætt. Við heimild í hesum rætti hava tær frítt at taka avgerð um stjórnarrættarligu støðu sína og frælst at fremja búskapar-, samfelags- og mentanarmenning sína.*
2. *Allar tjóðir kunnu, til sítt egið gagn, frælst ráða yvir náttúruríkidømi sínum og tilfeingi, skerjir tað ikki skyldur bundnar í millumtjóða búskaparsamvinnu grundaðari á meginregluna um sínámillum fyrimun og á altjóðarætt. Á ongum sinni kunnu verða tikin frá eini tjóð ráðini at bjarga sær sjálvari.*
3. *Tey ríki, sum eiga lut í hesum semingi, teirra millum tey, sum hava ábyrgd av at sita fyri umveldum, ið ikki ráða sær sjálvum, og tilsjónarumveldum, skulu stuðla til at fremja sjálvsavgerðarrættin og skulu virða tann rættin í samsvari við ásetingarnar í sáttmála Sameindu tjóða.*

Tey flestu munu kennast við tann fyrsta setningin í hesi greinini. Her verður sagt við greiðum orðum, at allar tjóðir hava sjálvsavgerðarrætt, og at føroyingar eru serstøk tjóð, ivast fáur í. Men hetta er kortini ikki allur sannleikin, og roynt skal verða at lýsa løgfrøðiliga innihaldið í hugtakinum um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna við grundarlagi í altjóða reglum og venju.

Tað vóru tveir so ymiskir menn sum Lenin og Wilson, ið hvør frá sínum fyritreytum og við so ymiskum grundsjónarmiðum, sum kunnu hugsast, fyrst í hesi øldini settu fram hvør sína læru um sjálvsavgerðarrættin. Hjá Lenin, sum legði dent á ytru síðuna av sjálvsavgerðarrættinum (*external self-determination*), var aðalendamálið tann heimsumfevnandi sosialistiska kollveltingin: Eitt og hvørt fólk

hevði rætt til at gera uppreistur móti sínum valdsharrum og stovna sítt egna (sosialistiska) ríki. Ørindi Wilsons vóru hinvegin at stuðla upp undir vesturlendsku hugsjónina um fólkaræði: Stjórnarvaldið mátti byggja á samtykki frá fólkinum. Hann legði dent á innaru síðuna av sjálvsavgerðarrættinum (*internal self-determination*). Her finna vit longu andsøgnina millum tvær ymiskar tulkingar av sjálvsavgerðarrættinum, ið framvegis eru grundleggjandi, tann innara og tann ytra síðan, sum vit koma aftur til niðanfyri.

## Fyrri heimsbardagi og Fólkasamgongan

Teir stóru tapararnir í fyrra heimsbardaga vóru Eysturríki-Ungarn, Týskland og Ottomanska ríkið. Øll trý vóru fleirtjóðaríki, og nú skuldi ligið væl fyri hjá Wilson sum forseta fyri sterkasta landinum millum vinnararnar, USA, at seta sínar hugsjónir um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna í verk, tá ið Evropakortið skuldi teknast av nýggjum. Hetta varð eisini gjørt, men bert lutvíst, bæði orsakað av mótstøðu frá hansara samvinnarum og av tí, at tað royndist torført at fremja ætlanirnar í verki.

Eitt av grundsjónarmiðum Wilsons var, at samsvar skuldi vera millum ríki og tjóð, og roynt varð eisini í ávísan mun at skipa soleiðis fyri, men kortini bert nøkulunda til fulnar, tá ið tað snúði seg um taparaíkini, og tað kom ikki upp á tal at venda eygunum út um Evropa og loyva teimum mongu hjálandafólkunum at stovna egin ríki. Tann største forðingin fyri at fremja hugskotið hjá Wilson var kortini tann, at skuldi hvør tjóð fáa egið ríki, hevði heimurin verið karvaður sundur í nógv smáríki. Ført hevur verið fram, at tað bert eru tvey ríki í Evropa í dag, sum av sonnum eru eintjóðarríki, nevniliga Ísland og Portugal.

Høvuðsendamálið hjá Fólkasamgonguni var at tryggja heimsfriðin, og sjónarmiðið um, at ríki skuldu skipast samsvarandi fólkaviljanum, varð hildið at fara at minka um eina høvuðsorsøk til ósemjur og stríð landanna millum. Í Evropa vórðu eitt nú Finnland, Pólland, Kekkoslovakia og tey trý Baltalondini Estland, Lettland og Litava stovnað sum egin ríki. Harumframt varð skipað fyri serligari verju av teimum minnilutum, ið ikki vóru so hepnir at fáa egið ríki. Hetta varð gjørt í teimum ymisku friðarsáttmálunum, sum Fólkasamgongan skuldi hava eftirlit við, og sum løgdu dent á verju av máli og øðrum mentanareyðkennum hjá hesum minnilutum.

Sum nevnt varð einki gjørt við at veita hjálondunum uttan fyri Evropa sjálvstýri og enn minni fullveldi. Her varð í staðin tann sonevnda *mandatskipanin* stovnað, sum undir eftirliti av Fólkasamgong-

uni skuldi tryggja hesum hjálondum líðandi framgongd við onkrum slag av sjálvstýri sum endamáli.

## Seinni heimsbardagi og Sameindu tjóðir

Undir seinna heimsbardaga náddi yvirgangurin móti bæði tjóðum og einstaklingum hæddum, ið áður høvdu verið ókendar. Longu tíðliga í bardaganum spruttu hugsjónirnar um ein nýggjan heimsfelagsskap, ið betur enn Fólkasamgongan hevði verið før fyri, skuldi skipa fyri nýggjari heimsskipan grundaðari á friðarligum samstarvi millum tjóðir. Sameindu tjóðirnar, ST, vórðu endaliga stovnaðar tann 26. juni 1945, tá ið stovningarsáttmálin varð undirritaður í San Francisco.

### Stovningarsáttmáli Sameindu tjóða

Aðalendamál ST eru sambært fyrstu grein í stovningarsáttmálanum at tryggja altjóða frið og trygd, at menna vinarligt samskifti tjóða millum við grundarlagi í virðing fyri javnrætti millum fólk og sjálvsavgerðarrætti teirra og at taka onnur hóskandi stig til at styrkja heimsfriðin.

Hetta var fyrstu ferð, at grundreglan um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna var staðfest í einum altjóða sáttmála, og orðadrátturin var eisini mikil millum umboð luttakaralandanna í teirri nevndini, ið fyrireikaði sáttmálan. Ósemjan stóð bæði um, hvørt reglan yvirhøvur skuldi takast við og um, hvussu hon skuldi skiljast. Yvirhøvur tykist kortini tann vanliga fatanin at hava verið, at hesin sjálvsavgerðarrættur ið hvussu er ikki rakk so langt, at hann gav einum ófrælsum fólki rætt at loysa seg úr ríkishaftinum og stovna egið ríki (*secession*). Sum árini gingu, varð hendan grundregla um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna kortini av limalondum ST so líðandi broytt bæði við samtyktum og í verki til eina reglu, ið gjørdist bindandi fyri ríkini, tó framvegis uttan at semja var um innihaldið.

### Kapitul XI í ST-sáttmálanum

Í hesum kapitli eru í greinunum 73 og 74 reglurnar um umveldi, ið ikki ráða sær sjálvum, at finna. Limalondini átaka sær ábyrgdina av hesum umveldum og fólkum teirra og skulu í hesum sambandi m.a. menna sjálvstýri *(self-government)* við atliti at politisku tráan fólkanna og stuðla teimum í framtøknari menning av teirra frælsu politisku stovnum. Harafturat høvdu limalondini skyldu til at senda ST-aðalskrivaranum regluligar fráboðanir um støðuna í hesum umveldum.

Í brævi til limalondini tann 29. juni 1946 bað aðalskrivarin um at fáa at vita, hvørji hesi umveldi vóru, og grundað á svørini varð ein listi við 74 umveldum samtyktur av aðalfundinum. Danmark setti

Grønland, men ikki Føroyar, á listan, og sendi eisini fráboðanir um Grønland til 1953, tá ið grundlógin varð sett í gildi í Grønlandi.

## Sjálvsavgerðarrættur tjóðanna: Gongdin í ST

Tann sjálvsavgerðarrættur, ið staðfestur varð í greinunum 1, stk. 2, og 55 í ST-sáttmálanum, var neyvan at rokna fyri annað enn ein grundregla av meira politiskum slagi enn løgfrøðiligum. Sum frá leið gjørdist hendan grundregla aðalvápnið í tí politiska rákinum, ið førdi til avtøku av øllum hjálandaveldi, sum Sovjetsamveldið saman við triðjaheimslondunum setti seg á odda fyri. Í fleiri fundarsamtyktum varð sjálvsavgerðarrætturin av ST-aðalfundinum gjøllari skilmarkaður og útbygdur til tess betur at tæna hesum endamáli.

### Eingin uppílegging í innanhýsismál

Hitt politiska rákið, sum flestu stóru londini í vesturheiminum og serliga gomlu hjálandaveldini stóðu á odda fyri, søkti sær heimild í grein 2 stk. 7 í ST-sáttmálanum, ið bannar uppílegging í viðurskifti, ið grundleggjandi eru undir løgdøminum hjá einum ríki. Hesi londini førdu fram, at viðurskiftini millum teirra og teirra hjálond vóru tílík innanhýsismál.

Hesi bæði politisku stevnumiðini, hjálandaavtøka og ikki-uppílegging (*non-intervention*), síggjast aftur í teimum flestu aðalfundarsamtyktunum um hjálandaavtøku.

Tvær týðandi samtyktir eru frá 14. og 15. desember 1960 ávikavist um frælsi til hjálond og fólk teirra og um fráboðanarskyldu sambært grein 73(e) í ST-sáttmálanum.

Samtykt 1514(XV) um frælsi til hjálandafólk leggur fyri við at staðfesta, at øll fólk hava sjálvsavgerðarrætt, og leggur afturat, at vantandi politiskur, fíggjarligur, samfelagsligur ella útbúgvingarligur førleiki skal ongantíð tæna sum umbering fyri at seinka frælsi. Lagt verður afturat, at ein og hvør roynd at slíta tjóðskaparligu eindina og landøkið hjá einum landi sundur, heilt ella lutvíst, er í ósamsvari við endamálini og grundreglurnar í ST-sáttmálanum.

Tá ið nú hjálandaavtøkan stóð ovast á dagsskránni hjá ST-aðalfundinum, var umráðandi gjølligari at lýsa innihaldið í skyldum hjálandaveldanna at lata fráboðanir til ST sambært grein 73(e) í ST-sáttmálanum. Hetta varð gjørt í samtykt 1541(XV), sum setti upp tólv grundreglur til vegleiðingar. Regla VI er soljóðandi:

*Eitt umveldi, ið ikki ræður sær sjálvum, kann sigast at hava nátt sjálvstýri í fullum máti við annaðhvørt (a) at gerast frælst ríki við fullveldi,*

*ella (b) fara upp í frælsan felagsskap við eitt frælst ríki, ella (c) verða innlimað í eitt frælst ríki.*

Meðan tað varð hildið óneyðugt at seta treytir fyri mannagongdini, um fyrsti kosturin varð valdur, verða gjølligari krøv sett til hinar báðar kostirnar, harðast til tann seinasta. Tíggju ár seinni varð ein fjórði møguleiki góðkendur: *Einhvør onnur politisk støða eftir frælsari avgerð hjá viðkomandi fólki.*

Við hesum – og nærum óteljandi øðrum – samtyktum sum hugmyndafrøðiligum grundarlagi tók hjálandaavtøkan, serstakliga frá 1960, dik á seg, so til ber at siga, at ytra síðan av sjálvsavgerðarrættinum fekk stóra undirtøku. Men hetta hendi tó nærum einans í hjálandahøpi; tað royndist sum vera man sum frá leið ógjørligt hjá hjálandaveldunum at vinna frama fyri tí sjónarmiði, at viðurskifti teirra við hjálond í øðrum heimspørtum, sum lítið og einki høvdu til felags við sonevnda miðveldið, skuldu roknast at vera innanhýsismál og tí vard fyri uppílegging.

**Sjálvsavgerðarrætturin, sambandið millum innaru og ytru síðuna**

Tað vóru onnur fólk enn hjálandafólk, ið høvdu hug at krevja rætt til at skipa síni egnu viðurskifti, helst í egnum ríki, men hjá flestu teirra bar verri til at fáa stuðul frá ST. Her vann reglan um ikki-uppílegging í innanríkisviðurskiftini hjá einum limalandi á ytra sjálvsavgerðarrættinum. Ella, við øðrum orðum, her varð sjálvsavgerðarrætturin ikki hildin at heimila kravi um loysing frá miðveldinum til tess at stovna egið ríki.

At flest limalond ST vóru samd um hesa støðu, er ikki torført at skilja, tá ið hugsað verður um teirra ymisku áhugamál. Fyrst av øllum eigur at verða havt í huga, at ST hóast alt er ein felagsskapur av fullveldisríkjum (*sovereign states*), ið sum felags áhugamál hava at verja ríkiseindir sínar móti syndran. Nýfrælsu afrikonsku og asiatisku londini, ið so gott sum uttan undantak vórðu skipað innan fyri tey mangan tilvildarligu landamørkini frá hjálandatíðini, óttaðust tær hundraðtals tjóðirnar, ið hildu til innan teirra landamørk, skuldu tær hvør í sínum lagi fingið viðhald í krøvum sínum um sjálvsavgerðarrætt. Sovjetsamveldið og vesturevropisku londini høvdu heldur ongan áhuga í at stuðla frælsisrørslur innan síni ríkismørk ella so nær teimum, at vandi kundi vera fyri, at „smittan" rak inn um mark.

Nú kom hin parturin av sjálvsavgerðarrættinum, tann innara síðan, aftur til sín rætt. Í hjálandaavtøkutíðini varð lítið spurt eftir, hvat slag av stýri tey nýggju londini fingu, og um tað var fólkaræðiligt ella ikki.

Innara síðan av sjálvsavgerðarrættinum kann í stuttum lýsast sum kjarnin í fólkaræðishugsjónini: Eitt og hvørt fólk skal hava rætt til,

uttan uppílegging uttaneftir, at velja sær ta stjórn, tað vil. Í ST-aðalfundarsamtykt 2625(XXV) frá 1970 um vinarligt samskifti ríkja millum er tað lýst á henda hátt: *Bannið móti uppílegging í innanhýsisviðurskifti hjá einum landi er treytað av, at landið hevur eina stjórn, ið umboðar alt fólkið í landinum uttan mun til ættarslag, átrúnað ella húðarlit*. Ella við øðrum orðum í einum fólkaræðissamfelag, ið loyvir øllum íbúgvum at taka lut í landsins stjórnarmálum uttan mismun, hevur ein serstøk tjóð í landinum ikki krav um at sleppa at býta frá og stovna egið ríki.

### Felagsskapurin fyri trygd og samstarvi í Evropa

Tann 1. august 1975 samtyktu umboð fyri 35 lond í Evropa og Norðuramerika Helsingforsskjalið, ið er um samstarv og trygd landanna millum. Ein partur av hesum skjali er ein yvirlýsing um tær grundreglur, ið skulu galda fyri viðurskiftini landanna millum.

Grundregla VIII er soljóðandi:

> *Luttøkuríkini fara at virða javnrættindi tjóðanna og sjálvsavgerðarrætt teirra, fara altíð at bera seg at samsvarandi endamálum og grundreglum ST-sáttmálans og viðkomandi reglum í altjóðarætti, teimum íroknaðum sum viðvíkja verju av landaøkjum ríkjanna.*
>
> *Við heimild í grundregluni um javnrættindi tjóðanna og sjálvsavgerðarrætti teirra hava allar tjóðir altíð rætt til, í fullum frælsi, tá ið tær vilja og sum tær ynskja tað, at taka avgerð um sína innaru og ytru politisku støðu, uttan uppílegging uttaneftir, og eftir egnum ynski at fremja politisku-, búskapar-, samfelags- og mentanarmenning sína.*
>
> *Luttøkuríkini endurvátta alheimstýdningin, tað hevur fyri menningina av vinarligum viðurskiftum teirra millum og millum øll lond, at javnrættindi tjóðanna og sjálvsavgerðarrættur teirra verða vird og útint til lítar.*

Havandi í huga, at hetta er ein tann nýggjasta millumtjóða samtyktin um sjálvsavgerðarrætt, og at hon hevur undirtøku frá flestøllum londum í Evropa, er eyðsæð at hon hevur alstóran týdning fyri tær tjóðir í hesum heimsparti, ið hava hug at gera sín sjálvsavgerðarrætt galdandi í verki. Harafturat kemur, at hjálandaveldi og fremmand herseting vórðu hildin at vera so gott sum ókend fyribrigdi í Evropa í 1975, og at samtyktin tí hevur havt onnur viðurskifti enn hjálandaavtøku í huga.

Av nýggjum í mun til ST-samtyktir um sjálvsavgerðarrætt er at merkja sær:

- Allar tjóðir hava henda rætt, og ikki bert (ella fyrst og fremst) hjálandatjóðir.
- Rætturin er galdandi til allar tíðir.
- Neyvt samband er millum sjálvsavgerðarrættin og mannarættindi.
- Bæði innara og ytra síðan av sjálvsavgerðarrætinum verða staðfestar, tó soleiðis at ytra síðan skal skiljast sum rætturin hjá øllum fólkinum í einum ríki at taka avgerð um politisku støðu ríkisins. Kjarnin í ytru síðuni av sjálvsavgerðarrættinum er, at ongar landøkis- ella aðrar broytingar kunnu verða settar í verk av einari stjórn, sum gongur ímóti viljanum hjá øllum fólkinum í landinum.
- Sjálvsavgerðarrætturin fevnir ikki um tjóðskaparligar ella aðrar minnilutar í einum ríki og heimilar ikki krøv um loysing.

### Samanumtikið um sjálvsavgerðarrætt og loysing

Sum greitt frá omanfyri, hava tvær grundleggjandi fatanir staðið í hørðum stríði, alt síðan ST-sáttmálin staðfesti tær báðar reglurnar um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna og vernd móti syndran av landøkinum hjá nøkrum ríki. Í tíðarskeiðinum tá ið hjálandaveldið varð avtikið, hevði fyrra fatanin yvirlutan, men síðani hevur størri dentur verið lagdur á ta seinnu.

Í dag tykist vanliga fatanin at vera, at ytra síðan av sjálvsavgerðarrættinum heimilar krøv um loysing í hesum førunum:

- Hjálandafólk hava framvegis rætt til loysing og at stovna egið ríki.
- Sama er galdandi fyri fólk, sum livir undir fremmandum hersetingarvaldi, ið søguliga er íkomið eftir 1945, tá ið ST-sáttmálin setti bann fyri valdsnýtslu í altjóða viðurskiftum.
- Fólk, sum liva undir umstøðum, ið gera innara sjálvsavgerðarrættin einkisverdan, eitt nú í førum, har stjórnin í einum fleirtjóðalandi áhaldandi kúgar ávísar tjóðir og brýtur teirra grundleggjandi mannarættindi, eiga somuleiðis at hava rætt til at krevja loysing og stovna egið ríki.

Onnur dømi um sundurluting av ríkjum í sjálvstøðug ríki eru sundurbýti av sambandsríkjum innan landamørk upprunaríkisins (Kekkia og Slovakia) og upploysn eftir samráðingar grundaðar á søgulig og/ella løgfrøðilig viðurskifti (Etiopia og Eritrea).

Frammanfyri er greitt frá, hvussu reglurnar um sjálvsavgerðarrætt eru vorðnar til, ofta sum neyðsemjur millum lond, ið hava ymisk hugsjónarlig og politisk áhugamál at røkja. Hesi áhugamál seta sín dám á samtyktirnar og ikki minni á útinningina av teimum í verki. Afturat hesum kemur, at tað er sjáldan, fyri ikki at siga ongantíð, at ymiskar ósemjur landa millum líkjast so mikið í fortreytum og veruligum við-

urskiftum, at tað ber til at siga, at ein ávís regla skal nýtast júst á sama hátt frá einari ósemju til aðra. Samanumtikið ber til at siga, at hvørt ávíst mál eigur at verða viðgjørt eftir sínum egnu fortreytum.

## Serstøk føroysk viðurskifti

Aðalfortreytin sambært øllum altjóða sáttmálum og samtyktum fyri at hava sjálvsavgerðarrætt, er at viðkomandi fólkahópur er serstøk tjóð. Eitt vælavmarkað landøki er í royndum eisini ein fyrimunur, um enn neyvan beinleiðis formligt krav. At hetta økið ikki er samanhangandi partur av ríkisøkinum er so týdningarmikið, at tað helst má roknast sum beinleiðis krav. Harumframt eru onnur viðurskifti, sum hava týdning, eitt nú hvørja rættarliga støðu viðkomandi fólk hevur í ríkinum, í hvønn mun sjálvsavgerðarrætturin er útintur og tá, um tað so at siga vendist aftur. Í hvønn mun hevur fólkið stríðst fyri sjálvræði, og hvørja støðu hava ríkismyndugleikarnir havt.

Við hesum spurningum í huga verður farið undir at lýsa støðu føroyinga og kanna, í hvønn mun teir lúka treytirnar sambært altjóða rætti til tess at gera sjálvsavgerðarrættin galdandi.

### Eru føroyingar serstøk tjóð sambært altjóðarætti

Hesin spurningur má tykjast løgin í eygum føroyinga og hartil eyðsvaraður. Her má havast í huga, at spurningurin verður settur av altjóðasamfelagnum og er als ikki so eyðsvaraður í flestum førum, har stríð stendur um sjálvsavgerðarrættin.

Nógvar royndir hava verið gjørdar at skilmarka, hvat eitt fólk er. Her verður bygt á Cristescu, ið lýsir eitt fólk soleiðis:

*Heitið "fólk" merkir ein samfelagslig heild, ið hevur ein greiðan samleika og síni egnu sereyðkenni; tað hevur sum fyritreyt tilknýti til eitt landøki, sjálvt um viðkomandi fólk av órøttum er rikið burtur og annað fólk uttan natúrligt tilknýti til økið komið í staðin; eitt fólk eigur ikki at verða blandað saman við tjóðskaparligar-, átrúnaðarligar- ella málsligar minnilutar, hvørja tilvera og rættindi eru viðurkend í grein 27 í altjóðaseminginum um borgaralig og stjórnmálalig rættindi.*

Hendan lýsingin byggir, eins og vanligt er, bæði á ítøkiligar veruleikar og eina sannkenning um at vera eitt fólk. Verður hugt at føroyska veruleikanum, er støðan hendan:

- Føroyingar búgva á vælavmarkaðum landaøki, fjart frá Danmark.

- Fyrisitingarliga hava Føroyar altíð havt eina serstøðu í mun til norska og seinni danska ríkið.
- Politiskt er munurin Føroya og Danmarkar millum eyðsýndur, bæði hvat politiskum stovnum og floksbýti viðvíkir.
- Løgfrøðiliga hava Føroyar fyrndargamla serstøðu, og hava ongantíð verið samrunnin partur av løgdømi Danmarkar.
- Búskaparliga hevur allar tíðir verið, og er framvegis, alstórur munur Føroya og Danmarkar millum.
- Søguliga hava Føroyar heilt fram til fyrst í 19. øld meira til felags við Noreg enn Danmark, og eisini í nýggjari tíð hevur søgugongdin verið ólík í Føroyum og Danmark.
- Mentanarligi skilnaðurin er eyðsýndur við ymiskum tungumálum og øðrum tjóðareyðkennum.
- At føroyingar harumframt allar tíðir hava kent seg sum egið fólk er sannroynd, sum eingin man ivast í.

Samanumtikið kann niðurstøðan ikki vera onnur, enn at føroyingar í fult mát lúka krøvini sambært altjóðarætti til at bera tjóðarheitið.

### Vælavmarkað umveldi

Sum nevnt undir viðgerðini av hjálandapolitikki Sameindu tjóða vóru tað bert hjálandafólkini handan hav, ið fingu fullan stuðul í frælsisstríðinum, meðan fólk, ið búðu innan ríkismørk í fleirtjóðaríkjum, ongar sømdir fingu. Við landafrøðiligu støðu Føroya í danska ríkinum í huga ber illa til at føra tað sjónarmiðið fram, at eitt føroyskt krav um frábýti við stovnan av egnum ríki sum endamáli, hevði ført til syndran av landøkiseind danska ríkisins. Til tess er ov nógvur sjógvur millum. Eitt aðalandmæli móti stovnan av egnum ríki kann tí neyvan nýtast Føroyum viðvíkjandi.

## Støða Danmarkar til føroyingar sum serstaka tjóð

Mótvegis altjóða samfelagnum tykist støða Danmarkar til spurningin um hvørt Føroyar eru serstøk tjóð, ógreið.

Sum nevnt frammanfyri varð Grønland, men ikki Føroyar, sett á ST-listan yvir umveldi, ið ikki ráddu sær sjálvum (*Non-Self-Governing Territories*) sambært grein 73 í ST-sáttmálanum. Grundin kann vera, at Danmark longu tá hevur havt ta fatan, at hesi øki í roynd og veru merktu hjálond, og at Grønland var hjáland var alment viðurkent, meðan tað neyvan hevði verið rætt at sagt tað sama um Føroyar. Hinvegin røðir grein 73 ikki, ella ið hvussu er ikki einans, um hjálond og kundi neyvan tulkast so trongt longu í 1946.

Ein onnur grund kundi verið, at Føroyar hava verið mettar at vera so samanrunnar við hin partin av ríkinum og tí ikki komu undir grein 73. Tílík støða var tó neyvan sambærilig við veruligu støðuna hjá Føroyum í ríkinum um tað mundið. Bráðfeingis stýrisskipanin frá 9. mai 1940 var framvegis í gildi, í 1946 góðkendi danska stjórnin, at fólkaatkvøða varð hildin, har annar valkosturin var loysing, og stjórnarrættarliga støða Føroya í ríkinum var ikki skipað fyrr enn í 1948 við heimastýrislógini. Undir hesum umstøðum átti tað at verið trupult hjá donsku stjórnini at hildið upp á, at Føroyar vóru ikki eitt slag av *non-self-governing territory*.

Tað er kortini lítið ella einki komið fram alment um grundgevingarnar fyri støðuni hjá donsku stjórnini.

Í frágreiðingum til ST sambært mannarættindaseminguinum frá 1966 hevur danska stjórnin umrøtt Føroyar (og Grønland) undir grein 1, ið viðger fólk, og ikki undir grein 27 um minnilutar.

Her eigur eisini at verða nevnt, at tá ið Danmark staðfesti rammusáttmála Evroparáðsins um verju av tjóðskaparligum minnilutum, varð váttað, at sáttmálin skuldi galda fyri týska minnilutan í Suðurjútlandi, men einki varð sagt um føroyingar (ella grønlendingar). Hetta kann neyvan skiljast øðrvísi enn ein óbeinleiðis viðurkenning av føroyingum sum serstakt fólk.

### Mótvegis Føroyum er danska støðan greiðari

Danskir ríkismyndugleikar hava bæði viðurkent føroyingar sum egið fólk og hava enntá viðurkent rætt føroyinga til fult sjálvræði ella loysing. Í brævi frá danska forsætisráðharranum í sambandi við tilstundandi løgtingsvalið, kunngjørt í Dimmalætting tann 27. oktober 1945, verður boðað frá, at ríkisstjórnin hevði góðkent, at bráðfeingis stýrisskipanin frá 9. mai 1940 framhaldandi skuldi vera í gildi, inntil endalig skipan var fingin í lag. Forsætisráðharrin sigur tað vera sína vón, at valið fer at geva greiða ábending um, hvat Føroya fólk vil viðvíkjandi framtíðarstøðu oyggjana, og leggur afturat, at um valið greitt og skilliga sigur, at føroyska fólkið vil fara burtur úr sambandinum, fer hetta ynskið ikki at verða afturrikið frá danskari síðu.

Undir samráðingunum frá januar til mars í 1946 um framtíðar stjórnarrættarligu støðu Føroya, legði danska stjórnin fram uppskot til samráðingarstøði, har sagt verður í innganginum, at "*Ministeriets Delegation har givet Udtryk for, at man, hvis Færingerne måtte ønske den fulde Selvstændighed og Ophør af det Historiske Samhørsforhold med Danmark, fuldt ud vil respektere dette Ønske*." Sama heystið góðkendi stjórnin fólkaatkvøðuna við loysing sum øðrum møguleikanum, og fyrsta almenna viðmerkingin til atkvøðuúrslitið var, at danski for-

sætisráðharrin viðurkendi úrslitið og legði afturat, at skilnaðurin Føroya og Danmarkar millum mátti fremjast á lagaligan hátt.

Í heimastýrislógini eru eisini dømi um danska viðurkenning av føroyingum sum tjóð. Í formælinum verður víst til serstøðu Føroya tjóðskaparliga, søguliga og landafrøðiliga, samanber skilmarkingina av einum fólki, og aðrar staðir í lógini verður eisini víst til føroyska fólkið. Í grein 1 í lógini verður fyrst staðfest, at ”*Færøerne udgør inden for denne lovs rammer et selvstyrende folkesamfund i det danske rige*”. Síðan verður sagt, at ”***I henhold hertil*** *overtager det færøske folk ... indenfor rigsenheden ordningen og styrelsen af færøske særanliggender som angivet i denne lov*”. Hetta *kann* lesast sum viðurkenning av sjálvsavgerðarrætti føroyinga, sum tó sambært heimastýrislógini varð útintur innan ríkiseindina.

## ST-aðalfundarsamtykt 1541(XV) og Føroyar

Ein ábending um, hvat ST leggur í hugtakið fólk, kann fáast við at kanna, hvørji eyðkenni dentur varð lagdur á, tá ið ræður um fráboðanarskylduna hjá hjálandaveldum sambært grein 73(e) í ST-stovningarsáttmálanum.

Í hesi samtyktini verða nakrar leiðbeinandi grundreglur settar upp, og byrjað verður við at minna á, at kapitul XI í sáttmálanum, sum umrøðir *Non-Self-Governing Territories*, skuldi galda fyri landøki, ið vóru mett at vera *of the colonial type* (Grundregla I). Víðari verður sagt, at ein menningargongd í hesum umveldum fram móti fullum sjálvstýri verður havd í huga, og at fráboðanarskyldan stendur við, inntil henda støðan er nádd (Grundregla II).

Grundregla IV er soljóðandi:

*Í fyrsta lagi er fráboðanarskyldan galdandi fyri eitt øki, ið landafrøðiliga er skilt frá tí landi, ið umsitur tað, og hevur tjóðar- og/ella mentanarlig sereyðkenni, ið víkja frá tí landinum.*

Lagt verður afturat í Grundreglu V:

*Er staðfest, at økið hevur tílík landafrøðilig, tjóðskaparlig og mentanarlig sereyðkenni, kunnu onnur viðurskifti havast í huga. Hesi viðurskifti kunnu eitt nú vera av umsitingarligum, politiskum, løgfrøðiligum, búskaparligum ella søguligum slagi. Um tey ávirka sambandið millum umsitandi landið og viðkomandi øki á ein hátt, ið má ætlast at bera í sær, at økið er í undirlutastøðu, stuðla tey ta meting, at fráboðanarskylda sambært grein 73(e) í sáttmálanum er galdandi.*

Sama, hvat hildið kann vera um hjálandastøðu ella ikki, er lítið at

ivast í, at viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum í flestum lutum eru lík teimum, ið upproknað eru frammanfyri, og at føroyingar tí eisini lúka hesar treytir Sameindu tjóða fyri at verða roknaðir sum tjóð.

### Kann kravið um sjálvsavgerðarrætt lissast?

Vanliga verður hildið, at eitt fólk, ið útinnir sjálvsavgerðarrætt sín við at verða samrunnið í eitt ríki, gerst ein minniluti í tí ríkinum og sostatt missir sjálvsavgerðarrættin. Her vendist sostatt ikki aftur.

Hvønn av hinum trimum møguleikunum, um nakran teirra, fingu føroyingar í 1948 við heimastýrisskipanini? Einki er at finna í fyrireikingunum til heimastýrislógina, sum bendir á, at altjóðarættur yvirhøvur hevur verið umhugsaður undir samráðingunum. Hetta kann tykjast løgið, tí hóast alt var ikki einki hent innan ST á hesum øki í 1948. Verður hugt at hinum trimum valkostunum, man tað vera næst at siga, at føroyingar, av góðum grundum uttan at vita tað, fingu tann fjórða møguleikan (”*einhvør onnur politisk støða eftir frælsari avgerð hjá viðkomandi fólki*”, sí omanfyri um *Sjálvsavgerðarrætti tjóðanna*), ið ikki hevði funnið veg inn í nakra ST-samtykt fyrr enn í 1970.

Um hetta sjónarmiðið heldur, er neyvan nøkur grund til at halda, at føroyingar hava avlutað sín sjálvsavgerðarrætt. Orðalagið í grein 73 í ST-sáttmálanum um stuðul til framtøkna menning av politisku stovnunum í hesum umveldum, ið ikki ráða sær sjálvum, stuðlar heldur tað sjónarmið, at sjálvsavgerðarrætturin ferst ikki lættliga.

Helsingforsskjalið, ið nevnt er omanfyri, ber eisini greið boð um hendan spurningin, tá ið tað verður sagt, at allar tjóðir altíð hava rætt at útinna sín sjálvsavgerðarrætt, tá ið tær vilja tað.

## Hvørji krøv hava føroyingar sambært altjóðarætti?

Føroyingar lúka øll krøv sambært altjóðarætti til at verða viðurkendir sum serstøk tjóð og eiga sostatt sjálvsavgerðarrætt. Tá ið mett skal verða um innihaldið í hesum rætti, ella við øðrum orðum, hvørji krøv føroyingar kunnu seta við heimild í sjálvsavgerðarrættinum og fáa viðhald í frá altjóða samfelagnum, er svarið neyvan so greitt.

Hvat *innaru síðuni* (fólkaræði) viðvíkir, man semja helst vera um, at føroyingar – so langt sum avgerðarrætturin røkkur sambært heimastýrisskipanini – hava sjálvsavgerðarrætt. Fáur man seta spurnartekin við, at politiska skipanin í Føroyum er fólkaræðislig, og at øll hava sama møguleika at taka lut í politiska lívinum í Føroyum. Harafturat eru føroyingar umboðaðir í fólkatinginum, sum er fólkavalda løggávutingið í ríkinum, tó at spurnartekin helst kann setast við virðið á hes-

ari umboðan, um tað skuldi komið at staðið á í grundleggjandi viðurskiftum landanna millum.

Tá ið tað ræður um *ytru síðuna* av sjálvsavgerðarrættinum, er málið fløktari. Tað man vera vanliga viðurkent í dag, at reglan um sjálvsavgerðarrætt tjóðanna er at meta sum partur av galdandi altjóðarætti, men framvegis er ikki semja um innihaldið í regluni, ella við øðrum orðum, hvussu langt hesin rættur gongur. Røkkur hann fram at loysing?

Frammanfyri er (í brotinum: *Samanumtikið um sjálvsavgerrrætt og loysing*) greitt frá, hvørji fólk í dag verða mett at hava krav um loysing við heimild í altjóðarætti, og neyvan ber til at siga við fullari sannføring, at føroyingar lættliga kunnu sigast at hoyra til nøkur av hesum fólkum. Hinvegin eru føroyingar í teirri hepnu støðu samanborið við flest av hesum fólkum, at landøki føroyinga er so væl avmarkað og fjart frá hinum pørtunum av ríkinum, at tær mótgrundir, ið vanliga verða førdar fram móti frábýti av landaøkjum og syndran av ríkiseindum, ikki eru galdandi, um føroyingar stuðla krav um loysing á sjálvsavgerðarrættin.

Her eigur at verða mint á, at altjóðarættur leggur ongar forðingar, um tveir ella fleiri ríkispartar gera av í sátt og semju at taka sundur og hvør í sínum lagi stovna serstøk ríki. Hetta hendi eitt nú tá Kekkoslovakia varð lutað sundur í tvey ríki tann 31. desember 1992. Longu tann 19. januar 1993 vóru tey nýggju ríkini, Kekkia og Slovakia, limir í ST.

## Viðurkenning av nýggjum ríkjum

Viðurkenning av ríkjum og stjórnum er eitt sera fløkt evni, av tí at politisk og løgfrøðilig atlit eru so samantvinnað, og harafturat kemur, at bæði altjóðarættur og stjórnarrættur hava týdning á hesum øki. Tá støða skal takast til viðurkenning av nýggjum ríki, eru tað ofta reint politisk áhugamál, ið eru avgerandi, men avgerðin fær kortini rættarligar avleiðingar á mangan hátt. Skynast má millum viðurkenning av einum ríki og viðurkenning av einari stjórn.

Tá ið eitt nýtt ríki verður stovnað, mega onnur ríki taka støðu til, um tey skulu viðurkenna tað og hava samskifti við tað sum lim í altjóða samfelagnum. Spurningurin um, hvørjar rættarfylgjurnar eru, um eitt nýtt ríki verður viðurkent ella ikki, hevur verið ógvuliga umstríddur, og hava tvey grundleggjandi ymisk sjónarmið verið galdandi. Klassiska fatanin var, at viðurkenning var ein neyðugur partur av teimum treytum, eitt nýtt ríki mátti lúka fyri at vera eitt ríki í fullum mæti, og at viðurkenning sostatt í roynd og veru var eitt sjálvstøðugt

krav, umframt tey, ið nevnd vóru í montevideosáttmálanum, til at eitt ríki gjørdist partur í altjóðasamfelagnum. Í dag eru flestir altjóða serfrøðingar samdir um, at hetta er ikki støðan. Viðurkenning er einans ein staðfesting av tí veruleika, at eitt nýtt ríki, ið lýkur krøvini sambært altjóðarætti, er sett á stovn.

Viðurkenning kann verða veitt á ymiskan hátt, annaðhvørt við beinleiðis yvirlýsing um, at viðkomandi ríki ger kunnugt, at nýggja ríkið verður viðurkent frá ávísum degi at rokna, ella á meira óformligan hátt, eitt nú við samskifti av ymiskum slagi ella tilnevning av sendiumboði. Viðurkenning kann eisini verða veitt sum felagsfráboðan frá fleiri ríkjum undir einum, ofta sum liður í politiskari semju landanna millum og ofta mótvegis nýggjum ríki, ið landafrøðiliga ella politiskt verður roknað sum hoyrandi til áhugaøkið hjá hesum ríkjum. Játtan av limarætti í altjóða felagsskapi, ið bert loyvir ríkjum at vera limir, má helst eisini skiljast sum viðurkenning av nýggja ríkinum, ið hvussu er av teimum, ið atkvøddu fyri limaskapi.

Í desember 1991 samtyktu limalondini í Evropiska samveldinum eina felags støðu til tað, sum hendi í Sovjetsamveldinum, Eysturevropa og serstakliga fyrrverandi Jugoslavia, ið m.a. hevði við sær felags stevnumið fyri viðurkenning av nýggjum ríkjum, ið staðfesta hesi krøv:

- virðing fyri reglunum í stovningarsáttmála Sameindu tjóða og teimum skyldum, ið staðfestar vórðu í Helsingforsskjalinum og Parísskjalinum, serstakliga tá ið ræður um lóg og landaskil, fólkaræði og mannarættindi;
- trygd fyri rættindunum hjá tjóðskaparligum bólkum og minnilutum samsvarandi skyldunum, ið limalondini í OSCE hava átikið sær;
- virðing fyri friðhalgan av øllum landamørkum, sum bert kunnu verða broytt á friðarligan hátt og sambært semju partanna millum;
- góðkenning av øllum viðkomandi skyldum viðvíkjandi avvápnan og ikki-útbreiðslu av kjarnorkuvápnum eins væl og trygd og javnvág;
- váttan um at øll trætumál um nýríki og teirra skyldur og rættindi í mun til tað ríkið, tey vóru partur av, eins væl og ósemjur annars í avvarðandi umveldi skulu greiðast í semju ella um neyðugt av gerðarrætti.

Hesi stevnumið skuldu vera galdandi í spurningum um viðurkenning av nýggjum ríkjum umframt vanligar altjóðareglur og krøv, ið greitt er frá omanfyri.

## Um rættindi og skyldur

Í teimum førum har ið fullveldið yvir einum ávísum landøki endaliga gongur frá einum ríki til annað samsvarandi reglunum í altjóðarætti, er spurningurin í hvønn mun nýggja ríkið er bundið av skyldunum og kann gera krøv um yvirtøku av rættindunum hjá tí gamla. Spurningarnir kunnu vera so mangir: Hvat hendir við verandi millumtjóða sáttmálum, við limaskapi í millumtjóða felagsskapum, við altjóða krøvum, við tjóðskapinum hjá avvarðandi persónum, við almennum ella privatum ognum og við ríkisskuld? Hesir og aðrir meira ella minni torgreiddu spurningar kunnu ikki verða viðgjørdir til fulnar her, og evnið verður bert lýst í høvuðstáttum.

Umveldið hjá einum ríki kann broytast á ymiskan hátt, og spurningarnir, nevndir omanfyri verða svaraðir ymiskt, alt eftir hvussu broytingarnar eru. Reglurnar eru ikki tær somu, um eitt landøki verður býtt frá einum ríki og lagt aftur at einum øðrum ríki, ella nýtt ríki verður stovnað á landøkinum. Her verður bert nortið við tað seinna førið, og evnið verður bert lýst í høvuðsheitum.

### Altjóðasáttmálar

Tá ið ræður um sáttmálar um rættindi yvir landøki (*dispositive treaties*), er høvuðsreglan, at teir fylgja umveldinum og verða ikki ávirkaðir av broytingum í fullveldinum yvir økinum. Ein fylgja av hesi regluni er, at nýríki arva tey landamørk, ið galdandi vóru frammanundan, hóast tey í mongum førum vóru tilvildarlig og uttan fyrilit fyri ítøkiligum viðurskiftum sum t.d. tjóðskapi. Hetta er einamest sjónskt, tá hugt verður at galdandi landamørkum í Afrika.

Hvat øðrum sáttmálum viðvíkur, er høvuðsreglan tann øvugta, tá ið ræður um fyrrverandi hjálond, ið gerast sjálvstøðug. Tey verða ikki bundin av eldri sáttmálum uttan at tey sjálv samtykkja. Tá ið ræður um nýríki, ið eru íkomin við loysing frá sjálvum miðveldinum, t.e. ikki fyrrverandi hjálond, verður høvuðsreglan hinvegin hildin at vera tann, at tey verða bundin av flestum sáttmálum, sum fyrrverandi miðveldið hevur gjørt.

### Tjóðskapur

Ofta verður hildið, at tá ið fullveldi yvir ávísum landøki skiftir frá einum ríki til annað, missa teir ríkisborgarar, ið eru búfastir á økinum, borgararættin í fyrra ríkinum og fáa samstundis borgararætt í tí nýggja. Hendan reglan skapar fleiri ivamál, ið eru torfør at greiða. Er nógmikið at viðkomandi búgva har, júst tá skiftið hendir, ella at teir eru føddir har? Ella skulu bæði krøvini verða lokin? Í royndum kunnu tílík ivamál einans verða loyst á nøktandi hátt við sáttmála ella sam-

bært innlendskari lóg. Ofta verður loyvt teimum avvarðandi at velja, um tey vilja varðveita gamla borgararættin ella taka við tí nýggja. Tað ið um ræður, er at skipað verður soleiðis fyri, at tað slepst undan bæði dupultum borgararætti og tí, sum verri er, at onkur stendur eftir við ongum borgararætti.

### Almennar og privatar ognir

Vanliga fatanin er, at ognarrættur til almennar ognir á landøki, ið skiftir fullveldi, fylgir við og verður yvirtikin av nýggja ríkinum. Ofta verða tílík viðurskifti greidd í sáttmála.

Privati ognarrætturin fellur ikki burtur uttan víðari um eitt øki skiftir fullveldi. Um stjórnin í nýggja ríkinum ognartekur privata ogn veldst um, hvar áognarin hevur borgararætt, tá ið støða skal takast til, hvørjar reglur galda. Hevur hann borgararætt í nýggja ríkinum, leggur altjóðarættur seg vanliga ikki út í málið. Hevur áognarin hinvegin borgararætt í gamla ríkinum ella í einum triðja ríki, noyðist nýríkið at lúka ávís minstukrøv til viðferð av útlendingum sambært altjóðarætti. Ognartøka kann bert verða framd til almenn endamál, og endurgjald má verða veitt. Full semja er tó ikki í altjóða samfelagnum um hesar reglur. Serliga fyrrverandi hjálond hava hildið upp á, at tey kunnu ikki vera bundin av ognarrætti, sum varð stovnaður áðrenn tey høvdu nakra ávirkan á galdandi reglur, og at órættvís krøv í hesum sambandi kunnu ikki koma teimum til skaða.

Viðurskiftini eru eisini ógreið, tá ið ræður um almenna skuld. Í nógvum førum verða tílík mál loyst við sáttmála, soleiðis at nýríkið yvirtekur lutfalsligan part av skuldini. Soleiðis verður ið hvussu er gjørt, tá ið skuldin kann sigast at vera stovnað eisini til fyrimunar fyri viðkomandi landøki, og peningurin er nýttur til almennar íløgur í økinum.

# Stjórnarrættur og føroyskt fullveldi

Í hesum parti verður tikið til umrøðu, hvørt tað er neyðugt at broyta donsku grundlógina, um danska stjórnin skal kunna eftirlíka Føroyum at fara úr danska ríkinum, so at tær kunnu verða skipaðar sum fullveldisríki.

Tá ið metast skal um tær stjórnarrættarligu fyritreytirnar fyri, at Føroyar kunnu verða skipaðar sum fullveldisríki, eru týdningarmestu ásetingarnar í grundlógini grein 1 og grein 19:

*§ 1. Denne grundlov gælder for alle dele af Danmarks Rige.*

*§ 19. Kongen handler på rigets vegne i mellemfolkelige anliggender. Uden Folketingets samtykke kan han dog ikke foretage nogen handling, der forøger eller indskrænker rigets område, eller indgå nogen forpligtelse, til hvis opfyldelse Folketingets medvirken er nødvendig, eller som i øvrigt er af større betydning. Ej heller kan kongen uden Folketingets samtykke opsige nogen mellemfolkelig overenskomst, som er indgået med Folketingets samtykke.*

*Stk. 2. Bortset fra forsvar mod væbnet angreb på riget eller danske styrker kan kongen ikke uden Folketingets samtykke anvende militære magtmidler mod nogen fremmed stat. Foranstaltninger, som kongen måtte træffe i medfør af denne bestemmelse, skal straks forelægges Folketinget. Er Folketinget ikke samlet, skal det uopholdelligt indkaldes til møde.*

*Stk. 3. Folketinget vælger af sin midte et udenrigspolitisk nævn, med hvilket regeringen rådfører sig forud for enhver beslutning af større udenrigspolitisk rækkevidde. Nærmere regler om Det Udenrigspolitiske Nævn fastsættes ved lov.*

Til tess at staðfesta stjórnarrættarligu broytingar Grønlands frá at vera hjáland til at vera samrunnin partur í danska ríkinum var ásetingin í grein 1 sett inn í grundlógina í 1953. Broytingin hevði við sær, at grundlógin varð sett í gildi í Grønlandi. Fyri stjórnarrættarligu støðu Føroya hevði ásetingin tó ongan serstakan týdning.

Síðan grundlógin á fyrsta sinni varð sett í gildi í Danmark í 1849, hevur hon ongantíð havt nakra fyritreyt um, at danska ríkið ikki kann verða sundurlutað. Eitt uppskot um eina tílíka áseting varð havnað á danska tjóðfundinum í 1848-49.

Heldur ikki í grein 1 í grundlógini frá 1953 er fortreyt fyri, at umveldi ríkisins er grundlógartryggjað, so at ein gildug minking av umveldinum einans kann fara fram samsvarandi reglunum um grundlógarbroyting í grein 88 í grundlógini.

Grein 19 í grundlógini sigur greitt, at umveldi ríkisins kann eins væl verða minkað og verða økt við ongari grundlógarbroyting. Sambært álitinum hjá stjórnarskipanarnevndini frá 1946 er talan um allar partar av danska umveldinum. Kongur, sum í hesum føri merkir stjórnin, hevur myndugleika til at gera eina slíka minking ella øking av umveldi ríkisins. Í hesum sambandi eigur at verða havt í huga grein 13 og 14 í grundlógini, sum áseta, at ráðharrarnir hava ábyrgdina av stjórnarleiðsluni, umframt at kongur undirritar saman við einum ella fleiri ráðharrum lógir og viðkomandi stjórnaravgerðir til tess at geva teimum gildi. Sambært grein 19 í grundlógini skal stjórnin tryggja sær samtykki fólkatingsins fyri at minka ella økja um umveldi ríkisins.

Sum áður umrøtt hevur grein 1 í grundlógini ikki nakra bindandi fyritreyt um, at Føroyar eru ein partur av danska ríkinum. Harumframt ásetir grein 19 greitt, at umveldi ríkisins kann verða minkað, um so er, at stjórnin og fólkatingið gera tað av. Hetta er avgerandi tá metast skal um, hvørt neyðugt er at broyta grundlógina, um danska stjórnin skal kunna eftirlíka Føroyum at fara úr danska ríkinum. Við støði í hesum ásetingum verður mett, at einki í grundlógini er til hindurs fyri, at umveldi ríkisins verður minkað, so at tað ikki fevnir um Føroyar longur.

Kortini kann sigast, at greinirnar 28, 32, 42 og 86 sum orðaðar í grundlógini í fyrstu syftu tykjast taka støði í eini fyritreyt um, at Føroyar eru ein partur av danska ríkinum:

*§ 28. Folketinget udgør én forsamling bestående af højst 179 medlemmer, hvoraf 2 medlemmer vælges på Færøerne og 2 i Grønland.*

*§ 32, stk. 5. Der kan ved lov gives særlige regler om færøske og grønlandske folketingsmandaters ikrafttræden og ophør.*

*§ 42, stk. 8. Nærmere regler om folkeafstemning, herunder i hvilket omfang folkeafstemning skal findes sted på Færøerne og i Grønland, fastsættes ved lov.*

*§ 86. Valgretsalderen til de kommunale råd og menighedsrådene er den*

*for valg til Folketinget til enhver tid gældende. For Færøernes og Grønlands vedkommende fastsættes valgretsalderen til de kommunale råd og menighedsrådene ved lov eller i henhold til lov.*

Endamálið við grein 28, sum hevur eina serstaka áseting um, at í Føroyum verða tveir fólkatingslimir valdir, er at tryggja Føroyum ein grundlógarfestan rætt til fólkatingsumboðan, sum ikki neyðturviliga hevði verið tryggjaður sambært grein 31, har ásett verður, at vallógin skal tryggja *en ligelig repræsentation af de forskellige anskuelser blandt vælgerne*, og at býtið av fólkatingsumboðum á staðnum skal taka fyrilit fyri *indbyggertal, vælgertal og befolkningstæthed*. Annars kann sigast, at grundlógin frá 1866, 1915 og 1920 longu tá greitt tryggjaði Føroyum ein landstingslim. Lóg frá 1850 um ríkisdagsval í Føroyum, tryggjaði eisini Føroyum ein fólkatingslim.

Grein 32 hevur eina áseting um, at tað við lóg kunnu gerast serstakar reglur fyri val og burturfall av fólkatingsumboðum í Føroyum. Stjórnarskipanarnevndin helt, at henda áseting átti at verið í grundlógini, tí at tað kundi gjørst neyðugt at skriva út nýval í Føroyum, aftaná at tað er gjørt í hinum pørtunum av ríkinum.

Grein 42 hevur eina áseting um, at tað við lóg kunnu gerast nærri reglur, um í hvønn mun ein fólkaatkvøða eisini skal vera í Føroyum. Á sama hátt sum umrøtt omanfyri eru serstøk føroysk viðurskifti orsøkin til hesa áseting.

Í grein 86 stendur, at valrættaraldurin til bygdaráð, býráð og kirkjuráð í Føroyum verður ásettur við lóg ella sambært lóg. Í hesi grein eru somuleiðis tikin fyrilit fyri serstøkum føroyskum viðurskiftum.

Mett verður, at eingin av omanfyri umrøddu fýra grundlógarásetingum hevur nakra bindandi fyritreyt um, at grundlógarbroytingar eru neyðugar fyri at danska stjórnin skal kunna eftirlíka Føroyum at fara úr danska ríkinum, so at tær kunnu verða skipaðar sum fullveldisríki.

Um so er, at umveldi ríkisins verður minkað sambært grein 19, so at Føroyar fara úr danska ríkinum, verða umrøddu ásetingarnar í greinunum 28, 32, 42 og 86 óneyðugar í teimum førum, tær viðvíkja Føroyum. Upprunaendamálið við ásetingunum – at veita Føroyum ein grundlógartryggjaðan rætt til fólkatingsumboðan umframt at veita møguleika fyri við lóg at áseta serstakar reglur fyri nývali, fólkaatkvøðum og valrættaralduri til býráð, bygdaráð og kirkjuráð við serstøkum atliti at føroyskum viðurskiftum – verður ikki fyri skaða kortini. Endamálið við ásetingunum fellur bert burtur. Viðvíkjandi grein 28 er at siga, at avleiðingarnar høvdu verið, um Føroyar fóru úr danska ríkinum, at fólkatingið sambært vallógini hevði

havt 177 limir og ikki 179 limir. Kortini forðar grundlógin ikki fyri, at limatalið verður økt aftur til 179 sambært einari samsvarandi broyting í vallógini.

Samanumtikið kann sigast, at danska stjórnin og danska fólkatingið kunnu eftirlíka Føroyum at fara úr danska ríkinum, so at Føroyar kunnu verða skipaðar sum eitt fullveldisríki, uttan at tað er neyðugt at broyta donsku grundlógina. Ein slík donsk avgerð kann verða tikin sambært ásetingunum í grein 19 í grundlógini um myndugleika stjórnarinnar við samtykki frá fólkatinginum at minka um umveldi ríkisins.

# Mannagongdir

## fyri sáttmálagerð og staðfesting

Hesin partur viðger mannagongdir í ávikavist Føroyum og Danmark fyri sáttmálagerð og staðfesting av millumtjóða sáttmála, ið skipar Føroyar sum fullveldisríki.

### Mannagongdir í Føroyum

Stýrisskipan Føroya frá 1994 er heimilað í heimastýrislógini frá 1948. Meðan heimastýrislógin ásetur valdsbýtið millum føroyskar og danskar myndugleikar Føroyum viðvíkjandi, ásetur stýrisskipanin valdsbýtið innanlands í Føroyum millum løgting og landsstýri.

Tá ið farið verður undir at gera altjóðarættarligan sáttmála við Danmark, sum viðurkennir Føroyar sum fullveldisríki, verður mannagongdin sambært ásetingunum í grein 52 og grein 54 í stýriskipan Føroya:

*§ 52. Landsstýrið hevur málsrøði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond.*

*Stk. 2. Uttan samtykki løgtingsins kann landsstýrið tó ikki gera avtalur, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintar, ella sum annars eru týdningarmiklar.*

*Stk. 3. Samstundis sum slík avtala verður løgd fyri løgtingið til góðkenningar, boðar landsstýrið frá, hvørjar løgtingslógir og hvørji ríkislógartilmæli, neyðug eru, til tess at millumlandasáttmálin kann verða útintur.*

*§ 54. Løgtingið velur millum løgtingsmenn eina uttanlandsnevnd við sjey limum, sum landsstýrið ráðførir seg við, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanlandspolitiskan týdning.*

*Stk. 2. Somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.*

Við øðrum orðum, samráðingar um ein altjóðarættarligan sáttmála millum Føroyar og Danmark, sum ásetur, at Føroyar verða viður-

kendar sum eitt fullveldisríki og sum harumframt ásetur ymiskar nærri tilskilaðar skipanir fyri samstarvi ríkjanna millum, verða at fara fram sambært grein 52, stk. 1 í stýrisskipanini, har ásett verður, at *landsstýrið hevur málsrœði í førum, sum heimastýrinum er heimilað at tingast við og gera avtalur við onnur lond* umframt grein 54, stk. 2 í stýrisskipanini har ásett verður, at *somuleiðis skal landsstýrið ráðføra seg við hesa nevnd í sambandi við samráðingar við ríkismyndugleikarnar av stórum týdningi fyri viðurskiftini Føroya og Danmarkar millum.*

Í samráðingunum verður tað sostatt landsstýrið, sum umboðar Føroyar mótvegis Danmark, samstundis sum landsstýrið ráðførir seg við uttanlandsnevnd løgtingsins um gongdina í samráðingunum.

Føroyska avgerðin um sáttmálan verður tikin sambært ásetingunum í grein 52 í stýrisskipanini um myndugleika landsstýrisins við samtykki frá løgtinginum at gera sáttmálar, sum krevja luttøku løgtingsins fyri at verða útintir, ella sum annars eru týdningarmiklir.

Stýrisskipan Føroya hevur onga áseting um fólkaatkvøður. Landsstýrið hevur í sínum viðmerkingum til uppskot til samtyktar boðað løgtinginum frá hesum: ”Sáttmálin verður lagdur fyri løgtingið, og tá løgtingið hevur samtykt hann, verður hann lagdur til fólkaatkvøðu til góðkenningar.” Løgtingið samtykti uppskotið 2. oktober 1998.

## Mannagongdir í Danmark

Ger Danmark sáttmála við Føroyar, sum viðurkennir Føroyar sum fullveldisríki, verður mannagongdin sum fyriskipað í grein 19 í grundlógini.

Í grein 19 er ásett, at sáttmálagerð, ið minkar um umveldi ríkisins krevur samtykki fólkatingsins. Harumframt verður ásett, at stjórnin skal ráðføra seg við uttanríkispolitisku nevnd fólkatingsins, áðrenn avgerðir verða tiknar, ið hava stóran uttanríkispolitiskan týdning.

Í grundlógini verður ikki ásett, í hvørjum líki samtykki fólkatingsins skal vera, tá ið ræður um uttanríkispolitiskar avgerðir. Samtykki fólkatingsins kann antin verða givið sum fólkatingssamtykt við vanligum meiriluta ella sum fólkatingslóg. Sambært grein 42 í grundlógini, kann fólkatingslóg samtykt eftir grein 19 verða løgd til fólkaatkvøðu, um so er, at tað verður ásett við serstakari lóg.

Í sambandi við týdningarmikla avhending av pørtum av umveldi ríkisins eru eins væl fólkatingssamtykt og fólkatingslóg vorðin nýtt. Sølan av teimum donsku vesturindisku oyggjunum í 1916 og avhendingin í 1918 av umveldi ríkisins, sum fevndi um Ísland, eru dømi um hetta.

Til tess at kunna fremja søluna av teimum donsku vesturindisku oyggjunum í 1916, var samtykki ríkisdagsins fingið til vega sambært grein 18 í grundlógini frá 1866, ið ásetti, at samtykki ríkisdagsins var ein fyritreyt fyri at kunna *afstaae nogen Deel af Landet.* Samtykki, sum fór fram bæði sum fólkatingssamtykt og landstingssamtykt, fevndi um ein sáttmála, ið Danmark hevði gjørt við USA frammanundan.

Samsvarandi grein 18 í grundlógini frá 1915 var samtykki ríkisdagsins givið í 1918 til tess at avhenda tað umveldi ríkisins, ið var Ísland. Samtykkið fór fram sum ríkisdagslóg undir heitinum donsk íslendsk samveldislóg. Sum umrøtt í triðja parti var samveldislógin samstundis sáttmáli millum Danmark og Ísland, sum hevði við sær, at Danmark frammanundan tigandi viðurkendi Ísland sum fullveldisríki við altjóðarættarligum virkisføri. Sostatt fór Ísland úr danska ríkinum samsvarandi donsku íslendsku samveldislógini. Við hetta varð Ísland viðurkent sum fullveldisríki, sum var sameint við Danmark við felags kongi og øðrum ásettum skipanum sambært samveldislógini.

Samanumtikið kann sigast um stjórnarrættarligar mannagongdir í Danmark, í sambandi við skipanina av Føroyum sum fullveldisríki, at ein sáttmáli kann gerast millum Føroyar og Danmark, sum ásetur, at Føroyar verða viðurkendar sum fullveldisríki. Sáttmálin kann antin gerast sum vanligur altjóðarættarligur sáttmáli, har danska avgerðin verður tikin sambært ásetingunum í grein 19 í grundlógini um myndugleika stjórnarinnar við samtykki frá fólkatinginum at minka um umveldi ríkisins ella sum lógaruppskot, ið verður lagt fram á fólkatingi til samtyktar, ið fevnir um tann altjóðarættarliga sáttmálan, sum frammanundan er gjørdur millum Føroyar og Danmark.

# Fyrisiting

Í fyrisitingarálitinum, sum er annað fylgibind til hesa frágreiðing, verður útgreinað, hvørji ábyrgdarøkini hjá donsku ríkismyndugleikunum eru í Føroyum, eins og hugt verður at, hvussu nógv tey donsku økini kosta. Tað er m.a. við upplýsingum úr hesum áliti sum grundarlagi, at føroysku myndugleikarnir skulu fyrireika seg til at taka við ábyrgdini av allari fyrisitingini, og at umskipa hana, so at hon í størri mun enn í dag verður lagað til føroyskar fortreytir og føroyskan tørv.

Við fyrisitingarálitinum sum grundarlagi verður her stutt greitt frá ríkisins leikluti á teimum økjum, sum hoyra undir Løgmansskrivstovuna og hvørt aðalstýri sær, og til endans verður hugt at uttanríkisviðurskiftunum.

Tá ið heimastýrið hevur yvirtikið málsøki, er tað í nøkrum førum gjørt eftir § 9 í heimastýrislógini – fyrst og fremst er her talan um skúlamál, almannamál og heilsumál. Hetta hevði við sær, at tann føroyska lóggávan varð gjørd við heimild í donskum rammulógum, og ein partur av teirri fíggjarligu ábyrgdini av økjunum varð verandi hjá donskum myndugleikum. Tá ið blokkstuðulsskipanin varð sett í verk, varð upphæddin upprunaliga eisini roknað út eftir tí, sum danska ríkið hevði rindað á hesum økjum. Tí verður stundum ført fram, at danir framvegis hava fíggjarliga ábyrgd av økjunum, og at rindað verður fyri tey við blokkinum. Orsøkin til at hetta ikki verður tikið við, tá her verður greitt frá donskum ábyrgdarøkjum, er, at tað í dag einki beinleiðis samband er millum umrøddu øki og blokkstuðulin, um heimastýrismyndugleikarnir halda seg innan fyri teir karmar, sum eru ásettir í viðkomandi donsku rammulóg.

## Løgmansskrivstovan

Undir Løgmansskrivstovuni eru fýra stór øki, har fullveldisætlanin fer at seta umfatandi krøv til bæði lóggávu, fyrisiting og fígging. Hesi eru uttanríkismál, dómsvald, ákæruvald og løgregla.

Rættarskipanin er donsk. Føroya rættur er sambært rættargangslógini skipaður sum serskilt rættardømi við trimum deildum, borgaralig mál, revsimál og skiftimál. Í Føroya rætti sita tveir sorinskrivarar og fýra fulltrúar. Harumframt eru o.u. 25 skrivstovufólk í starvi hjá sorinskrivaranum. Dómar sagdir av Føroya rætti kunnu verða

skotnir inn fyri Eystara landsrætt og í ávísum førum fyri Hægstarætt. Tinglýsingin, ið er yvirtikin sum sermál, verður umsitin av sorinskrivaranum vegna heimastýrið. Nettoútreiðslurnar av rættarskipanini, eftir at rættargjøldini eru mótroknað, eru umleið tríggjar mió. kr.

Í samband við gerð av føroyskari grundlóg, verður undir grundlógarnevndini settur bólkur, ið skal gera uppskot um føroyska rættarskipan. Tí verður hvørki í fyrisitingarálitinum ella her gjørt meira burturúr dóms- og ákæruvaldi. Sama er galdandi fyri rættargangsreglur. Nomið verður við uttanríkismálini aftast í hesum partinum.

Løgreglan er donsk, men hon er í ávísan mun lagað til føroysk viðurskifti, og tí verður hetta í fyrstu atløgu ikki nakar stórvegis trupulleiki fyri fullveldisætlanina.

Tá ið stórar ella óvanligar uppgávur eru fyri, fær løgreglan tøkniliga og fakliga hjálp úr Danmark. Skal føroysk løgregla kunna standa fyri hesum í framtíðini, verður tørvur á serútbúnaði og starvsfólki við serligum útbúgvingum. Hetta verður sera kostnaðarmikið, og mælt verður tí heldur til, at avtala verður gjørd við Danmark ella onnur lond um útgerð, kriminaltekniskar tænastur o.a.

Samanumtikið hevur ábyrgdin av lóggávu og fyrisiting á løgregluøkinum ikki við sær størri uppgávur enn, at føroyskir myndugleikar kunnu taka við henni.

Fíggjarliga er økið rættiliga tungt. 150 fólk tilsamans starvast hjá løgregluni og ákæruvaldinum í Føroyum, og rakstrarútreiðslurnar eru umleið 45 mió. kr. árliga. Aftur at hesum fær løgreglan, sum nevnt, nógvar tænastur úr Danmark. Samlaða virðið á hesum tænastum verður mett at vera omanfyri 15 mió. kr. árliga.

Í sambandi við fullveldisætlanina verður neyðugt at kanna, hvussu løgreglan kann umskipast, so hon verður meira virkisfør og betur lagað til tann føroyska tørvin. M.a. eigur at verða kannað, um hon í samstarvi við aðrar myndugleikar kann átaka sær fleiri og øðrvísi uppgávur, enn hon ger nú, og um uppgávur, hon higartil hevur røkt, betur kunnu røkjast av øðrum.

Umframt høvuðsstarv sítt, sum er samskifti millum heimastýrið og ríkismyndugleikarnar, røkir ríkisumboðið eisini aðrar uppgávur, sum føroyskir myndugleikar mega taka sær av, verður fullveldisætlanin sett í verk. Fyrst og fremst eru tað tey sivilrættarligu málini – hjúnaskilnaður, ómyndingamál, rættarstøða hjá børnum, ættleiðing, umsóknir um fría rættargongd o.a. Tey kunnu leggjast undir løgdeildina í løgmansskrivstovuni.

## Fíggjarmálastýrið

Fullveldisætlanin ber ikki í sær, at Føroyar skulu hava egið gjaldoyra. Ætlan samgongunnar er, at Føroyar skulu verða knýttar at eini aðrari gjaldoyraskipan - helst teirri donsku.

Men so stórar broytingar henda á økinum, at týðandi spurningar kortini verða at taka støðu til á hesum øki, tá sáttmáli skal gerast millum Føroya og Danmarkar. T.d. kann skjótt henda, at broytingar verða á danska økinum, sum fara at krevja eina sjálvstøðuga føroyska støðutøku. Ger Danmark eitt nú av at nýta evruna í staðin fyri donsku krónuna, má støða takast til, hvat gjaldoyra Føroyar skulu hava.

At restin av peninga- og kapitalmarknaðarøkinum kemur undir føroyskt málsræði, fer at seta krøv til bæði lóggávu, umsiting og fíggjarliga ábyrgd. Ráðiligt er, at tann føroyska lóggávan á økinum fylgir lóggávuni í øðrum londum. Gongdin í heimsbúskapinum hevur leingi verið tann, at londini hava roynt at beina burtur allar forðingar fyri altjóða handils- og fíggjarsamskiftinum. Tí er neyðugt, at londini hava álit á peningakervinum hjá hvør øðrum, og tað verður tryggjað við einfaldari og gjøgnumskygdari lóggávu og umsiting. Verður ivi um føroysku reglurnar, verður samstundis ivi um, hvussu tryggir teir føroysku peningastovnarnir eru. Tað fer at gera tað trupult at arbeiða út um landoddarnar við nøkrum, sum hevur við peningsfæ at gera.

EBS-lond – íroknað ES-lond – hava lóggávu, sum fylgir ES-fyriskipanum. Fyriskipanirnar verða í hesum londum roknaðar sum minstukrøv, og londini hava skyldu at fylgja teimum. Hetta eiga Føroyar eisini at gera.

Hvat viðvíkir kredittøkinum, er galdandi danska lógin um bankar og sparikassar í gildi í Føroyum. Føroyar kunnu eisini tilevna hesa lóggávu við støði í ES-fyriskipanunum, og harvið fylgja teimum minstukrøvum, ið har verða sett. Sama er við lógunum um virðisbrævahandil. Roknast má kortini við, at tað fer at krevja størri umsitingarorku, tá ið økið verður føroyskt.

Tær flestu donsku kunngerðirnar við heimild í banka- og sparikassalógunum eru í gildi í Føroyum. Tær mest umfatandi eru roknskaparkunngerðin og kunngerðin um reglur at tryggja, at peningastovnarnir hava fæ tøkt til sínar innsetarar. Tær áseta, hvørjar upplýsingar peningastovnarnir skulu lata danska fíggjareftirlitinum. Tað krevur nógva orku at gera og røkja hesar kunngerðir, og tí verður mælt til, at tær fyribils verða tær somu sum tær donsku. Soleiðis ber eisini til at tryggja, at eitt komandi føroyskt fíggjareftirlit fær somu upplýsingar sum tað danska, ið vit eru partur av.

Lógin um innsetaratrygdargrunnin, sum rindar privatum innsetar-

um upp til 300.000 kr. í part um ein peningastovnur fer á húsagang, fevnir um allar peningastovnar í danska ríkinum. Ivasamt er, um føroysku peningastovnarnir kunnu vera við í donsku skipanini, um danska lógin ikki longur geldur fyri Føroyar, og at gera føroyskan grunn eftir sama mynstri ber illa til, tí vit hava so fáar peningastovnar. Tí má ein onnur skipan finnast, um innsetaratryggingin skal varðveitast.

Fyri at styrkja álitið á bankaskipanina og at skapa ein so tryggan fíggjarmarknað tvørtur um landamørk sum gjørligt, hava bæði ES-lond og lond við tilknýti til ES seinastu 15-20 árini samtykt ein hóp av lógum við tí í hyggju at gera felagsreglur fyri fíggjarstovnar, og at styrkja um eftirlitið við hesum stovnum.

Tað er danska fíggjareftirlitið, sum hevur umsjón við, at ásetingarnar í lógum og kunngerðum verða hildnar. Verður fullveldisætlanin sett í verk, verður landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ovasti fyrisitingarligi myndugleiki á økinum, og eitt føroyskt fíggjareftirlit skal hava tær uppgávur, sum danski stovnurin higartil hevur røkt í Føroyum.

Tað føroyska fíggjareftirlitið kundi, umframt av hava eftirlit við bankum og sparikassum, havt eftirlit við tryggingarfeløgunum og øðrum fíggjarligum stovnum ella grunnum. Eftirlitið við gjaldskortum kundi eisini verði latið føroyska fíggjareftirlitinum.

Danska fíggjareftirlitið hevur eisini havt til uppgávu at gera ein part av teimum neyðugu kunngerðunum á økinum. Hetta kundi føroyska eftirlitið eisini gjørt.

Eitt sjálvstøðugt føroyskt fíggjareftirlit kann helst fáast at virka eftir einum góðum ári. Í hesi tíðini verður mælt til, at avtala verður gjørd við danska fíggjareftirlitið um leiðbeining og samstarv. Bæði tí at tað danska fíggjareftirlitið hevur havt eftirlit við føroyskum peningastovnum higartil, og tí at føroyska lóggávan fer at líkjast mest teirri donsku – ið hvussu er ta fyrstu tíðina.

Í núverandi skipan eru tað í høvuðsdráttum peningastovnarnir sjálvir, ið rinda fyri fíggjareftirlitið – hetta er ásett í banka- og sparikassalógini. Gjaldið verður ásett eftir skuld og ábyrgd. Tað eftirlit, sum fíggjareftirlitið eftir virðisbrævahandilslógini hevur við øðrum virkjum, verður somuleiðis goldið av hesum virkjum. Gjaldið verður ásett eftir teirri orku, sum brúkt verður til eftirlitið.

Tó er at vænta, at eitt føroyskt fíggjareftirlit fer at kosta tí almenna nakað. Sum er, gjalda føroysku peningastovnarnir smáar upphæddir fyri fíggjareftirlit, av tí at teir eru so smáir aftur ímóti donsku peningastovnunum. Hesar upphæddir eru ikki nóg mikið til at fíggja eitt sjálvstøðugt føroyskt eftirlit, men so leingi støða ikki er tikin til, hvussu føroyska fíggjareftirlitið skal skipast, og hvørjar uppgávur tað skal hava, ber illa til at meta um kostnaðin.

## Fiskimálastýrið

Á teimum lógarøkjum, sum verða fyrisitin av Fiskimálastýrinum, liggur at kalla øll ábyrgdin hjá heimastýrinum. Kortini eru tvey stór málsøki, har ábyrgdin framvegis er donsk ella partvís donsk.

Annað av hesum er eftirlit og bjarging á sjónum og verja av fiskimarkinum. Hetta eru *Færøernes Kommando* og Fiskiveiðieftirlitið felags um. Skal øll ábyrgdin flytast til Føroya, fer tað at krevja íløgur í eitt bjargingarskip og eina tyrlu aftur at teirri núverandi, soleiðis at ein tyrla altíð er tøk til fiskiveiðieftirlit, bjarging og sjúkraflutning. Henda tyrla kann kortini eisini verða brúkt til eitt nú ferða- og farmaflutning. Samanlagdi eykakostnaðurin av hesum fer at verða umleið 10 mió. kr. árliga.

Hitt stóra málsøkið er skipatryggleikin. Lóggávan á økinum er donsk, og danir rinda sum er allar rakstrarútreiðslur hjá skipaeftirlitinum. Hetta er eitt sera umfevnandi, tekniskt lógarøki, og verður tað føroyskt, fer tað at krevja, at føroyingar luttaka í altjóða nevndum og lógarsmíði. Eisini verður tørvur á samstarvi við danir í eina tíð eftir, at økið er vorðið føroyskt.

Tað er ilt at meta um kostnaðin av at taka við hesi ábyrgdini, men á vári 1999 varð ein arbeiðsbólkur settur at fyrireika yvirtøku av skipaeftirlitinum og at kanna kostnaðin. Álitið hjá hesum bólki fer at vísa, hvørji krøvini verða til eitt føroyskt eftirlit, og hvørji føroysku ynskini um møguligt samstarv á hesum øki skulu vera, tá ið samráðast skal um skiftistíðina.

Av øðrum donskum málsøkjum er sjólógin helst tað týdningarmesta. Hon ásetur reglur um atburð á sjónum, t.d. um flutning av fólki og góðsi, um framferð í sambandi við samanstoyt, bjarging á sjónum, oljudálking o.t.

Hóast hetta eru víðfevnd og týdningarmikil mál, er lítil fyrisiting av lógini. Hon verður mest brúkt, tá ið ymsar hendingar á sjónum koma fyri rættin, og staðfestast skal, um nakað ólógligt er farið fram. Ábyrgdin av hesum fer at hava við sær nakað av lógarsmíði í Føroyum og luttøku í millumtjóða samstarvi.

Skráseting av parta- og smápartafeløgum, vinnurekandi grunnum o.ø. er felagsmál, og lóggávan donsk. Kortini fyrisitur Skráseting Føroya øll skrásetingarmál. Skrásetingin verður lutvíst fíggjað við nýtslugjøldum (skrásetingargjøldum) og lutvíst um fíggjarlógina. Tí verður ikki tungt at taka við ábyrgdini her.

Verða avgerðir hjá Skráseting Føroya í sambandi við parta- og smápartafelagslógina og lógina um vinnurekandi grunnar kærdar, er kærumyndugleikin *Erhvervsministeriets Erhvervsankenævn*. Skal hetta verða fyrisitið í Føroyum, kann Føroya kærustovnur vera kærumyndugleiki.

*Erhvervs- og Selskabsstyrelsen* ger av, um ein grunnur lýkur treytirnar fyri at verða skrásettur í Føroyum, og danska løgmálaráðið góðkennir broytingar í viðtøkununum hjá vinnurekandi grunnum. Tann fyrra av hesum uppgávum kann latast Skráseting Føroya og tann seinna løgdeildini á Løgmansskrivstovuni.

## Vinnumálastýrið

Av vinnumálum er flogferðslan hitt størsta, ið heimastýrið onga formliga ábyrgd hevur av. Men øll flogferðsla verður skipað eftir teimum treytum, sum settar verða av Millumtjóða flogferðslufelagsskapinum, ICAO, altjóða sáttmálum og ES-reglum. Tí verður ikki tørvur á stórvegis broytingum í lóggávuni, tá ið ábyrgdin verður flutt til Føroya. Kortini verður mælt til, at avtala verður gjørd við danska ferðslumálaráðið um leiðbeining í sambandi við lóggávuarbeiðið á økinum í eina tíð.

Flogfarið hjá Atlantsflogi og tyrlan hjá landsstýrinum eru sum er skrásett í *National Register* hjá *Statens Luftfartsvæsen* (SLV). Tey kunnu skrásetast hjá Skráseting Føroya og fáa føroyskt tjóðarfrámerki.

Tørvur verður á at gera avtalu við Skaðanevndina (*Havarikommissionen for civil luftfart*), soleiðis at møguligar vanlukkur hjá føroyskt skrásettum flogførum verða kannaðar.

Flogvøllurin í Vágum verður rikin av SLV. Raksturin hevur víst eitt hall, sum sambært fíggjarætlanini 1998 var um 9 mió. kr., men sum er minkandi.

Hugsast kann, at raksturin skal á føroyskar hendur ið hvussu er, tí SLV hevur farnu árini avhent flestu av teimum flogvøllum, sum stovnurin hevur havt ábyrgdina av. Danskir myndugleikar hava eisini víst á møguleikan fyri, at føroyingar yvirtaka raksturin av vøllinum í Vágum, og ávísar kanningar hava verið gjørdar hesum viðvíkjandi.

Tá ið málsøkið verður føroyskt, kann yvirskipaða ábyrgdin av flogferðsluni vera hjá samskiftisdeildini í Vinnumálastýrinum. Deildin tekur sær longu partvíst av hesum øki, sum er. Raksturin av flogtrygdartænastuni í føroyskum loftrúmi verður í dag lutvíst umsitin av íslendingum Danmarkar vegna, og kann hetta óivað halda fram, inntil føroyskir myndugleikar sjálvir vilja átaka sær hesar uppgávur. Hetta fer ikki at kosta landskassanum nakað, tí raksturin hvílir í sær sjálvum.

Verja av havumhvørvinum er eisini danskt málsøki, men løgtingið hevur í vár samtykt ríkislógartilmæli, sum fer at flyta uppgávur og heimildir á hesum málsøkinum innan fyri føroyska fiskimarkið til heimastýrið. Tí verður tørvur á føroyskari fyrisiting og meirjáttan til

Heilsufrøðiligu starvsstovuna og Vaktar- og bjargingartænastuna – sama, um fullveldisætlanin verður framd.

Tilbúgving er eisini danskt lógarøki, men arbeitt verður í løtuni við at gera føroyska tilbúgvingarætlan eftir føroyskum fortreytum. Tí verður danska sivilverjulógin, sum nú er í gildi, helst avtikin uttan mun til, um fullveldisætlanin verður sett í verk ella ikki. Í sambandi við broytingina verður neyðugt at skúla fólk og at gera avtalu við grannalond um hjálp, um ein stór vanlukka skuldi hent.

Tilbúgvingarøkið er ógvuliga umfevnandi og fevnir um nógvar almennar stovnar og privatar felagsskapir. Ábyrgdin verður tískil býtt millum fleiri myndugleikar, men eitt einstakt aðalstýri – t.d. Vinnumálastýrið – eigur kortini at hava ábyrgdina av at samskipa teir ymsu partarnar.

Tað eru eisini nøkur smærri øki undir Vinnumálastýrinum, har ábyrgdin er donsk ella partvíst donsk, og har tað fer at hava útreiðslur við sær, tá ið hon verður flutt til føroyskar myndugleikar. Millum hesi eru uppmátingar og kortútgáva, vinnuframalóggáva og løggilding av tekniskari útgerð. Radiosamskiftið – serstakliga altjóða samstarv og frekvensfyrisiting – er eisini danskt málsøki. Hetta kann verða lagt saman við Fjarskiftiseftirlitið, tá ábyrgdin verður føroysk.

Um yvirtikin vinnumál hava eitt nú Heilsufrøðiliga starvsstovan, Landsdjóralæknin, Arbeiðseftirlitið og Bileftirlitið nógv samskifti og samstarv við danskar stovnar og myndugleikar. Hetta snýr seg serliga um fakliga ráðgeving, útbúgving og fleirtjóða umboðan. Tað er týdningarmikið fyri vinnumálini, at samstarvið við danskar myndugleikar og stovnar kann halda fram, tá ið fullveldisætlanin verður sett í verk.

## Undirvísingar- og mentamálastýrið

Fólkakirkjan er einasta málsøki, sum ríkið bæði umsitur og fíggjar í dag, og sum kann skipast undir Undirvísingar- og mentamálastýrinum, tá fullveldisætlanin verður sett í verk. Men sannlíkt er, at hetta verður føroyskt málsøki undir øllum umstøðum, tí landsstýrismaðurin við mentamálum hevur longu sett arbeiðsbólk at fyrireika yvirtøku av kirkjuni og at gera uppskot til føroyska kirkjulóggávu. Fólkakirkjan kostar í dag sambært tølum frá ríkisumboðsmanninum umleið 13 mió. kr.

Annars eru mentamálini undir føroyskum málsræði, men samstarv er kortini við danskar myndugleikar og stovnar á fleiri økjum. Framhald av hesum samstarvi kann tryggjast sambært avtalum við danskar myndugleikar.

Skúlarnir í Føroyum virka eftir føroyskum lógum, men orsakað av

at fleiri teirra eru yvirtiknir eftir § 9 í heimastýrislógini, eru løgtingslógirnar á økinum gjørdar við heimild í yvirskipaðum donskum rammulógum. Hesir skúlar eru fólkaskúlin, frítíðarundirvísingin, handilsskúlarnir, teknisku skúlarnir, maskinmeistaraskúlin og læraraskúlin. Fullveldisætlanin fer kortini ikki at krevja broytingar her, tí heimildin at gera føroyskar lógir er brúkt, og økið verður fyrisitið av føroyskum myndugleikum.

Hóast lógarverk og fyrisiting eru føroysk, er at kalla øll læra og útbúgving í landinum tætt knýtt at donskum myndugleikum og stovnum. Tær týdningarmestu samstarvsavtalurnar, eru hesar:

Avtalurnar við danska undirvísingarmálaráðið um próvtøkur á vinnu- og miðnámsútbúgvingunum. Hesar avtalur tryggja, at føroyskir næmingar kunnu verða tiknir upp til danskar útbúgvingar á jøvnum føti við danskar næmingar.

Avtalurnar, sum tryggja føroyskum lærlingum atgongd til danskar skúlar í lærutíðini. Av teimum 70 lærlingaútbúgvingunum í Føroyum eru 44, har hesin rættur verður brúktur. Umleið 70 lærlingar fara til Danmarkar í miðal 10 vikur hvørt ár.

Avtalurnar við at kalla allar yrkisnevndir í Danmark um, at føroysk sveinabrøv verða góðtikin ájavnt við donsk sveinabrøv. Treytirnar fyri hesum eru, at læruráðið veitir trygd fyri, at føroysku útbúgvingarnar eru fult so góðar sum samsvarandi útbúgvingar í Danmark.

Avtalan við *Søfartsstyrelsen* um útbúgvingarnar á Føroya sjómansskúla og Maskinmeistaraskúlanum. Hon snýr seg fyrst og fremst um danska góðkenning av føroyskum prógvum, soleiðis at tey fáa altjóða viðurkenning. *Søfartsstyrelsen* veitir Millumtjóða sjóferðslufelagsskapinum IMO trygd fyri, at tær føroysku útbúgvingarnar hava altjóða dygd og lúka altjóða krøv. IMO góðkenningin tryggjar føroyskum sjófólki rætt til at sigla við útlendskum skipum og við føroyskum skipum í altjóða sigling.

Hesum síðsta kunnu føroyskir myndugleikar sjálvir standa fyri, treytað av at vit fáa limaskap í IMO, men annars er umráðandi, at núverandi samstarvsavtalur kunnu halda fram.

Føroyingar hava eisini ókeypis atgongd til danskar og norðurlendskar útbúgvingarstovnar. Virðið á hesum er ilt at gera upp, men í 1996 gjørdu Norðurlond sáttmála um javnbjóðis atgongd til hægri lestur. Hon bar við sær, at Danmark, Finnland, Svøríki og Noreg árliga rinda 22.000 kr. fyri hvønn av teirra lesandi, sum er í hinum londunum. Sáttmálin tryggjar kortini íslendingum ókeypis atgongd til lestur í hesum londum. Hesin sáttmáli fer úr gildi 31. desember 1999, men væntandi heldur skipanin fram, helst í nakað broyttum líki.

Føroyingar hava sum er eisini rætt til danskan útbúgvingarstuðul.

Umleið 1.500 føroyingar fáa hendan stuðul, og samlaða upphæddin verður mett at vera oman fyri 60 mió. kr. árliga.

Lestur og útbúgving uttanlanlands er eitt so víðfevnd og kostnaðarmikið øki, at alneyðugt er at fáa eina áseting, sum tryggjar eina lagaliga tillagingartíð, har viðurskiftini verða løgd í eina trygga og nøktandi legu.

## Almanna- og heilsumálastýrið

Danskir myndugleikar hava framvegis ábyrgdina av nøkrum pørtum av almanna- og heilsuøkinum, men í 1995 vóru tvær rammulógir samtyktar, sum høvdu til endamáls at flyta meginpartin av ábyrgdini til Føroya.

Hesar rammulógir geva føroyskum myndugleikum heimild til at áseta reglur um uppgávur og fyrisiting á fleiri økjum, sum snúgva seg um, hvørjar veitingar fólk hava rætt til.

Á almannaøkinum vóru tað forsorgar- og barnaforsorgarskipanin, pensiónsskipanin, dagpeningaskipanin og reglur um dagtilboð og hjálp til børn og ung. Á heilsuøkinum vóru tað reglur viðvíkjandi sjúkrahúsverki, kommunulæknum, heilsu- og heimasjúkrasystrum, skúlalæknum, tannrøkt og sjúkratrygging.

Skipanin er, at tær donsku lógirnar, sum eru í gildi í Føroyum á hesum økjum, verða verandi í gildi, til tær verða avloystar av løgtingslógum. Í seinastu avtaluni við donsku stjórnina varð ásett, at allar løgtingslógirnar á økinum skulu vera lidnar í seinasta lagi í 1999. Hetta fer valla at eydnast, men tað grundleggjandi lógararbeiðið verður helst liðugt í 2000.

Á almannaøkinum verða uppskot um forsorgarlóg, barnaforsorgarlóg og dagpengingalóg løgd fyri tingið í tingsetuni 1999-2000. Tá ið tær eru samtyktar, er øll umsitingin av almannaøkinum yvirtikin. Arbeiðið við almannalóggávuni verður kortini ikki liðugt, tí sambært flestum lógum skulu kunngerðir og vegleiðingar gerast á teimum ymisku økjunum. Harumframt eiga broytingar alsamt at verða gjørdar í skipanunum til tess at finna tær bestu loysnirnar.

Á heilsuøkinum er bert eftir at seta í verk lógir um kommunulæknaskipan, skúlalæknaskipan og sjúkratrygging. Landsstýrismaðurin miðar ímóti at leggja uppskot um hesar lógir fyri løgtingið í tingsetuni 1999-2000.

Tískil er longu komið væl áleiðis við einum stórum parti av tí arbeiði, sum gerast skal fyri at laga almanna- og heilsuøkið til fullveldisætlanina.

Men hóast føroyskir myndugleikar í 2000 fara at hava ábyrgd av

hesum økjum, eru týdningarmiklir partar av almanna- og heilsuøkinum framvegis felagsmál, sum mugu takast til viðgerðar í sambandi við fullveldisætlanina.

Eitt tað týdningarmesta eru løggildingarlógirnar (autorisatiónslógirnar), sum áseta krøvini til góðkenning av heilsustarvsfólki. Tað er *Sundhedsstyrelsen*, sum sambært hesum lógum hevur fakliga eftirlitið við øllum góðkendum heilsustarvsfólki í Føroyum. Løggildingarlógirnar verða settar í gildi í Føroyum við kongligari fyriskipan.

Hini felagsmálini á økinum kunnu býtast í tveir bólkar. Tann fyrri bólkurin snýr seg um ymiskar tænastuveitingar, eitt nú fyribyrgjandi heilsukanningar og hjálp í sambandi við barnsburð, og ókeypis koppseting.

Tann seinni bólkurin snýr seg um faklig og altjóða krøv til heilsuverkið, m.a. um áseting av heilsufakligum reglum, ráðgeving av heilsumyndugleikum, eftirlit, serfrøðiligar kanningar og kæruviðgerð. Lógin um embætislæknar (landslæknan) kemur eisini undir hendan bólkin.

Á sama hátt sum viðvíkjandi løggildingarlógunum er helst ráðiligast, at tað á hesum økjum verður gjørd samstarvsavtala við Danmark ella eitt annað av grannalondunum.

Stovnar undir Almanna- og heilsumálastýrinum hava nógv samstarv við stovnar og myndugleikar í Danmark, serliga *Sundhedsstyrelsen*.

Tann týdningarmesta formliga samstarvsavtalan er millum sjúkrahúsverkið og ríkissjúkrahúsið og onnur sjúkrahús í Danmark um viðgerð av sjúklingum. Sjúkrahúsverkið rindar allan kostnaðin av hesum samstarvi, og tað fer tí ikki at økja útreiðslurnar, um tað heldur fram.

Apoteksverkið varð yvirtikið í 1948, men hevur framvegis formligt samstarv við danskar stovnar sambært løgtingslóg um apoteksverkið. Hesir stovnar eru m.a. *Sundhedsstyrelsen*, *Statens Serumslaboratorium* og *Statens veterinære institut for virusforskning*. Stovnarnir hava stóran serkunnleika á økinum, sum ikki finst í Føroyum.

Fleiri avtalur eru eisini um útbúgving, skeið, starvsvenjing og leiðbeining til starvsfólk. Hetta hevur bæði fakligan og fíggjarligan týdning. Miðað eigur tí at verða ímóti, at tað í fullveldissáttmálanum verður ásett, at samstarvið kann halda fram.

## Uttanríkistænasta og millumtjóða samstarv

Øll uttanríkisviðurskifti eru felagsmál, men í royndum virkar heimastýrið fyri ein part sjálvstøðugt á økinum. Ein uttanlandsdeild við seks fólkum er í Løgmansskrivstovuni, umframt at eitt fólk er í Brússel,

trý í Keypmannahavn og eitt í Aberdeen. Í miðfyrisitingini eru harafturat starvsfólk, sum fáast við uttanríkisviðurskifti á sínum øki, og í donsku uttanríkistænastuni er eitt starvsfólk, sum burturav tekur sær av føroyskum viðurskiftum.

Tað er fyrst og fremst innan fiskiveiði, at Føroyar hava havt ein sjálvstøðugan leiklut uttan fyri landoddarnar. Sambært § 8 í heimastýrislógini og sambært siðvenju hevur heimastýrið í ávísum førum heimild at tingast við og gera fiskiveiðisáttmálar við onnur lond. Hetta hevur verið gjørt í stórt mát. Umboð fyri donsku uttanríkistænastuna hava verið við til samráðingarnar, men mest sum eygleiðarar.

Føroyskir myndugleikar hava tískil drúgvar royndir at samráðast um og umsita fiskiveiðisáttmálar, hóast teir ikki fyrr enn við fullveldinum fáa formligu heimildirnar á økinum.

Viðvíkjandi luttøku í fleirtjóða samstarvi, hava føroyingar eisini royndir við tí, hóast Føroyar formliga ikki hava kunnað verið við sum sjálvstøðugt land. Danmark er limur í bæði Fiskiveiðifelagsskapinum fyri Útnyrðingsatlantshav (NAFO), og Fiskiveiðinevndini fyri Landnyrðingsatlantshav (NEAFC) vegna Føroyar og Grønland, men føroyingar og grønlendingar hava í felag myndað ta donsku sendinevndina. Støðan er tann sama viðvíkjandi Laksaverndarfelagsskapinum fyri Norðuratlantshav (NASCO).

Føroyingar hava í hesum samstarvi í royndum arbeitt sjálvstøðugt, og tað fer ikki at krevja umsitingarliga ella fíggjarliga meirorku at fáa egnan limaskap, tí Føroyar rinda longu sum er sín part av limagjaldi Danmarkar í bæði Millumtjóða havrannsóknarráðnum (ICES), NAFO, NEAFC og NASCO.

Viðvíkjandi hvalaveiði eru tveir fleirtjóða felagsskapir: Altjóða hvalaveiðinevndin (IWC), og Havsúgdjóranevndin fyri Norðuratlantshav (NAMMCO). Í tí fyrra umboðar Danmark alt ríkið, og í tí seinna eru Føroyar sjálvstøðugur limir.

Eins og við fiskiveiðisamráðingum er siðvenjan viðvíkjandi handilssamráðingum vorðin tann, at føroyingar skipa samráðingarnar sjálvir. Eisini her verður tað kortini formliga gjørt vegna ríkið, og umboð fyri danska uttanríkismálaráðið eru við, tá ið samráðst verður.

Hóast føroyingar ikki standa heilt á berum, setur fullveldisætlanin stór krøv á uttanríkisøkinum, serliga viðvíkjandi umboðsstovum, heruppií sendistovum.

Tá ið hesi viðurskifti skulu skipast í framtíðini, eru í høvuðsheitum tveir møguleikar. Annar er at tað í fullveldissáttmálanum verður ásett, at danska uttanríkistænastan tekur sær av føroyskum uttanríkismálum á teimum økjum, sum Føroyar ikki hava orku til. Hin er, at

Føroyar tryggja sær rætt at nýta ta donsku tænastuna í eini skiftistíð, meðan ein veruliga sjálvstøðug tænasta verður bygd upp.

Tá ið smá lond taka fullveldi, er vanligt, at tey seta á stovn umboðsstovur í fyrrverandi miðveldinum, stórveldinum í økinum, grannalondum, teimum stóru marknaðunum, og har teir stóru altjóða felagsskapirnar hava miðstøð. Hesum kann eisini stílast ímóti, um málið er at fáa eina sjálvstøðuga føroyska tænastu. Talan verður um einar sjey umboðsstovur.

Hetta gerst sjálvsagt ikki frá degi til dags, men í fyrsta umfari kann miðast ímóti at fáa umboðsstovur í Keypmannahavn og í New York (ST). Hesar skulu helst vera mannaðar eitt ár eftir, at Føroyar eru vorðnar fullveldisríki. Síðani kunnu trý til fýra nýggj starvsfólk setast um árið, til allar umboðsstovurnar eru farnar at virka. Tá ið komið er á mál, fara umleið 36 fólk tilsamans at vera í starvi aftur at teimum, sum longu arbeiða á hesum øki. Hetta fer helst at taka eini tíggju ár.

Trygdarmál verða í øðrum londum umsitin sum partur av uttanríkismálunum, og hetta kundi eisini verið gjørt í Føroyum. Her verður uppgávan at tryggja verju landsins og at veita grannalondunum vissu fyri, at tað innan fyri føroyskt ríkismark ikki er nakað virksemi, sum kann hótta trygdina á økinum. Hetta kann loysast við at ein sáttmáli verður gjørdur við annað land, ella við at Føroyar gerast limir í NATO.

Umframt tann avgerandi limaskapin í ST, norðurlandaráðnum og møguliga NATO, verður neyðugt at binda seg til fleiri millumtjóða sáttmálar og felagsskapir á ymiskum málsøkjum, aftur at omanfyrinevndu fiskiveiðifelagsskapum. M.a. kunnu nevnast:

Millumtjóða sjóferðslufelagsskapurin (IMO). Hetta er tann mest avgerandi sáttmálin, tá um fiski- og sjóvinnu ræður, og luttøka er avgerandi fyri nærum alt okkara virksemi á sjónum.

Millumtjóða flogferðslufelagsskapurin (ICAO). Við limaskapi her átaka Føroyar sær ta rættarligu ábyrgd á flogferðsluøkinum, sum nú liggur í Danmark.

Innan vinnumálini verða harafturat Heimshandilsfelagsskapurin (WTO) og Millumtjóða fjarskiftissambandið (ITU) viðkomandi. Eisini verður neyðugt at taka støðu til luttøku í millumtjóðasamstarvi um umhvørvisvernd.

Útbúgvingarøkið fer at krevja, at Føroyar verða við í sáttmálanum, sum tryggjar rætt til hægri lestur í hinum norðurlondunum.

Innan búskaparøkið verður eingin tørvur beinanvegin, men Millumtjóða gjaldoyragrunnurin (IMF) og Heimsbankin kunnu gerast viðkomandi.

Innan almanna- og heilsumálini verða tað serliga sáttmálarnir *Nordisk konvention om social sikring* og *Konvention om Europæisk Social-*

*pagt* sum fara at hava týdning. Teir tryggja føroyingum tryggar karmar á almannaøkinum tá ið teir ferðast ella starvast í Norðurlondum ella í Evropa.

Føroysk løgregla krevur limaskap í Millumtjóða løgreglufelagsskapinum (INTERPOL).

Tá ið Føroyar rinda fyri luttøku í hesum millumtjóða samstarvi, og føroyskar umboðsstovur í øðrum londum eru farnar at virka, fer heildarkostnaðurin av uttanríkisøkinum at tátta í 50 mió. kr. árliga.

Havast skal kortini í huga, at ið hvussu er ein partur av hesum peningi kann roknast sum íløgur. Umboðsstovurnar eiga m.a. at verða nýttar til at stuðla marknaðarføring og søluframtøk av føroyskum vørum í øðrum londum, og harvið skapa fortreytir fyri størri inntøkum til samfelagið.

Harafturat fer føroyskt fullveldi eisini at fáa nakað av inntøkum av altjóða samstarvi. Norðurlond og stórveldi fara helst at seta á stovn sendistovur her, og hetta fer at styrkja inntøkusíðuna á fíggjarlógini.

# Búskapur

Í búskaparfrágreiðingini, sum er fyrra fylgibind til hesa frágreiðing, verður útgreinað, hvussu tann búskaparliga gongdin í Føroyum hevur verið farnu árini, hvussu støðan er í dag, og hvønn týdning ríkisútreiðslurnar hava fyri búskapin. Síðan verður mett um, hvussu hesar veitingar kunnu minkast burtur, og hvørjar avleiðingar tað kann hugsast at fáa. At enda verða ymisk ráð givin um búskaparliga stýring í hesum sambandi.

Við búskaparfrágreiðingini sum grundarlagi verður her greitt frá hesum viðurskiftum.

Gjørt verður vart við, at búskaparnevndini ikki varð álagt at kanna, hvønn búskaparligan týdning tað kann hugsast at fáa, gerast Føroyar fullveldisríki. Her verður tískil einki gjørt burtur úr tí, sum greitt verður frá í fimta parti – nevniliga at fullveldi í sjálvum sær kann gerast grundarlag undir eini øðrvísi búskaparmenning.

## Búskaparliga støðan

Tjóðarroknskapartøl frá 1962-1989 vísa, at støddin á nýtslu og íløgum í Føroyum ikki bara hevur lagað seg eftir tí, sum landið sjálvt hevur framleitt. Ríkisútreiðslurnar í Føroyum hava gjørt, at til hevur borið hjá Føroyum at hava støðugt hall í samhandlinum við onnur lond, uttan at neyðugt var at læna pening úr útheiminum. Árini 1962-1989 var nýtslan í Føroyum í miðal 13% størri enn framleiðslan. Viðmerkjast skal, at árið 1962 var fyrsta árið, ið tjóðarroknskapur fyri Føroyar varð gjørdur, og fer tað tískil at verða víst til hetta árstal fleiri ferðir í hesi frágreiðing.

Partar av tíðarskeiðinum, og serstakliga í 1980-árunum, var innlendski eftirspurningurin sera stórur. Vøksturin í eftirspurninginum komst m.a. av eini sera stórari lántøku í útlondum.

Henda stóra skuldabinding hevði ógvisligar og kravdar búskaparligar tillagingar við sær undir kreppuni í 1990-árunum.

Síðan 1990 er stór broyting hend. Síðan tá hevur nýtslu- og íløgustigið í miðal verið 7% lægri enn framleiðslan. Tað, at nýtslu- og íløgustigið hevur verið lægri enn framleiðslan, er eindømi í nýggjari føroyskari búskaparsøgu.

Búskapurin hevur eftir kreppuárini verið merktur av, at fram-

leiðslukostnaðurin er fallin í mun til framleiðslukostnaðin í teimum londum, vit kappast við. Hetta hevur bøtt um kappingarførið. Búskapurin hevur eisini verið eyðkendur av stórum vøkstri, gjaldsjavnaavlopi, og av at nettoskuldin er broytt til nettoogn í útlondum. Somuleiðis hava almennu kassarnir fingið stórt og vaksandi avlop og harvið minkað nakað um skuld sína.

Talva 1 Gjaldsjavni Føroya 1992-1999, mia. kr.

| | **92** | **93** | **94** | **95** | **96** | **97** | **98** | **99** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Vøruútflutningur | 2,7 | 2,2 | 2,1 | 2,1 | 2,4 | 2,6 | 2,9 | 3,1 |
| - vøkstur í % | | -18,9% | -2,7% | -2,2% | 19,1% | 6,0% | 10,0% | 8,0% |
| Vøruinnflutningur | -2,0 | -1,4 | -1,6 | -1,8 | -2,1 | -2,4 | -2,6 | -2,9 |
| - vøkstur í % | | -29,0% | 8,9% | 13,7% | 21,6% | 10,1% | 10,4% | 10,0% |
| Ríkisútreiðslur í Føroyum | 1,1 | 1,1 | 1,2 | 1,2 | 1,2 | 1,3 | 1,3 | 1,3 |
| Aðrir postar netto (ex. rentur) | -1,0 | -0,5 | -0,2 | -0,4 | -0,1 | -0,4 | -0,5 | -0,3 |
| Úrslit á leypandi postum áðrenn nettorentur | 0,8 | 1,4 | 1,6 | 1,1 | 1,5 | 1,1 | 1,1 | 1,2 |
| Nettorentur | -0,8 | -0,7 | -0,5 | -0,3 | -0,3 | -0,3 | -0,2 | 0,0 |
| Úrslit á leypandi postum | 0,0 | 0,7 | 1,2 | 0,8 | 1,2 | 0,9 | 0,9 | 1,2 |
| **Nettoogn** | **-7,9** | **-6,7** | **-5,4** | **-4,4** | **-3,0** | **-2,2** | **-0,4** | **0,8** |

Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999. Tølini eru avrundað.

Hyggja vit at gjaldsjavnanum fyri 1992-1999 á talvu 1, síggja vit, at vøruútflutningurin í kreppuárunum minkaði úr 2,7 mia. kr. í 1992 til 2,1 mia. kr. í 1995, men hann hevur verið støðugt vaksandi síðan 1995, og mett verður, at vøruútflutningurin í 1999 røkkur umleið 3,1 mia. kr. Verður hinvegin hugt at vøruinnflutninginum, steðgaði minkingin longu í 1993, og síðan er hann vaksin frá 1,4 mia. kr. í 1993 til 2,9 mia. kr. í 1999 (talið fyri 1999 er ein meting). Av tí at vøruútflutningurin hevur verið størri enn vøruinnflutningurin alt tíðarskeiðið og ríkisútreiðslurnar í Føroyum eisini eru hækkaðar, samstundis sum rentuútreiðslurnar hava verið minkandi, hevur avlop verið á føroyska gjaldsjavnanum síðan 1993. Hetta hevur havt við sær, at nettouttanlandsskuldin, sum í 1992 var 7,9 mia. kr., sambært metingunum fyri 1999 er broytt til eina nettoogn á 0,8 mia. kr.

Hóast nettouttanlandsskuldin hjá Føroyum er broytt til ogn, merkir hetta ikki at tann almenni sektorurin er skuldafríur. Støðan í dag er tann, at samanlagda føroyska ognin í útlondum er størri enn samanlagda skuldin. Men hyggja vit at tí almenna sektorinum, var bruttouttanlandsskuldin, sum talva 2 vísir, 7,6 mia. kr. í 1993, og verður mett at verða umleið 6,5 mia. kr. í 1998. Men tað almenna

hevur eisini stóra ogn innlendis og í útlondum, og tískil var nettoskuldin í 1993 4.4 mia. kr. Í 1998 var hon minkað til 1,9 mia. kr.

Talva 2 Fíggjarligur kravsjavni við árslok 1993 & 1998, mia. kr.

| **1993** | *Skuldari:* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Alm.** | **Peningast.** | **Húsarhald** | **Fyritøkur** | **Útlond** | **Í alt** |
| *Ognari:* | **sektorur** | **& trygging** | | | | |
| Alm. sektorur | | 1,4 | 1,3 | 2,7 | 0,2 | 5,5 |
| Peningastovnar & trygging | 2,0 | | 4,5 | 3,2 | 3,0 | 12,7 |
| Húsarhald | 0,2 | 4,9 | | | 0,9 | 6,0 |
| Fyritøkur | 0,1 | 1,0 | | | 0,6 | 1,7 |
| Útlond | 7,6 | 0,5 | 0,1 | 3,1 | | 11,3 |
| Tilsamans | 9,9 | 7,7 | 5,8 | 9,0 | 4,7 | 37,2 |
| Tilsamans krav sum skuld | 9,9 | 7,7 | 5,8 | 9,0 | 4,7 | 37,2 |
| Tilsamans krav sum ogn | 5,5 | 12,7 | 6,0 | 1,7 | 11,3 | 37,2 |
| **Nettoskuld** | **4,4** | **-4,9** | **-0,2** | **7,.3** | **-6.6** | |

| **1998** | *Skuldari:* | | | | | |
|---|---|---|---|---|---|---|
| | **Alm.** | **Peningast.** | **Húsarhald** | **Fyritøkur** | **Útlond** | **Í alt** |
| *Ognari:* | **sektorur** | **& trygging** | | | | |
| Alm. sektorur | | 1,8 | 1,7 | 1,1 | 1,5 | 6,1 |
| Peningastovnar & trygging | 1,1 | | 4,7 | 1,7 | 4,9 | 12,4 |
| Húsarhald | 0,2 | 5,1 | | | 1,2 | 6,5 |
| Fyritøkur | 0,2 | 1,0 | | | 0,6 | 1,8 |
| Útlond | 6,5 | 0,3 | 0,2 | 1,3 | | 8,3 |
| Tilsamans | 8,0 | 8,2 | 6,6 | 4,1 | 8,1 | 35,0 |
| Tilsamans krav sum skuld | 8,0 | 8,2 | 6,6 | 4,1 | 8,1 | 35,0 |
| Tilsamans krav sum ogn | 6,1 | 12,4 | 6,5 | 1,8 | 8,3 | 35,0 |
| **Nettoskuld** | **1,9** | **-4,2** | **0,2** | **2,4** | **-0,2** | |

Viðm: Mett tøl, har grundfortreytin er a) niðurskriving av skuld hjá landskassanum við 900 mió kr, b) avlop hjá tí almenna upp á uml. 600 mió kr og c) gjaldsjavnaavlop upp á umleið 1 mia. kr.
Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999. Tølini eru avrundað.

Ein partur av tí búskaparliga vøkstrinum má metast at verða konjunkturvøkstur (*konjunktur* = búskaparlig sveiggj), sum hevur verið møguligur, tí búskapurin, og harvið eftirspurningurin, varð trýstur so langt niður í kreppuárunum. Hesi árini var nógv tilfeingi, bæði framleiðslutól, arbeiðsmegi og náttúrutilfeingi, sum ikki varð nýtt, og tá ið tað aftur er tikið í nýtslu, hevur tað havt vøkstur við sær. Men so hvørt sum tað ónýtta tilfeingið aftur verður tikið í nýtslu, steðgar hesin parturin av vøkstrinum.

Ein annar partur av vøksturin stavar frá tí bøtta kappingarførinum og hevur tískil møguleika fyri at gerast meira varandi. Hesin vøkstur, avlopið hjá tí almenna og avlopið á gjaldsjavnanum bendir á, at búskapurin er minni bundin av ríkisútreiðslunum, enn hann hevur verið.

## Ríkisútreiðslur í Føroyum

Ríkisútreiðslurnar í Føroyum eru vaksnar frá 1962 higar til dags. Størsti parturin av ríkisútreiðslunum hevur verið nýttur til almanna- og heilsuverkið og skúlaverkið. Nakað er kortini eisini farið til vinnu og samferðslu. Stuðulin úr danska ríkiskassanum hevur verið við til at fíggja uppbyggingina av týðandi pørtum av tí føroyska vælferðarsamfelagnum. Hetta sæst serliga aftur í íløguútreiðslunum hjá ríkiskassanum síðst í 1960-árunum.

Men hóast ríkisútreiðslurnar eru vaksnar síðan 1962, eru tær vorðnar ein støðugt minni partur av samanløgdu almennu útreiðslunum í Føroyum. Hetta kemst av, at føroyska eginfíggingin av almennum uppgávum er vaksin skjótari enn donsku ríkisútreiðslurnar.

Heildarveitingin (blokkurin) kom í 1988 og avloysti tá eina endurgjaldsskipan.

Talva 3 Ríkisútreiðslurnar í Føroyum 1992-1998, mió. kr.

| *Ár/ Endamál* | **1992** | **1993** | **1994** | **1995** | **1996** | **1997** | **1998** |
|---|---|---|---|---|---|---|---|
| Heildarveiting | 551,9 | 681,1 | 826,1 | 843,4 | 860,3 | 886,1 | 908,3 |
| Almannaverk | 240,1 | 118,3 | - | - | - | - | - |
| Krígspensjónir | - | 35,3 | 100,5 | 88,6 | 85,7 | 81,0 | 78,5 |
| Aðrar pensjónir | 16,6 | 17,5 | 17,7 | 18,8 | 20,5 | 22,3 | 24,9 |
| Veitingar tilsamans | 808,6 | 858,2 | 944,3 | 950,8 | 966,6 | 989,4 | 1011,7 |
| Rakstur av ríkisstovnum | 245,6 | 256,7 | 268,0 | 253,6 | 266,1 | 268,7 | 276,1 |
| **Samanlagdar útreiðslur** | **1030,4** | **1065,3** | **1212,3** | **1205,3** | **1232,7** | **1258,1** | **1287,8** |

Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999.

Sum talva 3 vísir, eru ríkisútreiðslurnar í Føroyum tilsamans umleið 1,3 mia. kr. um árið. Størsti parturin er heildarveitingin til landskassan, sum er góðar 900 mió. kr. Útreiðslurnar, sum eru av at reka ríkisstovnar í Føroyum, eru eisini taldar við. Tær eru umleið 300 mió. kr., harav størsti parturin fer til *Færøernes Kommando.*

Harafturat koma inntøkur frá pensjónum, sum eru umleið 100 mió. kr. um árið. Talan er um eitt útgjald frá ríkismyndugleikunum til einstakar persónar, ið ikki ávirkast av stjórnarrættarligu støðu Føroya.

Aðrar útreiðslur og inntøkur, ið ikki eru so neyvt upplýstar í almennum yvirlitum, og møguligar nýggjar inntøkur, sum kunnu koma við føroyskum fullveldi, verða ikki viðgjørdar í búskaparfrágreiðingini.

Týdningurin, sum ríkisútreiðslurnar hava fyri almennu kassarnar, sæst m.a. av, at tær eru umleið 30% av øllum teimum almennu inntøkunum. Almennu inntøkurnar vóru í 1997 umleið 4,4 mia. kr., og harav vóru ríkisútreiðslurnar umleið 1,3 mia. kr. Sostatt fíggjaðu teir føroysku almennu kassarnir sjálvir umleið 3 mia. kr. Men tá ið hugt verður at ríkisútreiðslunum í Føroyum á henda hátt, er ikki lagt upp fyri, at skattainntøkurnar av teimum lønunum, sum ríkisútreiðslurnar eru við til at fíggja, verða verandi í Føroyum. Somuleiðis verða avgjøldini verandi í Føroyum. Hesar skatta- og avgjaldskrónurnar eru inntøka hjá landskassa og kommunukassum, og tískil fíggja ríkisútreiðslurnar í Føroyum í veruleikanum ein part av teimum 3 mia. kr., sum almennu kassarnir fáa inn í skatti og avgjøldum. Verður hetta ikki tikið við, verður búskaparligi týdningurin av ríkisútreiðslunum í Føroyum undirmettur.

Ein háttur at leggja upp fyri hesum, er at rokna út tær sonevndu *fruminntøkurnar*. Ein fruminntøka hjá almennu kassunum er ein grundleggjandi inntøka, sum ikki er úrslit av at almennu kassarnir, t.e. lands- og kommunukassarnir, hava útreiðslur. Dømi um fruminntøkur eru beinleiðis skattir og avgjøld frá fiskivinnuni, alivinnuni og ferðavinnuni. Landskassin hevur ongar útreiðslur av ríkisútreiðslunum í Føroyum, og tí verða tær eisini roknaðar sum fruminntøka.

Viðmerkjast skal í hesum sambandi, at búskaparnevndin í sínum útrokningum tekur støði í, at allar ríkisútreiðslur verða nýttar í føroyska samfelagnum. Hinvegin verður avlopið hjá landi og kommunum, sum sambært metingum var 645 mió. kr. í 1998 og verður 767 mió. kr. í 1999, roknað sum partur av øðrum inntøkum hjá føroyska samfelagnum. Viðmerkjast skal, at inntøkuflytingar frá Føroya Banka, sum vóru ávikavist 134 og 113 mió. kr. í 1998 og 1999, eru íroknaðar í avlopið. Hesar flytingar verða munandi minni komandi árini.

Hetta yvirskot verður m.a. nýtt til at seta í útlendsk virðisbrøv, og fær sostatt ikki ringárin á føroyska búskapin.

Tað hevði eisini borið til at tikið støði í, at tað stóra yvirskotið eru ríkisútreiðslur, sum ”leypa av” og ikki verða nýttar í samfelagnum. Hevði hesin rokniháttur verið nýttur, hevði úrslitið víst, at ríkisútreiðslurnar hava minni árin á búskapin, enn mett verður í frágreiðingini frá búskaparnevndini.

Dømi um munin millum eina beinleiðis og eina avleidda fruminntøku: Fiskivinnan gevur bæði eina beinleiðis fruminntøku á 404 mió. kr., ið er tað sum sjómenn og vinna lata í skatti og meirvirð-

isgjaldið (MVG), og eina avleidda fruminntøku á 637 mió. kr.. Avleidda fruminntøkan er skatta- og avgjaldsinntøka frá teimum vinnum, ið eru avleiddar av fiskivinnuni.

Talva 4 Fruminntøkur 1997, mió. kr.

| Uppruni | Beinleiðis fruminntøka | Avleidd fruminntøka | Tilsamans |
|---|---|---|---|
| Ríkisútreiðslur | 1.288 | 0 | 1.288 |
| Fiskivinnan (og flakavinnan) | 404 | 637 | 1.041 |
| Alivinnan | 33 | 43 | 76 |
| Landbúnaður | 5 | 7 | 12 |
| Ferðavinnan | 32 | 27 | 59 |
| **Tilsamans** | **1762** | **714** | **2.476** |

Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999.

Talva 4 vísir m.a., at ríkisútreiðslurnar í Føroyum í 1997 vóru umleið helmingurin av fruminntøkunum hjá teimum almennu kassunum.

Tá ið peningurin verður nýttur í samfelagum, standast nøkur ringárin (eisini nevnd *multiplikatoreffekt*), sum økja um tjóðarinntøkuna og skattagrundarlagið. Samanlagda inntøkan hjá tí almenna gjørdist sostatt 4,4 mia. kr. í 1997. Harav vóru 500 mió. kr. í avlopi (sí talvu 5). Tær almennu útreiðslurnar vóru sostatt 3,9 mia. kr. í 1997.

Útflutningurin frá fiski- og alivinnuni øktist munandi í 1998 og verður væntandi enn størri í 1999. Føroyski parturin av teimum almennu fruminntøkunum verður tískil uttan iva størri í 1998 og 1999, enn hann var í 1997.

Talva 5 Fruminntøkur og útreiðslur í 1997, mió. kr.

| Útreiðsla | Fruminntøka | Faktorur | Útreiðsla |
|---|---|---|---|
| Lønir | 460 | 3,0 | 1.379 |
| Nýtsla | 288 | 2,5 | 721 |
| Studningur | 104 | 2,5 | 260 |
| Inntøkuflytingar | 645 | 1,5 | 967 |
| Íløgur | 115 | 1,7 | 196 |
| Rentur | 517 | 1,0 | 517 |
| Ríkið | 140 | 1,0 | 140 |
| Aðrar útreiðslur | -293 | 1,0 | -293 |
| Avlop | 500 | 1,0 | 500 |
| **Tilsamans** | **2476** | | **4.387** |

Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999

Talva 5 vísir, at um tveir triðingar av lønarútreiðslunum verða mettar at koma inn aftur í almennu kassarnar, kann sama lønarútreiðsla verða nýtt tríggjar ferðir. Undir hesum fortreytum krevst ein fruminntøka á 460 mió.kr. fyri at fíggja eina lønarútreiðslu á 1.379 mió. kr.. Verður hinvegin hugt at t.d. rentuútreiðslum (ið verða mettar at fara til útlond), skapa hesar eingi ringárin í føroyska búskapinum, og tískil krevur ein rentuútreiðsla á 517 mió. kr. eina fruminntøku á 517 mió.kr. Viðmerkjast skal, at faktorarnir, ið nýttir eru í talvu 5, eru somu faktorarnir, ið verða nyttir í EMFI-myndilinum (sí bls. 139). Tølini í talvu 5 eru tískil bert leiðbeinandi.

## Lækkandi ríkisútreiðslur í Føroyum

Búskaparnevndin vísir á trý dømi um, hvussu ríkisútreiðslurnar í Føroyum kunnu verða minkaðar burtur.

Ein møguleiki er, at minkingin verður knýtt at broytingum í føroysku bruttotjóðarúrtøkuni. Tíðin tað tekur at minka ríkisútreiðslurnar burtur, verður í hesum føri treytað av, hvussu stórur búskaparvøksturin er tey ymsu árini, og hvussu stóran part av hesum vøkstri, myndugleikarnir vilja nýta til endamálið.

Verður hesin háttur valdur, fer helst long tíð at ganga, áðrenn veitingin er avgerandi minkað, tí framferðarhátturin ber í sær óvissu um, hvussu politikarar og onnur skulu laga seg til gongdina, eins og hugsandi er, at skiftandi landsstýri fara at drála við neyðugum sparingum og tillagingum.

Ein annar møguleiki, ið sum kunnugt ofta er nevndur í politiska kjakinum, er, at ríkisútreiðslurnar í Føroyum verða kapitaliseraðar. Við kapitalisering av ríkisútreiðslunum, verður ein upphædd eina ferð fyri allar goldin frá danska ríkinum til føroysku myndugleikarnar, og eftir hetta verða ongar ríkisútreiðslur í Føroyum. Henda upphædd verður størri enn tann almenna skuldin er nú, og hon kann tískil m.a. nýtast til at gjalda hesa skuld, til at økja *støðuginntøkuna* (sí bls. 146) og/ella at seta í ein *búskapargrunn* (sí bls. 149).

Ein triði møguleiki er, at ríkisútreiðslurnar verða lækkaðar við einari fastari upphædd í eitt ávíst áramál. Verður hesin háttur valdur, vita bæði politikarar, vinnulívsfólk og borgarar betur, hvussu tey skulu laga seg til gongdina. Grundarlagið fyri at leggja til rættis búskapin gerst tískil betri, og somuleiðis gerst tann búskaparligi tryggleikin og framskygnið betri. Men um áramálið verður stutt, og búskaparvøksturin ikki verður nóg stórur til at kunna viga upp ímóti eini minking í ríkisútreiðslunum í Føroyum, fer tað at krevja sparingar og stóra og skjóta tillaging av búskapinum.

Tann háttur, sum valdur verður, tá ið ríkisútreiðslurnar skulu minkast burtur, hevur stóran týdning fyri, hvat krevst í Føroyum fyri at viga upp ímóti minkingini.

Greitt er, at almennu kassarnir hava stórt avlop, sum er. Um hetta heldur fram, verður ikki neyðugt at fremja beinleiðis skerjingar á fíggjarlógini, so leingi ríkisútreiðslurnar ikki minka við størri upphædd enn yvirskotið. So hvørt sum almenna skuldin minkar, ber til at minka meir um ríkisútreiðslurnar. Núverandi avlop í almennu kassunum, umleið 600-800 mió. kr., er tó ikki nóg stórt til, at allar ríkisútreiðslurnar kunnu verða minkaðar burtur á henda hátt.

Halda vit okkum til eitt avlop á 500 mió. kr., og ríkisútreiðslurnar verða skornar niður um eitt longri áramál, er tó møguleiki fyri at fremja eina ávísa fasta samansparing, sum kann geva tí almenna eina fasta rentuinntøku (t.e. *støðuginntøku* - sí bls. 146), ið partvíst kann fíggja burturfallið av ríkisútreiðslunum í Føroyum.

Trupult er at áseta virðið av hesi støðuginntøku, tí hon er í stóran mun treytað av realrentuni. Men um núverandi avlop hjá tí almenna heldur fram eitt longri áramál, verður gjørligt at skapa eina støðuginntøku frá hesi samansparing, sum kann koma at kasta av sær 400-500 mió. kr. árliga.

Hetta avkast, umframt eitt framhaldandi avlop í almennu kassunum, kann skapa grundarlag fyri, at ríkisútreiðslurnar kunnu minkast burtur. Hetta treytar kortini bæði, at skiftistíðin verður long, og at førdur verður ein sera varisligur búskaparpolitikkur, sum ger tað møguligt at hava stór árlig avlop í skiftistíðini.

Hinvegin er ikki sannlíkt, at støðuginntøkan, sum stavar frá núverandi avlopsstøði hjá tí almenna, kann gerast so stór, at hon eisini kann fíggja aðrar ríkisútreiðslur í Føroyum.

Tískil verður neyðugt annaðhvørt at spara almennar útreiðslur ella at økja inntøkurnar.

Inntøkurnar kunnu verða øktar við at hækka skatta- og avgjaldstrýstið ella við at ein vinnupolitikkur verður rikin, sum ger vinnulívið betur ført fyri at vaksa um framleiðsluvirðið við nøktandi avlopi.

Vøksturin í framleiðsluvirðinum (búskaparvøksturin) í føstum prísum, hevur seinastu fimm árini verið umleið 6% í miðal, og miðalvøksturin frá 1962 til 1999 hevur verið eitt sindur undir 5%. Veruligi virðisvøksturin í útflutninginum hevur í miðal verið 8% seinastu fimm árini, og 3,7% frá 1962 til 1999.

Um vit varisliga meta, at búskaparvøksturin komandi árini verður 2%, sum er helvtin av tí søguliga miðalvøkstrinum, er sannlíkt, at til ber at minka ríkisútreiðslurnar burtur eftir 15-20 árum, uttan at neyðugt verður at fremja beinleiðis skerjingar, ella at økja skatta og avgjaldstrýstið.

Slík gongd hevur tó sum treyt, at meirinntøkurnar hjá tí almenna, sum stava frá búskaparvøkstri, mest verða nýttar til at fíggja tær minkandi ríkisútreiðslurnar í Føroyum. Vøksturin í útreiðslunum hjá tí almenna til lønir, íløgur o.a. verður sostatt lægri enn inntøkuvøksturin. Hetta hevur við sær, at tann almenni sektorurin veksur seinni enn heildarbúskapurin. Harvið verður tann almenni sektorurin lutfalsliga minni, enn hann er í dag.

Tað er greitt, at kommunurnar eisini skulu fíggja sín part av minkingini av ríkisveitingunum. Neyðugt verður tí at gera eitt greitt uppgávu- og ábyrgdarbýti millum land og kommunur.

Um tað ikki ber til at fíggja minkingina í ríkisútreiðslunum á hendan hátt, verður neyðugt annaðhvørt at hækka skatt og avgjøld ella at spara.

Sparingar hava við sær avleiðingar fyri heildarbúskapin. Fyri at koma fram til, hvussu stórar avleiðingarnar verða, nýtir búskaparnevndin tann økonometriska myndilin EMFI (*Economic Model of the Faroe Islands*). Ein økonometriskur myndil er ein mynd av búskapinum sett upp sum støddfrøðiligar líkningar, soleiðis at til ber at rokna út ymisk árin á búskapin. Úrslitini skulu tulkast sum ein ábending um, hvussu stór árinini verða, og ikki sum endaligi sannleikin.

Verður spart, minkar skattagrundarlagið, og tí verður neyðugt at spara enn meiri fyri at røkka málinum. Sparingar á almennu fíggjarlógini raka ymist, alt eftir hvar spart verður. Størsta avleiðingin er av at spara í almennum lønum, tí stórur partur av almennu lønunum kemur inn aftur í skattum og avgjøldum. Verður í staðin spart aðrastaðni á almennu fíggjarlógini, t.d. í íløgum, nýtslu ella studningi, missa almennu kassarnir ikki líka stórar inntøkur.

Talva 6 Samanburður av ymsum tiltøkum, um neyðugt verður at fremja beinleiðis sparingar fyri at fíggja ein niðurskurð í ríkisútreiðslunum í Føroyum á 100 mió. kr. árliga

| **Tiltak** | **Stødd á tiltaki mió. kr. ársins prísir** | **Broyting í BTÚ 1. árið mió. kr.** | **Gjaldsjavnin** | **Lønarlagið** |
|---|---|---|---|---|
| Lønargjaldingar | -300 | -511 | Batnar | Lækkar |
| Nýtsla | -250 | -326 | Batnar | Lækkar |
| Studningur | -250 | -160 | Batnar | Lækkar |
| Inntøkuflytingar | -150 | -102 | Batnar | Lækkar |
| Íløgur | -170 | -150 | Batnar | Lækkar |
| Avlop | -100 | 0 | Versnar | Óbroytt |
| Skattur | 140 | -80 | Óbroyttur | Lækkar |

Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999

Talva 6 vísir, at verða ríkisútreiðslurnar skerdar við 100 mió. kr. og beinleiðis sparingar framdar fyri at fíggja tað, er neyðugt at spara millum 150 og 300 mió kr. á fíggjarlógini. Hetta hevði sambært EMFI havt við sær, at bruttotjóðarúrtøkan hevði minkað millum 102 og 511 mió. kr. tað árið, spart varð, alt eftir á hvørjum øki sparingarnar verða framdar. Eyðsæð er kortini, at allar sparingarnar í einum tílíkum føri neyvan høvdu verið gjørdar bert í einum øki.

Sum frá líður, rættar búskapurin seg upp aftur, og árinið á búskapin er tí ikki líka stórt, eftir at nøkur ár eru liðin.

## Árin av lækkandi ríkisútreiðslum í Føroyum

Tað er eingin ivi um, at tann føroyski búskapurin fer at verða fyri grundleggjandi broytingum, um ríkisútreiðslurnar í Føroyum hvørva. Hvørjar tær verða, er torført at siga, men lítil ivi er um, at tann almenni parturin av búskapinum fer at minka.

Tann føroyski búskapurin er, eins og aðrir búskapir, sum fáa stórar veitingar uttaneftir, eyðkendur av, at tann almenni sektorurin er lutfalsliga stórur. Eitt annað eyðkenni er, at stórur partur av tí privatu vinnuni framleiðir vørur og tænastur til almenna sektorin.

Tá ið ríkisútreiðslurnar í Føroyum minka, verður tað almenna lutfalsliga minni. Hetta hevur við sær, at eftirspurningurin frá tí almenna eisini verður lutfalsliga minni, og tí verður útboðið frá vinnuni til hitt almenna av vørum og tænastum ein minni partur av samanlagda útboðnum.

Hetta kann hava álvarsamar avleiðingar, um ríkisútreiðslurnar minka so skjótt, at neyðugt verður at fremja stórar sparingar innan tað almenna, og vinnulívið ikki klárar at laga seg til tær nýggju fortreytirnar. Hendir tað, minkar eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi. Ein slík gongd skapar arbeiðsloysi, og kann gera, at fólk flytur í onnur lond.

Men tá ið ein tíð er farin, førir hetta til fall (ella minni vøkstur) í lønarlagnum, bøtt kappingarføri í útflutningsvinnuni, og harvið vaksandi framleiðslu. Sum frá líður, hevur hetta við sær, at eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi økist, og at fólk aftur flytur til landið. Tá ið eftirspurningurin eftir arbeiðsmegi so gerst størri enn útboðið, hækkar lønarlagið aftur.

Framhaldandi kann sigast, at minkandi samanlagdur eftirspurningur hevði havt við sær minking í innflutninginum. Tá útflutningurin økist og innflutningurin gerst minni, orsakað av fallandi eftirspurningi, verður størri avlop á gjaldsjavnanum.

Um ríkisútreiðslurnar høvdu minkað eftir so stuttari tíð, at neyð-

ugt hevði verið at framt stórar sparingar hjá hinum almenna, kundi tað tískil havt við sær nógvar ymiskar bráðfeingisavleiðingar, ið høvdu havt ávirkan hvør á aðra.

Mynd 1 Stutt- og langtíðarárin, ið lækkandi ríkisútreiðslur hava á búskapin




Tá ið tosað verður um árin, sum frá líður, verða bráðfeingisárinini so at siga lopin um. Tí hóast inntøkan lækkar í fyrsta umfari, verður úrslitið sum frá líður, sum mynd 1 sýnir, at búskapurin kemur í eina nýggja legu. Tann nýggja legan kann vera hægri ella lægri enn við ríkisútreiðslum.

Við rættiliga stórari vissu kann verða sagt, at vinnubygnaðurin fer at broytast, um ríkisútreiðslurnar falla burtur. Hetta kemst fyrst og fremst av, at ríkisútreiðslurnar hava økt innlendska eftirspurningin so nógv, at tær vinnurnar, sum nøkta innlendska eftirspurningin, fara ikki at hava sama inntøkugrundarlag, tá ið ríkisútreiðslurnar ikki eru meira. Vardu vinnurnar, t.e. tær, sum framleiða til innlendskan eftirspurning, og ikki eru í kapping uttaneftir, fara ikki at kasta eins nógv av sær til lønir og kapital, tá eftirspurningurin minkar. Tá ið tað ikki fer at loysa seg eins væl at framleiða vørur og/ella tænastur til innlendska eftirspurningin, fer nakað av framleiðslutilfeinginum haðani, t.e. arbeiðsmegi og íløgukapitalur, at flyta í aðrar vinnur.

Harafturímóti fara vinnur í kapping, t.e. vinnur, sum framleiða til útflutnings ella sum framleiða vørur til heimamarknaðin í kapping við innfluttar vørur, at fáa betri kor at virka undir. Hetta kemst av tveimum orsøkum:

- Avkastið til arbeiði og kapital versnar í vardu vinnunum, og tí fara fólk og kapitalur at flyta í vinnurnar í kapping.
- Lønar- og kostnaðarvøksturin verður minni, og tí fara vinnurnar at vera meiri kappingarførar við somu framleiðslur aðrastaðni.

Sostatt batnar kappingarførið hjá útflutningsvinnunum, sum eru í innlendis kappingini um framleiðslutilfeingið, samstundis sum tær eisini verða betur kappingarførar á vørumarknaðinum.

Sannlíkt er, at bygnaðarviðurskifti sum frá líður fara at bøta um ta búskaparligu støðuna. Tað eru orsakir til at halda, at framleiðslutilfeingið verður ikki nóg væl nýtt, so leingi sum ríkisútreiðslur eru í føroyska búskapinum. Ávísur vandi er fyri, at nøkur fólk eru í starvi í almenna sektorinum, sum kanska høvdu verið í meira virðisskapandi vinnu, um tilfeingið varð øðrvísi nýtt. Lyndið hevur eisini verið til at veita studning til vinnuligt virksemi við lítlum avkasti, soleiðis at vinnurnar kasta lítið ella einki av sær til almenna húsarhaldið. Hugsandi er, at slíkar útreiðslur partvíst hvørva av sær sjálvum, tá ið verri ráð verða at reka virksemi við lítlum ella ongum avkasti.

## Búskaparpolitisk stýring

Stór krøv eru sett til at tillaga tey amboð, sum nýtt verða í búskaparstýringini hjá teimum londum, ið hava viljað verið við í teirri búskaparligu altjóðagerðini, sum verið hevur seinastu 20-30 árini. Smálond, og størri lond við, hava staðið í einari støðu, har tey hava skulað gjørt av annaðhvørt at varðveita nøkur stýringaramboð ella at fáa lut í teimum fyrimunum, sum meiri opinleiki í búskaparliga samskiftinum við onnur lond ber í sær.

Í nógvum førum hava myndugleikarnir í hesum londum mett fyrimunirnar við at liberalisera innlendis marknaðir fyri arbeiðsmegi, vørur, tænastur og kapital at vera størri enn vansarnar. Myndugleikar í fleiri av hesum londum hava tó vitað, at stórir trupulleikar kundu taka seg upp fyri búskaparstýringina, um liberaliseringin varð framd ov brádliga. Tá fíggjarmarknaðirnir vórðu liberaliseraðir skuldi fyrivarni t.d. bæði takast fyri kapitalflýggjan og tí øvugta trupulleikanum - at fólk fóru at læna ov nógvan pening uttanlands.

Liberaliseringarnar vórðu gjørdar stigvíst, samstundis sum ymsar tillagingar í innlendis fíggjarmarknaðunum vórðu gjørdar. Í hesari tilgongd vórðu krøvini til búskaparpolitikkin herd, av tí at tað nú er størri sínámillum ávirkan millum fíggjarmarknaðirnar og búskaparpolitikkin og búskapargongdina í teimum einstøku londunum. Vánaligur fíggjarpolitikkur í einum landi elvir til misálit á langtíðar

búskapargongdina. Hetta kundi nú revsast av fíggjarveitarum, t.d. pensiónskassum og peningastovnum, við størri rentukravi. Misálit á búskaparpolitikkin kundi nú eisini ítøkiliga vísa seg við, at peningur í alt størri mun varð beindur í tryggari íløgur í øðrum londum.

Fyri at skapa trúvirði á fíggjarmarknaðunum hava myndugleikarnir í fleiri londum bæði í fíggjarpolitikkinum og peningapolitikkinum tí lagt bond á seg sjálvar, heruppií eisini sagt frá sær møguleikan til at niðurskriva egið gjaldoyra sum amboð í búskaparstýringini. Dømi um týðandi tillagingar í hesum viðfangi hava verið:

- Nógv kunning um ætlaða og førda politikkin.
- Greið staðfesting av ábyrgd fyri fíggjarpolitikki og peningapolitikki.
- Mark fyri almennari skuld og fíggjarlógarhalli.

## Fortreytir fyri búskaparstýring í Føroyum

Føroysku myndugleikarnir hava í fleiri førum havt sterk búskaparpolitisk amboð, t.d. fíggjar- og peningapolitisk amboð, ið teir ikki hava nýtt skynsamiliga. Tað hevur ikki verið greiður skilnaður millum peninga- og fíggjarpolitikkin, og tað hava heldur ikki verið greiðar orðingar um konjunkturpolitikkin. Hetta hevur víst seg á tann hátt, at myndugleikarnir í fleiri førum hava ført stimbrandi politikk, tá ið umstøðurnar kravdu tað øvugta og, at teir hava táttað ov harðliga í, tá ið umstøðurnar kravdu stimbrandi politikk.

Danski tjóðbankin hevur í høvuðsheitum ført peningapolitikkin fyri alt tað danska gjaldoyraøkið og hevur ikki ført nakran serskildan peningapolitikk fyri Føroyar. Harafturímóti kann heldur ikki verða sagt, at føroysku myndugleikarnir hava ført nakran vælgrundaðan og skynsaman peningapolitikk við teimum amboðum, ið hava verið til taks, heldur tvørturímóti. Á fíggjarpolitiska økinum hevur fíggjarpolitikkurin millum land og kommunur heldur ikki verið samskipaður.

Føroyski búskapurin er eisini drigin upp í altjóðagerðina av vøru-, tænastu- og fíggjarmarknaðunum. Men sigast kann ikki, at føroyskir myndugleikar tilvitað hava framt so umfevnandi tillagingar í karmunum fyri búskaparpolitikkinum, sum nógv onnur lond hava gjørt.

Millum annað orsakað av áðurnevndu altjóðagerð, verða peningapolitisku amboðini færri í framtíðini. Tískil fer fíggjarpolitikkurin at fáa størri týdning sum búskaparpolitiskt stýringaramboð.

Til tess at føroyski búskapurin betur skal verða førur fyri at taka ímóti avbjóðingunum, sum lækkandi ríkisútreiðslur í Føroyum bera í sær, er neyðugt í búskaparpolitisku stýringini at reka ein politikk, ið

skal fyribyrgja ov stór sveiggj í búskapinum. Ein tílíkur politikkur hevur til endamáls at tryggja støðugan búskaparvøkstur, varðveita part av stóra gjaldsjavnaavlopinum og avlopið hjá almennu kassunum.

Enn ein orsøk til at føra slíkan politikk er, at búskapurin sum heild, við framhaldandi gjaldsjavnaavlopi, fer at fáa vaksandi avkast frá nettoogn í øðrum londum, sum kann viga upp móti lækkandi ríkisútreiðslum. Somuleiðis fáa vinnur í altjóða kapping betri kor at mennast, um tað við fíggjarpolitikkinum eydnast at halda vøkstrinum á innlendska eftirspurningunum á einum hóskandi stigi næstu árini.

Um so er, at einki verður gjørt fyri at stýra nýtslu- og íløguvøkstrinum, er sannlíkt, at yvirskotið á gjaldsjavnanum, á umleið eina mia. kr. um árið, kemur í umfar í búskapinum. Hetta ber í sær, at vardu vinnurnar, t.d. almennar tænastur og flestu privatu tænastuvinnur, leggja hart kostnaðartrýst á vinnur í altjóða kapping. Eitt slíkt økt kostnaðartrýst kann hava við sær, at kappingarførið, sum bygt er upp seinnu árini, fer fyri skeytið og at útflutningsvinnan harvið verður fyri afturstigi. Hetta merkir, at tað sum frá líður kann gerast sera trupult at minka um ríkisútreiðslurnar í Føroyum.

Búskaparvøksturin hevur verið so stórur farnu árini, at arbeiðsmarknaðurin er komin undir støðugt harðari trýst. Tískil er ein øking av eftirspurninginum fyri at økja búskaparvøksturin ikki rætta leiðin, sum búskaparstøðan er nú.

Tí er ógvuliga umráðandi at hava eina búskaparpolitiska stýring, sum er væl løgd til rættis. Í hesum sambandi hevur nýggja stýrisskipanarlógin frá 1993 havt við sær týðandi formligar broytingar. Tað er nú greiður skilnaður millum ábyrgdarøkini hjá landsstýrismonnunum, og hvør landsstýrismaður hevur fíggjarliga og fyrisitingarliga ábyrgd av sínum málsøki. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum hevur ábyrgdina av útinnandi og samskipandi partinum av fíggjarpolitikkinum. Hetta gevur m.a. møguleika fyri at reka ein meira skynsaman fíggjarpolitikk.

Mannagongdin, sum er í fíggjarlógararbeiðinum, er rættiliga nýggj og varð fyrstu ferð roynd í 1996. Skipanin er ikki fullroynd enn, men hildið verður, at hon í sær sjálvari er eitt stórt framstig í fíggjarlógararbeiðinum.

Búskaparnevndin heldur eisini, at ein avgerandi fyritreyt fyri at føra ein skynsaman búskaparpolitikk varð løgd við avtaluni millum donsku stjórnina og Føroya landsstýri 10. juni 1998. Í avtaluni er ásett, at føroysku myndugleikarnir nú hava alla ábyrgdina av tí føroyska búskapinum.

Tørvur er á styrktum mannagongdum fyri fíggjarlógararbeiðið. Stjórnarskipanarligar bindingar á fíggjarpolitikkin, heruppií bann fyri, at almennu kassarnir seta seg í skuld, kunnu verða umhugsaðar.

Búskaparnevndin hevur gjørt uppskot um ábøtur á mannagongdir fyri lóggávuni. Endamálið er at tryggja:

- Trúvirði á fíggjarpolitikkin.
- Gjøgnumskygni.
- Samanhang millum ætlan og útinning.
- Samskipan av eftirspurningsávirkan úr landskassanum, kommunum og øðrum almennum búskapareindum.

Viðvíkjandi fíggjarlógararbeiðinum verður rátt til, at ein mannagongd í fýra stigum verður sett í verk. Størstu broytingarnar eru løgtingsorðaskifti um fíggjarpolitikkin, og at kommunur og almennir stovnar, heruppií kommunalir felagskapir og almenn partafeløg, verða drigin upp í fíggjarpolitikkin. Mannagongdin kundi eitt nú verið henda:

1. **stig.** Arbeiðið fram móti einum fíggjarpolitiskum karmi fyri eitt fíggjarár byrjar við aðalorðaskifti á tingi í februar/mars árið fyri. Evnið á hesum aðalorðaskifti er búskaparliga støðan og útlitini. Tingið eigur við hesi viðgerð at gera niðurstøðu um, hvussu fíggjarpolitikkurin árið eftir eigur at vera. Við øðrum orðum eigur tingið at taka støðu til, um tað almenna eigur at stimbra búskaparvøksturin ella tálma honum.

Skotið verður upp, at aðalorðaskiftið í høvuðsheitum bara eigur at snúgva seg um heildarbúskaparligu viðurskiftini, og at stovnar og fakfólk, ið takast við hesi viðurskifti, verða kallað inn til hoyringarumfar. Skotið verður somuleiðis upp, at ein sokallaður *rating-stovnur*, tað er ein stovnur sum ger búskaparligar góðskumetingar av fyritøkum, stovnum og londum, verður biðin um at góðskumeta føroyska almenna sektorin.

2. **stig.** Ásettur verður ein fíggjarpolitiskur karmur fyri alt virksemið hjá landi, kommunum og almennum stovnum. Soleiðis verður ein samsvarandi fíggjarpolitikkur tryggjaður fyri land og kommunur. Landsstýrismaðurin í fíggjarmálum ger hetta í mars/apríl mánaði.

3. **stig.** Samráðingar eru millum landsstýrismannin í fíggjarmálum og kommunurnar um, hvussu fíggjarliga býtið skal vera millum land og kommunur. Landsstýrismaðurin kann ikki samráðast við hvørja kommunu sær, men við ein kommunufelagsskap, ið umboðar allar kommunur. Ein slíkur felagsskapur eigur møguliga at verða stovnaður við lóg. Samráðingarnar verða í apríl-juli, samstundis sum samráðingar eru við hinar landsstýrismenninar. Tá ið tað er lagt fast, hvussu

karmarnir verða býttir, er tað kommunufelagsskapurin, ið tingast við tær einstøku kommunurnar.

**4. stig.** Fíggjarlógaruppskotið og fíggjarkarmurin hjá kommununum verður framlagdur og viðgjørdur á tingið. Hetta verður gjørt 1. oktober eins og nú.

Eisini verður skotið upp, at um ein løgtingslimur ella landsstýrismaður leggur lógaruppskot fyri tingið, skal verða víst á, hvat árin uppskotið hevur á heildarbúskapin.

## Støðuginntøka

Høvuðsinntøkukeldurnar í føroyska búskapinum eru inntøkur frá fiskivinnunum og frá ríkisútreiðslunum í Føroyum. Hesar inntøkukeldur eru óvissar. Inntøkurnar av fiskivinnunum hava søguliga víst seg at verið óstøðugar, og eingin vissa er fyri, at ríkisútreiðslurnar fara at verða støðugar. Tað sama er galdandi fyri inntøkur, sum kunnu koma frá oljuvinnu. Búskaparstýringin eigur tí, nógv meiri enn higartil, at verða grundað á tann veruleika, at høvuðsinntøkukeldurnar eru óvissar. Dentur verður her serliga lagdur á at lýsa slíka stýring í sambandi við lækkandi ríkisútreiðslur í Føroyum.

Fyri at henda gongd ikki skal fáa ov skaðilig árin á føroyska búskapin, verður rátt til, at fíggjarpolitikkurin verður lagaður til eina varisliga metta støðuginntøku av ríkisútreiðslunum í Føroyum.

Støðuginntøkan av ríkiútreiðslunum kann lýsast sum ein støðug upphædd, sum tað almenna kann nýta í framtíðini, eisini eftir at ríkisútreiðslurnar eru burtur. Hugskotið er, at tað almenna ikki nýtir allar tær árligu ríkisútreiðslurnar, men sparir ein part av teimum saman, meðan tær enn eru stórar. Endamálið er, at samansparingin skal geva tí almenna eitt árligt avkast.

Ásetingin av støðuginntøkuni verður ávirkað av fleiri viðurskiftum, serliga av áramálinum ríkisútreiðslurnar verða skornar niður, og teirri rentu, samanspardi parturin av ríkisútreiðslunum kann væntast at geva av sær. Í búskaparfrágreiðingini eru sett upp dømi um, at støðuginntøkan av núverandi ríkisútreiðslum í Føroyum á umleið 1,3 mia. kr. kann væntast at liggja ímillum 200 og 570 mió. kr., alt eftir skiftistíð og rentufortreytum. Av tí at skiftistíðin ikki er fastløgd, ber ikki til at siga nakað við vissu um, hvussu stór støðuginntøkan kann gerast.

Støðuginntøkan kann nýtast sum eitt grovt mát fyri, hvussu stóran part av ríkisútreiðslunum í Føroyum tað hevði verið búskaparliga forsvarligt at leitt inn í búskapin umvegis landskassan. Verður støðug-

inntøkan t.d. roknað til 400 mió. kr., verður hetta føst árlig inntøka hjá landskassanum. Hetta er treytað av, at allur parturin av ríkisútreiðslunum oman fyri 400 mió. kr., t.e. umleið 900 mió. kr., verður settur av til samansparingar. Avlopið hjá tí almenna sektorinum hevur, sum umrøtt, seinastu árini verið 500-700 mió. kr., og tí krevst størri avlop fyri at fremja hesa uppsparing.

Ein langtíðarætlan fyri fíggjarpolitikkin eigur at byggja á varisligar metingar av støðuginntøkuni, ið verður grundað á ríkisútreiðslurnar í Føroyum og møguligar inntøkur frá oljuvinnu.

Her verður hendan hugsan lýst við trimum dømum. Samanspardi parturin av ríkisútreiðslunum verður mettur at hava eina rentu á 3,5% um árið í øllum trimum dømunum.

Í fyrsta dømi verður støði tikið í, at ríkisútreiðslurnar tilsamans eru 1,3 mia. kr. Tær verða óbroyttar tey fyrstu trý árini, og minka síðan við 50 mió. kr. árliga, til tær eru burtur.

Mynd 2 Støðuginntøka, dømi 1




Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999

Mynd 2 vísir gongdina við eini støðuginntøku á góðar 500 mió. kr. Myndin kann tulkast soleiðis, at tað almenna árliga kann nýta umleið 0,5 mia. kr. í longri áramál, hóast ríkisútreiðslurnar minka niður í einki. Myndin vísir somuleiðis, hvussu stórur partur av árligu ríkisútreiðslunum eiga at verða spardar saman, fyri at støðuginntøkan kann koma upp á hesa hædd. Eisini sæst, at sum frá líður gerst avkastið/rentan av hesi samansparing mest týðandi parturin av støðuginntøkuni.

## Mynd 3 Støðuginntøka, dømi 2




Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999

Á mynd 3 verður støðið° tikið í, at tað bert er heildarveitingin á umleið 900 mió. kr. sum skal minkast burtur, meðan danski ríkiskassin framvegis ber útreiðslurnar til rakstur av ríkisstovnum. Í mun til fyrsta dømi er her ikki neyðugt at avseta so stóran part av ríkisútreiðslunum til samansparingar, men tvørturímóti kann støðuginntøkan gerast hægri.

## Mynd 4 Støðuginntøka, dømi 3




Heimild: Búskaparfrágreiðingin, 1999

Sum triðja dømi um støðuginntøku, varðveita ríkisútreiðslurnar í Føroyum sítt núverandi virði næstu 10 árini, og hvørva síðani í einum.

Tá ið tað er staðfest, hvussu nógv og eftir hvussu langt skifti, ríkis-

útreiðslurnar skulu minka, kann støðuginntøkan verða roknað eftir nøkrum fortreytum og er sostatt vegleiðandi fyri, hvør eftirspurningur og hvør eftirspurningsvøkstur kann verða loyvdur í búskapinum. Fyrimunurin við at nýta støðuginntøkuna sum vegleiðing er, at í staðin fyri at brúka alla inntøkuna so hvørt og síðan minka um peninganýtsluna, so hvørt sum ríkisútreiðslurnar minka, ber til beinanvegin at áseta eina peninganýtslu, sum kann vara við.

Norska stjórnin nýtir búskapargrunn og støðuginntøku sum amboð at stýra, hvussu oljuinntøkurnar verða nýttar í búskapinum.

## Búskapargrunnur

Búskaparnevndin hevur gjørt uppskot um ein búskapargrunn. Í hendan grunn skulu sonevndar *serinntøkur* beinast, soleiðis at tær ikki órógva búskapargongdina í samfelagnum. Serinntøkur eru inntøkur hjá tí almenna, ið ikki stava beinleiðis frá tí búskaparliga virkseminum. Felagseyðkenni fyri serinntøkur eru, at tær eru skiftandi, óvissar ella tíðaravmarkaðar inntøkur, sum t.d. ríkisútreiðslur í Føroyum, oljuinntøkur og inntøkur, sum kunnu standast av, at almennar fyritøkur verða privatiseraðar.

Høvuðsendamálið við at stovna búskapargrunnin er, at hann skal skapa eina fíggjarlógartilgongd, har langtíðaráhugamálini í búskaparstýringini verða sett í hásæti, tá ið nýtt verður av serinntøkum í tí einstaka fíggjarárinum. Grunnurin skal geva eitt betri grundarlag undir einum støðugum búskaparvøkstri, ið ikki er grundaður á ótrygt inntøkugrundarlag.

Hvussu nógv verður brúkt í einum fíggjarári av skiftandi serinntøkum hjá landskassanum, eigur ikki at verða knýtt at støddini á árligu serinntøkunum. Ein høvuðsgrundgeving fyri búskapargrunninum, eftir einum kapitalumsitingarligum sjónarmiði, er, at grunnurin skal virka sum eitt fríholt, so at serinntøkurnar verða nýttar skynsamt, sum frá líður.

Búskapargrunnurin og nakrar meginreglur fyri grunnin kunnu verða staðfestar í eini framtíðar føroyskari stjórnarskipan. Útreiðslur hjá grunninum kunnu bara vera afturberingar til landskassan. Útreiðslustøðið verður undir hesum treytum ásett við serligum atliti at gongdini í búskapinum.

## Gjaldoyraskipanin

Búskaparnevndin heldur, at føroyski búskapurin tekur óneyðuga stór-

an transaktións- og váðakostnað á seg við at vera knýttur at donsku krónuni, tí at hon er eitt lítið gjaldoyra í altjóða høpi. Við tað, at evran fevnir um størri part av samhandilsøki føroyinga enn danska krónan, hóskar evran betur til føroysku búskaparáhugamálini.

Búskaparnevndin heldur tí, at tað hevði verið føroyska búskapinum at gagni, um galdandi gjaldoyraskipan við donsku krónuni sum grundgjaldoyra, varð broytt til eina gjaldoyraskipan, har evran var grundgjaldoyra.

Neyðugt verður at fara hóvliga fram, um umskiftið til evru-grundaða gjaldoyraskipan skuldi komið upp á tal. Nógv tann størsti parturin av fíggjarskyldum og -krøvum hjá og mótvegis føroyskum løgfrøðiligum eindum er grundaður í donskum krónum. Tørvur er tí á skiftisreglum galdandi eitt áramál, har greitt verður ásett, um og hvussu eitt nú lán, innlán, handilssáttmálar í donskum krónum o.a. verða umskipað til evru-grundað gjaldoyra.

# Hugtøk og heiti

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Alheimsgerð** | Globalization | Globalisering | At ríkismørk missa týdning, eitt nú í heimshandli. |
| **Altjóða felagsskapur** | International organization | International organisation | Felagsskapur, ið fullveldisríki kunnu gerast limir í (dømi: ST). Eisini nevndur millumtjóða felagsskapur. |
| **Altjóðagerð** | Internationalization | Internationalisering | Sama sum alheimsgerð. |
| **Altjóðarættur** | International law, law of nations | Folkeret, international ret | Rættarreglur, ið skipa viðurskifti millum fullveldis-ríki. Tó er gongdin í altjóðarætti, at hann í størri mun eisini leggur seg út í viðurskifti, ið áður vórðu hildin at vera innanríkis, eitt nú á mannarættinda-økinum. Stundum nevndur fólkarættur ella altjóða lóg. |
| **Altjóða sáttmáli** | International treaty, agreement, accord, convention, covenant, charter, pact, protocol | International traktat, overenskomst, aftale, pagt, protokol | Ein altjóða (ella millum-tjóða) sáttmáli er ein altjóðarættarligur sáttmáli millum fullveldisríki. Eisini altjóða semingur, altjóða sátt, altjóða sáttur, altjóða sætt, altjóða semja, altjóða sáttarmáli, altjóða sáttarmál og altjóða sáttargerð. |
| **Atland** | Dependency | Biland | Land / umveldi, ið er knýtt at einum miðveldi. Eisini nevnt tegnland. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Borgararættur, -skapur** | Citizenship | Statsborgerskab, indfødsret | Sama sum ríkisborgararættur, -skapur. |
| **Fíggjarpolitikkur** | Fiscal policy | Finanspolitik | Við fíggjarpolitikki ávirka politisku myndugleikarnir eftirspurningin í samfelagnum. Hetta kann annaðhvørt gerast við at broyta inntøkur ríkiskassans sum skatt og onnur avgjøld, ella við at broyta útreiðslurnar. |
| **Fleirtjóða** | Multilateral | Multilateral, flerstatslig | Fleirtjóða verður nýtt um samstarv, sáttmálar ella felagsskapir, har fleiri fullveldisríki eru við. Eisini nevnt fleirlanda, fleirríkja og fleirstjórna. |
| **Frælsur felagsskapur** | Free association | Associeret statsforbindelse | Skipan, har eitt land er knýtt at einum fullveldisríki við sáttmála, ið er góðkendur av ST, og har atknýtta landið hevur rætt til eftir egnum vilja at fara úr felagsskapinum og stovna egið fullveldisríki. |
| **Fullveldi** | Sovereignty | Suverænitet, højhedsret, overhøjhedsret | Einkarrættur at skipa lóggevandi vald, útinnandi vald og dømandi vald í einum umveldi, og einkarrættur at umboða umveldið í altjóða høpi. |
| **Fullveldisríki** | Sovereign state | Suveræn stat | Ríki við fullveldi. Tjóðarrættarligur týdningur: sí undir fullveldi. Altjóðarættarligur týdningur: rætturin at taka lut í altjóða samstarvi á jøvnum føti við onnur fullveldisríki. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Gjaldsjavni** | Balance of payments | Betalingsbalance | Gjaldsjavnin er býttur í ein leypandi inntøku- og útreiðslupart, og ein kapitalpart. Inntøkur og útreiðslur av vøru- og tænastuhandli við útlond verða skrásettar í leypandi partinum, og somuleiðis inntøkuflytingar millum Føroyar og útlond. Kapitalparturin vísir, hvussu úrslitið á leypandi partinum verður fíggjað. |
| **Grundfesting** | Entrenchment | Forankring | T.d. kann føroyska heimastýrið sigast at vera grundfest í heimastýrislógini frá 1948 og rættarsiðvenju síðani. |
| **Handilsjavni** | Balance of trade | Handelsbalance | Handilsjavnin er ein partur av gjaldsjavnanum, og vísir munin millum innflutning og útflutning av vørum og tænastum. |
| **Heimarættur** | Citizenship | Statsborgerskab, indfødsret | Sama sum ríkisborgararættur. Heimarættur hevur eisini í føroyska orðaskiftinum verið nýtt í sammerking við svenska orðið hembygdsrätt, ið er ein skipan, sum gevur serrættindi til ávísan minniluta í ríkinum. |
| **Heimastýri** | Autonomy, home rule | Hjemmestyre, hjemmestyre-ordning, autonomi | Skipan, har ein ríkislutur hevur serstakar sjálvstýrisheimildir (dømi eru Føroyar, Grønland, Áland og nú eisini Skotland). |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Heimstaðarrættur** | Domicile | Hjemmeret | Serrættindi hjá borgarum í einum sjálvstýrandi ríkisluti. Dømi: Hembygdsrätt í Álandi. |
| **Inntøkuflytingar á gjaldsjavnanum** | Foreign current transfers | Indkomstoverførsler på betalings-balancen | Allar einvegis inntøkuflytingar, t.e. flytingar, har eingin mótrokning er. Blokkstuðulin er ein inntøkuflyting úr Danmark til Føroya. |
| **Kongsfelags-skapur, -samband** | Union of Crowns, personal union | Kongefællesskab, realunion, personalunion | Tað at fleiri lond ella ríki hava í minsta lagi tað felags, at kongur er hin sami. |
| **Kravsjavni** | Balance of assets and liabilities | Fordringsbalance | Fíggjarligur kravsjavni vísir fíggjarogn og samsvarandi fíggjarskuld á ymiskum økjum í samfelagnum. |
| **Leypandi postar** | Current Account | Løbende poster | Handilsjavnin umframt nettoinntøkuflytingar millum Føroyar og onnur lond. Tá tosað verður um yvir- ella undirskot á gjaldsjavnanum, eru tað teir leypandi postarnar, ið sipað verður til. |
| **Loysing** | Secession, separation | Udtrædelse, løsrivelse | Tað, at ein ríkislutur fer úr einum ríki. |
| **Lýðveldi / tjóðveldi** | Republic | Republik | Ríki, har ríkisleiðarin er valdur (mótsett í kongs-ríki). T.d. Ísland, Finnland og USA. |
| **Løgdømi** | Jurisdiction | Jurisdiktion | Tað umveldið, har ein ávís lóggáva er galdandi. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Løgfesting** | Entrenchment in law | Forankring i lov | At ein rættarstøða er staðfest í lóg, t.d. í grundlóg. |
| **Miðveldi** | Central power/state, metropolitan power/ state, colonial power | Hovedland, centralmagt, kolonimagt, moderland | Høvuðslandið í ríki við fleiri londum, ella høvuðslandið í ríki við atlondum. Hjálandaveldi, tá talan er um eina hjálandastøðu. Í danska kongsríkinum er Danmark miðveldi mótvegis Føroyum og Grønlandi. |
| **Millumtjóða** | International, interstate, intergovernmental | International, mellem-statlig, mellemfolkelig | Millumtjóða viðurskifti eru viðurskifti millum ríkisstjórnir. Eisini nevnd millumlanda-, millumríkja-, millumstjórna-. Millumtjóða kann vera sammerkt við altjóða, um talan er um samstarv, har í grundregluni øll ríki kunnu vera við. |
| **Orðsending** | Note Verbale Verbal Note | Verbalnote, note verbal | Boð frá einari ríkisstjórn til aðra orðað í formligum skjali. |
| **Pengapolitikkur** | Monetary Policy | Pengepolitik | Snýr seg um at tryggja ein javnan og støðugan búskaparvøkstur við at skapa tryggleika í penga- og fíggjarviðurskiftum. Pengapolitikkur verður rikin av einum óheftum aðalbanka. Amboðini eru t.d. áseting av rentu, og ymiskar reglugerðir fyri fíggingarvirksemi. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Ríki** | State (ikki so beinrakið: nation, country) | Rige, stat (ikki so beinrakið: land, nation) | Sjálvstøðugt land við egnari stjórnarskipan og við egnum ríkisovasta. Landið kann tó vera í samveldi/ríkjasambandi við annað land, eins og tað kann hava felags ríkis-ovasta við onnur ríki (sum Danmark og Ísland høvdu í 1918-1944, og Commonwealth-ríkini hava í dag). |
| **Ríkisborgara-rættur, ríkisborgara-skapur** | Citizenship | Statsborgerskab, indfødsret | Ríkisborgararættur er vanliga ásettur í lóg, og fevnir um rætt at búgva í ríkinum, valrætt og valbæri til ting og (ofta) kommunur. Vanliga kunnu bert ríkis-borgarar fáa tænastu-mannastørv. Verður eisini nevnt heimarættur. |
| **Ríkisfelags-skapur** | (Hugtakið er ikki til í enskum) | Rigsfællesskab | Hugtak, sum er nýtt um sambandið millum Føroyar, Grønland og Danmark. Tann løgfrøðiligi og stjórnmálafrøðiligi týdningurin er ógreiður. |
| **Ríkisvald** | Government, state | Statsmagt | Felags hugtak fyri útinn-andi valdið, lóggávuvaldið og dómsvaldið. |
| **Ríkjasamband** | Confederation | Konføderation, statsforbund | Felagsskapur av fleiri í grundstøðinum sjálv-støðugum ríkjum, oftast skipað við sáttmála og við felags ríkisovasta (t.d. Sveis). |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Samband** | Unionism | Samhørighed | Politisk stevna, ið er fyri felagsskapi, oftast millum eitt atland og eitt miðveldi. Dømi: Samband millum Føroyar og Danmark, Norðurírland og Stórabretland. |
| **Sambandsríki** | Federal state, federation | Føderalstat, forbundsstat | Ríki, har stjórnarvaldið í sjálvari stjórnarskipanini er býtt millum einstøku partarnar ella sambandslondini (í USA *states*) og felags ríkismyndugleikan. |
| **Samveldi** | Union, union state, federation, federal state, confederation | Forbundsstat, statsforbund, union, føderalstat, konføderation | Felagsheiti fyri ymisk sløg av ríkjum, ríkjasambondum og sambandsríkjum, ið hava tað til felags, at tey í sjálvum grundstøðinum (t.d. í stjórnarskipanini ella í altjóðarættarligum sáttmála) eru samansett av meira ella minni sjálvstøðugum umveldum. Dømi eru Ísland-Danmark 1918-44 og USA. |
| **Semingur** | Covenant | Traktat, pagt | Sama sum sáttmáli, men á hægri málsligum stigi. |
| **Sendistova** | Embassy, representation, mission | Ambassade, repræsentation, mission | Umboðsstova hjá eini ríkisstjórn í einum øðrum ríki. |
| **Serstovnar undir ST** | UN Special Agencies | FN-institutioner | Serstovnar undirskipaðir ST, hvørs virksemi fevnir um serstøk virkisøki, t.d. WHO, UNESCO. |
| **Sjálvsavgerðarrættur tjóðanna** | The right of peoples/nations to self-determination | Nationernes selvbestemmelsesret | Rætturin hjá eini tjóð at ráða sær sjálvari, heruppií rætturin til at stovna egið ríki. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Smáríki** | Microstate | Mikrostat | Í hesi bók er týdningurin fullveldisríki við færri enn einari mió. íbúgvum. |
| **Stjórnarrættur** | Constitutional law | Statsret, forfatningsret, statsforfatningsret | Rættarreglur og rættar-venja um skipan av og virki hjá evsta stjórnarveldinum í einum ríki (ting, stjórn, dómstólar). |
| **Stjórnarskipan** | Constitution | Forfatning, stats-forfatning, grundlov | Tær grundleggjandi reglurnar, ið skipa stýris-lag og myndugleika í einum ríki, oftast (men ikki altíð) orðað í einum skjali. Eisini nevnd stýrisskipan. |
| **Stjórnarvald** | Government | Regeringsmagt, statsmagt | Í víðari merking er stjórn-arvald sammerkt við ríkis-vald – eitt felags hugtak fyri útinnandi valdið, lóg-gávuvaldið og dómsvaldið; í trengri merking valdið hjá sjálvari stjórnini. |
| **Støðuginntøka** | Permanent income | Permanent indkomst | Støðug rentuinntøka av samanspardum peningi. |
| **Tegnur** | Subject | Undersåt | Tegnar kongs eru teir/tey, ið kongur hevur myndug-leika yvir, t.e. einhvør í ríki kongs. |
| **Tingræði** | Parliamentarism | Parlamentarisme | Ein skipan, har hesar báðar treytirnar eru loknar: Stjórnarleiðarin verður valdur av (meiriluta í) tinginum og kann verða feldur av (meiriluta í) tinginum. |

| FØROYSKT | ENSKT | DANSKT | FRÁGREIÐING |
|---|---|---|---|
| **Tjóð, fólk** | Nation, people | Nation, folk | Ein tjóð er tað sama sum eitt fólk, t.e. ein bólkur, ið hevur felags mentan, søgu og siðir, og sum kennir seg sum eina felagseind. Ein tjóð er oftast knýtt at einum ávísum landafrøðiligum øki. |
| **Tjóðarrættur** | National law, municipal law | National ret | Innanríkis rættarreglur (mótsett altjóðarætti). |
| **Tvítjóða** | Bilateral | Bilateral | Viðurskifti millum tvey ríki. Tvítjóðasáttmáli (bilateral treaty) er sáttmáli millum tvey ríki. Eisini tvílanda, tvíríkja, tvístjórna og sínámillum. |
| **Umboðsstova** | Representation, mission | Repræsentation, mission | Umboðsstova hjá eini ríkisstjórn í einum millumtjóða ella altjóða felagsskapi (dømi: danska ST-umboðsstovan í New York og danska ES-umboðsstovan í Brússel). Sendistovur verða stundum eisini nevndar umboðsstovur. |
| **Umveldi** | Territory | Territorium | Landafrøðiliga avmarkað øki við serskildari rættarstøðu. |
| **Varðland** | Protectorate | Protektorat | Land, ið er undir ræði og vernd hjá øðrum landi (miðveldi), oftast við formligum grundarlagi í sáttmála landanna millum. |
| **Økisfelagsskapur** | Regional organization | Regional organisation | Felagsskapur, har ríki í ávísum parti av heiminum kunnu gerast limir (dømi: ES, NAFTA og NATO). |

FØROYA LANDSSTÝRI 1999